# ÁRSFRÁGREIÐING

# 2011

# FÓTBÓLTSSAMBAND FØROYA

Ársfrágreiðing 2011
© Fótbóltssamband Føroyar
Lagt til rættis: Fríði B. Nielsen
Forsíðumyndir: Høgni Heinesen
Prent og innbinding: Prenta
Tórshavn, februar 2012

INNIHALDSYVIRLIT


32. regluligi aðalfundur Fótbóltsambandsins ... 6
1. Val av fundarstjóra ... 7
2. Góðkenning av dagsskrá ... 8
3. Forsetin greiður frá virksemi FSF's í farna ári ... 8
4. Framløga og góðkenning av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu ... 13
5. Uppskot um at koyra lim úr FSF ... 13
6. Viðgerð av uppskotum frá Starvsnevndini ... 13
7. Innkomin uppkot ... 17
8. Val av óheftum grannskoðara ... 17
9. Val av 3 limum og 2 varalimum í Starvsnevndina ... 17
10. Val av varaforseta ... 18
11. Val av limum í Aganevndina og Yvirkærunevndin ... 18
12. Upptøka av nýggjum limum ... 18
13. Ymiskt ... 19
Ársroknskapur 2010 ... 20
Kappingarreglur fyri fótbólt ... 33
Loyvisskipanin hjá UEFA 2011 ... 44
Eftirmeting av fótbóltsárinum 2011, Vaksnamannadeildin ... 45
Tilmeldingar 2002-2011 ... 48
Tilmeldingar 2011 ... 49
Úrmeldingar 2011 ... 50
Endaliga støðan í lands- og steypakappingini ... 51
Býtið av plaseringum 2001-2011 ... 53
Landskappingin 2011 – úrslit og støður ... 54
Vodafonedeildin ... 54
1. deild menn ... 59
2. deild menn ... 62
3. deild menn ... 64
Old boys ... 67
Unglingar ... 69
Dreingir ... 71
Smádreingir ... 73
1. deild kvinnur ... 75
2. deild kvinnur ... 77
Old girls ... 79
Gentur 14-17 ár ... 80
Smágentur ... 82

Steypakappingin 2011 – úrslit og støður ..... 85
Løgmanssteypið ..... 87
Th. Dam, Intarsport Steypið, unglingar ..... 89
Blaðberasteypið, dreingir ..... 91
Cadburysteypið, smádreingir ..... 93
Steypakappingin, kvinnur ..... 95
Mótasteypið, gentur 14-17 ár ..... 97
Niels L. Arge steypið, smágentur ..... 99
A-landsliðið 2011 ..... 101
Føroyar - Slovenia ..... 102
Føroyar -Estland ..... 103
Norður Írland - Føroyar ..... 104
Føroyar - Italia ..... 105
Serbia-Føroyar ..... 106
Hagtøl frá dystum ..... 107
Onnur hagtøl ..... 112
U21-landsliðið 2011 ..... 120
Føroyar – Norður Írland ..... 122
Norður Írland – Føroyar ..... 124
Serbia – Føroyar ..... 126
Danmark – Føroyar ..... 128
Makedonia – Føroyar ..... 130
Hagtøl frá dystum ..... 132
U19-landsliðið 2011 ..... 137
U19-landsliðið, EM-undankapping í Portugal ..... 137
Hagtøl frá dystum ..... 144
U17-landsliðið 2011 ..... 147
NM 2011 á Akureyri, Ísland ..... 147
U17 EM undankappingin í Luxembourg 2011 ..... 151
Hagtøl frá dystum ..... 154
U15-landsliðið 2011 ..... 160
U15 Landsliðið í Brøndby Cup 2011 ..... 160
A-landsliðið kvinnur 2011 ..... 167
"Undan-undankapping" á Malta ..... 167
Hagtøl frá dystum ..... 172
Onnur Hagtøl ..... 175
U19-landsliðið kvinnur 2011 ..... 179
U-19 kvindelandsholdet sæsonen 2011 ..... 179

Hagtøl frá dystum ... 182
U17-landsliðið kvinnur 2011 ... 185
Frágreiðing úr Moldova - U 17 gentur ... 185
Hagtøl frá dystum ... 187
FSF-leikaramenningin 2011 ... 190
Ársfrágreiðing fyri Grassroots 2011 ... 197
Ársfrágreiðing - Venjaraútbúgvingin 2011 ... 200
Yvirlit yvir venjara við B og A-prógvi ... 203
Tilmeldingarlistar til fótbóltsskúlarnar 2011 ... 205
Altjóða døming 2011 ... 211
Frá dómaradeildini til árðsfrágreiðingina 2011 ... 212
Føroyskur UEFA Delegate 2011 ... 213
Aganevndin 2011 ... 214
Yvirkærunevndin 2011 ... 261
Champions League, Europa League & Europa Cup kvinnur 2011 ... 281

# 32. regluligi aðalfundur Fótbóltsambandsins

**leygardagin, 26. februar 2011, kl. 13.00, í FSF-húsinum**




## Aðalfundarskrá:

1. Val av fundarstjóra eftir tilmæli frá Starvsnevndini
2. Góðkenning av dagsskrá
3. Forsetin greiður frá virksemi FSF's í farna ári
4. Framløga og góðkenning av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu fyri farna roknskaparár
5. Uppskot um at koyra lim úr FSF, smb. grein 15 stk1,c í lógunum fyri Fótbóltssamband Føroya: Ravnur FC
6. Viðgerð av uppskotum frá Starvsnevndini:
   a) Broytingar í viðtøkum FSF´s
   b) Broytingar í Kappingarreglum FSF´s
   c) Broytingar í Leikarareglugerðini
7. Innkomin uppskot
8. Val av óheftum grannskoðara eftir uppskoti frá Starvsnevndini
9. Val av 2 limum og 2 varalimum í Starvsnevndina
10. Val av varaforseta
11. Val av limum í Aganevndina og Yvirkærunevndina
12. Upptøka av nýggjum limum: EB STREYMUR
13. Ymiskt

Fundurin byrjaði við at forseti FSF´s segði nøkur um Andreas Poulsen úr Gøtu, sum andaðist í januar mánaða 2011. Síðani varð hann mintur við tøgn í ein minut.

# 1. Val av fundarstjóra

Forsetin mælti til at velja Petur Even Djurhuus  til fundarstjóra, og varð  hetta einmælt samtykt, og gav hann síðani orðið til Petur Even Djurhuus.

**Møtt:**

| | |
|---|---|
| **O7 Vestur** | Eivin H. Jacobsen, Albert Ari Thomasen |
| **AB** | AndrassDrangastein, Sigmar Jacobsen, Thordur Thorsteinsson |
| **B36** | Sámal Ímundarsson, Jákup Mørk, Hákun Steingrímsson |
| **B68** | Jógvan Højgaard, Ólavur Jensen, Jan Petersen |
| **B71** | Jens C. M. Petersen |
| **EB** | Rólant Højsted |
| **FC Hoyvík** | Fróði Danielsen |
| **FC Suðuroy** | Bjarni Johansen |
| **HB** | Dánial Pauli Davidsen, Børge B. Hansen, Heri Nolsøe |
| **ÍF** | Ólavur Larsen |
| **KÍ** | Tummas Lervig, Jóhan Lútzen, Símun W. Høgnesen |
| **MB** | Dánial A Hansen, Jónfinn Olsen, Poul Helgi Selfoss |
| **GIZA** | Kenneth Djurhuus, Bogi Heiðriksson |
| **NSÍ** | Sølvi R. Hansen |
| **Royn** | Maud Julianna Næs, Jonhard Thomsen, Oddur Holm |
| **SÍ** | Oddmar Selfoss, Jógvan Páll Joensen |
| **SÍF** | Heðin Joensen |
| **SKÁLA** | Hans J. Andreasen, Hans J. Høj |
| **STREYMUR** | Ingolf Joensen, Annvør Zachariasen |
| **TB** | Andre Dalfoss, Palle Eysturberg |
| **Undrið** | Mikkjal Hvannastein, Nikkil Heinesen, Áki Vang |
| **Víkingur:** | Páll Gregersen, Ólavur Olsen, Ólavur Thomsen |

| | |
|---|---|
| **Nevnd FSF's:** | Christian Andreasen, Niklas á Líðarenda, Niclas Davidsen, Róin Schrøter, Jákup Martin Joensen,  Fríðin Ziskason og  Karl Vidtfeldt |
| **Fyrisitingin** | Virgar Hvidbro, Fríði Nielsen, Josva Thomsen, Ronnnie Háfoss, Petur Simonsen, Lassin Isaksen |

| | |
|---|---|
| **Aganevndin**: | Sissal Kj.Kristiansen |
| **Yvirkærun**. | Jens Erik Magnussen |
| **Loyvisnev.** | Terji Sigurðsson |
| **UEFA:** | Liutauras Varanavičius |
| **ÍSF:** | Petur Elias Petersen |
| **FDF:** | Eiler Rasmussen, Petur Reinert |
| **FVF:** | Eingin |
| **INPACT** | Jógvan Joensen, Gunnar Nielsen |
| **Onnur:** | Tummas Pauli Olsen, Marni Mortensen, Annfinn Danielsen, Trygvi Mortensen, Heðin D. Poulsen |

**Fjølmiðlar** Hilmar Jan Hansen, Álvur Haraldsen Sosialurin,  Hanus Mikkelsen, Hans Erik Danielsen Kringvarpið, Allan Brockie, Dimmalætting, Mourits Clementsen

Fundarstjórin staðfesti at aðalfundurin var innkallaður sambært Lógunum hjá FSF og tí lógligur og viðtøkuførur.

## 2. Góðkenning av dagsskrá
Fundarstjórin spurdi um viðmerkingar vóru til dagsskránna, tað vóru tað ikki, og varð dagsskráin einmælt góðkend.

## 3. Forsetin greiður frá virksemi FSF's í farna ári
Árið 2010 var eitt hendingarríkt ár.

Á seinasta aðalfundi var nýggjur forseti valdur og 3 nýggir nevndarlimir. Samstarvið í nevndini hevur gingið væl og fleiri týðandi avgerðir eru tiknar.

Í juni 2010 varð nýggjur tekniskur stjóri settur. Tekniski stjórin kemur at hava ábyrgdina av allari útbúgving og menning av leikarum og venjarum, og hann skal eisini geva ráð í samband við tilrættalegging av okkara kappingum.

Í august 2010 varð nýggjur aðalskrivari settur.

Starvsnevndin hevur saman við aðalskrivaranum gjøgnumgingið fyrisitingina. Arbeiðið er enn í gongd, og eftir árskiftið er nýggjur loyvisstjóri settur, og eitt starvsfólk, sum serliga skal taka sær av kunning og samskifti millum FSF og feløgini er eisini sett. Við hesum starvssetanum skuldi manningin innan nýggju fyrisitingina verið sett.

Starvsnevndin hevur sett sær fyri at fremja broytingar, sum skulu tryggja, at samskiftið millum FSF og feløgini kann betrast, eisini soleiðis, at feløgini kunna fáa eina betri kunning um tað virksemið, sum gongur fyri seg í FSF.

Arbeitt hevur verið við at gera eina nýggja heimasíðu. Nýggja heimasíðan verður væntandi tikin í nýtslu fyrra hálvár 2011. Ætlanin er, at heimasíðan innan ikki ov langa tíð, skal kunna nýtast til skráseting av leikarum, skráseting av dómaraseðlum, gulum kortum v.m. Eisini er ætlanin, at heimasíðan skal bøta um samskiftið millum FSF og feløgini.

**Fíggjarliga gongdin**
Í byrjanini av 2010 var FSF í stórum gjaldsføristrupulleikum.

Roknskapurin fyri 2009 gav stórt hall, serstakliga orsakað av, at FSF hevði bundið seg til at rinda stórt bonus til leikararnar á A-landsliðnum. Eftir seinasta aðalfund hevði FSF ein ófíggjaðan gjaldsføristørv uppá slakar 8 mill. Kr.

Eik Banki hevði stutt undan aðalfundinum niðurskriva kassakredittin til felagið og Føroya Banki hevði givið noktandi svar uppá at veita FSF rakstrarfígging.

Eftir aðalfundin fekk FSF eina avtalu í lag við Eik Banka um rakstrarfígging uppá 3,5 mill. kr. FSF fekk eisini eina tilsøgn frá Føroya Banka um rakstrarfígging, men fíggingin var sera kostnaðarmikil.

Fyri at loysa trupulleikan vendi FSF sær til UEFA við fyrispurningi, um tað var møguligt at fáa eina fyribils fígging frá UEFA. Umsóknin hevði við sær, at eitt umboð fyri UEFA kom á vitjan í Føroyum ,har alt okkara virksemið bleiv eftirhugt. Eftir hetta gav UEFA tilsøgn um rindan av forskoti av stuðli, soleiðis at FSF kundi fáa gjaldsføristørvin dekkaðan. Forskotið frá UEFA var uppá góðar 4 mill. kr.

Fíggjarliga úrslitið seinasta ár gjørdist eitt yvirskot uppá 2. mill. kr. Orsakað av stóra hallinum í árinum frammanundan, hevur FSF framvegis tørv á, at fíggja dagliga raksturin. FSF hevur eina avtalu við Eik Banka um rakstrarfígging uppá 3,5 mill. kr. Tað er onki at ivast í, at fíggjarstovnar frameftir

fara at seta strangari treytir, til tess at fíggja virksemi hjá FSF. Ein treyt verður sjálvandi, at dagligi raksturin fíggjarliga hongur saman.

Starvsnevndin hevur lagt stóra arbeiðsorku í at gera eina nýggja fíggjarætlan fyri 2011, sum kemur at geva eitt ávíst avlop, tá árið er úti. Soleiðis sum fíggjarligu útlitini eru í løtuni, kann væntast at ávísar skerjingar fara at verða gjørdar í tí virksemi, sum FSF í dag hevur. Starvsnevndin roynir tó at leggja soleiðis til rættis, at virksemi felagsins í minst møguligan mun verður skert av teimum sparingum, sum mugu fremjast.

**Søla av sjónvarpsrættindum**
FSF hevur selt síni sjónvarpsrættindi, at senda frá heimadystum, til Kentaro. Avtalan við Kentaro gevur fótbóltssambandinum rættiliga væl av peningi, og avtalan er galdandi fram til 2013.

Inntøkukeldurnar hjá FSF eru stuðul frá UEFA / FIFA og so sølu peningur frá Kentaro. Tað hevur ikki eydnast FSF at útvega aðrar sponsorar av týdningi, sum kunnu fíggja rakstur felagsins.

Verandi støða ger, at FSF er rættiliga sárbært, um eitt nú verandi sponsorar fella frá.

Upplýsast skal, at UEFA arbeiðir í løtuni við at samskipa alla sølu av sjónvarpsrættindum eftir einum konsepti, sum líkist nógv tí, sum verður brúkt í samband við evropeisku kappingarnar. Enn fyriliggur ikki nakað endaligt úrslit, men roknast kann við, at UEFA fer at seta fram eitt ynski um at keypa okkara sjónvarpsrættindi, tá avtalan við Kentaro gongur út.

Eftir teimum útsøgnum sum fyriliggja, er mangt sum bendur á, at UEFA vil rinda nøkulunda somu upphædd fyri okkara sjónvarpsrættindi, sum Kentaro í dag rindar. Tó skal staðiliga viðmerkjast, at FSF hevur havt eitt sera gott samstarv við Kentaro, og at vit tí ongar ítøkiligar ætlanir hava um at siga upp samstarvið við Kentaro.

**Bonus til landsliðsleikarar**
Eftir seinastu undankapping til HM 2010 gjørdist greitt, FSF hevði bundið seg til at rinda eitt stórt bonus til leikararnar á A-landsliðnum. Stór upphædd varð avsett í næst seinasta ársroknskapi hesum viðvíkjandi, og var skyldan at rinda bonus, ein av høvuðsorsøkunum til, at FSF í 2009 hevði stórt undirskot. Eftir seinasta aðalfund vórðu samráðingar tiknar upp við landsliðsleikararnar, sum endaðu við eini semju, hareftir FSF samanlagt rindaði 4.9 mió.kr. í bonus, harav 3.116.500 kr. vórðu goldnar beinanvegin, meðan restin kr. 1.783.500 verður goldin í ár.

FSF er í løtuni í samráðingum við landsliðsleikararnar um nýggja avtalu.

**Samstarv við UEFA**
FSF hevur seinastu tíðina lagt stóran dent á at fáa í lag eitt gott samstarv við UEFA. Í hesum sambandi hevur starvsnevndin sett sær fyri at troyta allar møguleikar, sum standa okkum í boði, í samband við okkara altjóða limaskap í UEFA.

Forsetin var í seinasta ár og vitjaði UEFA. Á vitjanini varð avtala gjørd um, at forsetin fyri UEFA skuldi koma á vitjan og handa steypið til Føroyameistaran í fótbólti í 2010.

Michel Platini var í Føroyum og vitjaði í okt. í fjør, og vitjanin eydnaðist væl. Saman við Michel Platini var eisini Allan Hansen, sum er nevndarlimur í UEFA, og sum eisini er formaður í HatTrick grunninum hjá UEFA.

FSF hevur verið í tøttum samstarvi við UEFA, um møguleikar fyri nýtslu av peningi, sum er játtaður FSF gjøgnum HatTrick grunnin.

Umboð fyri UEFA hava eisini verið í Føroyum og hugt eftir viðurskiftunum, og hava gjørt tilmæli til FSF um framtíðarútbyggingar í Føroyum. Serfrøðingar hjá UEFA hava mælt FSF til at fremja útbyggingar á Tórsvølli, sum skal gerast til okkara framtíðar tjóðarleikvøllur. Eisini hevur UEFA mælt til, at vøllurin á Toftum verður nýttur til onnur endamál, og vøllurin annars verður tiltaksvøllur til landsdystir.

Starvsnevndin hevur fylgt tilmælinum frá UEFA og hevur tikið avgerð um at fremja munandi útbyggingar á Tórsvølli. Á Tórsvølli er ætlanin at leggja graslíki á og at seta upp ljós við vøllin, eins og ætlanin er at yvirdekka setrini. FSF hevur játtað at nýta 19. mill. kr. til hetta tiltak, og roknast má við, at meir peningur verður brúktur til hetta endamálið seinni.

Viðv. Tofta leikvølli, hevur starvsnevndin tikið avgerð um at fremja útbyggingar soleiðis at graslíki verður lagt á vøllin. Eisini er ætlanin at gera ábøtur av verandi húsi. Á Toftum er ætlanin at útbyggja soleiðis, at frálíku umstøðurnar har verða nýttar sum karmur um eitt tekniskt sentur, sum serstakliga skal hýsa landsliðssamlingum, fótbóltsskúlum og øðrum líknandi tiltøkum. FSF er í løtuni í samráðingum við Nes kommunu um ein leist fyri útbyggingunum á Toftum.

Starvsnevndin søkti UEFA um loyvi til at veita ein part av tí peningi, sum verður játtaður gjøgnum Hattrick grunnin at nýta sum stuðul til feløgini í samband við útbygging av vøllum í Føroyum. UEFA hevur góðkent ætlanina. Starvsnevndin hevur í fyrsta umfari avsett 6. mill. kr., sum kunnu nýtast sum stuðul til feløg at útbyggja vøllir.

Fyri roknskaparárið 2011 er ætlanin at nýta 2,5 mill. kr. og hevur starvsnevndin avgjørt, at stuðulin í ár skal nýtast til útskifting av graslíkisvøllum, og hartil hoyrandi instalatiónum. Starvsnevndin hevur avgjørt at seta eina nevnd, sum skal gera innstilling til starvsnevndina viðv. teimum umsóknum sum koma. Umsóknarfreistin er sett til 01.03.2011, og ætlanin er at avgreiða allar umsóknirnar áðrenn 01.04.2011.

**Samstarv við FIFA**
Starvsnevndin hevur á sama hátt roynt at fingið í lag eitt tættari samstarv við FIFA.

FIFA stuðlaði í sínari tíð byggingini av okkara høvuðssæti. Tað er soleiðis, at tað fyriliggja aðrir óroyndir møguleika at fáa stuðul játtaðan frá sokallaða Goal projektinum hjá FIFA.

Fótbóltssambandið hevur seinasta ár fingið játtað stuðul til álegging av graslíki á Tórsvøll uppá 400.000 USD, og møguleiki er at fáa onnur tiltøk játtaðið, eftir at hesin peningur er brúktur. Forsetin hevur verið á vitjan hjá FIFA. Á vitjanini fingu vit upplýst, at tað eisini er rúm fyri øðrum tiltøkum sum FIFA hevur møguleika at stuðla.

Eitt nú hevur FIFA bjóða seg til at skipa fyri útbúgving av okkara leiðslu, og at veita okkum tekniskan stuðul, eitt nú í samband við telduforrit, til tilrættalegging av okkara virksemi, herundir eisini okkara landsliðsarbeiðið.

Hendan verkætlanin tykist sera spennandi, og ætlanin er at taka av hesum tilboðið, hóast hetta tekur nakað av tíð av gjøgnumføra. Ætlanin var, at forsetin fyri FIFA Joseph Blatter skuldi koma á vitjan í septembur í fjør. Vitjanin bleiv av ongum, tí lendandi var ikki í Vágunum. FSF forsetin hevur bjóðað Blatter at vitja í Føroyum í ár, og hevur hann tikið av hesum tilboðið. Væntandi kemur Blatter á vitjan í mai ella juni í ár, men enn er vitjanin ikki endaliga ásett.

**Landskappingin**
Landskappingin í fjør gekk avbera væl. Kappingin í Vodafon deildini varð gjøgnumførd uttan stórvegis trupulleikar. Seinasta ár vóru ávísir trupulleikar viðv. skráseting av yngru leikarunum, og

ætlanin er at fáa hesin viðurskifti avgreidd í hesum árinum. Í fjør vóru heili 350 lið tilmeldað í landskappingini. 248 lið vóru tilmeldað innan mans fótbólt og 102 lið innan kvinnu fótbólt.

Tað sigur seg sjálvt, at tað krevur stóra orku at leggja slíka kapping til rættis. Í fremstu deildunum verða leiktir 3. dystir, eins og steypakappingin skal gjøgnumførast. Sum kunnugt er tíðin, har tað eg gjørligt at leika fótbólt rættiliga stutt, og tí setur kappingin stór krøv til tey sum skipa fyri.

Tað er sera týdningarmikið, at dystir verða leiktir til ásettu tíðina, og so fáar flytingar verða gjørdar sum yvirhøvur til ber.

Seinasta ár vóru ávísir trupulleikar og starvsnevndin hevur tí umrøtt um eitt nú summarsteðgurin eigur at verða avtikin ella styttur.

Í komandi tíðum verður neyðugt at taka upp eitt kjak, hvussu landskappingin í fremstu deildunum skal skipast. Skulu broytingar gerast, mugu hesar sjálvsagt verða gjørdar í samráð við feløgini.

**Steypakappingin**
Starvsnevndin tók í fjør avgerð um, at finalan um løgmanssteypið skuldi leikast í Klaksvík samstundis sum summarfestivalurin fór fram.

Finalan seinasta ár var sera væl eydnað. Talið av áskoðarum hevur neyvan nakrantíð veri hægri, og væl var fyriskipað.

Luttakandi feløgini gjørdu eisini sítt til, at tiltakið eydnaðist so væl. Millum annað við at selja atgongumerkir til sínar fjepparar, og skipa fyri tiltøkum henda dagin, alt til tess at fáa finaluna so spennandi sum gjørligt.

Enn er ongin avgerð tikin, hvar finalan verður leikt í ár.

Tað er týdningarmikið at undirstrika, at FSF eigur rættindi til inntøkurnar av løgmansfinaluni.

**Venjaraútbúgvingin**
Venjarar/feløg taka væl ímóti venjaraútbúgvingini. Í 2010 byrjaðu yvir 40 luttakarar uppá B-útbúgvingina. Harafturat byrjaðu 12 luttakarar uppá A-útbúgvingina, og verða teir væntandi lidnir í juni mánaða í ár, - tá hava vit útvið 50 persónar sum hava UEFA A- vnjaralisens. Í 2010 fingu vit eisini fyrsta føroyska venjaran við UEFA-PRO venjarútbúgving, og var tað Jógvan Martin Olsen.

**Dómaraútbúgvingin**
2010 var ikki eitt gott ár, í samband við at útbúgva nýggjar dómarar, - FSF bjóðaði tvey skeið út, men varð einki hildið vegna væntandi undirtøku. Vónandi síggja feløgini álvaran í hesum, og taka uppgávuna at fáa nýggjar dómarar í størsta álvara. Í 2011 verða skeiðini bjóða útaftur, og møguliga verður farið út í økini við teimum. Dómaraútbúgvingin er útbygd, og verða dómarar, sum hava tikið prógv, kallaðir inn til C, B og A dómara skeið, sum eru 8 tímar skeið. Hetta er krav, um dómarin skal sleppa at døma hægri deildir.
Stórur dentur verður lagdur á at menna verandi dómarar, og verður árliga skeiðið fyri teir hildið áðrenn kappingin fer í gongd, soleiðis at teir fáa nýggjastu vitanina og eyka íblástur.
Fyri trimum árum síðani fingu vit ein kvinnuliga dómaratrio, men tíverri hildu ikki allar fram, og tískil hava vit bert havt ein kvinnuligan dómara í 2010. Okkara vón er, at enn fleiri kvinnur beyrja at døma.

**Fótbóltsskúlar**
FSF hevur lagt stóra orku at menna ungdómin, og at skapa góðar karmar fyri ungdómsfótbólti. Aftur í 2010 varð skipað fyri fótbóltsskúlum. 511 børn teknaðu seg til skúlarnar. Fótbóltsskúlarnir vóru hildnir í Tórshavn, á Toftum og í Sandavági. Tiltøkini eydnaðust sera væl.

**Landslið**
Føroyska A-landsliðið leikti í fjør 8 landsdystir harav 3 vinardystir. Liðið fekk tveir javnleikir móti Luxemburg og Norður  Írlandi.

U-21 landsliðið leikti tveir landsdystir. Teir vunnu móti Andorra, og fingu 11 stig í bólkinum.

U-19 landsliðið var í venjingarlegu í Newcastle, og leikti sera væl í EM bólkinum, har teir fingu javnleik móti Kroatia.

U-17 landsliðið var eisini á venjingarlegu í Newcastle, luttók í eini kapping í Aberdeen, í norðurlanda meistaraskapi í Finlandi og EM undankapping í Ungarn.

U-15 landsliðið var við í kappingini í Aberdeen.

Kvinnulandsliðið leikti 4 dystir í Algarve cup.

U-19 landsliðið hjá kvinnum leikti tveir vinardystir móti Ìslandi, og var við í EM undankapping í Norra, har liðið millum annað leikti javnt móti Hvíta Ruslandi.

U-17 landsliðið hjá kvinnum leikti somuleiðis tveir vinardystir móti Ísland,i og var við í EM undankapping í Ruslandi.

**Framtíðin**
Tað er av stórum týdningi at virksemi hjá FSF kemur í eina trygga fíggjarliga legu, og at stabilitetur valdar kring felagið. Tað hevur vakt ans uttanlanda at stórar og títtar útskiftingar hava verið í nevnd og leiðslu hjá FSF. Greiðar ábendingar eru komnar til okkum um, at vit eiga at royna at tryggja kontinuitet í okkara arbeiðið. Samsvarandi hesum, hevur starvsnevndin sett uppskot um broyting í viðtøkum felagsins, soleiðis at nevndarlimir frameftir verða valdir fyri 4 ár í senn.

Vónandi vinnur uppskotið frama, tí tá verður størri møguleiki fyri stabiliteti í tí arbeiði, sum skal fremjast innan FSF.

FSF hevur verið fyri stórum broytingum seinastu árini, og hevur nú tørv á konsoludering bæði á fíggjarliga og fyrisitingarliga økinum.

Tað er av sera stórum týdningi, at feløgini standa saman um FSF. Hetta gerst einans við at skapt verður álit millum partarnar, og at samskiftið verður so opið sum gjørligt.

Starvsnevndin hevur tí sett sær fyri at kunna neyvt um tað virksemi, sum gongur fyri seg innan FSF.

Ætlanin er eisini frameftir at skipa fyri tiltøkum, har kunnað verður um okkara virksemi. Eisini er neyðugt, FSF og feløgini møtast eftir tørvi, til tess at viðgera ávís evni, sum stinga seg upp.

Sum heild er starvsnevndin væl nøgd við virksemi seinasta ár, og skal eg tí egna vegna og vegna starvsnevndina takka fyri eitt avbera gott samstarv millum FSF og limir felagsins í farna ári.

## Endi
Eg fari at enda við at takka feløgunum, nevnd, starvsfólki, venjarum, tekniskum starvsfólki og øllum tykkum, sum á einhvønn hátt hava verið við til at stíga enn eitt stig fram á leiðini. Tøkk til stuðlar fyri týdningarmikið og gott samstarv.

Somuleiðis ein tøkk til fjølmiðlar og áskoðarar, sum á tykkara hátt eru við til at gera fótbólt til nakað serligt.

Eisini skal eg takka øllum, sum hava stuðlað Fótbóltssambandi Føroya í farna ári. Takk til Atlantic Airways og Adidas fyri stuðul til A-landsliðið. Eisini ein tøkk til Føroya Bjór, LÍV og ÍSF. Harafturat ein serstøk tøkk til Vodafone sum stuðlar .

Loksins vil eg takka øllum teimum nógvu, sum á ein ella annan hátt varða av føroyskum fótbólti, fyri hjálpsemi í 2010.

Takk fyri

**Christian F. Andreasen,**
forseti

Fundarstjórin spurdi um viðmerkngar vóru til frágreiðingina. Tað vóru tað ikki og staðfesti fundarstjórin at aðalfundurin hevði tikið frágreiðignina til eftirtektar.

Fundarstjórin gav síðani orðið til Mr. Liutauras Varanavičius, sum var her sum UEFA umboð.

Mr. Liutauras Varanavičius bar fram eina stutta heilsu, - hann var glaður fyri møguleikan at vera aftur her fyri sjeyndu ferð.

Hann gleddist um, at tað var komið gongd á HatTrick verkætlaninar hjá FSF. Somuleiðis gleddist hann um, at uppskot var frammi um, at broyta lógarverkið soleiðis, at forsetin og nevndarlimirnir verða valdir fyri eitt fýra ára skeið.

## 4. Framløga og góðkenning av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu

Jógvan Joensen frá Grannskoðaravirkinum Inpact legði fram grannskoðan roknskap.
(roknskapurin hjálagdur)
Fundarstjórin setti síðani roknskapin undir atkvøðugreiðslu og varð hann einmælt góðkendur.

## 5. Uppskot um at koyra lim úr FSF

Fótbóltsfelagið Ravnur FC varð upptikið sum limur í FSF á aðalfundinum í 2009, men teir hava ongantíð luttikið í kappingini. Tískil mælir starvsnevnd FSF´s til, smb. grein 15 stk1,c í lógunum fyri Fótbóltssamband Føroya, at Ravnur FC verður koyrt úr FSF.

Fundarstjórin setti uppskotið undir atkvøðugreiðslu og varð hetta einmælt samtykt.

## 6. Viðgerð av uppskotum frá Starvsnevndini

**a)Broytingar í viðtøkum FSF´s**

Grein 14.4 verður í broyttum líki flutt yvir í grein 21, sum nýggj stk 2. Í grein 21, verður orðingin "limafeløg hava eina atkvøðu í part" í grein 21 a) strikað – og verandi stk 2, 3, 4 verða stk. 3, 4, 5.
Nýggja grein 21, stk 2, verður soljóðandi:
2) Allir limir FSF's hava eina atkvøðu á aðalfundinum. Limir, sum tóku lut í virksemi hjá FSF í farna kappingarári, við í minsta lagi einum vaksnamannaliði (t.e. øll vaksnamannalið undantikið oldboys og oldgirls) og einum ungdómsliði (t.e. ikki vaksnamannalið og ikki oldboys og oldgirls), fáa eina atkvøðu afturat á aðalfundinum. Limur, sum ikki hevur síni fíggjarviðurskifti í lagi við FSF, missur atkvøðurættin á aðalfundinum, og umboð fyri felagið kunna ikki verða vald í nevndir v.m., til limurin aftur hevur uppfylt skyldur sínar í hesum sambandi.

Har limir í felags samstarvi við øllum virksemi sínum taka lut í virksemi hjá FSF, verða samstarvandi limirnir, í atkvøðuhøpi, at meta sum ein limur.

Róin Schrøter, formaður í Lógarnevndini, greiddi nærri frá uppskotinum og svaraði spurningum í tí sambandi.

Fundarstjórin setti síðani uppskotið undir atkvøðugreiðslu og varð hetta einmælt samtykt.

***Nýggja atkvøðuskipanin varð tikin nýtlsu, ta´hendan broytingin var framd***.
**Í grein 32, stk 3, verður talið "2" broytt til "4", og hendan skiftisreglan viðtikin**:

"Til starvsnevndarvalið 2011, verður viðtikið, at valskeiðið fyri teir starvsnevndarlimir og forsetan sum standa fyri vali 2012, verður longt við einum ári til 2013".

Róin Schrøter, formaður í Lógarnevndini, greiddi nærri frá uppskotinum og svaraði spurningum í tí sambandi.

Áðrenn fundarstjórin setti uppskotið undir atkvøðugreiðslu, so viðmerkti hann, at hetta uppskot ber í sær, at Christian Andreassen forseti við uppskotinum verður valdur til forseta fram til 2013 og er sama galdandi fyri nevndarlimirnar Róin Schrøter, Jákup Marin Joensen og Fríðin Ziskason.

Fundarstjórin setti síðani uppskotið undir atkvøðugreiðslu og varð hetta einmælt samtykt.

Í §32 stk. 2 og 3, verður orðið "varaforseti" strikað. Í § 32, stk. 2, verður hendan orðing skoytt upp í: "Starvsnevndin skipar seg annars við val av varaforseta og limum í ymsu undirnevndunum (sí § 39 í tí sambandinum)

**Í § 37 stk. 1, 2 og 3, verður broytt til hesa orðing:**

**Grein 37 Uppskot til forseta**
1 Forsetin verður valdur einsæris av aðalfundinum fyri eitt tíðarskeið uppá 4 ár. Valskeið hansara byrjar, tá aðalfundurin, ið hevur valt hann, er liðugur. Forsetin kann veljast aftur.

2 Til val av forseta skal ein vanligur meiriluti av gildugum atkvøðum vera fyri einum ávísum valevni. Eru fleiri enn 2 valevni, verður valevnið, ið fær lægsta tal av atkvøðum, koyrt úr í sambandi við seinni atkvøðugreiðslur, til bert 2 valevni eru eftir.
3 Bert limir í FSF kunnu seta fram uppskot um valevni til forseta. Limirnir skulu boða skrivstovu FSF's skrivliga frá navni á valevni til forseta í FSF í minsta lagi 10 dagar áðrenn aðalfundin.

Róin Schrøter, formaður í Lógarnevndini, greiddi nærri frá uppskotinum og svaraði spurningum í tí sambandi.

Áðrenn fundarstjórin setti uppskotið undir atkvøðugreiðslu, so viðmerkti hann, at møguliga vóru allar konsekvnesrættingar í lógunum hjá FSF ikki fingnar við í uppskotinum um at varaforsetin ikki skal veljast beinleiðis á aðalfundinum og skjeyt hann tí upp sum part av uppskotinum at ***aðalfundurin heimilar starvsnevndi at fremja neyðugar konsekvens rættingar í lógum FSF's í samband við at varaforsetin ikki verður valdur beinleiðis á aðalfundinum***

Fundarstjórin setti síðani uppskotið við hesum ískoyti undir atkvøðugreiðslu og varð hetta einmælt samtykt.

**Starvsnevndin setti niðanfyri nevnda uppskot fram:**

**Grein 39, stk 2 verður broytt við hesi orðing**
Fastar nevndir
2 Nevndarformenninir í føstu nevndunum skulu vera limir í starvsnevndini. Í fíggjarnevndini skal harafturat ein nevndarlimur vera úr Starvsnevndini. Nevndarlimirnir í føstu nevndunum verða útnevndir av starvsnevndini. Formenninir, varaformenninir og limirnir í føstu nevndunum skulu sita í 2 ár.

**Páll Gregersen setti broytingaruppskot fram:**
***Starvsnevndin velir undirnevndirnar. Í fíggjarnevndini er forsetin føddur formaður*.**

Fundarstjórin setti fyrst broytingaruppskotið undir atkvøðugreiðslu og varð hetta samtykt við 30 atkvøðum fyri .

Tá broytingaruppskotið soleiðis var samtykt, fall høvuðsupskot nevndarinnar burtur.

**b)Broytingar í Kappingarreglum FSF´s**

**KR, GREIN 7.**
Tey lið, sum aftan á kappingarárslok eru nr. 9 og 10 í Vodafonedeildini, flyta niður í 1. deild. Nr. 1 og 2 í 1. deild flyta upp í Vodafonedeildina. Eru hesi feløg frammanundan umboðað í Vodafonedeildini, verður nr. 3 at flyta upp. Er felagið frammanundan umboðað í Vodafonedeildini, verður eingin upp- ella niðurflyting hetta árið.
Stk. 2.
Tey lið, sum aftan á kappingarárslok eru nr. 9 og 10 í 1. deild, flyta niður í 2. deild. Nr. 1 og 2 í 2. deild flyta upp í 1. deild. Eru hesi feløg frammanundan umboðað í 1. deild, verður nr. 3 at flyta upp. Er felagið frammanundan umboðað í 1. deild, verður eingin upp- ella niðurflyting hetta árið.
Stk. 3.
Tey lið, sum aftan á kappingarárslok eru nr. 9 og 10 í 2. deild, flyta niður í 3. deild. Nr. 1 og 2 í 3. deild flyta upp í 2. deild. Eru hesi feløg frammanundan umboðað í 2. deild, verður nr. 3 at flyta upp. Er felagið frammanundan umboðað í 2. deild, verður eingin upp- ella niðurflyting hetta árið.
Stk. 4.
Feløg, ið flyta úr Vodfonedeildini niður í 1. deild og frammanundan eru umboðað í 1. deild, skulu flyta annað av liðunum niður í 2. deild, og skal tá eitt ella einki lið flyta niður í 2. deild hetta árið.
Stk. 5.
Feløg, ið flyta úr 1. deild niður í 2. deild og frammanundan eru umboðað í 2. deild, skulu flyta annað av liðunum niður í 3. deild, og skal tá eitt ella einki lið flyta niður í 3. deild hetta árið

**Alternativ 1 – broyting av verandi reglum:**
Har felag sambært omanfyri tilskilaða, eftir kappingarlok hevur lið ið er ávegis niður úr Vodafonedeildini, samstundis hevur lið sum er ávegis upp í Vodafonedeildina, verður niðurflyting úr Vodafonedeildini at fara fram, samstundis sum lið felagsins í 1. deild verða at flyta í 2. deild.

**Alternativ 2 – útgreining av verandi reglum:**
Har felag sambært omanfyri tilskilaða, eftir kappingarlok hevur lið ið er ávegis niður úr Vodafonedeildini, samstundis hevur lið sum er ávegis upp í Vodafonedeildina, varðveitur felagið umboðan í Vodafonedeildini og 1. deild.

Ivi varð sáddur hetta var rætt, tí man revsaði seriøsar leikarar/venjarar, um eitt annað lið flutti niður.

Undan atkvøðugreiðsluni varð skotið upp at skoyta hesa orðing uppí bæði alternativ 1 og 2 og varð tað gjørt:

"Um lið verður tikið úr kappingini, so skal tað metast sum niðurflyting."

Nevndu alternativ 1 og 2 vóru eisini galdandi í spurninginum um upp- og niðurrykking millum hinar deildirnar, nevniliga 1, 2 og 3 deild.

**Tað varð atkvøtt skrivliga, og atkvøddu 23 fyri alternativi 1, meðan 14 atkvøddu fyri alternativi 2, sostatt varð alternativ 1 samtykt.**

**c)Broytingar í Leikarareglugerðini**
Felag hevur rætt til fult gjald fyri venjing og útbúgving av leikara, um hann er undir 23 ár, tá hann fer sum yrkisleikari til annað felag, men um leikarin er fyltur 23 ár ella er eldri, so hevur felagið ikki rætt til nakað gjald.
Talan hevur verið um at broytt hesa reglur soleiðis, at ein niðurlaðing av gjaldinum fer fram soleiðis, at gjaldi minkar við einum triðingi trý tey fylgjandi árini soleiðis, at upp til 23 ára aldur er gjald samb. § 22, upp til 24 ár hevur felagið rætt til 2/3 av gjaldinum og upp til 25 ár hevur felagið rætt til 1/3 av gjaldinum. T.v.s. at um leikarin er fyltur 25 ár, hevur felagið ikki rætt til nakað gjald.
Útfrá hesum verður mælt til at broyta soleiðis:

**Kapitul 4 Endurgjald fyri venjing og útbúgving**

**§ 18 Endurgjald fyri venjing og útbúgving skal gjaldast.**
Tá leikari undir 23 ár (mælt broytt til 25 ár) undirskrivar sín fyrsta sáttmála sum yrkisleikari hevur felagið, sum leikarin fer frá og feløg, hann hevur leikt við áður, rætt til endurgjald eftir reglunum í hesum kapitul.
Hvørja ferð yrkisleikari undir 23 ár (mælt broytt til 25 ár) verður fluttur ella læntur út til annað felag, hevur felagið, sum leikarin fer frá, rætt til endurgjald eftir reglunum í hesum kapitli.

**§ 23.Útrokning av endurgjaldi**
Endurgjaldið verður við støði í grein 22 útroknað soleiðis:
a) Fyri árini, leikarin var 12 -15 ár, verður upphæddin roknað við at falda talið av árum við upphæddini, sum nevnd er í grein 22, stk. 1, litra 1.
b) Fyri árini, frá leikarin fyllir 16, fram til aldurin við sáttmálabyrjan verður upphæddin ásett við at falda árini við teirri upphædd, sum sambært grein 22 er galdandi fyri ta felag, leikarin verður fluttur til.
c) Um leikari er fyltur 23 ár, men ikki 24 ár, hevur felagið, leikarin fer frá, rætt til 2/3 av útroknaða endurgjaldinum.
d) Um leikari er fyltur 24 ár, men ikki 25 ár, hevur felagið, leikarin fer frá, rætt til 1/3 av útroknaða endurgjaldinum.

Ólavur Larsen vísti á, at leikarar, sum eru eldri enn 21, men yngri enn 23 eru læstir í skipanini, og vildi hava aðalfundin at broyta Grein soleiðis, at talið 21 varð hækkað til 23.
Fundarstjórin metti, at aðalfundurin kundi ikki viðgera málið, tí tað var ov stórt frávik frá uppruna uppskotinum og tí mátti metast sum eitt sjálvstøðugt uppskot, ið inn skuldi verið komið innan tær freistir ásettar eru fyri slíkum í Lógini fyri FSF. Uppskotið hjá Ólavi Larsen varð tí avvíst.

**Broytingarnar í leikarareglugerðini vórðu settar undir atkvøðugreiðslu og samtyktar við 30 atkvøðum fyri.**

## 7. Innkomin uppkot

**Uppskot 1 frá FC Suðuroy:**
***Skotið verður upp, at øll feløg fáa ferðaendurgjald hvørja ferð ferðast verður í.s.v. miðvikudystir, uttan at skula senda FSF umsókn. Ella í minsta lagi tey feløg, ið skulu ferðast við skipið yvir firðir til miðvikudystir.***

Forsetin mælti frá at samtykkja uppskotið, tí hetta er eitt umsitingar mál, og tað er eisini vandamikið at løggeva í kassan hjá FSF. Mælti hinvegin til, at nevndin tók málið upp til viðgerðar.

Fundarstjórin setti uppskotið undir atkvøðugreiðslu og fall hetta við 8 atkvøðum fyri og 16 ímóti

**Uppskot 2 frá FC Suðuroy:**
***Skotið verður upp, at feløg, sum eru komin illa fyri fíggjarliga / roknskaparliga ikki kunnu gera nýggjar leikararsáttmálar yvirhøvur, fyrr enn tey hava lagt fram ein nýggjan roknskap, ið vísur at nøktandi skil er komið á aftur roknskapin. Møguliga kundi eisini verið álagt hesum feløgum, at tey skulu minka um lønarútreiðslurnar beinanvegin.***

Forsetin vísti á, at loyvisumsitingin arbeiðir við málinum, og tað kann ikki skiljast frá har, tískil mælti hann FC Suðuroy at taka málið aftur.

Bjarni Johansen tók málið aftur vegna FC Suðuroy.

## 8. Val av óheftum grannskoðara

P/f Grannskoðaravirkið INPACT, Tórshavn

Grannskoðaravirkið INPACT einmælt afturvalt.

## 9. Val av 3 limum og 2 varalimum í Starvsnevndina

**Hesi uppskot vóru til starvsnevndarlimir – fyri 4 ár**
Niclas Davidsen
Jógvan Páll Joensen
Trygvi Mortensen
Heðin D. Poulsen
Karl Vidtfeldt

Atkvøtt varð skrivliga og gjørdist úrslitið hetta:

| | |
|---|---|
| Jógvan Páll Joensen fekk | 37 atkvøður |
| Heðin D. Poulsen fekk | 31 atkvøður |
| Trygvi Mortensen fekk | 29 atkvøður |
| Karl Vidfeldt fekk | 8 atkvøður |
| Niclas Davidsen fekk | 6 atkvøður |

**Sostatt vórðu Jógvan Páll Joensen, Heðin D. Poulsen og Trygvi Mortensen valdir**.

**Hesi uppskot vóru til varalimir – fyri 2 ár**
Kristian Dahl
Niclas Davidsen
Mortan Poulsen
Karl Vidtfeldt

Atkvøtt varð skrivliga og gjørdist úrslitið hetta:

| | |
|---|---|
| Karl Vidfeldt fekk | 22 atkvøður |
| Niclas Davidsen fekk | 22 atkvøður |
| Mortan Poulsen fekk | 17 atkvøður |
| Christian Dahl fekk | 13 atkvøður |

Sostatt vórðu Karl Vidtfeldt og Niclas Davidsen valdir.

Karl Vidfeldt varð við lutakasti valdur til 1. varalim**.**

## 10. Val av varaforseta
Tikið av skrá, tá lógarbroytingin um at varaforseti ikki skal veljast beinleiðis á aðalfundi varð viðtikin.

## 11. Val av limum í Aganevndina og Yvirkærunevndin

**<u>Aganevndin:</u>**
Uppskot til nevndarlim - fyri 2 ár
Ingun Eiriksdóttir Tekur við afturvali

Ingun Eiriksdóttir varð afturvald.

**<u>Yvirkærunevndin:</u>**
Uppskot til nevndarlim - fyri 2 ár
Høgni Høgnesen Tekur við afturvali

Høgni Høgnesen varð afturvaldur.

## 12. Upptøka av nýggjum limum
Fundarstjórin upplýsti, at EB/STREYMUR, hevur søkt um limaskap í FSF. Skrivarin kunnaði um, at Starvsnevnd FSF's mælir aðalfundinum til at samtykkja at taka nevnda felag upp sum lim í FSF.

Fundarstjórin setti uppskotið undir atkvøðugreiðslu og varð hetta einmælt samtykt.

## 13. Ymiskt

Orðið varð givið frítt.

Niclas Davidsen takkaði fyri tíðina, og ynskti nýggju nevndini góða eydnu.
Tummas Lervig takkaði fráfarandi nevndini vegna formansbólkin. Greiddi frá at hetta hevði verið ein trupul uppgáva, men nú var talvan rein, og so ynskti man at hyggja frameftir.

Forsetin fekk síðani orðið, og takkaði fyri ein góðan fund. Hann takkaði teimum sum fóru úr nevndini fyri gott arbeiði, og handaði teimum blómir. Somuleiðis ynskti hann nýggju limunum vælkomnar, og vónaði at fáa eitt gott samstarv.

Til seinast varð fyrsta ørindi av tjóðsanginum sungið.

Fundur lokin kl. 16.30

# Ársroknskapur 2010

FÓTBÓLTSSAMBAND FØROYA

ÁRSROKNSKAPUR

2010

AVRIT

K.NR. 401 FEBRUAR 2011

# INNIHALDSYVIRLIT


Síða

Upplýsingar um FSF ........ 2

Nýttur roknskaparháttur ........ 3 - 4

Leiðsluátekning ........ 5

Átekning frá óheftum grannskoðara ........ 6

Rakstrarroknskapur 2010 ........ 7

Fíggjarstøða pr. 31. desember 2010 ........ 8 - 9

Notur ........ 10 - 12

## UPPLÝSINGAR UM FSF

### FSF

| | |
|---|---|
| Navn: | Fótbóltssamband Føroya |
| Adressa: | Postboks 3028, Gundadalur, Tórshavn |
| Telefon: | 35 19 79 |
| Telefax: | 31 90 79 |
| T-postur: | fsf@football.fo |
| Heimasíða: | www.football.fo |

### NEVNDIN

Christian Andreasen, Tórshavn, forseti
Niklas á Líðarenda, Gøta, varaforseti
Fríðin Ziskason, Klaksvík
Niclas Davidsen, Toftir
Róin Schrøter, Hvalba
Jákup Martin Joensen, Tórshavn
Karl Vidtfeldt, Sandur

### DAGLIG UMSITING

Virgar Hvidbro, Tórshavn, aðalskrivari

### GRANNSKOÐAN

**Sp/f Grannskoðaravirkið *INPACT***
løggilt grannskoðaravirki
R. C. Effersøesgøta 26
Postrúm 191, FO-110 Tórshavn
Telefon: 31 47 00 - Telefax: 31 38 15
T-postur: inpact@inpact.fo
Heimasíða: www.inpact.fo

Ársroknskapurin 2010 er góðkend á ársaðalfundi, tann 26. februar 2011.

_________________
fundarstjóri

## Nýttur roknskaparháttur

Ársroknskapurin hjá Fótbóltssambandi Føroya fyri 2010 er uppsettur eftir roknskaparháttinum, ið er lýstur niðanfyri. Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur, í mun til undanfarna ár.

### Alment

Allar inntøkur verða førdar í rakstrarroknskapinum, so hvørt tær verða vunnar. Hetta er eisini galdandi fyri virðisbroytingar á fíggjarligum ognum og skyldum. Allur kostnaður, sum hoyrir árinum til, verður tikin við í rakstrarroknskapinum, eisini møguligar avskrivingar og niðurskrivingar.

## Rakstrarroknskapurin

### Inntøkur

Inntøkan er øll fakturerað og atgongumerkjasøla, har vøran ella tænastan er veitt keyparanum innan árslok. Meirvirðisgjald og veittur avsláttur eru drigin frá.

Stuðul og aðrar sáttmálatengdar inntøkur verða tiknar við og tíðargreinaðar, samsvarandi sáttmálainnihaldinum.

### Kostnaður

Rakstrarkostnaður fevnir um allan kostnað, sum knýtir seg til høvuðsraksturin hjá FSF.

### Fyrisitingarkostnaður

Fyrisitingarkostnaður fevnir um kostnað, sum knýtir seg til umsitingina av FSF, herundir avskrivingar v.m., sum ikki knýtir seg til høvuðsraksturin. Mvg-regulering svarar til tann partin av meirvirðisgjaldinum, sum FSF ikki fær endurrindað. Endurrindanin er bert lutvís.

### Starvsfólkakostnaður

Starvsfólkakostnaður fevnir um allan kostnað, sum stendst av at hava fólk í starvi. Tað er lønar- og eftirlønarkostnaður og øll sosial gjøld.

### Fíggjarpostar

Fíggjarligar inntøkur og kostnaður eru rentuinntøkur og –kostnaður, umframt ásannaðar og ikki-ásannaðar kursbroytingar viðvíkjandi áogn og skuld í fremmandum gjaldoyra.

## Fíggjarstøðan

### Materiell støðisogn

Materiell støðisogn verður tikin við til útveganarvirði, frádrigið akkumuleraðar avskrivingar.
Grundøkir verða ikki avskrivað.

Avskrivingarnar eru grundaðar á ætlaða nýtslutíð og verða gjørdar við eins stórum árligum prosentparti. Í ávísum føri verður eitt minstavirði (scrapvirði) ásett, sum ikki verður avskrivað niðurum.

Nýtslutíðin er ásett soleiðis:

| | |
|---|---|
| Bygningar | 25 ár |
| Rakstrargøgn | 5 ár |

Tá materiell støðisogn verður seld, verða vinningur ella hall gjørd upp sum munurin millum søluprís og niðurskrivaða virði á støðisognini, sum verða tikin við í rakstrarroknskapin.

**Vørugoymslur**
Vørur á goymslu verða virðisásettar til kostvirði eftir FIFO-háttinum. Um nettusøluvirðið er lægri, verður tað nýtt.

Kostvirðið á hjálpitilfari verður roknað sum útveganarvirði, saman við flutningsgjaldi.

**Áogn**
Áognin er tikin við til áljóðandi virði. Tapsvandi verður gjørdur upp eftir einstaklingameting og frádrigin í rakstrinum.

**Tíðaravmarkingar**
Tíðaravmarkingar undir ognini er goldin kostnaður, sum viðvíkur komandi ársroknskapum.

**Skuld**
Skuld verður tikin við til áljóðandi virði við árslok.

**Umrokning av útlendskum gjaldoyra**
Flytingar í útlendskum gjaldoyra eru í árinum roknaðar um til kursin tann dagin, flytingin er gjørd.

Áogn, skuld og aðrir postar í útlendskum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við árslok, verða roknaðir um til kursin við árslok.

Ásannaðir og ikki-ásannaðir gjaldoyrakursmunir eru við í rakstrinum undir fíggjarligum inntøkum ella fíggjarligum kostnaðum.

## Leidsluátekning

Nevndin hevur í dag viðgjørt og samtykt ársroknskapin fyri 2010 hjá Fótbóltssambandi Føroya.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi soleiðis, at ársroknskapurin gevur eina rætta mynd av ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni og rakstrarúrslitinum.

Ársroknskapurin fyri 2010 verður hervið lagdur fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Tórshavn, tann 14. februar 2011

Nevndin:

| | | |
|---|---|---|
| Christian Andreasen<br>forseti | Niklas á Líðarenda<br>varaforseti | Niclas Davidsen |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríðin Ziskason | Jákup Martin Joensen | Róin Schrøter | Karl Vidtfeldt |

## ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

**Átekning á ársroknskapin**
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Fótbóltssambandi Føroya fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2010 við leiðsluátekning, nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapin**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd. Henda ábyrgd ber í sær, at felagið støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

**Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans**
Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørd.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2010 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2010.

Tórshavn, tann 14. februar 2011

**Sp/f Grannskoðaravirkið *INPACT***
løggilt grannskoðaravirki

Jógvan Joensen
løggildur grannskoðari

## RAKSTRARROKNSKAPUR 2010

| | Nota | 2010 | t.kr. 2009 |
|---|---|---|---|
| Inntøkur | 1 | 29.213.025 | 26.798 |
| Kostnaður | 2,4 | -15.643.340 | -22.454 |
| **Úrslit áðrenn fyrisitingarkostnað** | | **13.569.685** | **4.344** |
| Fyrisitingarkostnaður | 3,4 | -10.628.201 | -10.646 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | | **2.941.483** | **-6.302** |
| Rentuinntøka v.m. | | 3.411 | 38 |
| Rentukostnaður v.m. | | -237.150 | -280 |
| **Ársúrslit** | | **2.707.744** | **-6.544** |

## FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

| OGN | Nota | 2010 | t.kr. 2009 |
|---|---|---|---|
| Bygningur við Tórsvøll | | 11.361.717 | 11.762 |
| Rakstrargøgn | | 782.642 | 1.143 |
| **Materiell støðisogn tilsamans** | 5 | **12.144.360** | **12.904** |
| **STØÐISOGN** | | **12.144.360** | **12.904** |
| Fótbóltslutir | | 295.100 | 255 |
| **Goymslur tilsamans** | | **295.100** | **255** |
| Skuldarar | | 3.942.003 | 4.948 |
| Meirvirðisgjald | | 402.390 | 679 |
| Millumrokning við nevnd og onnur | | 202.124 | 62 |
| **Áogn tilsamans** | | **4.546.517** | **5.689** |
| **Peningur tilsamans** | | **117.008** | **1.585** |
| **OGN Í UMFERÐ** | | **4.958.626** | **7.529** |
| **OGN TILSAMANS** | | **17.102.985** | **20.433** |

## FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

| SKYLDUR | Nota | 2010 | t.kr. 2009 |
|---|---|---|---|
| Eginogn | | 11.186.445 | 8.479 |
| **EGINOGN** | 6 | **11.186.445** | **8.479** |
| Rakstrarkredittur | | 2.680.558 | 3.091 |
| Sparkivallar-verkætlan: Tøk upphædd við árslok | | 240.000 | 420 |
| MAFF (Menning av Fótbóltsfeløgum) | | 490.328 | 451 |
| Ognarar | | 689.679 | 2.484 |
| Millumrokning við nevnd og onnur | | 32.477 | 145 |
| Bonus til A-Landsliðið, menn | | 1.783.498 | 5.184 |
| Onnur skuld | | 0 | 180 |
| **Stuttfreistað skuld tilsamans** | | **5.916.540** | **11.955** |
| **SKULD** | | **5.916.540** | **11.955** |
| **SKYLDUR TILSAMANS** | | **17.102.985** | **20.433** |

## NOTUR

| | 2010 | t.kr. 2009 |
|---|---|---|
| **Nota 1. Inntøkur** | | |
| Atgongumerkir | 535.784 | 663 |
| Luttøkugjald, kapping og skeið | 955.505 | 776 |
| Kærugjøld | 28.000 | 19 |
| Kappingarskipanin og lýsingar | 410.840 | 174 |
| Sendirættindi v.m. | 12.689.255 | 9.104 |
| Landskassastuðul | 154.589 | 1.198 |
| UEFA v.m. | 9.354.396 | 10.601 |
| FIFA | 2.867.801 | 1.313 |
| ÍSF - Ítróttarvedding v.m. | 750.000 | 758 |
| Dómarakonventiónin | 490.000 | 982 |
| Aðrar inntøkur | 976.854 | 1.210 |
| | **29.213.025** | **26.798** |

| | 2010 | 2009 |
|---|---|---|
| **Nota 2. Kostnaður** | | |
| *Landslið* | | |
| A-Landsliðið, menn | 7.082.001 | 12.597 |
| U-21 Landsliðið, menn | 861.623 | 2.240 |
| U-19 Landsliðið, menn | 700.615 | 668 |
| U-17 Landsliðið, menn | 1.109.508 | 1.144 |
| U-14 Landsliðið, menn | 322.638 | 342 |
| A-Landsliðið, kvinnur | 638.811 | 567 |
| U-19 Landsliðið, kvinnur | 557.802 | 605 |
| U-17 Landsliðið, kvinnur | 654.042 | 579 |
| *Nevndir* | | |
| Kappingarnevndin | 407.221 | 564 |
| Dómaranevndin | 1.390.404 | 1.322 |
| Útbúgvingarnevndin | 1.918.674 | 1.826 |
| | **15.643.340** | **22.454** |

| | 2010 | t.kr. 2009 |
|---|---|---|
| **Nota 3. Fyrisitingarkostnaður** | | |
| Lønir og samsýningar | 3.782.995 | 3.773 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld og eftirlønir | 731.967 | 927 |
| Skrivstovuhald | 347.749 | 475 |
| Telefon og internet | 319.632 | 343 |
| Ferðir og uppihald | 175.454 | 161 |
| Umboðan | 90.413 | 205 |
| Fundir | 822.643 | 997 |
| Strategist arbeiði | 178.486 | 172 |
| Stadionútbyggingar | 99.071 | 98 |
| Bilar | 76.355 | 87 |
| Húsið | 386.691 | 359 |
| Stuðul | 1.372.336 | 1.225 |
| Sakførarar, ráðgeving og grannskoðan | 269.469 | 453 |
| Regulering MVG | 500.116 | 195 |
| Avskrivingar | 1.037.365 | 959 |
| Annar kostnaður | 437.458 | 216 |
| | **10.628.201** | **10.646** |

| | | |
|---|---|---|
| **Nota 4. Starvsfólkakostnaður** | | |
| Fyrisitingarlønir og samsýningar | 3.782.995 | 3.773 |
| Aðrar samsýningar, venjarar, leikarar o.o. | 6.413.189 | 6.488 |
| Bonus til A-Landsliðið, menn | 0 | 5.436 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld og eftirlønir | 731.967 | 927 |
| | **10.928.152** | **16.624** |

| **Nota 5. Materiell støðisogn** | Bygningur | Rakstrargøgn |
|---|---|---|
| Sølda, við ársbyrjan | 17.261.717 | 4.566.218 |
| Tilgongd 2010 | 0 | 114.753 |
| **Útveganarvirði tilsamans** | **17.261.717** | **4.680.971** |
| Niðurskriving við ársbyrjan (Landskassastuðul) | -2.700.000 | 0 |
| Niðurskriving 2010 | 0 | 0 |
| **Niðurskrivingar tilsamans** | **-2.700.000** | **0** |
| Avskrivingar við ársbyrjan | -2.800.000 | -3.423.440 |
| Avskrivingar 2010 | -400.000 | -474.889 |
| **Av- og niðurskrivingar tilsamans** | **-5.900.000** | **-3.898.329** |
| **Bókført virði, pr. 31.12.2010** | **11.361.717** | **782.642** |
| **Bókført virði, pr. 31.12.2009** | **11.761.717** | **1.142.779** |

| **Nota 6. Eginogn** | 2010 | t.kr. 2009 |
|---|---|---|
| Flutt úrslit, undanfarin ár | 8.478.701 | 18.009 |
| Javning UEFA áogn | 0 | -2.987 |
| Ársúrslit | 2.707.744 | -6.544 |
| | **11.186.445** | **8.479** |

Javningin í UEFA-áognini stavar frá uppgerðini av millumverandi í 2007, tá eykagjald fyri 2007/2008 viðvíkjandi Hat Trick/Scoreboard varð innroknað við CHF 600 t.kr. Eftirfylgjandi er staðfest, at talan ikki var um eitt bindandi lyfti, og at peningurin verður ikki fluttur FSF.

Javningin hevur onga ávirkan á ársroknskapin fyri 2010.

# Kappingarreglur fyri fótbólt

## 1. Inngangur

**GREIN 1**
Allir dystir í føroysku lands- og steypakappingini verða leiktir eftir teimum reglum, ið hesar kappingarreglur áseta. Í tann mun hesar kappingarreglur onga áseting hava, eru tær til hvørja tíð galdandi alheimsreglur fyri fótbólt "Laws of the Game" og sum International FA Board/FIFA áseta galdandi.

**Stk. 2.**
Hægsta myndugleika í øllum fótbóltsviðurskiftum hevur Fótbóltssamband Føroya (F.S.F).

**Stk. 3.**
Kappingarnevndin ásetur nærri reglur fyri kappingarnar í 4. deild menn, Old Boys, kvinnulið sum leika á hálvum vølli og yngru deildirnar upp til og við unglingadeildina og gentudeildina. Hesar kappingarreglur, sum kunnu víkja frá hesum kappingarreglum, skulu lýsast av Kappingarnevndini í seinasta lagi ein mánaða áðrenn kappingarbyrjan.

**Stk. 4.**
Starvsnevnd FSF's kann taka avgerð um, at seta serligt navn og broyta heitið á teimum deildum, sum luttaka í lands –og steypakappingini, eitt nú í sambandi við stuðulsavtalur.

**Stk. 5.**
Kappingarnevndin tekur avgerð um allar spurningar í samband við lands- og steypakappingina, heruppií kappingarskrá og broytingar, ið møguliga verða í skránni.
Kappingarnevndin skal góðkenna øll almenn fótbóltstiltøk innan føroyskan fótbólt.

**Stk. 6.**
Loyvisgóðkenningin frá UEFA til feløgini, soleiðis sum hesi eru ásett í FSF-loyvishandbók, eru galdandi fyri Føroyar.

**GREIN 2**
Kappingarárið er frá 01. januar til 31. desember.

**GREIN 3**
F.S.F. hevur fyrsta rættin til nýtslu av vallunum, tá landskappingar- og steypadystir og aðrir dystir, skipaðir av Kappingarnevndini, verða leiktir.

**Stk. 2.**
Í sambandi við finaludystir í steypakappingini hevur F.S.F rættin til lýsingar við girðingina rundanum vøllin.

**Stk. 3.**
Feløgini skulu senda Kappingarnevndini váttan um, at tey hava nýtslurætt yvir vøllinum sum tey fráboða sum teirra heimavøll.

## 2. Skipan av kappingum

**GREIN 4.**
Landskappingin í fótbólti verður skipað soleiðis:

**A: Vaksnamannadeildin.**

| | |
|---|---|
| Vodafonedeildin, | 10 lið |
| 1. deild, | 10 lið |
| 2. deild, | 10 lið |
| 3. deild, | óavmarkað |

Fyri at luttaka í vaksnamannadeildini, skal leikari vera fyltur 16 ár.

**B: Kvinnudeildin**

| | |
|---|---|
| 1. deild, | 6 lið |
| 2. deild, | óavmarkað |

Fyri at kunna luttaka í kvinnudeildini, skal leikari vera fyltur 15 ár.
Kappingarnevndin kann gera frávik í tal av liðum í hvørjari deild og skipa fyri undankapping – og endaumfari.

**GREIN 5**
Í lands- og steypakappingum er leiktíðin henda:

| | |
|---|---|
| Vodafone., 1., 2. og 3. deild | 2 x 45 min. |
| Kvinnur 1. og 2. deild | 2 x 45 min. |

**Stk. 2.**
Stendur eftir vanliga leiktíð á jøvnum í finaludysti í landskappingini, verður farið til longda leiktíð, og er leiktíðin tá henda:

| | |
|---|---|
| Vodafonedeildin., 1., 2. og 3. deild | 2 x 15 min. |
| Kvinnudeildin | 2 x 15 min. |

**Stk. 3.**
Er kappingin skipað soleiðis at leikast skulu tveir finaludystir í lands- ella steypakapping, tveir fjórð- ella hálvfinaludystir í lands- ella steypakapping, tveir upp- og niðurflytingardystir í landskapping, og tað stendur framvegis á jøvnum, í stigum og málum, er vinnarin tann sum hevur skotið flest mál á útivølli. Stendur framvegis á jøvnum verður farið undir longda leiktíð, sum verður ásett samsvarandi stk. 2.

**Stk. 4.**
Er støðan framvegis javnleikur eftir longda leiktíð, verður sektarsparks-kapping, soleiðis at hvørt liðið fær 5 brotsspørk, sum fimm ymsir leikarar sparka. Gjørt verður av við lutakasti, hvat liðið skal byrja. Stendur framvegis á jøvnum, heldur sektarsparkskappingin fram, til vinnarin er funnin.

**Stk. 5.**
Burtursæð frá ásetingunum í stk. 3 og 4 verður raðfylgjan í lands- og steypakappingini funnin soleiðis:

a) Stendur á jøvnum í stigum, er samlaði málmunurin avgerðandi.
b) Stendur á jøvnum eftir a), er tað liðið fremst, sum hevur flest vunnin mál.
c) Stendur framvegis á jøvnum verður umdystur leiktur á uttanveltaðum vølli, um neyðugt við longdari leiktíð og brotssparkskapping.
d) Reglan undir punkt c) umfatar dystir:
    - sum geva heiðursmerki
    - atgongd til evropeiskar kappingar og
    - fyri at avgera upp- og niðurflytingar millum deildir

Í øðrum førum verður raðfylgjan av liðunum funnin við lutakasti.

**GREIN 6**
Vinnarar av føroysku landskappingini fáa hetta heitið:

| | |
|---|---|
| Vodafonedeildin | Føroyameistari |
| 1. deild | Vinnari í 1. deild |
| 2. deild | Vinnari í 2. deild |
| 3. deild | Vinnari í 3. deild |

Kvinnudeildin:

| | |
|---|---|
| 1. deild | Føroyameistari |
| 2. deild | Vinnari í 2. deild |

**GREIN 7**
Tey lið, sum aftan á kappingarárslok eru nr. 9 og 10 í Vodafonedeildini, flyta niður í 1. deild. Nr. 1 og 2 í 1. deild flyta upp í Vodafonedeildina. Eru hesi feløg frammanundan umboðað í Vodafonedeildini, verður nr. 3 at flyta upp. Er felagið frammanundan umboðað í Vodafonedeildini, verður eingin upp- ella niðurflyting hetta árið.

Har felag sambært omanfyri tilskilaða, eftir kappingarlok hevur lið ið er ávegis niður úr Vodafonedeildini, samstundis hevur lið sum er ávegis upp í Vodafonedeildina, verður niðurflyting úr Vodafonedeildini at fara fram, samstundis sum lið felagsins í 1. deild verða at flyta í 2. Deild

"Um lið verður tikið úr kappingini, so skal tað metast sum niðurflyting."

**Stk. 2.**
Tey lið, sum aftan á kappingarárslok eru nr. 9 og 10 í 1. deild, flyta niður í 2. deild. Nr. 1 og 2 í 2. deild flyta upp í 1. deild. Eru hesi feløg frammanundan umboðað í 1. deild, verður nr. 3 at flyta upp. Er felagið frammanundan umboðað í 1. deild, verður eingin upp- ella niðurflyting hetta árið.
Har felag sambært omanfyri tilskilaða, eftir kappingarlok hevur lið ið er ávegis niður úr 1.deild, samstundis hevur lið sum er ávegis upp í 1.deild, verður niðurflyting úr 1.deild at fara fram, samstundis sum lið felagsins í 2. deild verða at flyta í 3. Deild

"Um lið verður tikið úr kappingini, so skal tað metast sum niðurflyting."

**Stk. 3.**
Tey lið, sum aftan á kappingarárslok eru nr. 9 og 10 í 2. deild, flyta niður í 3. deild. Nr. 1 og 2 í 3. deild flyta upp í 2. deild. Eru hesi feløg frammanundan umboðað í 2. deild, verður nr. 3 at flyta upp. Er felagið frammanundan umboðað í 2. deild, verður eingin upp- ella niðurflyting hetta árið.
Har felag sambært omanfyri tilskilaða, eftir kappingarlok hevur lið ið er ávegis niður úr 2.deild, samstundis hevur lið sum er ávegis upp í 2.deild, verður niðurflyting úr 2.deild at fara fram, samstundis sum lið felagsins í 3. deild heldur fram í 3. Deild

"Um lið verður tikið úr kappingini, so skal tað metast sum niðurflyting."

**Stk. 4.**
Feløg, ið flyta úr Vordfonedeildini niður í 1. deild og frammanundan eru umboðað í 1. deild, skulu flyta annað av liðunum niður í 2. deild, og skal tá eitt ella einki lið flyta niður í 2. deild hetta árið.

**Stk. 5.**
Feløg, ið flyta úr 1. deild niður í 2. deild og frammanundan eru umboðað í 2. deild, skulu flyta annað av liðunum niður í 3. deild, og skal tá eitt ella einki lið flyta niður í 3. deild hetta árið

**GREIN 8**
Leikari, sum hevur luttikið í landskappingini í eini deild, kann ikki luttaka í landskappingardysti í eini lægri deild, uttan at felag hansara í millumbilinum ella sama dag, hevur leikt landskappingardyst- ella steypadyst, sum hesin ikki luttók í, í hægru deildini, hóast viðkomandi leikari lógliga kundi luttaka. Tá felag leikar í fleiri deildum, roknast hægsta deildin at hava leikt fyrst.

**Stk. 2.**
Leikari sum ikki er fyltur 21 ár 1. januar í kappingarárinum, men sum lýkur treytirnar fyri at luttaka í vaksnamannadeildini, kann leika tveir dystir sama leikdag. Víst verður annars til grein 9

**Stk. 3.**
Leikari í dreingjadeildini, ið lýkur treytirnar fyri at luttaka í unglinga- ella vaksnamannadeildini, kann leika tveir dystir sama leikdag. Tó er ikki loyvt dreingi at leika tveir dystir í unglinga- og ella vaksnamannadeildini sama leikdag.

**Stk. 4.**
Luttekur felag við meira enn einum liði í somu deild, verður flyting av leikara at fara fram á sama hátt sum millum hægri og lægri deild. Liðini skulu tá nevnast í bókstavarøð, soleiðis at A-liðið verður at rokna sum tann hægra deildin og B-liðið sum tann lægra deildin, og verður hildið soleiðis fram alt eftir, hvussu nógv lið luttaka í somu deild.

**Stk. 5.**
Ásetingarnar í hesi grein fevna eisini um eykaleikara, sum kemur inn í dysti.

**Stk. 6.**
Tað er bert loyvt leikara at leika ein dyst hvønn leikdag, sí tó stk. 2 og 3. Tó er loyvt málmanni í lægri vaksnamannadeild, at verða eykamálmaður í hægri vaksnamannadeild sama leikdag.

**Stk. 7.**
Fríggjadagur, leygardagur, sunnudagur og mánadagur verða roknaðir sum ein leikdagur.

**GREIN 9**
Leikari kann ikki flyta frá hægri til lægri deild, eftir at fjórðseinasti dystur er leiktur í lægri deildini. Hetta umfatar eisini leikarar, sum koma undir grein 8, stk. 2. Tó er loyvt leikara, sum í kappingarárinum hevur leikt í mesta lagi 3 dystir í hægri deildini, at flyta niður í lægri deildina í hesum dystum samsvarandi ásetingunum í grein 8.

**GREIN 10**
Eingin landskappingar- ella steypadystur má verða leiktur undir almennari guðstænastu, og um møguligt heldur ikki byrja fyrr enn ein tíma aftaná at slík guðstænasta er lokin.

**3. Luttøka í lands- og steypakappingum**
**GREIN 11**
Kappingarnevndin ásetur gjøllari reglur viðvíkjandi tilmelding til luttøku í lands- og steypakappingunum.

**Stk. 2.**
Tá feløgini hava boðað frá luttøku, leggur Kappingarnevndin kappingina til rættis.
**Stk. 3.**
Luttøkugjaldið fyri hvørt luttakandi liðið verður ásett av Starvsnevnd FSF's.

**Stk. 4.**
Luttøkugjaldið skal vera skrivstovu F.S.F.'s í hendi ein mánað áðrenn kappingin byrjar, og felag sleppur ikki at luttaka í kappingini, fyrr enn peningurin er goldin.

**GREIN 12**
Kappingarnevndin kann loyva felagi at taka lið úr kappingini. Umsókn um hetta skal sendast skrivliga til skrivstovu FSF's. . Góðtekur Kappingarnevndin umsóknina, verða stig og mál strikað, um helvtin av leikumførunum ella færri eru leikt. Eru fleiri enn helvtin av leikumførunum leikt, verða stig og mál standandi og eftirfylgjandi dystir verða taptir 0-3.

**Stk. 2.**
Møtir lið uttan haldgóða orsøk ikki til ein ella fleiri dystir í lands- og steypakappingini, kann liðið verða koyrt úr kappingini. Kappingarnevndin ger úrskurð um, hvørjar avleiðingar tað skal hava fyri viðkomandi felag, herundir um viðkomandi felag kemur undir sekt og hvørjar avmarkingar skulu verða galdandi fyri luttøku hjá viðkomandi felag í komandi kappingarári. Eru helvtin ella færri leikumfør leikt verða stig og mál strikað. Eru fleiri enn helvtin av leikumførunum leikt, verða stig og mál standandi og eftirfylgjandi dystir verða taptir 0-3.

**4. Loyvisgóðkenning**
**GREIN 13**
Felag, sum sambært teimum reglum, sum eru ásettar sambært grein 1 stk. 6, fær noktað luttøkuloyvi í Vodafone, verður flutt niður í 1. deild.

**Stk. 2**
Um felag verður flutt niður í 1. deild, sambært stk. 1, verður næstniðasta niðurflytingin úr Vodafonedeildini frá árinum fyri, strikað. Verða tvey lið flutt niður í 1. deild, sambært stk. 1, verður øll niðurflytingin úr Vodafonedeildini árið fyri strikað. Verða fleiri enn eitt felag flutt niður í 1. deild, flytur tað felagið upp, sum árið fyri gjørdist ovast í 1. deild eftir at uppflyting var farin fram o.s.v.
Er felag frammanundan umboðað í Vodafonedeildini, verður nr. 2 ella 3, o.s.v. at flyta upp í staðin.

**Stk. 3**
Felag, ið verður flutt niður í 1. deild, sambært stk. 1, og sum frammanundan er umboðað í 1. deild flytur annað av liðunum niður í 2. deild. Er felagið frammanundan umboðað í 2. deild flytur annað av liðunum niður í 3. deild.

**Stk. 4**
Liðið sum flytur upp í Vodafonedeildina skal lúka treytirnar fyri at luttaka í 1. deild.

**Stk. 5**
Felag, sum sambært teimum reglum, sum eru ásettar sambært grein 1 stk. 6, fær noktað luttøkuloyvi í 1. deild, verður flutt niður í 2. deild.

**Stk. 6**
Um felag verður flutt niður í 2. deild, sambært stk. 5, verður niðurflytingin úr 1. deild frá árinum fyri, strikað. Verða fleiri enn eitt felag flutt niður í 2. deild, flytur tað felagið upp, sum árið fyri gjørdist ovast í 2. deild eftir at uppflyting var farin fram o.s.v.
Er felag frammanundan umboðað í 1. deild, verður nr. 2 ella 3, o.s.v. at flyta upp í staðin.

**Stk. 7**
Felag, ið verður flutt niður í 2. deild, sambært stk. 5, og sum frammanundan er umboðað í 2. deild flytur annað av liðunum niður í 3. deild.

**Stk. 8**
Liðið sum flytur upp í 1. deild skal lúka treytirnar fyri at luttaka í 1. deild.

**GREIN 14**
Um limafelag hjá FSF, ella onnur løgfrøðislig eind sum rekur virksemið fyri viðkomandi felag, boðar skiftirættinum frá gjaldssteðgi ella letur skiftirættinum áheitan um trotabúgvaviðgerð sambært konkurslógini, verður fremsta mansliðið hjá viðkomandi felag trekt við 3 stigum. Frátøkan av stigum fær virkna frá 1. leikumfari aftaná at fráboðanin er innlatin til skiftirættin. Verður fráboðan um gjaldssteðg ella áheitanin um konkurs latin skiftirættinum millum tvey kappingarár, byrjar liðið við minus 3 stigum.

Stk. 2
Staðfestur skiftirætturin samsvarandi konkurslógini eina tvangsakkord fyri eitt limafelag, ella aðra løgfrøðisliga eind, sum rekur virksemið fyri viðkomandi felag, verður fremsta mansliðið hjá viðkomandi felag trekt við 6 stigum við virkna frá 1. leikumfari aftaná avgerðina hjá skiftirættinum. Verður tvansakkordin staðfest millum tvey kappingarár, byrjar liðið við minus 6 stigum.

Stk. 3
Um skiftirætturin tekur avgerð um trotabúgvaviðgerð yvir eitt limafelag hjá FSF ella aðra løgfrøðisliga eind, sum rekur virksemið fyri viðkomandi felag, verður fremsta mansliðið hjá felagnum flutt 2 deildir niður í mun til tað støðu, sum vildi verið úrslitið, um sæð verður burtur frá virknaðinum av hesi reglu. og møguligum øðrum serstøkum flytingum.

1. Um limafelag við sáttmálum verður rakt av trotabúgvaviðerð verður fremsta mansliðið beinvegin koyrt úr kappingini, Úrslit sum liðið hevur fingið, verða standandi, meðan dystir sum eftir eru at leika verða stigaroknaðir við málmuninum 3-0 til mótstøðuliðið.
2. Um viðkomandi felag luttekur í steypakappingini, verður liðið eisini koyrt úr hesi kapping, alt við somu avleiðing sum nevnd undir litra 1).
3. Verður trotabúgvaviðgerð staðfest millum tvey kappingarár, verður niðurflytingin framd frá teirru støðu sum felagið hevði leikt seg til við endan av seinasta kappingarári.
4. Niðurflyting og møgulig úrkoyring úr steypakappingini fer fram, sjálvt um konkursbúgvið roynur at reka virksemið hjá felagnum fyribils víðari, ella um ítróttarliga virksemið hjá trotabúnum verður yvirtikið av eini aðrari løgfrøðisligari eind, uttan at viðkomandi løgfrøðisliga eind eisini yvirtekur skuldina hjá konkursrakta felagnum.

Stk. 4
Tá skriftirætturin hevur tikið avgerð um konkurs, missur limafelagið av sær sjálvum rættin til at styrkja seg við leikarum. Felagið ella onnur løgfrøðislig eind, sum rekur part av virkseminum fyri felagið, sum er rakt av húsagangi, (eisini møguligur eftirkomari sambært stk. 3, litra 4, sum bara yvirtekur og víðariførir fótbóltsvirksemi hjá konkursrakta limafelagnum og ikki eisini yvirtekur skuldina) kann í fyrsta lagi fáa loyvi at styrkja seg við leikarum, tá eitt ár er umliðið frá endanum av tí árinum, tá húsagangurin varð staðfestur.

Stk. 5
Starvsnevnd FSF's kann takað avgerð um, at tað heilt ella partvíst kann síggjast burtur frá ávirkanini av konkursinum sum nevndar eru í stk. 2 og stk. 3, um trotabúgvaviðgerðin verður tikin aftur áðrenn 30. mars, rokna frá at konkursi er staðfest aftaná 15. oktobur árið frammanundan.

Stk. 6.
Í sambandi við frátøku av stigum, niðurflyting eins og møguliga úrkoyring úr steypakappingini hjá limafelag samsvarandi stk. 1 til 5, sum møguliga luttekur í fleiri deildum, kann Starvsnevnd FSF eftir eini ítøkiligari meting taka avgerð um, hvørjar deildir skulu verða raktar av ásetingunum í hesum reglum.

Stk. 7.
Ásetingarnar í stk. 1 - 6 eru eisini galdandi fyri aðrar løgfrøðisligar eindir, sum reka virksemiðð fyri eitt limafelag hjá FSF.

Stk. 8.
Um so er at limafelag hjá FSF fráboðaar gjaldssteðg til skiftirættin ella biður skiftirættin um trotabúgvaviðgerð skal hetta samstundis fráboðast FSF. Verður eitt akkorduppskot staðfest av skiftirættinum sum nevnt undir stk. 2 staðfest, ella tekur skiftirætturin avgerð um konkurs sambært stk. 3 skal eisini hetta beinanvegin fráboðast FSF.

**5. Loyvisbrøv v.m.**
**GREIN 15**
Fyri at leikari kann luttaka í lands- og steypakappingini, skal leikari uppfylla hesar treytir:

a) Leikari, sum av fyrstan tí byrjar at leika fótbólt fyri ávíst felag, skal av viðkomandi felag tilmeldast leikaraskráseting FSF's. Tá skrivstova FSF's hevur skrásett leikaran í leikaraskráseting FSF's, er leikarin at meta sum lógligur leikari hjá viðkomandi upprunafelag til upprunafelagið leysgevur leikaran til annað felag.

b) Um leikari flytir frá einum felag til annað ella kemur úr útlandinum til Føroya, skal viðkomandi felag hava loyvisbræv frá Kappingarnevndini at nýta leikaran.

**Stk. 2.**
Feløgini hava ábyrgdina av, saman við tilmelding av liðum, á hvørjum ári at leggja við dagførdan leikaralista fyri allar deildir, tilmeldingin fevnir um, til leikaraskráseting FSF's við upplýsingum um navn, bústað og føðingardag.

Skrivstova FSF's skrásetur leikarar og útflýggjar loyvisbrøv sambært ásetingunum í stk. 1.

**Stk. 3.**
Tá leikari er skrásettur í leikaraskráseting FSF's sambært stk. 1 a) ella felag hevur fingið útskrivað loyvisbræv frá skrivstovu FSF's sambært stk. 1 b) , er hann at meta sum lógligur leikari.

**GREIN 16**
Skráseting og loyvisbræv er í gildi, til felag gevur Kappingarnevndini skrivliga fráboðan um, at viðkomandi leikari ikki longur leikar fyri felagið.

**GREIN 17**
Felag sum skal hava ein leikara frá øðrum føroyskum felag, skal senda skrivstovu FSF's umsókn um loyvisbræv til leikaran. Meginskjalið "LOYVISBRÆV til flytan av leikara millum feløg" skal nýtast. Skjalið verður undirskrivað av nýggja felagnum, leysgevandi felagnum og leikaranum ella, um hann er ómyndugur, av verja hjá viðkomandi leikara.

**Stk. 2.**
Kappingarnevndin kann áseta í kunngerð, nærri reglur um innlatan av umsókn og frávik hesum viðvíkjandi.

**Stk. 3.**
Flyting av áhugaleikara kann fara fram alt árið. Leikari skal tó hava havt leikaraloyvi fyri eitt felag í minsta lagi 30 dagar, áðrenn nýggj flyting kann fara fram. Tó kunnu flytingar ongantíð fara fram seinastu 3 leikumførini av kappingini

Flytingar av yskisleikarum kunnu einans fara fram samsvarandi kunngerð um flytingarglugga sambært stk. 4

Starvsnevnd FSF's kann í serligari reglugerð áseta reglur um sáttmálaviðurskifti millum feløg og leikara og í hesari reglugerð áseta nærri reglur um flyting av leikarum og hvussu samskiftið skal fara fram millum leikara og feløg í samband við flyting av leikarum og hvør samsýning skal rindast í hesum sambandi.

Stk. 4.
Kappingarnevndin ásetur í kunngerð, útgivin á hvørjum ári, dagfestingarnar fyri nær flyting av yrkisleikara er loyvd. Henda regla fevnir um allar yrkisleikarar sum hava rætt til luttøku í vaksnamannadeildini, sambært grein 4 í kappingarreglunum.

**Stk. 5.**
Kappingarnevndin kann í heilt serligum førum loyva frávik frá stk. 3, tá talan er um flyting av málmonnum ella sáttmálabundnum leikarum,

hvørs felag er farið á húsagang ella missir luttøkuloyvi. Somuleiðis kann Kappingarnevndin sambært rundskriv frítaka ávísar deildir frá hesum reglum.

**Stk. 6**
Feløg kunnu gera avtalu um leigu av leikara til annað felag, uttan at møguligur leikarasáttmáli nýtist at fara úr gildi. Slík avtala má ikki stríða ímóti ásetingunum í stk. 3 ella øðrum ásetingum givnar við heimild í hesi reglu og skal góðkennast sambært grein 17 stk. 5.

**GREIN 18**
Felagið, leikari hevur leikað fyri, kann nokta leikara at flyta til annað felag sama kappingarár, um so er, at felagið metir, at peningalig ella onnur felagslig áhugamál binda leikaran.

**Stk. 2.**
Felagið, sum noktar leikara at flyta sambært grein 18, stk. 1, skal lata sítt mótmæli til Aganevndina, sum síðan ger úrskurð í málinum. Í mótmælinum skal grundgevast fyri, hví felagið noktar leikaranum at flyta. Mótmælið skal vera Aganevndini í hendi í seinasta lagi 8 dagar aftaná at umbønin um flyting er komin felagnum í hendi.

**Stk. 3.**
Um felag noktar leikara at leika fyri annað felag, kann leikari kæra til Aganevndina, sum ger úrskurð í málinum.

**Stk. 4.**
Starvsnevnd FSF's ásetur í reglugerð nærri treytir um góðkenning av leikaraavtalum og kann somuleiðis við reglugerð áseta nærri treytir viðvíkjandi flyting av áhugaleikarum frá einum felagi til annað, herundir áseta tey gjøld sum skulu gjaldast í sambandi við flytingina.

**Stk. 5.**
Avtalur millum leikara og felag skulu altíð góðkennast av Lógar- og Sáttmálanevndini. Ikki góðkendar avtalur hava einki gildi.

**6. Útlendskir leikarar**
**GREIN 19**
Fyri at nýta útlendskan leikara skal viðkomandi felag hava loyvisbræv at nýta viðkomandi leikara í føroysku lands- og steypakappingini.

**Stk. 2.**
Feløg kunna bert fáa loyvisbræv til útlendskar leikarar og føroyskur avtaluleikarar sum búgva uttanlands til at leika í kappingini í Vodafonedeildini, 1., 2., og 3. deild menn og 1. deild kvinnur fyri kappingarárið, um umsókn um hetta verður latin skrivstovu FSF's innanfyri teir tíðarkarmar sum verða settir av Kappingarnevndini sambært grein 17 stk. 4.
Í umsóknini skal upplýsast navn, føðidagur og bústaður hjá leikaranum og navn og bústaður á útlendska felagnum hann leikar fyri. , Víst verður somuleiðis til stk. 3. Somuleiðis skal váttan frá føroyska fólkayvirlitinum fyriliggja á skrivstovu FSF um, at leikarin er skrásettur í fólkayvirlitinum sum fluttur til Føroya.
Í hinum deildunum kann felag fáa loyvisbræv til útlendskan leikara, tá viðkomandi leikari er skrásettur í fólkayvirlitinum sum fluttur til Føroyar.

**Stk. 3.**
Feløg kunna bert fáa loyvisbræv viðvíkjandi útlendskum leikara um váttan frá útlendska Fótbóltssambandinum fyriliggur um at viðkomandi leikari er leysgivin til Føroyar.

**Stk. 4.**
Lið, ið luttekur í føroysku lands- og steypakappingini, hevur loyvi til at nýta í mesta lagi 4 útlendskar leikarar í einum dysti.

**GREIN 20**
Sum útlendskur leikari verður roknaður persónur, ið ikki hevur fast tilknýti til Føroyar, og sum ikki hevur havt fastan bústað í Føroyum seinastu 3 árini frammanundan, at umsókn um loyvisbræv verður latin skrivstovu FSF's.

Útlendskur leikari, sum burturav hevur havt spæliloyvi at leika í Føroyum í minsta lagi í 3 fylgjandi kappingarár, og sum hereftir 4. kappingarárið á rað søkjur um spæliloyvi, kemur ikki undir reglurnar um útlendskar leikarar.

**Stk. 2.**
Føroyingur, sum hevur fastan bústað uttanlands, kann fáa loyvisbræv til at leika í Føroyum, tá váttan sambært grein 18, stk. 3 fyriliggur.

**7. Vøllurin**
**GREIN 21.**
Øll ítróttarøki, ið verða nýtt í føroysku lands- og steypakappingini, skulu vera góðkend av Kappingarnevndini og taka atlit til Loyvisgóðkenningina hjá UEFA.

**Stk. 2.**
Kappingarnevndin ásetur nærri reglur um ítróttarøkir, men kann undir serligum umstøðum gera frávik, men skal somuleiðis taka atlit til Loyvisgóðkenningina hjá UEFA..

**8. Dómarar og hjálpardómarar**
**GREIN 22**
Feløgini hava ábyrgd av tilgongd av dómarum og hjálpardómarum og at hesir taka neyðug prógv.

**Stk 2.**
Dómaranevndin ásetur, hvussu nógvar dómarar og hjálpardómarar ymsu feløgini í minsta lagi skulu tilmelda.

**GREIN 23**
Dómaranevndin hevur hægsta myndugleika í øllum spurningum um góðkenning av dómarum og hjálpardómarum.

**Stk. 2.**
Starvsnevnd FSF's velur dómaranevndina.

**GREIN 24**
Tað felag sum hevur heimavøll hevur ábyrgdina av vælferð dómaranna og hjálpardómaranna bæði undan, undir og eftir dystin.

**Stk. 2.**
Felagið skal ansa eftir, at eingin áskoðari órógvar ella sýnir óhøviskan atburð móti dómara, hjálpardómara ella leikara.

**Stk. 3.**
Tá ið dystur verður leiktur, má eingin koma inn á vøllin uttan við serligum loyvi frá dómaranum.

**GREIN 25**
Dómaraumtitingin setur dómarar og hjálpardómarar til dystir í Vodafonedeildini, 1. og 2. deild, unglingadeildini og 1. deild kvinnur, sambært ásetingunum í grein 43 í lógum FSF's. Í øðrum deildum setur heimafelagið dómarar og hjálpardómarar, ið skulu verða góðkendir av Dómaranevndini, at døma dystin.

**GREIN 26**
Starvsnevndin ásetur samsýningina til dómarar, hjálpardómarar og eygleiðarar, ið verða útnevndir.

**Stk. 2.**
FSF rindar í fyrsta umfari samsýningina til teir dómarar, sum verða settir at døma av Dómaranevndini. Feløgini endurrinda FSF fyri dómarasamsýningina Verður gist rindar F.S.F fyri gisting eftir nærri avtalu millum dómaratríbólkin og Dómaranevndina.

**GREIN 27**
Møtir dómarin ikki upp til ásettan dyst í Vodafone., 1., 2. deild, unglingadeildina og 1. deild kvinnur, ásetur Kappingarnevndin nýggjan dyst.

**Stk. 2.**
Kappingarnevndini ger úrskurð um, hvørja avleiðing vantandi uppmøting skal hava fyri dómara og tað felag, hann umboðar.

**Stk. 3.**
Í hinum deildunum ásetur heimafelagið nýggjan dyst um dómarin ikki er møttur. Fráboðan um hetta skal beinanvegin gevast Kappingarnevndini, sum undir serligum umstøðum kann nokta at flyta dystin sum annars ásett av heimafelagnum.

**9. Dómaraseðilin**
**GREIN 28**
Kappingarnevndin ásetur nærri reglur um dómaraseðilin, hvat innihald hann skal hava, og hvussu hann skal undirskrivast. Seðilin skal handast dómaranum, áðrenn dystur byrjar. Á dómaraseðlinum skulu standa allir leikararnir, tó í mesta lagi 16 leikarar fyri hvørt felag.

**Stk. 2.**
Dómaraseðilin skal góðkennast av Kappingarnevndini, sum somuleiðis kann áseta reglur um hvørji fylgiskjøl skulu vera til dómaraseðilin viðvíkjandi upplýsingum um navn á leiðarum, venjarum, og onnur ábyrgdarfólkum, sum hava samband við dystin.

**Stk. 3.**
Eftir leikbyrjan er bert loyvt at seta skotin mál, úrslit, skiftingar, ávaringar, útvísingar, viðmerkingar og undirskrift dómarans á dómaraseðilin.

**Stk. 4.**
Dómaraseðilin skal av dómaranum sendast til skrivstovu FSF's í seinasta lagi 2 dagar eftir dystin.

**Stk. 5.**
Dómaraseðilin verður fyltur út undir ábyrgd av navngivnum ábyrgdarfólki og dómara. Ábyrgdarfólkið skrivar undir, meðan dómarin er hjástaddur.

**Stk. 6.**
Kæra um, at skeivleiki møguliga er á dómaraseðilinum, skal vera skrivstovu FSF's í hendi seinast 2 dagar eftir, at dystur er leiktur.

**10. Bólturin**
**GREIN 29**
Kappingarnevndin ásetur í reglugerð støddina á bólti, sum skal nýtast í ymsu deildunum. Tað liðið, sum leikar á heimavølli, skal útvega bólt og tiltaksbóltar.

**11. Búnar**
**GREIN 30**
Hvørt liðið skal hava serligan búna. Eru búnarnir so líkir, at dómarin heldur tað vera ringt at skilja teirra millum, skal útiliðið skifta búna. Leika bæði liðini á útivølli, skal tað liðið, ið er síðst nevnt skifta búna.

**Stk. 2.**
Dómari og hjálpardómarar skulu vera í búna, sum líkist frá búnum leikaranna.

**Stk. 3.**
Hvør leikari skal hava nummar á rygginum, og skal hetta í hædd ikki vera lægri enn 25 cm.

**Stk. 4.**
Um leik- ella venjingarbúni hevur lýsing, skulu hesar lúka treytir, Starvsnevnd FSF's ásetir í reglugerð. Tað er ikki loyvt dómara ella hjálpardómara at hava lýsing á dómarabúnum teirra, uttan at hetta er góðkent av Dómaranevndini frammanundan.

**12. Heimavøllur - útivøllur**
**GREIN 31**
Í lands- og steypakappingini hevur fyrst úttikna liðið heimavøll.

**Stk. 2.**
Møtast tvey lið í lands- og steypakappingini, og leiktur verður ein hálvfinalu- ella finaludystur, har annað hevur vunnið á heimavølli og hitt á útivølli, eigur tað liðið heimavøll, ið hevur vunnið á útivølli.

**Stk. 3.**
Um bæði liðini hava vunnið á heimavølli ella útivølli, verður lutakast og eigur fyrst úttikna liðið heimavøll.

**13. Dysturin**
**GREIN 32**
Eingin dystur má byrja við færri enn 7 leikarum á hvørjum liði. Eru liðini ikki fullmannað 15. min. aftaná leikbyrjan, kann dómarin slíta dystin.

**Stk. 2**
Um dysturin verður slitin, skal dómarin beinanvegin geva skrivstovu FSF's skrivliga fráboðan um hetta. Kappingarnevndin ger úrskurð í málinum og kann avgera, at tað liðið, ið ikki var fullmannað, skal tapa dystin.

**GREIN 33**
Dystur í lands- og steypakappingini skulu verða avgreiddir samsvarandi hesum kappingarreglum og ta til hvørja tíð galdandi STEVNU sum F.S.F. ásetur og sum verður lýst í seinasta lagi ein mánaða áðrenn kappingarbyrjan.

**Stk. 2.**
Heimafelagið skal seta seg í samband við tann tilnevnda dómaran og við útiliðið í seinasta lagi 3 dagar undan dystinum og upplýsa, hvønn klokkutíma, dysturin skal leikast, og annars skal

heimafelagið tryggja sær, at alt er í lagi til dystin.

**GREIN 34**
Dómarin kannar eisini eftir, um alt er í lagi, áðrenn dystur byrjar.

**Stk. 2.**
Um dómarin heldur, at vøllurin er í slíkum standi, at at tað kann vera vandamikið at leika á honum, kann hann gera av, at dysturin ikki skal verða leiktur. Dómarin kann, í samráð við liðskipara, steðga dysti, ið verður leiktur, orsakað av vánaligum líkindum. Dysturin kann í mesta lagi verða útsettur í ein tíma. Fráboðan um hetta skal beinanvegin gevast Kappingarnevndini, sum ásetur nýggjan dyst.

**Stk. 3.**
Dómarin kann somuleiðis nokta at seta dyst í gongd ella steðga dysti, ið verður leiktur, um so er, at vøllurin ikki er merktur, málnetini ikki eru heil v.m. og um vøllurin annars ikki lýkur tey krøv, sum nevnd eru í reglugerðini fyri vøllir, sbr. grein 21.

**Stk. 4.**
Heimafelagið hevur ábyrgdina av, at vøllurin lýkur krøv Kappingarnevndarinnar.

**GREIN 35**
Allir dystir skulu byrja til ásettu tíðina. Kappingarnevndin kann undir serligum umstøðum áseta hvønn klokkutíma, dysturin skal byrja, hóast heimafelagið hevur ásett aðra tíð sambært grein 32 stk. 2. Kappingarnevndin skal geva báðum feløgunum og dómaranum boð um hetta. Somuleiðis kann kappingarnevndin áseta, at allir dystir í seinastu umførunum í eini deild skulu byrja samstundis.

**Stk. 2.**
Um lið ikki uttan haldgóða orsøk møtir til tíðina, ella í seinasta lagi 15 minuttir eftir, at dysturin skuldi byrja, tapir viðkomandi lið dystin, soleiðis at møtta liðið fær 3 stig við málmuninum 3-0. Dómarin skal beinanvegin geva Kappingarnevndini fráboðan um hetta, og Kappingarnevndin ger úrskurð í málinum samsvarandi grein 12, stk. 2.

**Stk. 3.**
Sama er galdandi um lið við leikbyrjan noktar at leika uttan haldgóða grund ella noktar at halda fram, til dystur er lógliga lokin.

**Stk. 4.**
Lið, sum ikki møtir upp til annan hálvfinalu- ella finaludystin, tapir báðar dystirnar við málmuninum 0-3.

**GREIN 36**
Vunnin dystur gevur 3 stig. Javnleikur 1 stig.

**GREIN 37**
Ber leikari seg so ósømiliga at á leikvølli, at dómarin má reka hann úr leiki (reytt kort), skal dómarin skrivliga siga Kappingarnevndini frá hesum, og skal Kappingarnevndin nokta slíkum leikara at luttaka í kapping í ásetta tíð. Leikbannaður leikari, hevur ikki loyvi at uppihalda seg á bonkinum, hvørki sum leikari ella sum leiðari, meðan hann hevur leikbann
Er talan um leikara, ið leikar í bæði dreingja og unglingadeild, fær viðkomandi leikbann í teirri deild hann varð rikin úr leiki.
Er talan um leikara, ið leikar í bæði dreingja- og vaksnamannadeild og unglinga- og vaksnamannadeild, fær viðkomandi leikbann í teirri deild hann varð rikin úr leiki.
**Er talan um leikara, sum er fevndur av § 8 stk. 2 í kappingarreglunum, og sum verður leikbannaður í vaksmannadeild, verður leikarin leikbannaður í øllum dystum í vaksmannadeildini, sum hann annars lógliga kundi luttikið í.**

**Stk. 2**
Dómarin skal skrivliga boða Kappingarnevndini frá teimum ávaringum (gult kort) ið givnar verða.
Tá leikari hevur fingið 3 gul kort, fær hann 1 dag leikbann
Tá leikari harnæst hevur fingið 2 gul kort, fær hann 1 dag leikbann
Tá leikari harnæst hevur fingið 2 gul kort, fær hann 1 dag leikbann, men kann Kappingarnevndin taka støðu til longri leikbann. Leikbann eftir hesi reglu eru galdandi frá fyrst komandi leikdegi.

**Stk. 3**
Galdandi fyri Vodafonedeildina og 1. deild menn
Tá leikari hevur fingið 5 gul kort, fær hann 1 dag leikbann
Tá leikari harnæst hevur fingið 3 gul kort, fær hann 1 dag leikbann
Tá leikari harnæst hevur fingið 2 gul kort, fær hann 1 dag leikbann
Tá leikari harnæst hevur fingið 2 gul kort fær hann 1 dag leikbann, men kann Kappingarnevndin taka støðu til longri leikbann. Leikbann eftir hesi reglu eru galdandi frá fyrst komandi leikdegi.

**Stk. 4.**
Givnar ávaringar føra við sær leikbann fyri viðkomandi leikara í teirri deild hann hevur fingið ávaringina. Ávaringar givnar í steypakappingum eru bert galdandi fyri dystir í steypakappingini.
**Stk. 5.**

*Ber venjari ella leiðari, seg so ósømiliga at á ítróttarøkinum, at dómarin má reka hann burtur, skal dómarin skrivliga siga Kappingarnevndini frá hesum, og kann Kappingarnevndin nokta slíkum venjara ella leiðara atgongd til ítróttarøki í ásetta tíð.*

**GREIN 38**
Nýtir dómari rætt sín til at slíta leik ella reka leikara úr leiki sambært grein 37, stk. 1, skal hann skrivliga boða Kappingarnevndini frá hesum og í frágreiðing sínari greiða frá, hví hann gjørdi so. Kappingarnevndin gerð annars úrskurð um, hvørja avleiðing brotið ella tilburðurin skal hava fyri viðkomandi lið og tað felag leikarin umboðar. Sama er galdandi viðvíkjandi møguligum brotum, ið verða framd móti grein 24.

**14. Steypakappingar**
**GREIN 39**
Reglur fyri steyp, ið givin eru til kappingar millum feløg, ella broytingar av slíkum reglum, skulu í seinasta lagi 10 dagar áðrenn slík kapping fer fram, latast Kappingarnevndini til góðkenningar. Heldur Kappingarnevndin at kappingarreglurnar kunnu vera F.S.F. til bága, skulu tær broytast, áðrenn kappingin um steypið byrjar.

**15. Brot og kærur.**
**GREIN 40**
Kærur um brot á hesar reglur skula viðgerast samsvarandi teirri til eina og hvørja tíð galdandi agareglugerð FSF's.

**GREIN 41**
Verður lið dømt at tapa dyst, verður málmunurin 0-3 roknaður.

**16. Gildið**
**GREIN 42**
Hesar kappingarreglur koma í gildi kappingarárið 2007.

***Soleiðis samtykt á aðalfundi FSF's tann: 3. mars 2007 og við broytingum á aðalfundi FSF's tann, 1. mars 2008, 21. februar 2009, 27.februar 2010 og 26. februar 2011.***

# Loyvisskipanin hjá UEFA 2011

Feløgini í Vodafone deildini og 1. deild fingu freist til tann 18. februar 2011, at senda inn umsókn um luttøkuloyvi fyri kappingarárið 2011, og tann 11. mars 2011 tók Loyvisnevndin í FSF avgerð um at játta øllum feløgunum luttøkuloyvi til føroysku landskappingina.

Tey 4 feløgini sum skuldu luttaka í UEFA kappingum í 2011 fingu av Loyvisnevndini játtað luttøkuloyvi seinast í mai mánað 2011, eftir at leikarar hjá feløgunum høvdu verið til kravda heilsukanning.

Tann 1. juni 2011 komu nýggjar reglur í gildi frá UEFA um "Financial Fair Play Club Monitoring", sum eru galdandi fyri tey feløgini, sum luttaka í UEFA kappingum. Í hesum sambandi hava feløgini mótvegis UEFA gjørt upp um felagið pr. 30. juni 2011 hevði skuld til onnur feløg, um felagið hevði skuld til starvsfólk, herundir til leikarar, og um felagið hevði skuld til sosialar myndugleikar ella skattamyndugleikar. Feløg sum høvdu tílíka gjaldkomna skuld skuldu av nýggjum senda inn fíggjarliga uppgerð pr. 30. september 2011, umframt upplýsingar um framtíðar fíggjarviðurskifti hjá felagnum.

Tað er UEFA sum tekur støðu til um feløgini hava hildið seg til ásetingarnar frá UEFA um "Financial Fair Play Club Monitoring".

# Eftirmeting av fótbóltsárinum 2011, Vaksnamannadeildin



19-11-2011

Menn, eftirmeting 2011
Skrá

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 13:00 | Bjóða verður vælkomin | CA |
| | Fundurin verður settur – kunnað verður um skránna | JMJ |
| Kl. 13:05 | Eftirmeting av kappingini 2011 | JMJ |
| Kl. 13:20 | kjak | |
| Kl. 13:45 | Kunning frá Útbúgvingarnevndini | PS |
| Kl. 13:50 | Leikdagar 2012 | PS |
| Kl. 14:00 | Kaffisteðgur | |
| | Ætlaðar broytingar | |
| Kl. 14:15 | - Kappingarnevndin | JMJ |
| Kl. 14:35 | - Dómaranevndin | FZ/NÀL |
| | kjak | |
| Kl. 15:20 | Kaffisteðgur | |
| Kl. 15:30 | Ymiskt | |
| Kl. 15:45 | Tikið verður samanum/endi | JMJ |

| <u>Møtt feløg</u> | <u>Umboð</u> |
|---|---|
| B68 | Jógvan Højgaard, Niclas Davidsen, Sámal Olsen |
| MB | Annfinn Danielsen |
| TB | Kári Niclasen<br>Niels P. Eysturberg, Kári Niclasen |
| Skála | Hans J. Andreasen |
| AB | Andrass Drangastein, Sigmar Jacobsen, Thordur Thorsteinsson |
| Víkingur | Brandur Jacobsen, Svenn Olsen, Ólavur F. Olsen |
| FC Hoyvík | Fróði Danielsen |
| FF Giza | Andrass Thomsen, Kenneth Djurhuus |
| FC Suðuroy | Bjarni Johansen, Palli Augustinussen |
| KÍ | Johan Lútzen |
| EB/Streymur | Anvør Zachariasen |
| Royn | Ingi Mortensen, Jónhard Thomsen |
| HB | Dánial Pauli Davidsen, Jóannes Mouritsen, Sigfríður Clementsen |
| B36 | Jákup Mørk |
| ÍF | Ólavur Larsen, Dánjal á Lakjuni |
| B71 | Karl Vidtfeldt |
| Faroe Soccer | Marni Mortensen |
| FDF | Petur Reinert, Eiler Rasmussen |
| FSF | Christian Andreasen, Jákup M. Joensen, Trygvi Mortensen, Fríðin Ziskason, Petur Simonsen, Bill Jacobsen |
| Skrivari | Sunniva Kollslíð |

**Fundarfrágreiðing**

Christian Andreasen, forseti bjóðar vælkomin
Jákup M. Joensen, form. í Kappingarnevndini kunnar stutt um skránna.
Hann gekk síðani stutt ígjøgnum kappingarnar í ymisku deildunum.
Nevndi síðani nakað um flytingarskjal, um feløgini eru samd og dómarin kann, so hevur Kappingarnevndin í 2011 slakað nakað í mun til krøvini, sum vit annars hava havt framman undan, í sambandi við flytan av dystum.
Skráseting av leikarum: Alt ov nógvir leikarar, sum ikki eru skrásettir, og talan er um fleiri ymisk feløg.
Heitir á feløgini um at fáa skrásett allar leikarar til kappingina 2012.
Sí framløguskjal 1 um skrá, eftimeting og ætlanir

**Eftirmeting**

Form í HB sigur at FSF eisini hevur feil í skráseting av leikarum . FSF hevur eina góða umsiting.
Faroe soccor skráseta leikarar !

| | |
|---|---|
| **HB** | Heldur at okkurt má gerast við leikbann hjá leikarum U21, tað kann blíva serliga trupult í samb. við landsdystir o.a., tí steðgurin verður so langur. |
| **TB** | Vóru eitt sindur vónbrotnir av at HB kundi nýta fleiri av betru leikarunum á 1. deild, av tí at Vodafonedeildin hevði frí orsakað av landsdysti. |
| **B36** leikarum U21, og | Saknar greiðari reglur við tá umræður upp- og niðurflyting yvirsiting av leikbannum. |
| **Víkingur** | Um endamálið við serregluni fyri leikarar U21 er menning, so er løgið at forða teimum at leika í tveimum deildum 3 tey seinastu umførini. |
| **B36** | Samdur |
| **AB** | Samdur |
| **Sunniva** | Kunnaði um, at hendan reglan hevur verið galdandi tvey tey seinastu árini, eftir ynski frá feløgunum, men tá reglan kom í gildi fyrstu ferð, vóru ongar avmarkingar seinastu dystirnar í kappingarárinum. |

Flestu feløgini eru samd um, at leikararnir U21 burdu kunna flutt upp- og niður alla kappingina.
Skráseting av leikarum: Feløgini eru samd um, at tað skuldi ikki verið so trupult at fingið skrásett allar leikarar. Ynski er um at fáa elektroniskar dómaraseðlar.

| | |
|---|---|
| **HB** | Steypakappingin eigur ikki at verið fyrsti dystur í kappingarárinum. |
| **FF Giza** | Skipa 3. deild við einum finalubólki. |
| **AB** | Um Vodafone- og 1. deild enda sama dag, so má longri verða millum dystirnar. Halda uppá flytiskjalið Sí framløguskjal 1 um skrá, eftimeting og ætlanir |

**Kunning frá Útbúgvingarnevndini**

Venjaraskeið – vil hava feløgini at leggja dent útbúgving, tó serliga á útbúgving av kvinnum
Skipa verður fyri málmansvenjaraskeiðið
A-útbúgvingin verður byrja aftur í 2013
Minnir venjarar á at endurnýggja licensin við impulsskeiðum, 15 tímar fyri hvørji 3 ár.
Sí skjal 2 viðv. meginreglum og 3 við uppskotið til leikdagar 2012.

**Leikdagar 2012**

Sí skjal 2 viðv. meginreglum og 3 við uppskotið til leikdagar 2012.

**Kjak:**

Skulu vit royna at enda landskappingina áðrenn seinasta landsdystin ella skulu vit hava tvey umfør eftir seinastu landsdystirnar.

| | |
|---|---|
| **B68** | Enda kappingina so tíðliga sum gjørligt |
| **ÍF** | Tað eru leikararnir sum ynskja summarfrí |
| **HB** | Geva liðunum sum skulu út í Evropa so góðar umstøður sum gjørligt |
| **B68** | Vit kunnu gott leika meira í summarfrítíðini – serliga í Vodafone, leikarar og venjarar fáa løn |
| **KÍ** | Fáa kanska fleiri áskoðarar í juli heldur enn í oktobur |

**B68** Spurningurin er um 27 umfør ikki er ov nógv, tí kappingin skuldi helst verið liðug tá vit koma til okt.

**HB** So skal FSF tora at taka avgerð um, at ikki øll lið spæla sama umfar samstundis, so at liðini, sum leika í Evropa í juli, leika fleiri dystir í fyrru hálvu enn hini liðini.

**ÍF** Spyr um man ikki kann leika eina hálvfinalu heldur enn tvær í steypakappingini? So kundu vit vunni ein leikdag.

Feløgini hava ikki í móti, at vit royna at leggja fleiri dystir í Vodafonedeildini í juli fyri at kunnu enda fyrr, og um tað ber til, so áðrenn seinastu landsdystirnar í 2012.

**B36** Heldur at tað fer at verða trupult, men at vit skulu royna.

**FC Hoyvík** FSF eigur umhugsað, um 2. og 3. deild eisini skulu hava frí, tá landsdystirnir verða leiktir.

__**Ætlaðar broytingar:**__

__Sí framløguskjal 1 um skrá, eftimeting og ætlanir__

Jákup Martin kunnar um ætlaninar at broyta revsingina fyri lið í hægru deildunum, sum ikki møta til dyst.

**Víkingur:** Hevur man hugsað um at straffa lið í hægri deild, fyri at lið í lægri deild ikki møta upp.

**Jákup M.** Vit í kappingarnevndini hava eisini hugsað um tann møguleikan, men hetta uppskotið verður mett rættari.

**B36** Hví fær 3. deild ikki helvtina av bótini, tá lið verður koyrt úr kapping, tað burdi tað verið.

**MB** Bótin er í størra lagið í 3. deild, heldur at 3. deild eisini skal hava helvtina av bótini í endurgjaldið.

Fleiri feløg eru samd um, at uppskotið er á góðari leið, men kanska skal okkurt broytast við 3. deild.

__**Vegleiðing til leikbann**__

Ískoyti til punkt 9, sí skjal 1

Uppskot frá Kappingarnevndini.

**HB** Kappingarnevndin hevur heimildina, men avgerðirnar hava verið heldur tilvildarligar.

**B36** Burdu havt møguleika at kært øll leikbann.

**Christian:** Burdi altíð verið hoyring.

Kappingarnevndin í ár hevur valt ikki at revsa tey dømini við gegni, tí man vildi hava greiðari reglur.

__**Ætlanir**__

Seinasta freist at flyta áhugaleikarar verður ætlandi broytt til 25. august í kappingarárinum.
Ongin viðmerking frá feløgunum um hetta.
Kunning um at broyta aldurin hjá Old Boys.
Ongar viðmerkingar frá feløgunum.

__**Dómaranevndin**__

Fríðin Ziskason kunnar um ymiskt frá Dómaranevndini, __sí skjal 4__

**Víkingur:** Var nakað inni á um at geva stig fyri gul kort

**Jákup Martin** heldur at tann skipan sum er í dag virkar útmerkað, tað skal vera so einkult sum gjørligt.

**B36** er eisini inni á stig skipan

**FC Suðuroy** spyr um dómarafelagið ikki sjálvir kunnu skaffa dómarar

**Fríðin** heldur tað kundi kanska verið ein møguleiki.

**B36** heldur at hendan uppgávan liggur úti hjá feløgunum

**HB** heldur, at man ikki kann brúka óroyndar 4 dómarar.

**Christian** heldur, at tað er stórur trupuleiki, at so fáir dómarar eru.

**HB** heldur, at feløg sum ikki hava dómarar, eiga at fáa bót.

__**Ymiskt**__

**AB** heldur at tað er stórur trupuleiki at bóltdreingir ikki eru til 1 deildar dystir.
Summir av hesum dreingjum/gentum eru oftast alt ov ung børn.
Síðani tók Jákup Martin saman um og takkaði fyri ein siðiligan fund.

**Fundur lokin kl. 16:00**

# Tilmeldingar 2002-2011

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | "+/-lið" |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vodafonedeildin | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | **0** |
| 1. deild menn | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | **0** |
| 2. deild menn | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | **0** |
| 3. deild menn | 19 | 20 | 21 | 15 | 26 | 24 | 25 | 28 | 29 | 27 | **-2** |
| Unglingar | 11 | 12 | 14 | 12 | 12 | 13 | 14 | 10 | 12 | 12 | **0** |
| Dreingir | 17 | 16 | 17 | 19 | 19 | 17 | 16 | 16 | 18 | 17 | **-1** |
| Smádreingir | 23 | 27 | 28 | 26 | 17 | 18 | 20 | 22 | 20 | 27 | **7** |
| 1. deild kvinnur | 6 | 6 | 9 | 8 | 10 | 6 | 6 | 6 | 6 | 6 | **0** |
| 2. deild kvinnur | | | | | 0 | 6 | 7 | 5 | 4 | 6 | **2** |
| Gentur 14-17 ár | 12 | 17 | 15 | 17 | 11 | 11 | 9 | 7 | 7 | 13 | **6** |
| **Landskapping íalt** | **117** | **128** | **134** | **127** | **125** | **125** | **127** | **124** | **126** | **138** | **12** |
| | | | | | | | | | | | |
| 5. deild menn | 12 | 12 | 12 | 10 | | | | | | | **0** |
| Kvinnur ½ vøll | 6 | 5 | 0 | 13 | 8 | 5 | 4 | 5 | 7 | 7 | **0** |
| Old boys | 17 | 12 | 10 | 10 | 14 | 14 | 12 | 19 | 16 | 17 | **1** |
| Old girls | | | 1 | 3 | 3 | 2 | 3 | 3 | 5 | 5 | **0** |
| Gentur 14-17 ár, ½ vøll | | | | | 5 | 9 | 3 | 4 | 2 | | **-2** |
| Smádreingir ½ vøll | | | | | 6 | 7 | 7 | 3 | 6 | | **-6** |
| Piltar | 39 | 33 | 36 | 30 | 39 | 39 | 39 | 38 | 42 | 42 | **0** |
| Smápiltar | 42 | 46 | 48 | 46 | 49 | 50 | 51 | 52 | 50 | 51 | **1** |
| Pinkulingar | | | | | | | | | 36 | 37 | **1** |
| Smágentur | 27 | 26 | 23 | 24 | 22 | 18 | 16 | 17 | 19 | 17 | **-2** |
| Gentur 10-12 ár | 29 | 25 | 22 | 19 | 19 | 21 | 20 | 19 | 25 | 20 | **-5** |
| Pinkur | 24 | 19 | 22 | 19 | 22 | 19 | 19 | 22 | 27 | 29 | **2** |
| **Økiskapping íalt** | **196** | **178** | **174** | **174** | **187** | **184** | **174** | **182** | **235** | **225** | **-10** |
| | | | | | | | | | | | |
| **Tilmeld. tilsamans** | **313** | **306** | **308** | **301** | **312** | **309** | **301** | **306** | **361** | **363** | **2** |

Frámeldingar eru ikki tiknar við.
"+/- lið, er í mun til árið frammanundan

# Tilmeldingar 2011

| Deild | Menn | | | | | | | | | | | | | | | Kvinnur | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Vodafonedeildin | 1. deild | 2. deild | 3. deild | Old Boys | Unglingar | Dreingir | | | Smádreingir | | Piltar | Smápiltar | Pinkulingar | Menn tils. | 1. deild | 2. deild | Kv. ½ vøll | Old girls | Gentur 14-17 | Smágentur | Gentur 10-12 | Pinkur |
| **Bólkur** | | | | | | | M | Ø | ½ | M | Ø | | | | | | | | | M | | | |
| **07 Vest** | 1 | 1 | | 1 | | 1 | | 1 | | | 2 | | | | **7** | | | | | | | | |
| **AB** | | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | | 1 | | 1 | 1 | 3 | 3 | 1 | **15** | 1 | | 1 | | 1 | 1 | 1 | 2 |
| **B36** | 1 | | 1 | 1 | 2 | 1 | 1 | 1 | | 1 | 2 | 5 | 7 | 3 | **26** | 1 | | 1 | 1 | 2 | 2 | 3 | 4 |
| **B68** | 1 | | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | | | | 1 | 2 | 2 | 2 | **13** | | 1 | | | | 1 | 1 | 3 |
| **B71** | 1 | | | 1 | | | | 1 | | 1 | | 1 | 2 | | **7** | | | | | 1 | 1 | 1 | 1 |
| **EB/S** | 1 | 1 | | 3 | 1 | 1 | 1 | | | 1 | 1 | 3 | 4 | 3 | **20** | 1 | | | 1 | 1 | 2 | 2 | 3 |
| **FC Hoy** | | 1 | 1 | | | | | | | | | | | | **2** | | | | | | | | |
| **FC Suð** | | 1 | 1 | 1 | 2 | | | 1 | | | 1 | 2 | 2 | 1 | **11** | | 1 | | 1 | 1 | 1 | | |
| **FF Giza** | | | | 4 | | | | | | | | | | | **4** | | 1 | | | | | | |
| **HB** | 1 | 1 | | 1 | 2 | 1 | 1 | 1 | | 2 | 3 | 7 | 9 | 8 | **37** | | 1 | | | 1 | 1 | 1 | 1 |
| **ÍF** | 1 | | 1 | 1 | | 1 | | | | | 1 | 1 | 2 | 2 | **10** | | 1 | | | 2 | 1 | 1 | 2 |
| **KÍ** | 1 | | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | | 1 | 1 | 1 | 4 | 4 | 3 | **20** | 1 | | 1 | | 1 | 2 | 2 | 2 |
| **MB** | | | | 1 | | 1 | | 1 | | | 1 | 1 | 1 | 3 | **6** | | 1 | | | | 1 | 1 | 2 |
| **NSÍ** | 1 | 1 | | 2 | 2 | 1 | 1 | | | 1 | 1 | 4 | 3 | 2 | **19** | | | 1 | 1 | 1 | 1 | 2 | 2 |
| **ROYN** | | | 1 | | | | | | | | | | 1 | | **2** | | | | | 1 | | 1 | 1 |
| **SÍ** | | | | | 1 | | | | | | | 1 | 2 | 2 | **4** | | | | | | 1 | 1 | 3 |
| **SÍF** | | | | | | | | | | | | 3 | 3 | 2 | **6** | | | | | | | 1 | 1 |
| **SKÁLA** | | 1 | | 2 | 2 | 1 | | 1 | | | 1 | 1 | 2 | 1 | **12** | 1 | | | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 |
| **TB** | | 1 | 1 | | 1 | | 1 | | | 1 | | 2 | 2 | 1 | **10** | | | | | | | | |
| **UNDRI** | | | 1 | 1 | | | | | | | | | | | **2** | | | 2 | | | | | |
| **Víkingur** | 1 | 1 | | 3 | 1 | 1 | 1 | | | 1 | 1 | 2 | 2 | 2 | **16** | 1 | | 1 | | | 1 | 1 | 1 |
| **Íalt** | **10** | **10** | **10** | **25** | **17** | **12** | **8** | **8** | **1** | **10** | **17** | **42** | **51** | **36** | **249** | **6** | **6** | **7** | **5** | **13** | **17** | **20** | **29** |

# Úrmeldingar 2011

| Deild | | | | | Menn | | | | | | | | | | | | | Kvinnur | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Formuladeildin | 1. deild | 2. deild | 3. deild | Old Boys | Unglingar | Dreingir | | Smádreingir | | Piltar | Smápiltar | Menn tils. | 1. deild | 2. deild | Kv. ½ vøll | Old girls | Gentur 14-17 | Smágentur | Gentur 10-12 | Pinkur | Kvinnur tils. |
| **Bólkur** | | | | | | | M | Ø | M | Ø | | | | | | | | M | | | | |
| **07 V** | | | | | | | | | | | | | **0** | | | | | | | | | **0** |
| **AB** | | | | | 1 | | | | | | | | **1** | | | | | | | | | **0** |
| **B36** | | | | | | | | | | | | | **0** | | | | | | | | | **0** |
| **B68** | | | | | 1 | | | | | | | | **1** | | | | | | | | | **0** |
| **B71** | | | | | | | | | | | | | **0** | | | | | | | | | **0** |
| **EB/S** | | | | | 1 | | | | | | | | **1** | | | | | | | | | **0** |
| **FC Hoyv** | | | 1 | | | | | | | | | | **1** | | | | | | | | | **0** |
| **FC Suð** | | | | | 1 | | | | | | | | **1** | | | | | | 1 | | | **1** |
| **FF Giza** | | | | | | | | | | | | | **0** | | 1 | | | | | | | **1** |
| **HB** | | | | | 1 | | | | | 2 | | | **3** | | | | | | | | | **0** |
| **ÍF** | | | | | | | | | | | | | **0** | | | | | | 1 | | | **1** |
| **KÍ** | | | | | 1 | | | 1 | | | | | **2** | | | | | | | | | **0** |
| **MB** | | | | | | 1 | | | | | | | **1** | | | | | | 1 | | | **1** |
| **NÍF** | | | | | | | | | | | | | **0** | | | | | | | | | **0** |
| **NSÍ** | | | | | | | | | | | | | **0** | | | | 1 | | | | | **1** |
| **ROYN** | | | | | | | | | | | | | **0** | | | | | 1 | | | | **1** |
| **SÍ** | | | | | | | | | | | | | **0** | | | | | | | | | **0** |
| **SÍF** | | | | | | | | | | | | | **0** | | | | | | | | | **0** |
| 5 | Jesper Lauridsen | | 6 | Hallur Hansson | 26 |
| 6 | Thomas Delaney | | 7 | Viljormur Davidsen (C) | |
| 7 | Emil Larsen | 69 | 9 | Jóan Edmundsson | 54 |
| 8 | Mads Albæk (C) | 17 | 10 | Róaldur Jacobsen | 75 |
| 9 | Nicklas Helenius | 60<br>77 | 11 | Klæmint Olsen | 89 |
| 10 | Rasmus Falk | 15<br>72 | 12 | Gilli Sørensen | 58 |
| 11 | Andreas Laudrup | | 15 | René Joensen | |

| | **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | |
|---|---|---|---|---|---|
| 16 | Nicolai Larsen (GK) | | 1 | Hans Jørgensen (GK) | |
| 12 | Daniel Høegh | | 4 | Danial Lakjuni | |
| 13 | Kasper Hansen | 66 | 8 | Karl Løkin | 75 |
| 14 | Mathias Wichmann | | 13 | Gunnar Zachariasen | 53 |
| 15 | Jens Stryger Larsen | | 14 | André Olsen | |
| 17 | Osama Akharraz | 72 | 17 | Páll Klettskard | 89 |
| 18 | Simon Makienok | 77 | 18 | Sørmund Kalsø | |

**Venjari** Morten Wieghorst (DK) — Bill McLeod Jacobsen (FRO), Heðin Askham (FRO)

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

# MAKEDONIA – FØROYAR

**U21 EM 2011 – Undankapping, bólkur 1**

**Úrslit** 1-0 (1-0)
**Dato** 11. november 2011 kl. 13.00
**Leikvøllur** Boris Trajkovski – Skopje

**Dómarar:** Dómari: Thoroddur Hjaltalin (ISL)
Hj.dómarar: Frosti Vidar Gunnarsson (ISL), Áskell Thór Gíslason (ISL)
4. Dómari: Gunnar Jarl Jónsson (ISL)

**Lið**

| **MAKEDONIA** | | | **FØROYAR** | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Filip Gacevski (GK) | | 16 | Hans Jørgensen (GK) | |
| 2 | Stefan Ristovski | 90+2 | 2 | Heini Vatnsdal | |
| 5 | Goran Bogdanovic (C) | | 4 | Rógvi Holm | |
| 6 | Jasmin Micinovic | | 5 | Høgni Eysturoy | |
| 9 | Samir Fazli | 41<br>71<br>77 | 6 | Karl Løkin | |
| 10 | Ilija Nestorovski | 71 | 7 | Viljormur Davidsen (C) | 32 |
| 13 | Abdula Dzelil | | 10 | Jóan Edmundsson | |
| 16 | Flamur Tairi | | 12 | Gilli Sørensen | 62 |
| 17 | Marjan Altiparmakovski | 67 | 13 | Kaj Bartalstovu | 79 |
| 18 | Vladica Brdarevski | 58 | 14 | André Olsen | 86 |
| 20 | Stefan Spirovski | 45+1 | 15 | Danial Lakjuni | 89 |

| **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 12 | Andreja Efremov (GK) | | 1 | Teitur Gestson (GK) | |
| 3 | Kirce Ristevski | | 3 | Monrad Jacobsen | |
| 7 | Aleksandar Trajkovski | 67 | 8 | Gunnar Zachariasen | |
| 8 | Darko Glisic | | 9 | Páll Klettskard | 62 |
| 14 | Zeni Husmani | 90+2 | 11 | Klæmint Olsen | 89 |
| 15 | Goran Siljanovski | | 17 | Sørmund Kalsø | |
| 19 | Nikola Jakimovski | 71 | 18 | Jan Ellingsgaard | 79 |

**Venjari** Boban Babunski (MKD) — Bill McLeod Jacobsen (FRO), Heðin Askham (FRO)

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

# U19-landsliðið 2011

*Landsliðsvenjarar: Abraham Løkin & Eli Hentze*

## U19-landsliðið, EM-undankapping í Portugal



**Mikudagur 2. November 2011**
**Dagur 1**
U19 menninir og leiðarar máttu vera tíðliga á fótum mikumorgunin, tí fráferðin úr Vágunum var longu kl. 08.15.

Føroyska heystarveðrið vinkaði farvæl, og menn gleddu seg til vónandi mildari dagar longri suðuri í Evropa. Bíðitíðin í danska høvuðsstaðnum var drúgv. Kl. 18.45 á kvøldi varð flogið víðari til Frankfurt og haðani suðurvesturyvir til portugisiska havnabýin Porto.

Busstúrurin norður til Esposende var tíbetur ikki drúgvur, men farið var um midnáttina, áðrenn ferðalagið var farið til songar.

**Liðini í okkara EM-undanbólki eru:**
Portugal
Ungarn
Føroyar
San Marino

**Dystarskráin hjá okkum er henda**:

| | |
|---|---|
| 04.11.11 | Føroyar-Portugal |
| 06.11.11 | Føroyar-Ungarn |
| 09.11.11 | Føroyar-San Marino |

**Ferðalagið telur hesar:**
Eli. F. Nólsøe, HB
Jákup Højgaard, B36
René S.Joensen, Brøndby
Heðin Hansen, Víkingur
Sonni Ragnar Nattestad, 07 Vestur
Beinir Ellefsen, AB
Eirikur Magnussarson, TB
Allan Hansen, EB/Streymur
Ragnar Tausen, TB
Brandur Suðuroy, FC Suðuroy
Bogi R. Petersen, HB
Marcus Klementsen, B71
Ari Ó. Ellingsgaard, NSÍ
Rógvi Joensen, TB
Ári Danielsen, Silkeborg
Tróndur Jensen, HB
Magnus Egilson, HB
Arni Gregersen, NSÍ

Abraham Løkin, venjari
Eli Hentze, hjálparvenjari
Thom Jacobsen, liðleiðari
Jógvan Páll Joensen, ferðaleiðari
Kristian Poulsen, fysioterapeutur
Petur Simonsen, tekniskur stjóri í FSF

**Hósdagur 3.nov. 2011**
**Dagur 2**
Skráin:

| | |
|---|---|
| Kl.09.30 | veking |
| Kl.09.40 | morgunmatur |
| Kl.10.30 | fráferð til venjing |
| Kl.11.00 | venjing |
| Kl.14.00 | døgurði |
| Kl.15.00 | hvíld og fysioterapi |
| Kl.20.00 | nátturði |
| Kl.21.00 | fundur/sandwich og frukt |
| Kl.22.30 | góða nátt |

Kolandi stormur og oysandi regn ynskti góðan morgun, tá ið gardinurnar vórðu drignar frá í kamarinum. Eitt uppøst Atlantshav spældi sær so listiliga, og tað tóktist sum allir einglar í himli høvdu fingið vatnslangur at spæla sær við.

Men menn høvdu brúk fyri at røra seg eftir langa og sera møðsama túrin úr Føroyum suður til Portugal. Tað tók knappar 20 minuttir at koyra til býin Varzim, har vit vandu í nærum hálvan annan tíma. Municipal stadium er karmurin um teir báðar fyrstu dystirnar hjá okkum.

Seinnaparturin hevur verið brúktur til hvíld, viðgerð og uttan iva eitt sindur av teldubrúki. Í kvøld høvdu vit ein tímalangan fund, har vit í felag royndu at finna fram til, hvat skal til fyri at fáa gott úrslit í dystinum í morgin móti Portugal.

Kl. 22.30 varð farið til songar.

**Fríggjadagur 4. nov. 2011**
**Dagur 3**
Skráin:

| | |
|---|---|
| Kl.08.00 | veking |
| Kl.08.15 | morgunmatur |
| Kl.10.30 | upplegg til dyst |
| Kl.11.10 | gongutúrur |
| Kl.12.00 | pre-match meal |
| Kl.13.00 | fráferð til dyst |
| Kl.15.00 | Føroyar-Portugal |
| Kl.18.30 | nátturði |
| Kl.19.00 | fysioterapi |
| Kl.22.30 | fundur+ábit |
| Kl.23.00 | góða nátt |

Vit høvdu glett okkum almikið til fyrsta leikdagin, har vit møttu vertstjóðini Portugal. Leikarar og venjarar vóru fullgreiðir yvir, at vit skuldu gera okkara allarítarsta fyri at fáa eitt gott úrslit, men í kvøld mugu vit bara ásanna, at vit rætt og slætt blivu avhølvaðir, nýtast valla at siga meira. At burturforklára veruleikan nyttar lítið. Nú ræður um at leggja henda dystin afturum og byrja av nýggjum!

Dagsins dystur bleiv leiktur á Municipal Stadium í býnum Póvoa de Varzim.

**Føroyar-Portugal 1-9 (0-3)**
Málskjútti: Bogi Reinert Petersen (86.min)
Gult kort: Sonni Ragnar Nattestad (37.min) Ari Ellingsgaard (60.min) Bogi Reinert Petersen (72.min)

Liðið:
Eli Leifsson Nólsøe - René Joensen - Heðin Hansen - Sonni Ragnar Nattestad - Beinir Ellefsen - Bogi Reinert Petersen (liðskipari) - Ari Ellingsgaard - Magnus Egilson - Rógvi Joensen - Ári Jónsson - Brandur Suðuroy

Inn/útskiftingar:

| | |
|---|---|
| 56.min | Marcus Klementsen inn fyri Rógva Joensen |
| 66.min | Arni Gregersen inn fyri Beinir Ellefsen |
| 76.min | Tróndur Jensen inn fyri Brand Suðuroy |

Jákup Højgaard, Allan Hansen, Eirikur Magnussarson, Ragnar Tausen komu ikki á vøllin

Orð eru væl rættiliga fátøk, tá ið man hevur verið úti fyri einum veruligum avsmurningi! Í stuttum ber til at siga, at portugisar vóru sera góðir, og vit spældu ein minni góðan dyst.

Hagtølini siga, at heimamenninir høvdu 12 royndir á málið og 9 teirra endaðu í málinum, rættiliga effektivir. Tó skal leggjast afturat, at teir so sanniliga høvdu rímiliga nógvar royndir, ið fóru framvið málinum, fleiri teirra ikki so langt av leið!

Føroyska málið skoraði liðskiparin Bogi Reinert Petersen eftir frálíkt forarbeiðið av innskifta Arna Gregersen, sum snaraði portugisa hegnisliga av á baklinjuni og legði bóltin væl innfyri, har Bogi var hægstur og skallaði bóltin væl í málið.

Í morgin er venjing á skránni kl. 14.00.

At gráta yvir spilta mjólk nyttar onki!

**Leygardagur 5.nov. 2011**
**Dagur 4**
Skráin:

| | |
|---|---|
| Kl.08.45 | veking |
| Kl.09.00 | morgunmatur |
| Kl.12.00 | lunch |
| Kl.13.45 | fráferð til venjing |
| Kl.14.00 | venjing |
| Kl.16.30 | ábit |
| Kl.17.00 | hvíld+fysioterapi |
| Kl.20.00 | nátturði |
| Kl.22.00 | fundur/sandwich og frukt |
| Kl.22.30 | góða nátt |

Hvílidagurin undan Ungarn-dystinum hevur verið rættiliga avslappandi. Nakrir av leikarunum høvdu hug at fara oman á ein venjingarvøll, ið liggur beint við hotellið, og tað gjørdu teir so. Seinnapartin høvdu vit taktiska venjing í nærum 1 ½ tíma, har vit løgdu serligan dent á flytingar í verjustøðu. Dysturin móti Portugal vísti okkum, at vit ikki vóru serliga stinnir taktiskt í verjustøðu, og var hetta viðvirkandi til sera vánaliga úrslitið.

Á fundinum í kvøld hugdu vit nærri eftir nøkrum bortum úr okkara dysti móti Portugal. Umframt nøkur brot frá dystinum Ungarn móti San Marino. Ungarn vann dystin 5-0. Vit staðfestu, at Ungarn er eitt gott lið. Tó ikki eins stinnir við bóltinum sum portugisar. San Marino liðið er nokk á støðið við okkum at spæla bólt, men teir arbeiða nógv harðari enn okkara gjørdu seinast, so....

Menn vóru samdir um, at tað bara kann blíva betri! Liðið til dystin móti Ungarn í morgin bleiv kunngjørt, og har eru fleiri broytingar!

So er bara eftir at lata tíðina ganga til kl. 15.00 í morgin, tá ið Muncipal leikvøllurin í Varzim aftur er karmur um dyst!

**Sunnudagur 6.nov 2011**
**Dagur 6**
Skráin:

| | |
|---|---|
| Kl.08.00 | veking |
| Kl.08.15 | morgunmatur |
| Kl.10.30 | upplegg til dyst |
| Kl.11.10 | gongutúrur |
| Kl.12.00 | pre-match meal |
| Kl.12.50 | fráferð til dyst |
| Kl.15.00 | Føroyar-Ungarn |
| Kl.18.30 | nátturði |
| Kl.19.00 | fysioterapi |
| Kl.22.30 | fundur+ábit |
| Kl.23.00 | góða nátt |

Eftir lemjandi ósigurin móti Portugal vóru nakrar broytingar gjørdar til dystin móti Ungarn. Venjingin í gjár snúði seg í høvuðsheitum um at fáa verjupartin at rigga betri. Vit kundu staðfesta eftir keðiligu upplivingina móti vertunum, at vit reint

taktikst ikki avrikaðu nøktandi. Harumframt skuldi innsatsurin frá hvørjum einstøkum leikara betrast munandi.

Vit tí í skjáttuni fóru vit við góðum treysti undir uppgávu nr. 2. Vit vistu, at mótstøðuliðið var gott, men ikki slíkir bóltsnillingar sum portugisararnir.

Eisini hesin dysturin bleiv leiktur á Municipal leikvøllinum í Varzim

**Føroyar-Ungarn 1-3 (0-2)**
Málskjútti: Ári Jónsson (46.min)

Gult kort: Jákup Højgaard (14.min), Eirikur Ellendersen (35.min), Tróndur Jensen (56.min)

Liðið:
Jákup Højgaard - Eirikur Ellendersen - Bogi R. Petersen(liðskipari) - René Joensen - Sonni R. Nattestad - Tróndur Jensen - Ari Ellingsgaard - Arni Gregersen - Marcus Klementsen - Ári Jónsson - Brandur Suðuroy

Inn/útskiftingar:

| | |
|---|---|
| 46.min | Ragnar Tausen inn fyri Marcus Klementsen |
| 73.min | Allan Hansen inn fyri Arna Gregersen |

91.min Heðin Hansen inn fyri Ári Jónsson

Eli L.Nólsøe, Magnus Egilson, Rógvi Joensen, og Beinir Ellefsen komu ikki á vøllin

Vit taptu 3-1, men vit vunnu! Vit vunnu á okkum sjálvum! Vit reistu okkum og stríddust fyri sakini frá fyrsta bríksli til síðsta! Flott avrik og tá serliga, um samanborið verður við fyrsta dystin.

Taktiskt vóru vit sera væl skipaðir og stríðsviljin var allatíðina eyðsýndur. Men eisini við bóltinum megnaðu vit at skapa nakað. Ikki eins nógv og ofta, ið vit kundu hugsa okkum, men tó só.

Tíbetur misnýttu ungarar eitt brotsspark longu í 14.minutti. Ein feilavlevering hjá einum av okkara langt frammi á vøllinum setur eitt mótálop í gongd. Endin er, at okkara málverji fellir ein av teirra, men lukkutíð skeyt maðurin langt omanfyri.

Á hálva tímanum koma teir framum við einum sera góðum máli. Flott innlegg úr høgru til miðáloyparan nr. 9, sum vit høvdinum knallar bóltin í kassan, eitt sera flott mál. Stutt aftaná koma teir á odda 2-0. Lítil og ongin vandi tykist at vera, men ein av okkara driblar inni í feltinum og missir bóltin, og so eru teir eirindaleysir og økja til 2-0. Men hóast hesi bæði málini eru vit allatíðina væl við og fella als ikki í fátt.

Seinni hálvleikur er ikki meira enn byrjaður, tá ið Ári Jónsson fangar bóltin úti í okkara vinstru síðu og rekur nærum ein hálvan vøll við bóltinum klistraðum til føturnar við 3 ungarum rundanum seg. Komin inn móti brotsteigarmarkinum snarar hann hegnisliga við eini skotfintu til høgru soleiðis at bólturin kemur at liggja til høgrabeinið og ger ikki mætari enn at høgga hann upp í nærmasta málhorn. Óle, eitt flott mál, og vit eru við aftur av álvara, men.. Í sama minutti økja teir til 3-1, ið eisini gjørdist endaliga støðan. Helst fingu vit ikki armarnar niður aftur!

Brandur Suðuroy hevði størsta føroyska møguleikan at minka um munin, men góða fluktskotið tók í eitt mótstøðubein og fór út til horna.

Gamaní skal man ikki gleðast um ósigrar, men vit vóru meira og minni fegnir eftir dystin. Tí avrikið var gott! Og vit høvdu prógvað yvirfyri okkum sjálvum, at vit kundu reisa okkum eftir eyðmýkjandi ósigurin á vertunum, har vit at kalla vóru úrlatnir.

San Marino tapti 0-6 móti Portugal. Tað merkir, at vit undan tí síðsta dystinum móti teimum eru nr. 3 í bólkinum við betri málmuni. San Marino er ikki eitt vánaligt lið, men vit vóna og ætla at fáa nakað við úr tí dystinum. Livst so spyrst!

Á fundinum í kvøld hugnaðu vit okkum við eini spurnakapping: kennir tú land títt. Leikararnir vóru í parti móti leiðarunum. Endin var, at leiðararnir vunnu við tveimum stigum!

**Mánadagur 7.nov. 2011**
**Dagur 6**

Skráin:

| | |
|---|---|
| Kl.09.30 | veking |
| Kl.09.40 | morgunmatur |
| Kl.10.30 | fráferð til venjing |
| Kl.11.00 | venjing |
| Kl.13.30 | døgurði |
| Kl.15.00 | fráferð til Braga |
| Kl.20.00 | nátturði |
| Kl.22.00 | sandwich og frukt |
| Kl.22.30 | góða nátt |

Fyrsti frídagur av tveimum undan síðsta dystinum móti San Marino mikudagin. Ikki tað stóra á skránni í dag. Vit høvdu eina góða, men lætta venjing kl. 11.00 á einum vølli her í Esposende.

Um 3 tíðina gekk leiðin til ein av stóru býunum í Portugal, kallaður Braga. Har bleiv steðgað góðan 1½ tíma í einum keypssentri, so pengapungurin kundi minkað nakað.

Annars ikki tað stóra uttan hvíld, teldur og prát.

**Týsdagur 8.nov. 2011**
**Dagur 7**

Skráin:

| | |
|---|---|
| Kl.09.30 | veking |
| Kl.09.45 | morgunmatur |
| Kl.10.50 | fráferð til venjing |
| Kl.11.00 | venjing |
| Kl.13.30 | lunch |
| Kl.16.00 | fysioterapi |
| Kl.19.30 | nátturði |
| Kl.22.30 | fundur/sandwich og frukt |
| Kl.23.00 | góða nátt |

Eftir nakrar góðar dagar við sól og mildum veðri, hevði regnið aftur leita sær til Esposende. Fyrrapartin høvdu vit síðstu venjingina á túrinum. Nú verður í tí stóra og heila bert bíðað eftir síðsta dystinum móti San Marino.

Vit hava hugt eftir báðum dystunum hjá San Marino á DVD. Høvuðseyðkennini hjá liðnum eru góð organisatión og knallhart defensivt arbeiðið. Ógvuliga sannlíkt verður hesin dysturin eitt sindur øðrvísi enn undanfarnu tveir. Vit verða neyvan eins hart trýstir yvir allan vøllin allatíðina. Tað merkir so, at vit skulu umstilla okkum til at hava bóltin meira og gera gagn av honum. Hagtølini undan dystinum siga, at vit hava havt 5 royndir á málið hjá mótstøðuliðunum og 1 við síðuna av, meðan San Marino bert hevur havt ta einu royndina á málið.

Allir mans eru tøkir til dystin. Teir, sum høvdu gult kort, skikkaðu sær somikið væl í tí næsta dystinum, at teir ikki eru leikbannaðir.



U19 landsliðið ímóti Ungarm

**Mikudagur 09.nov. 11**
**Dagur 8**

Skráin:

| | |
|---|---|
| Kl.08.00 | veking |
| Kl.08.15 | morgunmatur |
| Kl.10.00 | upplegg til dyst |
| Kl.11.30 | pre match meal |
| Kl.12.15 | fráferð til dyst |
| Kl.15.00 | Føroyar-San Marino |
| Kl.19.00 | nátturði |
| Kl.20.00 | fysioterapi |
| Kl.22.00 | fundur - sandwich |
| Kl.23.00 | góða nátt |

Tað var fínasta veður her í Esposende henda okkara síðsta dag í hesi EM-undankappingini. Veðurforsøgnin hevði annars lovað okkum fitt av tí váta úr erva, men hóast onkur illbrýnt skýggj fylgdu okkum, tá ið vit í bussinum koyrdu móti Vila Verde, so bleiv tað bert til nakrar heilt fáar hálvvátar dropar.

Á síðsta leikdegi var mótstøðuliðið San Marino. Og uttan at undirmeta teir, hildu vit okkum av røttum at hava ein góðan møguleika at fáa 3 stig í hús. Talan var als ikki um ein "walk over" uppgávu. Hetta vistu vit eftir at hava sæð liðið dystast móti Ungarn og Portugal. Tað skuldi vísa seg at blíva ein sera góður dagur fyri okkum og fyri føroyskan fótbólt!

**Føroyar-San Marino 4-0 (0-0)**
Málskjútti: Bogi R. Petersen (54.min & 85.min), Ári Jónsson (50.min), Tróndur Jensen (92.min)

Gult kort: René Joensen (15.min), Sonni R. Nattestad (74.min), Ari Ellingsgaard (83.min)

Liðið:
Jákup Højgaard - Eirikur Ellendersen - Bogi R. Petersen (liðskipari) - René Joensen - Sonni R. Nattestad - Tróndur Jensen - Ari Ellingsgaard - Arni Gregersen - Ragnar Tausen - Ári Jónsson - Brandur Suðuroy

Inn/útskiftingar:

| | |
|---|---|
| 72.min | Rógvi Joensen inn fyri Eirik Ellendersen |
| 75.min | Magnus Egilson inn fyri Arna Gregersen |
| 91.min | Heðin Hansen inn fyri Brand Suðuroy |

Eli L.Nólsøe, Marcus Klementsen, Allan Hansen og Beinir Ellefsen komu ikki á vøllin

6 mál í hesi EM-undankappingini er ikki so galin úrtøka umframt tey 3 stigini, ið sigurin móti San Marino í dag gevur. Hesi tøl geva okkum eitt 3.pláss aftanfyri Portugal og Ungarn, sum í sínum innanhýsisdysti deildu stigini við 3-3 javnleiki.

**Endaliga støðan í bólkinum gjørdist tískil henda:**

| | | |
|---|---|---|
| Portugal | 18-4 | 7 |
| Ungarn | 11-4 | 7 |
| Føroyar | 6-12 | 3 |
| San Marino | 0-15 | 0 |

Í fyrra hálvleiki bendi lítið á, at vit við dystarlok skuldu fáa ein so sera kærkomnan stórsigur. Bólturin var meira á okkara fótum, men vit skaptu millum lítið og onki. Trillaðu hann millum okkum í verjupartinum og partvíst á miðjum vølli, har San Marino menninir vóru væl skipaðir, góvu okkum ikki pláss at spæla. Og tað vóru teir, ið vóru nærmastir at koma á odda, men lukkutíð vardu vit og stongin væl fyri í tveimum førum. Okkara besta møguleika átti Arni Gregersen, tá ið hann rann seg frían afturum verjuna og royndi at lobba uppum málverjan, ið var komin langt út úr málinum, men tíverri fór bólturin við síðuna av. Vit hildu at dómarin dømdi brotsspark, men málverjin hevði tíverri felt Arna uttanfyri feltið. Onki spurdist burturúr frísparkinum!

Í seinna hálvleiki var neyðugt hjá okkum at spæla øðrvísi. Stuttu avleveringarnar góvu okkum onki. San Marino hevði bert tørv á at "standa" rætt. Tískil løgdu vit dent á at fáa bóltin skjótt afturum teirra verju umframt diagonalsendingar og so at pressa "annan bóltin". Hetta eydnaðist til fulnar. Knappliga fekk teirra verja nógv meira at síggja til og vit fingu skapt pláss og møguleikar.

Tá ið 50 minuttir vóru leiktir fara vit í skjótt mótálop. Ragnar Tausen spælir henisliga innum verjuna til ein púra leysan Ári Jónsson, sum umvegis fingrarnar á tí hartrópandi málverjanum leggur Føroyar á odda 1-0 til ovurstóra gleði fyri okkara. Bert 4 minuttir seinni er dysturin í veruleikanum avgjørdur, tá ið liðskiparin Bogi Reinert Petersen eftir horna og returbólt smekkar til við vinstrabeininum og skorar sítt næsta mál í hesi kappingini. Tá ið 5 minuttir restaðu, økti Bogi aftur til 3-0. Innskifti Heðin Hansen spælir hegnisliga skrátt útfrá til Boga, ið bara skal seta høgru innsíðu á. Og tað er aftur Heðin Hansen sum hesuferð úr vinstru síðu við somu uppskrift finnur Trónd Jensen, sum flatt økir til endaliga úrslitið 4-0.

Samanumtikið ein fult uppiborin sigur. Eftir forferdiligu byrjanina móti Portugal hava ungu menninir av álvara reist seg. Fyrst í dystinum móti Ungarn og so av álvara í dag móti aðrari lítlari tjóð San Marino. At vit so megna at skora 4 mál og vinna 4-0 ger tað bara uppaftur betri. Ivasamt um nakað føroyskt landslið áður hevur sigrað so stórt. Og at skora 6 mál í eini undankapping fyri tey yngru landsliðini hendir

sjáldan, men hesuferð hava teir víst, at tað ber til.

Tá ið nátturðabitin var farin niðurum var ein lítil fundur, har tikið bleiv samanum.

Fráferð er longu kl. 04.15 í nátt, so tíð er at fara til songar.

Vit takka fyri okkum hiðani úr Esposende á norðurvestur strondina í Portugal.

**Hósdagur 10.november.2011**
**Dagur 9**
Skráin:

| | |
|---|---|
| Kl.03.30 | veking |
| Kl.04.15 | fráferð á flogvøllin |
| Kl.06.05 | Porto-Frankfurt |
| Kl.11.25 | Frankfurt-Keypmannahavn |
| Kl.19.00 | Keypmannahavn - Føroyar |

Við ítrótarkvøðu

Eli Hentze & Abraham Løkin
venjarar

# Hagtøl frá dystum

## PORTUGAL – FØROYAR

**U19 EM 2012 – Undankapping, bólkur 1**

**Úrslit** 9-1 (2-0)
**Dato** 4. november 2011 kl. 15.00
**Leikvøllur** Póvoa do Varzim Municipal Stadium - Povoa do Varzim

**Dómarar:** Dómari: Harald Lechner (AUT)
Hj.dómarar: Julian Weinberger (AUT), Senad Ibrisimbegović (BIH)
4. Dómari: Emir Alecković (BIH)

| Lið | PORTUGAL | | | FØROYAR | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 12 | Rafael Veloso (GK) | | 16 | Eli Leifsson (GK) | |
| | 2 | Pedro Almeida | | 2 | René Joensen | |
| | 3 | Tiago Ferreira | 79 | 3 | Beinir Ellefsen | 66 |
| | 4 | João Carlos | 19<br>79 | 4 | Hedin Hansen | |
| | 5 | Daniel Martins | 51<br>60 | 5 | Ragnar Nattestad | 38 |
| | 8 | João Mário (C) | | 6 | Bogi Petersen (C) | 72<br>86 |
| | 9 | Betinho | 29<br>41<br>54 | 9 | Ari Ellingsgaard | 61 |
| | 10 | Ricardo Esgaio | 84 | 11 | Ári Jonsson | |
| | 11 | Ivan Cavaleiro | 46 | 12 | Magnus Egilsson | |
| | 13 | Tiago Ilori | | 15 | Rógvi Joensen | 56 |
| | 16 | Ricardo Alves | 65 | 18 | Brandur Suduroy | 76 |
| | **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | | |
| | 1 | André Pereira (GK) | | 1 | Jákup Højgaard (GK) | |
| | 6 | Paulo Jorge | | 7 | Tróndur Jensen | 76 |
| | 7 | Bruma | 46 | 8 | Marcus Klementsen | 56 |
| | 14 | André Teixeira | | 10 | Arni Gregersen | 66 |
| | 15 | Fabio Martins | | 13 | Allan Hansen | |
| | 17 | Tó-Zé | 79<br>90 | 14 | Eirikur Magnussarson | |
| | 18 | Cafú | 60<br>82<br>90+1 | 17 | Ragnar Tausen | |
| **Venjari** | Edgar Borges (POR) | | | Abraham Løkin FRO) | | |

# UNGARN – FØROYAR

**U19 EM 2012 – Undankapping, bólkur 1**

**Úrslit** 3-1 (2-0)
**Dato** 6. november 2011 kl. 16.00
**Leikvøllur** Póvoa do Varzim Municipal Stadium - Povoa do Varzim

**Dómarar:** Dómari: Vladimir Vnuk (SVK)
Hj.dómarar: Dušan Hrčka (SVK), Rui Tavares (POR)
4. Dómari: Cosme Machado (POR)

**Lið**

| | **UNGARN** | | | **FØROYAR** | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Dávid Dombó (GK) | | 1 | Jákup Højgaard (GK) | 15 |
| 2 | Máté Kozma | 64 | 2 | René Joensen | |
| 3 | Ádám Lang | | 5 | Ragnar Nattestad | |
| 5 | Ferenc Tóth (C) | | 6 | Bogi Petersen (C) | |
| 6 | Zsolt Patvaros | 72 | 7 | Tróndur Jensen | 56 |
| 7 | Márk Szécsi | 32<br>48<br>83 | 8 | Marcus Klementsen | 46 |
| 9 | Soma Novothny | 30<br>65 | 9 | Ari Ellingsgaard | |
| 13 | Dávid Pál | | 10 | Arni Gregersen | 73 |
| 14 | András Radó | 15 | 11 | Ári Jonsson | 47<br>90+1 |
| 16 | Roland Paku | | 14 | Eirikur Magnussarson | 35 |
| 18 | Krisztián Adorján | | 18 | Brandur Suduroy | |
| **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | | |
| 12 | Attila Abu (GK) | | 16 | Eli Leifsson (GK) | |
| 4 | Zsolt Tar | 72 | 3 | Beinir Ellefsen | |
| 8 | Ádám Hajdú | | 4 | Hedin Hansen | 90+1 |
| 10 | Patrik Vass | 83 | 12 | Magnus Egilsson | |
| 11 | David Holman | | 13 | Allan Hansen | 73 |
| 15 | Patrik Poór | | 15 | Rógvi Joensen | |
| 17 | Bálint Vécsei | 65<br>87 | 17 | Ragnar Tausen | 46 |

**Venjari** Frigyes Tuboly (HUN) Abraham Løkin (FRO)

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

# FØROYAR – SAN MARINO

**U19 EM 2012 – Undankapping, bólkur 1**

**Úrslit** 4-0 (0-0)
**Dato** 9. November 2011 kl. 16.00
**Leikvøllur** Municipal – Vila Verde

**Dómarar:** Dómari: Emir Alecković (BIH)
Hj.dómarar: Senad Ibrisimbegović (BIH), Rui Tavares (POR)
4. Dómari: Cosme Machado (POR)

**Lið**

| **FØROYAR** | | | **SAN MARINO** | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Jákup Højgaard (GK) | | 1 | Massimo Francioni (GK) | 25 |
| 2 | René Joensen | 16 | 2 | Alessandro Zonzini | |
| 5 | Ragnar Nattestad | 75 | 3 | Edoardo Cecchetti | 90 |
| 6 | Bogi Petersen (C) | 55<br>86 | 6 | Mattia Merlini | |
| 7 | Tróndur Jensen | 90+3 | 8 | Alessandro Golinucci | |
| 9 | Ari Ellingsgaard | 84 | 9 | Nicola Giorgini | 75 |
| 10 | Arni Gregersen | 76 | 10 | Manuel Battistini (C) | |
| 11 | Ári Jonsson | 51 | 11 | Marco Bernardi | 90+2 |
| 14 | Eirikur Magnussarson | 73 | 13 | Maximiliano Baizan | 71 |
| 17 | Ragnar Tausen | | 15 | Giacomo Guerra | |
| 18 | Brandur Suduroy | 83 | 18 | Michele Giuliani | 79 |

| **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 16 | Eli Leifsson (GK) | | 12 | Alessandro Berardi (GK) | |
| 3 | Beinir Ellefsen | | 4 | Giovanni Righi | 90 |
| 4 | Hedin Hansen | 83 | 7 | Riccardo Aluigi | |
| 8 | Marcus Klementsen | | 14 | Angelo Faetanini | |
| 12 | Magnus Egilsson | 76 | 16 | Rinaldo Ragini | 79<br>85 |
| 13 | Allan Hansen | | 17 | Andrea Zavoli | 71 |

**Venjari** Abraham Løkin (FRO) Roberto Marcucci (SMR)

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

# U17-landsliðið 2011

*Landsliðsvenjarar: Áki Johansen og Pól F. Joensen*



## NM 2011 á Akureyri, Ísland

**01.08.2011 Mánadagur**
Vit fara úr Vágum kl 9.30 til Reykjavíkar eftir stegg í 5 tímar, sum vit millum annað brúkt til ein túr í svimjihøll og ein góðan døgurað, gekk leiðin við flogfari til Akureyri, kl 18 vórðu vit uppá pláss á. Her eru búð umstøðurnar sera góðar fyri okkara leikarar. Eftir at vit høvdu fingið alt viðførið uppá pláss, fingu vit døgurða. Áðrenn farið var til songar høvdu vit leikarafund og upplegg til dystin móti Ongland longu dagin eftir, eftir ein sera langan dag við nógvari ferðing, har vit vórðu ávegis í heili 12 tímar, fóru leikarinir til songar kl 23.00.

**02.08.2011 Týsdagur**
**Ongland – Føroyar 4 – 0 (2-0)**
Í fyrsta dystinum møtti føroyska U17-landsliðið Onglandi. Ikki kann sigast, at liðið fekk eina ynskiliga byrjan, tí eftir hálvleikstøðuna 2-0, gjørdist endaliga úrsliti 4-0, hóast føroyska liðið megnaði at skapa tvær

støður, har okkara áleypari var einsamallur við enska málmanninum áðrenn enska liðið skorðið til 1-0, sum var eitt sera óheppið sjálvamál, har eingin vandi var á ferð. Ein onglendingur skuldi senda bóltin til ein av sínum viðleikarum, men rakti eina av okkara verjuleikarum og snýtti sostatt okkara málmann.
Í mun til leikgongdina var úrslitið ikki nøktandi. Í altjóða fótbólti verða feilir oftast revsaðir og er hetta, nakað leikararnir á yngru landsliðunum skulu læra at fyribyrgja. Í dystinum komu vit hóast alt til 4 stórar málmøguleikar, sum vit mugu skorða uppá, um vit skulu gera okkum vón um betri úrslit. Sæð yvir dystin sum eina heild, var avrikið tó væl betri enn úrslitið. Leikarinir kunnu verða væl

nøgdir við fyrsta hálva tíman og fyrstu tjúgu minuttirnar av seinra hálvleiki. Liðið skal longu aftur í eldin í morgin, tá Íslendingar standa fyri tørni.

Leikarar: Elias Rasmusen, Teitur Olsen, Poul N Nolsøe, Jón Áki Jacobsen, Karl Martin Danielsen, Hákun Edmundsson, Haraldur R Højgaard, Brandur Olsen, Poul Ingason, Sigurð Poulsen, Rasmus D Sørensen.
Inn komu eisini: Tórur Justesen, Eivind Sørensen, John J Fredriksen, Jógvan á Lað Jacobsen, Tóri Rasmussen, Johannes Hansen.

**03.08.2011 Mikudagur**
**Ísland – Føroyar 3 – 0 (2-0)**
Dagurin byrjar við morgunmati kl 08.30 og eftir hetta er taktikfundur. Dreingirnir eru væl fyri í dag hóast tap í gjár, men leikararnir leveraðu tað besta teir kundu og tað eru teir nøgdir við. Sum heild eru teir við gott mót, men vit vita av royndu frá undanfarnu kappingunum, at dystur nummar tvey ofta er sera trupul fyri okkara.
Um dystin er sum heild at siga, at eingin munur á liðunum og tað var einki sum bendi á at úrslitið skuldi gerast eitt 3-0 tap. Men í avgerandi løtunum vórðu Íslendinger betri enn okkara. Vit vórður sum heild sera ónøgdir við dómaran í hesum dystinum, tí vit mettu at hann gjørdi skeivar ella manglandi dømingar við øll trý málini. Tað var tí ein tungur túrur aftur á hotellið fyri okkara, men aftur í dag var einki at seta á innsats og vilja hjá leikarunum. Høvdu vit marginalarnar við okkum fingu vit kanska stig í dag. Leikarinir eru fysiskt nógv merktir av tveimum stravnum dystun, so dagurin í morgin, fer til at hvíla og byggja upp, vit hava strikað venjingina.

Leikarar: Elias Rasmusen, Teitur Olsen, Poul N Nolsøe, Jón Áki Jacobsen, Karl Martin Danielsen, Hákun Edmundsson, Haraldur R Højgaard, Brandur Olsen, Poul Ingason, Sigurð Poulsen, Rasmus D Sørensen.
Inn komu eisini: Tórur Justesen, Eivind Sørensen, John J Fredriksen, Jógvan á Lað Jacobsen, Tóri Rasmussen, Johannes Hansen.

**04.08.2011 Hósdagur (frídagur)**
Eftir sera torførar dystir tveir dagar á rað slapp manningin at slappa av í dag. Venjingin varð strikað og staðin sluppu leikarinir at svimja. Hóast tvey tap, er hýrurin góður á monnum og tað hevur stóran týdning áðrenn dystin móti Norra. Leikarinir vórðu glaðir fyri lætta dagin í dag og eru allir tøkir til dystin í morgin.

**05.08.2011 Fríggjadagur**
**Norra – Føroyar 2 – 0 (1-0)**
So var aftur dystardagur og spenningurin er stórur undan dystinum móti Norra, leikarinir siga seg kenna á sær, at teir kunnu skapa eitt betri úrslit enn í dystunum frammanundan. Vit fingu morgunmat kl 8.30, leikararnir fingu møguleika at hvíla seg eina løtu áðrenn taktikfundin.
Hóast liðið hesaferð var meiri verjukent frá byrjan, vórðu vit væl við í dystinum eisini fram eftir vøllinum. Noreg fekk sítt fyrst mál, tá ið fyrri hálvleikur var hálvrunnin og kom hetta eftir eina deyðbóltsstøðu, har vit ikki fingu avvíst teirra stóra áleypara. Tá farið var til hálvleiks var støðan 1-0. Vónirnar til eitt rættuliga gott úrslit vóru góðar í umklæðingarrúminum. Men í seinna hálvleiki fekk Norra einasta málið, so endaliga støðan gjørdist 2-0. Alt í alt eitt góðkent úrslit og gott avrik av okkara. Í morgin er frídagur. Sunnudagin kl. 11, møta føroysku Svøríki. Hetta er ein sonevndur plaseringsdystur um 7. og 8. plássið. Helst verður hetta ein eins torførur dystur sum undanfarnu.
Leikarar: Elias Rasmusen, Teitur Olsen, Poul N Nolsøe, Jón Áki Jacobsen, Karl Martin Danielsen, Hákun Edmundsson, Haraldur R Højgaard, Brandur Olsen, Sigurð Poulsen, Tórur Justesen, Rasmus D Sørensen.
Inn komu eisini: Eivind Sørensen, John J Fredriksen, Jógvan á Lað Jacobsen, Poul Ingason Tóri Rasmussen, Johannes Hansen.

**06.08.2011 Leygardagur (frídagur)**
So var aftur ein frídagur og tað er als ikki nakað sum hóvar okkara leikarum, sum hava nakað at prógvað eftir tapið móti Norra í gjár, har dreingirnir aftur høvdu eina kenslu av, at teir vórðu væl við. Í dag er eingin venjing, so tað er eisini pláss fyri einum túrið, har leikararnir fáa møguleika at shoppa, nakað sum

altíð er væl móttikið. Helst hevur tað sína ávirkan á leikararnar at sleppa burtur frá dagligu rutinunum. Reaktiónin frá leikarunum hevur verið framúrskarandi, allar dagarnar. Vit eru klárir til seinasta dystin móti Svøríki í morgin. Friður var eins og vanligt kl. 23.00.

**07.08.2011 Sunnudagur**
**Føroyar – Svøríki 0 – 3 (0-2)**
Tað var eitt stórt vónbrot at føroysku dreingirnir taptu seinasta dystin í kappingini og endaðu á 8. og aftasta plássinum. Hóast svenska liðið leikliga ikki var veikari enn hini liðini, sum Føroyar hava møtt í NM-kappingini, høvdu vit vónir um at fáa stig í hesum dystinum. Vit byrjaðu eisini dystin sera væl og høvdu nakrar møguleikar fyrstu løtuna og serliga kendu vit okkum snýttar fyri eitt brotsspark, tá ið í Brandur Olsen bleiv feldur í brotsteiginum, men dómarin flutti bóltin út um, nakað sum var púrasta óskiljandi eisini fyri sviar. Svøriki koma á odda eftir 15 min, tá ið eitt skot bleiv avrættað og snýtti okkara málmann og beint eftirfylgjandi gjørdu vit ein sera stóran persónligan feil, sum førdi til 2-0. Annars er at siga, at sviar bert høvdu tríggjar royndir innanfyri málrammuna og at tær allar góðu mál, tíverri. Tað skal eisini viðmerkjast at okkara leika ein sera góðan dyst aftur í dag og at vit bjóða av hvørja ferð, vit hava møguleikan til tess.
Samanlagt 4 tap, einki stig, 12 mál ímóti okkum og einki mál á pluss kontoina.

Leikarar: Fríði Sigurðsson, Teitur Olsen, Poul N Nolsøe, Jón Áki Jacobsen, Karl Martin Danielsen, Hákun Edmundsson, Haraldur R Højgaard, Brandur Olsen, John J Fredriksen, Jógvan á Lað Jacobsen
Inn komu eisini: Tórur Justesen, Poul Ingason, Tóri Rasmussen, Rasmus D Sørensen, Sigurð Poulsen.

**08.08.2011 Mánadagur**
Í dag skulu vit heim og vit koma upp áðrenn sólin. Heimferðin gekk væl. Heima aftur í Vágum standa glað foreldur fyri okkum, vit takka allir hvørjum øðrum fyri ein góðan túr, og gleða okkum til komandi EM undankapping.

**Ítróttarligt:**
Heldur ikki í ár megnaðu vit at fáa stig í kappingini. Tó var avrikið ikki nær so vánaligt, sum tølini annars kundu bent á. Við nakað av hepnið og marginalum høvdu vit fingið mál í øllum dystunum og møguliga eisini okkurt stig. Alt í alt kann sigast um dystirnar, at vit eru rímuliga væl við í øllum dystunum. Vit gera tó enn nøkur mistøk, sum tíverri kosta mál, tá ið vit leika móti liðum, sum hava so høgt støði sum hesi í norðurlanda kappingini. Tó, so skulu vit framvegis gerast betri til at spæla, tá ið vit hava bóltin og mótstøðuliðið leggur trýst á okkum.
Henda NM kappingin gevur tó leikarunum dýrabarar royndir til EM kappingina í heyst, og so mugu vit hóast alt eisini minnast til, at 4 av okkara leikarum eru 96-arir, sum merkir at hesir eisini kunnu umboða U17 komandi ár. So vit hava orsøkir til at síggja ljóst upp á framtíðina, hóast úrslitini í hesi kappingini.
Vit høvdu ein málseting undan kappingini um at vit skuldu fáa mál, stig og ikki enda á aftasta plássi í kappingini. Vit rukku ikki setninginum, men vit eru hóast hetta partvíst nøgdir.
Avrikini hjá leikarunum kunnu vit ikki annað enn verða nøgdir við, og vit vóru samdir undan kappingini um, at um vit kundu síggja hvønn annan í eyguni og síggja at vit góðu alt vit áttu, so var tað eisini nøktandi og tað helt heilt á mál.
Tað kann eisini viðmerkjast at øll liðini, sum vit møttu vunnu sínar plaserings dystir, so tað bendir á at vit vóru í sterkara bólkinum.
Í ár hava vit ikki haft møguleika at verða á venjingarlegu uttanlands, vit høvdu tó eina sera góða 5 dagar venjingarlegu í Tórshavn, har vit búðu í FSF húsinum. Tað er tó heilt greitt, at vit mangla teir dystirnir móti sterkari mótstøðu, sum vit vanliga fáa, tá ið vit eru á venjingarlegunum uttanlanda. Helst hevði hetta eisini ávirka úrslitini rætta vegin.
Í fyrireikingunum til kappingina høvdu vit lagt stóran dent á at leikararnir livdu sum røtt ítróttarfólk, og at teir mintust til at drekka nokk av vætu í døgunum áðrenn kappingina, so at teir vóru vanir við at upptaka nógva vesku tá vit so komu til Ísland. Her var tó eingin trupulleiki, og kanska serliga tí veðurlagið minnir nógv um okkara.
Tað sum vit í tí stóra heila skulu betra til EM er, at vera 100% konsentreraðir allan dystin. Vit mugu eisini sleppa undan teimum nógvu

einføldu mistøkunum, sum kosta mál, um vit skulu gera okkum vónir um at gera betri úrslit enn higartil. Leikarinir hava eisini fingið at vita, at teir mugu royna at koma í betur fysiskan form enn nú, her verður serliga hugsað um muskulstyrkina. Vit hava vegleitt hópinum um hvussu hetta kann gerast.
Tað fyrikemur okkum eisini, at tað er líkt til, at okkara/føroysku leikarar ikki mennast eins nógv, sum hinir leikarinir í londunum kring okkum í aldurbólkinum 14 til 16 ár. Fysiski munurin í ár var um nakað størri enn undanfarin ár. Hetta hóast vit hava í huganum at 95” ikki er ein stórur árgangur hjá okkum, so eiga hesir leikarar við meira og miðvísari venjing at vera longur frammi í teirra leikara útbúgving.
Uttanfyri vøllin
Hóast úrslitini, so var hýrurin í hópinum góður allan túrin. Leikararnir uppførdu seg fyrimyndarliga væl og vit høvdu ongar trupulleikar av nøkrum slag. Roynt var at læra leikararnar, hvussu ein livir sum landsliðsleikari, og høvdu vit eisini fundir og persónligar samrøður við leikarinar á túrinum. Vit meta, at samanumtikið at vit hava flutt leikararnar nógv hesa NM vikuna og at hesir hava fingið góðar royndir, at taka við sær frameftir.
Umstøðurnar at búgva vóru sera góðar, gott hotel, góður matur og fyriskipanin av kappingini sum heild var góð. Alt riggaði, bussar koyrdu til tíðina og vit høvdu ein góðan Liaison Officer, sum gekk okkum til handa alla vikuna.
Til seinast kann nevnast, at leikararnir megnaðu rættuliga væl at halda fokus á uppgávunum alla vikuna. Hetta bendir á eina ella aðra mentala styrki hjá leikarunum.

**Samanumtikið**
Alt í alt var talan um eitt gott avrik frá leikarunum, her var talan um sera sterka mótstøðu og vit vórðu í tí sterkara bólkinum. Vit rukku ikki okkara málsetning og grunda á hetta eru úrslitini ikki nøktandi og tí kunnu vit hóast eitt annars gott avrik ikki verða heilt nøgdir við hetta NM.
Tó kunnu vit staðfesta, at liðið hóast alt hevur ment seg, ikki bara hesa seinastu vikuna undir NM, men eisini tann seinasta mánaðin í fyrireikingar skeiðinum undan Norðurlanda kappingini.

# U17 EM undankappingin í Luxembourg 2011



**Mikudagin 26.10.2011**
U17 liðið fór úr Vágum til Keypmannahavn ávegis til Luxemburg. Eftir stegg í Kastrup gekk leiðin til Luxemburg kl 15.30. Landsliðið var í á Parc Hotel stutt áðrenn kl 18. Alt gekk væl á ferðini, hóast hetta samnalagt var ein langur dagur at ferðast, fyri teir flestu umleið 12 tímar. Gist verður á Parc Hotel, umstøðurnar har leikarinir og leiðarar skulu búgva eru sera góðar.

**Hósdagin 27.10.2011**
Var bara tann eina venjingin á skránni. Fyrireikingarnar til fyrsta dystin eru so góðar sum tær kunnu verða tá ið tað bert er ein dagur tøkur, sum ikki er heilt optimalt, vónandi kemur hetta ikki at broyta fortreytirnar fyri eina góðari byrjan upp á undankappingina tað er tó eingin ivi um, at leikararnir og leiðararnir fara at gera tað, sum teir eru mentir fyri at fáa eitt gott úrslit. Liði hevði sum ætla sína seinraparts venjing, og gekk hendan sera væl. Venjingar vøllurin liggur bert fimtan minuttir frá gistingarhúsinum.

**Fríggjadagin 28.10.2011**
**Frakland – Føroyar 5 – 0**
Føroyska U17 landsliðið fær veruliga roynt seg í dag, tá ið Frakland stendur og bíðar. Umstøðurnar at leika fótbólt vórðu av teimum bestu, vøllurin lá hálvan tíma í bussi frá okkara gistingarhúsi og vórðu okkara leikarar væl upplagdir til dystin.
Frakland spældi sera skjótt og hevði geiða yvirvág allan dystin. Úrslitið gjørdist eisini ein tryggur 5-0 sigur til Frakland, sum tó skoraði uppá allar sína stóru møguleikar, hinvegin høvdu vit bara tvær royndi á málið hjá fraklendingunum. Okkara leikarar eiga rós fyri, at teir kempaðu framúr væl og vístu sera góða hugburð, líka til síðsta bríksl.
Í morgin er hvíludagur. Sunnudagin verður dystur móti Norðurírland, sum tapti 1-0 fyri Luxembourg. Hetta verður eisini ein torførur dystur, men leikarnir fara at gera alt tað teir megna.

**Leygardagin 29.10.2011**
Var ein løtt venjing seinrapart. Annars er bara hvíld á skránni hjá leikarunum. Lagið í hópinum er sera gott, hást tapið móti Fraklandi og teir flestu eru eina stóra fótbólts uppliving størri. Venjarinir eru samdir um at Frakland er tað besta liðið vit hava møtt í samband við eina U17 kapping. Tí hava vit eisini rímuliga góðar vónir til dystin í morgin móti Norður Írland.

**Sunnudagin 30.10.2011**
**Norður Írland – Føroyar 2 - 0**
Í dag, leika vit okkara næsta dyst í EM-undankappingini í móti Norður Írland í Pretange. Vit høvdu onga venjing á leik degnum, men tað er líkt til at leikarinir eru væl fyri, allir eru tøkir til dystin í dag.
Dysturin byrjaði eisini rímiliga javnt, har hvørki av liðunum hevði teir stórar mál møguleikar. Vit stóðu framúr væl á vøllinum, so norðurírar høvdu stórar trupulleikar at koma í gjøgnum og fáa royndir á okkara mál. Vit høvdu sjálvir nakrar góðar málmøguleikar og serliga fremsti áleyparin, var ein hóttan móti írsku verjuni.
Tí var tað sera keðiligt, at tá góður hálvur tími var spældur, at Norðurírland fekk mál. Eitt innlegg úr vinstru síðu fór allanvegin tvørturum málfeltið. Har stóð ein norðuríri púra leysur, og kundi seta bóltin í netið til 1-0. Okkara góvust ikki so. Tá 39 min vóru farnir av fyrra hálvleiki, sendi Brandur eina góða avlevering innum verjuna, har Rasmus var púra leysur við málverjanum. Rasmus slapp framvið málverjanum, sum í besta Schumacher stíli feldi Rasmus. Dómarin ivaðist ikki - brotsspark til Føroyar og málverjin fekk reyða kortið. Rasmus noyddist av vølli, og staðfest var eftir dystin, at hann hevur fingið heilaskjálvta og skal binda frið í 2 dagar. Tíverri so brendu vit brotssparkið, sum Brandur skeyt á stongina. Støðan gjørdist brátt verri, tí Norðurírland fór beint í álop skoraði til 2-0. Dómarin brískslaði síðan fyri hálvleiki. Hetta var sum at fáa ein beint frammaná.
Í seinna hálvleiki høvdu vit bóltin nógv meira enn norðurírarnir, men vit skaptu ikki teir heilt stóru málmøguleikarnar. Írarnir vóru nøgdir við 2-0 leiðslu, og høvdu teir ikki ein málmøguleika í seinna hálvleiki.
Skuffilsið var sjálvandi stórt aftaná dystin, tí vit kundu havt skapt senstiónina, men soleiðis skuldi ikki vera. Nú hava vit ein dyst eftir, og hann verður mikudagin móti vertstjóðini Luxembourg.

**Mánadagin 31.10.2011**
Hesin dagurin er vanliga frídagurin har leiðarar og leikarar eru shopping túr, og soleiðis var eisini hesuferð. Eftir døgurðan gekk leiðin til eitt innkeyps sentur, stutt uttanfyri býðin hetta var sum altíð sera hugnaligt fyri allan hópin. Vit høvdu ongan venjing í dag, tí vit valdu at seta ein túr í svimjihylin á skránna í staðin, her hugnaðu allir sær óført, tað vórðu eisini onkrir leikarar sum tóku túrin av 10 metur vippuni.

**Týsdagin 01.11.2011**
Dagin undan seinasta dystinum er bara ein taktisk seinraparts venjing á skránni. Vit hava sæð dystirnar hjá Luxemburg á video og nú verður alt lagt upp til at vit kunnu leika ein góða dyst móti teimum. Nú skulu leikarinir bara hvíla og gerða seg til kláran til dystin í morgin.

**Mikudagin 02.09.2011**
**Føroyar - Luxemburg 1 - 1**
Síðsti dysturin í hesum umfarinum hjá U17-dreingjunum var í kvøld ímóti. Luxemburg hevði frammanundan tapt móti Fraklandi 2-0 og vunnið 1-0 á Norður Írlandi, so vónir vóru fyri at fáa eitt heiðurligt úrslit.
Okkara vórðu verðuliga klárir frá byrjan, so hóast Luxemburg legði hart út, kom teir ikki til tað stóra, talan bleiv um ein javan dyst, har Luxemburg, tó hevði munin, men vit vórðu altið ein hóttan og teir kundu ikki føla seg tryggar. Hálvleiks støða var 0-0 og okkara høvdu eina góða kensulu av at tað kundi blíva í dag at sigurin kom í hús. Vit komu eisini sera væl út til seinra hálvleik og longu eftir fimm minuttir kundi Jón Áki Jacobsen seta bóltið í netið til 1-0 og sjálvandi stór frøði á okkara. Tað sum eftir var stóð nógv á okkara, Luxemburg legði trýst á, 10 min áðrenn vanliga leiktíðin var farin hevði Eivindur Sørensen ein roynd sum rakti stólpan, nær við at vit avgjørdu dystin har.
Til alla ólukku fekk Luxemburg javna tá ið vit høvdu leikt fýra minuttir yvir vanligu leiktíðina. Skuffilsið var sjálvandi stórt aftaná

dystin, tí vit kundu aftur havt skapt senstiónina, men tað er rættuliga stong út, fyri okkara aftur í dag.

Hósdagin 03.11.2011
So er hendan drúgva ferðin komin at enda og vit venda nøsina heim aftur móti Føroyum. Ferðin gekk sera væl og kl umleið 14.00 vóðu vit aftur heima í Føroyum, eftir eina heimferð sum byrjaði bara fýra tímar áðrenn í Luxemburg. Fótbóltárið 2011 hjá U17, er sostatt komi at enda hjá hesum ungu monnunum. Men longu nú byrja fyrireikingarnar til komandi kappingar hjá U17 landsliðinum í 2012.

**Eftirmeting av EM undankappingini nakrar niðurstøður**

**Ítróttarligt:**
Alt í alt kann sigast um dystirnar, at tað eru nøkur mistøk sum aftur kosta í síðsta enda, tá ið vit leika hesar altjóða dystirnar verða feilir straffaðir. Áðrenn vit fóru til Luxemburg vistu vit, at talan fór at gerast um tríggjar truplar dystir, sum um illa vildi til kundu enda við stór tapum vónirnar vórðu settar til góð úrslit móti Norður Írland og Luxemburg.
Men leikararnir vóru sera raskir og ídnir, og við góðari fyrireiking bar til at spæla við í partum av serliga tveimum dystunum, vit megnaður eisini í stóran mun at avmarka møguleikarnar hjá mótstøðuliðinum og eisini at spæla nakað av góðum fótbólti sjálvir, í stórum parti av dystinum móti Norður Írland og Luxemburg. U17 liði var ikki langt undan at koma víðari úr bólkinum hesaferð og tað í sær sjálvum er eitt stórt avrik.
Vit høvdu gjørt 3 broytingar í hópinum, samanborið við norðurlanda kappingina í Íslandi, og styrkti hetta samanumtikið um liðið . Sum heild vóru úrslitini, nakað væl betri enn vit høvdu væntað frammanundan. Eisini eru tað fleiri leikarar í hesum árganginum, sum vit kunnu seta góðar vónir til árini sum koma.

**Vistarhald og Ferðing:**
Í heila tikið vórðu allar umstøðurnar í sambandi við hesa kappingina í topp. Gistingarhúsið, var stórt og gott, maturin er sum heild góður, men manglar fjølbroytni, men dreingirnir fingu góðan mat, sum hóskar seg rímuliga væl til ítróttarfólk. Kømur og baðirúm vórðu góð.
Eisini høvdu vit hjálpsom hjálparfólk frá fótbóltsambandinum hjá Luxemburg tætt at okkum alla kappingina. Sum heild vórðu vit væl nøgdir við umstøðurnar við undantak av at tað vórðu nakrir trupuleikar í samband við fráferð til dystir og venjing
Ferðing í samband við túrin var gott fyriskipað, men tað er framvegis ynskiligt at liðið hevði ein eyka dag til fyrireiking áðrenn fyrsta dystin.

**Uttanfyri vøllin**
Hýrurin í hópinum var góður allan túrin og virkaði tað sum at allir leikarar trivust væl í hesum umhvørvinum. Tað sást at leikararnir vórðu blivnir meira búnir enn til NM og vóru teir seriøsir í sínum fyrireikingum til allar dystirnar. Eingir disiplin trupulleikar vóru og allir virkaðu "mindaðir" um uppgávuna. Tá frídagarnir vóru tóku vit okkum av løttum. Vit fóru ein túr í eina handilsmiðstøð, og svimjihøll hetta var fínt til at fáa tíðina at ganga við.

**Samanumtikið**
Alt í alt so eru vit rættuliga nøgdir við okkara avrik til hesa EM minikappingina. Sum nevnt, so vóru úrslitini væl betri enn vit høvdu væntað frammanundan, men samstundis kunnu vit ikki lata vera við at iðra okkum um, at vit ikki fingu fult móti Luxembourg og stig móti Norður Írland.
Leikararnir hava ment seg nógv í ár, og spennandi verður at fylgja gongdini komandi ár, havandi í huga, at heili 7 av leikarunum hava aldur til at umboða U17 aftur komandi ár.

***Frásøgn: Áki Johansen & Pól F. Joensen***

# Hagtøl frá dystum

## England – FØROYAR

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **U17 NM 2011 – Bólkur A, dystur 1** | | | | | |
| **Úrslit** | 4-0 (2-0) | | | | | |
| **Dato** | 2. august 2011 | | | | | |
| **Leikvøllur** | Þórsvøllur | | | | | |
| **Dómarar:** | Dómari: | Espen Eskaas (FIN) | | | | |
| | Hj.dómarar: | Jon Michael Knudsen (NOR), Bryngeir Valdimarsson(ISL) | | | | |
| | 4. Dómari: | Bjarni Hrannar Héðinsson (ISL) | | | | |

| **Lið** | **England** | | | **FØROYAR** | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1 | Shay Facey | 55′ | 1 | Elias Rasmussen | |
| | 2 | Alistair Gordon | | 2 | Haraldur R. Højgaard | 62′ 59′ |
| | 3 | Lawrence Gorman | | 3 | Jón Áki Jacobsen | |
| | 4 | Connor Randall | 55′ | 5 | Teitur J. Olsen | |
| | 5 | Lewis Baker | 55′ | 6 | Poul Nolsøe Mikkelsen | |
| | 6 | Chuba Akpom | 43′ 55′ | 7 | Hákun Edmundsson | 83′ |
| | 8 | Chris Long | 28′ 48′ | 8 | Rasmus Dan Sørensen | 55′ |
| | 13 | Tyler Renton | 55′ | 9 | Brandur H. Olsen | 77′ |
| | 16 | Luke McGee | | 10 | Sigurð Poulsen | 69′ |
| | 17 | Danny Smith | 13 68′ | 11 | Poul Kjartan Signar Ingason | |
| | 18 | Jasper Johns | 16′ | 13 | Karl MartinE. Danielsen | |
| | **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | | |
| | 12 | Angus Gunn | | 16 | Eivindur Sørensen | |
| | 7 | Luke Woodland | | 4 | Tórur Justesen | 62′ |
| | 9 | Isaac Hayden | 55′ | 12 | Jógvan Andreas á Lað | ′ |
| | 10 | Kwame Thomas | 16′ | 14 | Tóri Rasmussen | 81′ |
| | 11 | Ashley Smith-Brown | 68′ | 15 | JohnJohannesen Frederiksen | ′ |
| | 14 | Georg Glendon | ′ 55′ | 17 | Jóhannes Hansen | 83′ |
| | 15 | Mason Bennett | 55′ 63 | 18 | Fríði Sigurðsson | |
| **Venjari** | | | | Áki Johansen og Pól F. Joensen(FRO) | | |

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

# Ísland – FØROYAR

**U17 NM 2011 – Bólkur A, dystur 2**

**Úrslit** 3-0 (2-0)
**Dato** 3. august 2011
**Leikvøllur** Sauðárkróksvøllur

**Dómarar:** Dómari: Ville Nevalainen(FIN)
Hj.dómarar: Riku Vihreavouri(FIN), Jon Michael Knutsen(Norge
4. Dómari: Espen Eskaas(FIN)

**Lið**

| **Ísland** | | | **FØROYAR** | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 12 | Orri Sigurður Ómarsson | 61′ | 16 | Elias Rasmussen | |
| 2 | Hjørtur Hermannsson | 40′ | 2 | Haraldur R. Højgaard | 51 |
| 5 | Ævar Ingi Jóhannesson | 56′ | 3 | Jón Áki Jacobsen | |
| 6 | Oliver Sigurjónsson | 26′<br>40′ | 5 | Teitur J. Olsen | 46′ |
| 7 | Frederik Albrecht Schram | | 6 | Poul N. Mikkelsen | |
| 10 | Darri Tryggvason | 56′ | 7 | Hákun Edmundsson | |
| 11 | Ingiberg Ólafur Jónsson | | 8 | Rasmus Dan Sørensen | 80′ |
| 13 | Jovan Kujundzic | | 10 | Brandur H. Olsen | 27′<br>80′ |
| 16 | Svavar Berg Jóhansson | | 12 | Sigurð Poulsen | |
| 17 | Elías Már Ómarsson | 11′ | 13 | Poul Kjartan Ingason | 32′<br>51′ |
| 18 | Daði Bergsson | 71′ | 17 | Karl Martin E. Danielsen | 71′ |

| **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rúnar Rúnarsson | | 1 | Eivindur Sørensen | |
| 3 | Adam Ørn Arnarson | 40′ | 4 | Tórur Justesen | 51′ |
| 4 | Osvald J. Trausason | 61′ | 9 | Jógvan Andreas á Lað | 71′ |
| 8 | Tórður Jóhannesson | 40′<br>49′ | 11 | Tóri Rasmussen | 80′ |
| 9 | Stefán Pálsson | 56′ | 14 | John J. Frederiksen | 51′ |
| 14 | Kristian Flóki Finnbogason | 56′ | 15 | Jóhannes Hansen | 80′ |
| 15 | Páll Torsteinsson | 71′ | 18 | Fríði Sigurðsson | |

**Venjari** Áki Johansen og Pól F. Joensen(FRO)

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

## Noreg – FØROYAR

**U17 NM 2011 – Bólkur A, dystur 3**

**Úrslit** 2-0(1-)
**Dato** 5. august 2011
**Leikvøllur** Dalvíkurvøllur

**Dómarar:** Dómari: Jan Eric Jessen
Hj.dómarar: Eðvarð Eðvarðsson og Tobias Warn
4. Dómari: Ville Nevalainen

**Lið**

| | **Noreg** | | | **FØROYAR** | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kent are Antonsen | | 16 | Elias Rasmussen | |
| 2 | Dursa Ahmed | 59 | 2 | Haraldur R. Højgaard | |
| 4 | Thomas Kristensen | 59 | 5 | Jón Áki Jacobsen | 80′ |
| 5 | Herman Stengel | | 6 | Teitur J. Olsen | |
| 8 | Bård Finne | 47′<br>56′ | 7 | Poul N. Mikkelsen | |
| 9 | Riki Tomas Alba | 23′ | 8 | Hákun Edmundsson | 60<br>73″ |
| 11 | Ola Herman Opheim | | 9 | Tórur Justesen | 60′ |
| 13 | Alexander Jones | | 10 | Rasmus Dan Sørensen | |
| 14 | Peter Aase | | 12 | Brandur H. Olsen | |
| 16 | Alexander Sørloth | | 13 | Sigurð Poulsen | 56′ |
| 17 | Sondre Tronstad | | 17 | Karl Martin E. Danielsen | 77′ |
| | **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | |
| 12 | Pål Vestly Heigre | | 1 | Eivindur Sørensen | 60′ |
| 3 | Vegard Bergan | 59′ | 3 | Jógvan Andreas á Lað | 56′ |
| 6 | Kamer Qaka | 56′ | 4 | John J. Frederiksen | |
| 7 | Martin Trøen | | 11 | Jóhannes Hansen | |
| 10 | Anders Trondsen | 59′ | 14 | Tóri Rasmussen | 73′ |
| 15 | Gard Kristensen | | 15 | Poul Kjartan S. Ingason | 75′<br>75′ |

**Venjari** Áki Johansen og Pól F. Joensen(FRO)

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

# FRAKLAND – FØROYAR

**U17 EM 2012 – Undankapping, bólkur 10**

**Úrslit** 5-0 (3-0)
**Dato** 28. oktober 2011 kl. 16.30
**Leikvøllur** Rodange – Rodange

**Dómarar:** Dómari: Thorvaldur Árnason (ISL)
Hj.dómarar: Birkir Sigurdarson (ISL), Claudio De Carolis (LUX)
4. Dómari: Laurent Kopriwa (LUX)

**Lið**

**FRAKLAND**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Mike Maignan (GK) | |
| 2 | Yarouba Cissako | |
| 4 | Jean-Charles Castelletto (C) | |
| 5 | Clément Lenglet | |
| 6 | Seko Fofana | |
| 7 | Daniel Brunard | 28 |
| 8 | Thomas Lemar | 76 |
| 11 | Dolan Bahamboula | |
| 15 | Louis Nganioni | |
| 17 | Zakarie Labidi | 22 56 |
| 18 | Anthony Martial | 16 48 64 |

**Eykaleikarar:**

| | | |
|---|---|---|
| 16 | Axel Kacou (GK) | |
| 3 | Yassine Amrioui | |
| 9 | Jean Corentin | 64 |
| 10 | Mohamed Chemlal | 56 61 |
| 12 | Jonathan Mexique | 76 |
| 13 | Brian Landini | |
| 14 | Hervin Ongenda | |

**FØROYAR**

| | | |
|---|---|---|
| 16 | Fríði Sigurðsson (GK) | |
| 2 | Haraldur Højgaard | 64 69 |
| 3 | Jón Jacobsen | |
| 4 | Teitur Olsen | |
| 5 | Poul Mikkelsen | |
| 6 | Hákun Edmundsson | |
| 9 | Rasmus Sørensen | |
| 10 | Brandur Olsen (C) | |
| 11 | Jógvan Jacobsen | 53 |
| 17 | Poul Ingason | 72 |
| 18 | Karl Martin Danielsen | |

**Eykaleikarar:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Elias Rasmussen (GK) | |
| 7 | Eivindur Sørensen | 72 |
| 8 | Tórur Justesen | 69 |
| 12 | Sigurð Poulsen | 53 |
| 13 | Jákup Hansen | |
| 14 | John Guðjónsson | |
| 15 | Meinhard Olsen | |

**Venjari** Jean-Claude Giuntini (FRA) — Áki Johansen (FRO)

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

## N. ÍRLAND - FØROYAR

**U17 EM 2012 – Undankapping, bólkur 10**

**Úrslit** 2-0 (2-0)
**Dato** 30. oktober 2011 kl. 16.30
**Leikvøllur** Municipal – Petange

**Dómarar:** Dómari: Vlado Glodjović (SRB)
Hj.dómarar: Milan Minić (SRB), Claudio De Carolis (LUX)
4. Dómari: Laurent Kopriwa (LUX)

**Lið**

| | **N. ÍRLAND** | | | **FØROYAR** | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Christopher Johns (GK) | 39 | 1 | Elias Rasmussen (GK) | |
| 2 | Matthew Buchanan | | 3 | Jón Jacobsen | |
| 3 | Reece Glendinning | | 4 | Teitur Olsen | |
| 4 | Aaron McEneff | | 5 | Poul Mikkelsen | |
| 5 | Liam Donnelly | | 6 | Hákun Edmundsson | |
| 7 | Liam McGillian | 30<br>40 | 8 | Tórur Justesen | 57 |
| 8 | Jamie Glackin | | 9 | Rasmus Sørensen | 41 |
| 10 | Dominic Ball (C) | 40+1<br>49<br>64 | 10 | Brandur Olsen (C) | 40+1 |
| 11 | Tom Carlin | | 12 | Sigurð Poulsen | 67 |
| 14 | Matthew McMahon | 60 | 17 | Poul Ingason | 37 |
| 17 | Corey Hegarty | | 18 | Karl Martin Danielsen | |

| | **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | |
|---|---|---|---|---|---|
| 12 | Conor Thompson (GK) | 40 | 16 | Fríði Sigurðsson (GK) | |
| 6 | Cameron McGeehan | 64 | 2 | Haraldur Højgaard | |
| 9 | Josh Doherty | | 7 | Eivindur Sørensen | 41 |
| 15 | Aaron Patterson | | 11 | Jógvan Jacobsen | 67 |
| 16 | Patrick McNair | | 13 | Jákup Hansen | |
| 18 | Darren McKnight | | 14 | John Guðjónsson | |
| | | | 15 | Meinhard Olsen | 57 |

**Venjari** Paul Kee (NIR) Áki Johansen (FRO)

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

# FØROYAR – Luxembourg

**U17 EM 2012 – Undankapping, bólkur 10**

**Úrslit** 1-1 (0-0)
**Dato** 2. november 2011 kl. 19.00
**Leikvøllur** Rodange – Rodange

**Dómarar:** Dómari: Thorvaldur Árnason (ISL)
Hj.dómarar: Birkir Sigurdarson (ISL), Emanuel Marek (CZE)
4. Dómari: Miroslav Zelinka (CZE)

| Lið | | FØROYAR | | | LUXEMBOURG | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1 | Elias Rasmussen (GK) | | 1 | Luca Ivesic (GK) | |
| | 2 | Haraldur Højgaard | 75 | 3 | Alexandre Klopp | |
| | 3 | Jón Jacobsen | 49 | 4 | Aristote Kitenge (C) | |
| | 4 | Teitur Olsen | | 6 | Michel Bechtold | |
| | 5 | Poul Mikkelsen | | 7 | Dwayn Holter | 56 |
| | 6 | Hákun Edmundsson | 58 | 8 | Cédric Sacras | 54 |
| | 8 | Tórur Justesen | 80+4 | 11 | Mike Schneider | 52 |
| | 9 | Rasmus Sørensen (C) | 40+2<br>80+1 | 15 | Milos Todorovic | |
| | 12 | Sigurð Poulsen | 62 | 16 | Gérard Mersch | 80+4 |
| | 17 | Poul Ingason | | 17 | Ivan Iovalone | 48<br>72 |
| | 18 | Karl Martin Danielsen | | 18 | Bryan Simoes | 41 |
| | **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | | |
| | 16 | Fríði Sigurðsson (GK) | | 12 | Yann Duarte (GK) | |
| | 7 | Eivindur Sørensen | 62<br>74 | 2 | Pit Fehlen | |
| | 11 | Jógvan Jacobsen | | 5 | Romario Lima | |
| | 13 | Jákup Hansen | 75 | 9 | Damien Steinmetz | 63 |
| | 14 | John Guðjónsson | 80+1 | 10 | Glenn Gomes Borges | 72 |
| | 15 | Meinhard Olsen | | 14 | Ricardo Couto Pinto | 41<br>63 |
| **Venjari** | | Áki Johansen (FRO) | | | Marc Birsens (LUX) | |

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

# U15-landsliðið 2011

*Landsliðsvenjarar: Eli Hentze og Mathias Davidsen*

## U15 Landsliðið í Brøndby Cup 2011



**Keypmannahavn, Leygardagur 30. juli 2011**
**Dagur 1**

So var Aberdeen International Football Festival søga, í hvussu so er fyribils. Føroyingar hava luttikið í hesi kapping síðani mitt í 90´unum.

Tí er føroyska U15 landsliðið hesuferð farið til Keypmannahavnar at luttaka í stóru Brøndby Kup kappingini 2011.

Vit luttaka í Elitu-bólkinum, ið telur 16 lið. 4 bólkar á 4 lið. Okkara bólkur telur liðini:
Føroyar
Vejle Boldklub
Lyngby Boldklub
AB

Dystarskráin er henda:

| | |
|---|---|
| 31.07 | Føroyar v Vejle Boldklub |
| 01.08 | Føroyar v AB |
| 02.08 | Føroyar v Lyngby Boldklub |

Føroyska ferðalagið fór úr Vágunum kl. 11.00 í morgun. Av flogvøllinum gekk leiðin beinleiðis til Brøndby, har setanin var kl. 16.00 seinnapartin. Nøkur av liðunum, har í millum okkara, gingu skrúðgongu inn á vøllin og vóru presenteraði. Síðani var røða hildin umframt sangur frá “tvillingunum” frá X-factor.

Vanløse og eitt lið úr Suður Afrika í U19 aldursbólkinum spældu fyrsta dystin í kappingini, men okkara menn vóru bæði móðir

og svangir, so hugurin til at fylgja dystinum var ikki tann stóri, og hann minkaði munandi, tá ið regndroparnir, sum vit kenna so væl heimanífrá, duttu av himli.

Eftir dystin fingu vit ein góðan náttúrðabita í stórari fimleikahøll, áðrenn leiðin gekk heim á Hotel Scandic í Glostrup, har vit skulu halda til fyrstu dagarnar.

**U15 ferðalagið telur hesi:**
Hjalti Strømsten
Jákup F. Hansen
Betuel Hansen
Bartal Wardum
Aron Clementsen
Esmar Clementsen
Rói Olsen
Hilmar Leon Jacobsen
Meinhard Olsen
Levi Jøkladal
Ari M. Olsen
Absalon Eliasen
Jákup Andreasen
Sunnvar G. Hansen
Høgni E. Nielsen
Karstin Hansen
Erlendur Magnusson
Jákup L. Thomsen

Eli Hentze
Mathias Davidsen
Jan Andersen
Gudrid Nolsøe
Niclas Davidsen

**Keypmannahavn, Sunnudagur 31. juli 2011**
**Dagur 2**
Skráin:

| | |
|---|---|
| 09.00 | veking |
| 09.15 | morgunmatur |
| 09.50 | spákitúrur |
| 11.00 | upplegg til dyst |
| 12.00 | døgurði |
| 12.30-13.20 | hvíld |
| 14.20 | Føroyar v Vejle Boldklub |
| 16.30 | ábit |
| 18.00 | Brøndby v Horsens |
| 20.15 | náttúrði |
| 21.00 | heim á hotellið |
| 22.00 | songartíð |

**Føroyar-Vejle Boldklub 0-2 (0-1)**
Liðið:
Karstin Hansen - Rói Olsen - Jákup F. Hansen (liðs.) - Bartal Wardum - Hilmar Leon Jacobsen - Aron Clementsen - Betuel Hansen - Esmar Clementsen - Levi Jøkladal - Meinhard Olsen - Sunnvar G.Hansen

Inn/útskiftingar:

| | |
|---|---|
| 42.min | Høgni E. Nielsen inn fyri Levi Jøkladal |
| 46.min | Ari M.Olsen inn fyri Sunnvar G. Hansen |
| 52.min | Jákup Andreasen inn fyri Hilmar Leon Jakobsen |
| 59.min | Jákup L. Thomsen inn fyri Esmar Clementsen |
| 64.min | Erlendur Magnusson inn fyri Betuel Hansen |

Hjalti Strømsten kom ikki á vøllin

Máttu lúta fyri teimum reyðu úr Vejle, men hitin spældi okkum eitt puss!

Lat tað verða sagt beinanvegin. Teir reyðu úr Vejle vunnu uppiborið! Dystin á tamb vóru teir meira ágrýtnir og høvdu munandi meira orku enn okkara. Tað var týðiligt nærum frá dystarbyrjan, at flestu okkara høvdu meira enn trupult at flyta seg nóg skjótt og nóg nógv í nógva hitanum. Vit vóru rímliga væl við fyrstu løtuna, men tað var so tað. Høvdu onkrar einstakar møguleikar í mótálopsstøðum bæði í fyrra og seinna hálvleiki, men nærri enn einum skoti á yvirleggjaran komu vit ikki.

Vit hildu stand til stutt fyri hálvleik, tá ið eitt sera gott innlegg úr høgru í fyrsta umfari verður avgreitt frá okkara verju, men tíverri beint fyri føturnar á vejlensara, ið staddur uttanfyri brotssteigarmarkið smekkar til flatt, og bólturin brestur í netmeskurnar.

Vejle hevði munin í fyrra hálvleiki, meðan munurin í seinna var stórur. Teir trýstu okkum runt allan vøllin og vit høvdu onki mótsvar uttan einstakar mótálopsroyndir.

Stutt inn í annan hálvleik skora teir til 2-0 við frísparki úr 25-30 metrum.

Í stuttum kunnu vit siga, at vit vóru ikki sørt skuffaðir. Úrslitið er sum tað er, men vit vóru allir greiðir yvir, at vit lítið og onki kundu taka við okkum frá hesum dystinum. At nógvi hitin gjørdi uppgávuna uppaftur truplari mugu vit bara læra av og fyrireika okkum betri til næsta dyst.

Í kvøld hava vit verið á Brøndby Stadion og sæð Horsens stutt og greitt hølva heimaliðið av heili 4-1. Ikki sørt at teir gul/bláu heimamenninir mintu um okkara, hvat orku viðvíkur.

Í morgin er næsti dysturin á skránni, tá ið vit kl. 14.00 møta AB, sum í teirra fyrsta dysti legði rygg til lemjandi 7-0 ósigur móti Lyngby.

**Keypmannahavn, Mánadagur 1. aug., 2011**
**Dagur 3**

Skráin:

| | |
|---|---|
| 09.00 | veking |
| 09.15 | morgunmatur |
| 09.30 | fysioterapi |
| 10.30 | upplegg til dyst |
| 11.30 | døgurði |
| 12.00-13.00 | hvíld |
| 14.00 | Føroyar v AB |
| 16.30 | ábit |
| 17.30 | náttturði |
| 18.15 | heim á hotellið |
| 23.00 | songartíð |

**Føroyar-AB 1-0 (0-0)**
Málskjútti: Absalon Eliasen

Liðið:
Hjalti Strømsten - Rói Olsen - Jákup F. Hansen (liðs.) - Bartal Wardum - Hilmar Leon jacobsen - Betuel Hansen - Aron Clementsen - Levi Jøkladal - Høgni E. Nielsen - Esmar Clementsen - Meinhard Olsen

Inn/útskiftingar:

| | |
|---|---|
| 19.min | Sunnvar G. Hansen inn fyri Betuel Hansen |
| 46.min | Absalon Eliasen inn fyri Levi Jøkladal |
| 65.min | Jàkup L. Thomsen inn fyri Høgna E. Nielsen |

Karstin Hansen, Ari M. Olsen, Erlendur Magnusson og Jákup Andreassen komu ikki á vøllin

**Sigur í næstu royndini**
Vit, sum búleikast í Føroyum gremja okkum ikki so sjáldan um veðrið. M.a. ynskja vit meira sól. Hesir tríggir teir fyrstu dagarnir í danska høvuðsstaðnum hava givið okkum upp í spannir av sól. Nógvi hitin ávirkaði avrikið í gjár almikið, men í dag gekk munandi betri, hóast hitin helst var meira tyngjandi í dag. Men vit høvdu fyrireika okkum betri við nógvari vesku til dagsins dyst.

Í upplegginum løgdu vit stóran dent á, at avrikið, hóast hita, skuldi verða betri enn í gjár. Eisini broyttu vit spælskipan til eina heldur meira varna 1:4:5:1 ásannandi at allarhelst noyddust vit at økonomisera við renningini í hitanum. Í gjár valdu vit at spæla 1:4:4:2, men hetta riggaði ikki eftir ætlan. Liðið gjørdist alt ov langt og ov lítil samanhangur var millum keturnar.

Vit vistu, at AB liðið ikki var eins sterkt og Vejle, og hildu okkum hava ein góðan møguleika at fáa fult hús, og hetta eydnaðist eisini. Hetta takkað verið fyrst og fremst einum nógv betri avriki frá leikarunum. Til tíðir var spælið eisini munandi betri enn í gjár, men enn ikki heilt nøktandi. Alt ov ofta standa okkara leikarar nærum stillir, tá ið bólturin kemur til teirra, alt ov ofta duga okkara ikki nøktandi at orientera seg, áðrenn móttøku. Hesi bæði viðurskiftini til samans gera, at vit ov ofta missa bóltin rættiliga óneyðuga. Høvuðsorsøkin skyldast, at okkara leikarar eru óvanir við "nógva"ferð í leiki. Tað mekir so, at teir her verða stressaðir dystin á tamb, teir skulu alla tíðina verða klárir at flyta seg við ferð samstundis sum teir skulu hava tak á bóltinum. Tað tekur tíð at venja seg vit broyttu umstøðurnar í leiki!

Men at vit sóu stóra framgongd síðani í gjár er at fegnast um!

Sigursmálið kom, tá ið vit høvdu leikt 13 minuttir av seinna hálvleiki. Eftir eitt sindur av ping-pong inni í AB málteiginum endar bólturin hjá innskifta Absalon Eliasen, ið prikar hann síðstu metrarnar inn um

málstrikuna til sjálvsagda stóra gleði hjá okkara monnum. Bæði liðini høvdu einstakar málmøguleikar í dystinum, men vit hildu, at vit høvdu uppiborið góða sigurin.

Beint eftir okkara dyst sóu vit hini bæði liðini í okkara bólki dystast. Ein fínur dystur millum jútsku Vejle og høvuðsstaðardreingirnar úr Lyngby. Talan gjørdist um sera tættan dyst, ið Lyngby at enda vann 3-2. Stóri leikarin á Lyngby liðnum er ein pinkulítil 10´ari kallaður Emre, ið minnir ikki sørt um ein ávísan Messi í Barcelona troyggjuni. Hesin lítli vinstrabeini bóltsnillingurin er sera skjótur við bóltinum klistraðum at vinstrafótinum, hevur sera gott skot. Spennnadi at vita, um hesin einaferð í tíðini blívur til "nakað"!

Úrslitini av dagsins dystum bera í sær, at Lyngby er ovast við 6 stigum. Vejle og Føroyar hava 3 stig, meðan AB enn onki hevur. Í morgin skulu vit so taka okkum av Emre og Lyngby, meðan Vejle møtir AB.

**Keypmannahavn, Týsdagur 02. aug. 2011**
**Dagur 4**

Skráin:

| | |
|---|---|
| 09.00 | veking |
| 09.15 | morgunmatur |
| 09.30 | fysioterapi |
| 11.15 | upplegg til dyst |
| 12.30 | døgurði |
| 13.00-14.15 | hvíld |
| 15.25 | Føroyar v Lyngby Boldklub |
| 17.30 | nátturði |
| 18.15 | heim á hotellið |
| 20.15 | fráferð til diskotek |
| 22.30 | heima á hotellið |
| 23.00 | songartíð |

**Føroyar-Lyngby Boldklub 3-3 (3-2)**
Málskjúttar: Meinhard Olsen 2, Betuel Hansen 1

Liðið:
Karstin Hansen - Rói Olsen - Jákup F. Hansen (liðs.) - Bartal Wardum - Hilmar Leon Jacobsen - Betuel Hansen - Aron Clementsen - Absalon Eliasen - Høgni E. Nielsen - Esmar Clementsen - Meinhard Olsen

Inn/útskiftingar:

| | |
|---|---|
| 46.min | Jákup Andreassen inn fyri Absalon Eliasen |
| 52.min | Levi Jøkladal inn fyri Esmar Clementsen |
| 54.min | Sunnvar G. Hansen inn fyri Róa Olsen |
| 65.min | Ari M. Olsen inn fyri Hilmar Leon Jakobsen |
| 69.min | Rói Olsen inn fyri Betuel Hansen |

Hjalti Strømsten, Erlendur Magnusson og Jákup L. Thomsen komu ikki á vøllin

Okkara besti dystur higartil, hóast hitin var tann mesti.

Triði og síðsti innleiðandi dysturin var so nógv tann besti. At kalla alt tað, ið vit eftirlýstu í teimum báðum undanfarnu og tá serliga í tí fyrsta, var eyðsætt í truplu uppgávuni móti oddaliðnum í bólkinum, sum í sínum tveimum undanfarnu dystum hevði smurt AB av heili 7-0 og vunnið tepurt 3-2 móti Vejle.

Skuldu vit gera okkum vónir um at koma víðari sum 2´ari varð neyðugt at fáa 3 stig samstundis sum AB tók stig frá Vejle. Lítið restaði í!

Hesin dysturin móti Lyngby bleiv spældur á einum góðum graslíkisvølli. Hitin var tann mesti, út í móti teimum 30 bleiv sagt, men vit høvdu fyrireikað okkara leikarar væl og virðiliga til uppgávuna, og teir vóru klárir at taka dystin upp.

Venjararnir hvødu havt møguleika at síggja Lyngby í dysti og vóru vitandi um, at høvuðshóttanin kom frá álopsleikara nr. 9 og skuggaáloypara nr. 10. Sum móttrekk til hesar góðu einstaklingar, høvdu vit valt at hava tveir meiri verjukendar miðvallarar. 10´arin byrjaði tó ikki dystin! Okkara byrjaði við høgari leikferð og góðum spæli og longu í 1.minutti smekkaði Betuel Hansen til, staddur nakað uttanfyri brotsteigin, og bólturin fór sum eitt projektil í Lyngby málið. Leiðslumálið gav okkum bara uppaftur meiri árræði. Og hóast teir bláu javnaðu stutt eftir, vístu okkara stríðsvilja og sera gott spæl.

Í 19.minutti fær Meinhard Olsen bóltin eitt vet yvir í vinstru síðu nakað uttan fyri brotsteigin, dregur eitt sindur upp á tvørs, áðrenn hann við høgrabeininum smekkar til. Bólturin skrúvar úteftir og hevur kós móti handara málhorni, har hann eisini lendur til stóra gleði fyri okkara, og vit eru á odda 2-1. Enn einaferð ganga nakrir fáir minuttir, so svarar Lyngby aftur. Eitt frálíkt innlegg úr vinstru lendir í skallanum á 9´aranum, ið drønstútar í okkara mál, men Meinhard vildi meira. Í minuttinum eftir fær hann bóltin frá Esmari, hann trekkir inn móti 16-metrinum og so høggur hann til flatt yvir í handara síðunet. 3. flotta langskotið i hesum dystinum, ið gevur mál til okkara! 3-2, tá ið farið verður til hálvleik.

Um miðjan seinna hálvleik fær Lyngby brotsspark, ið gevur mál til endaligu støðuna 3-3. Hóast vit síðstu løtuna av dystinum stríddust við at finna fram góða spælið, høvdu vit málmøguleikar í seinna hálvleiki, ið kundu givið okkum ein uppibornan sigur, men...

Framgongdin frá tí fyrsta dystinum var stór, og tað er sjálvsagt at stórfegnast um

Beint eftir okkara dyst spældu Vejle og AB. Vejle vann tepran 2-1 sigur, hóast AB tað sama kundi vunnið við fleiri málum, men teir vóru ikki dugnaligir nokk at umseta nógvu risamøguleikararnar til mál.

Sostatt vóru vit rættiliga nær 2.plássinum, men noyddust at taka til takkar við 3.plássinum við 4 stigum í skjáttuni.

Um kvøldið vóru dreingirnir á diskoteki, meðan leiðararnir sótu frammanfyri kassanum og sóu FC Keypmannahavn vinna 2-0 móti Shamrock Rovers yvir í Dublin í Champions League kappingini.

**Keypmannahavn, Mikudagur 3.aug. 2011**
**Dagur 5**
Skráin:

| | |
|---|---|
| 09.00 | veking |
| 09.15 | morgunmatur |
| 09.30 | fysioterapi |
| 09.30 | keypstúrur |
| 13.00 | fráferð til stadion |
| 13.30 | døgurði |
| 15.00 | upplegg til dyst |
| 16.15 | ábit |
| 17.40 | Føroyar-Kolding |
| 19.30 | nátturði |
| 23.00 | songartíð |

**Føroyar-Kolding 0-1 (0-0)**

Liðið:
Hjalti Stømsten - Høgni E. Nielsen - Jákup F. Hansen (liðf.) - Bartal Wardum - Jákup B.Andreasen - Betuel Hansen - Aron Clementsen - Erlendur Magnusson - Meinhard Olsen - Ari M. Olsen - Jákup L. Thomsen

Inn/útskiftingar:

| | |
|---|---|
| 36.min | Esmar Clementsen inn fyri Erlend Magnuson |
| 42.min | Rói Olsen inn fyri Ari M.Olsen |
| 42.min | Hilmar L. Jakobsen inn fyri Jákup Andreasen |
| 50.min | Absalon Eliasen inn fyri Jákup L. Thomsen |

Sunnvar G. Hansen, Karstin Hansen og Levi Jøkladal komu ikki á vøllin

Brendaroykur í ósigri móti Kolding
Í dag møttu vit nr. 3 í bólki 1, ið gjørdist Kolding. Úrslitini hjá teimum vóru góð í innleiðandi bólkaspælinum, so vit ivaðust ikki í at fáa nokk av mótstøðu.

Men tað vísti seg, at vit høvdu sera gott tak á teimum. Bert tann eini stóri møguleikin til teirra, meðan vit vóru nær við fleiri ferðir. Nærmast, tá ið skot frá Meinhardi tók í stólpan, umhugsaði at fara inn í málið, men tíverri fyri okkum stakk í spæla aftur.

Einasta tíðarskeiðið í dystinum, har teir vóru eitt sindur omaná, var fyrstu 8 minuttirnar í seinna hálvleiki. Og tað var í hesum tíðarbili, at teir eitt sindur heppið fingu málið. Eitt innlegg úr høgru til aftaru stong. Sær út til at allir okkara verjuleikarar eru ivaleysir í, at maðurin er rangstaddur, men flaggið er ikki á lofti og dómarans luft verður ikki nýtt til floyting, og tískil sleppur ein Kolding leikari púrasta ótarnaður at skalla bóltin í málið,

meðan vit øll, eisini føroysku spælararnir á vøllinum, standa og hyggja at.

Eftir hetta trýstu vit aftur og komu til nógvar gyltar málmøguleikar, men inn vildi kúlan ikki í dag. Onkur kundi kanska tosa um brendaroyk í Kolding-brotsteiginum, men soleiðis eru tíverri onkrar fótbóltsløtur!

Kolding sigurin var alt annað enn uppiborin, men tað nyttar onki at gráta um spilta mjólk! Vit kunnu gleðast um, at okkara leikarar í stórum fetum hava ment seg síðani sunnudagin, tá ið dystaravrikið móti Vejle var alt annað enn gott!

Í morgin er síðsti dystur á skránni, tá ið vit skulu møta B93.

**Keypmannahavn, Hósdagur 4.aug. 2011**
**Dagur 6**

Skráin:

| | |
|---|---|
| 08.00 | veking |
| 08.30 | morgunmatur |
| 11.00 | upplegg til dyst og ábit |
| 12.50 | Føroyar - B93 |
| 14.30 | ábit |
| 16.15 | fráferð til flogvøllin |
| 19.00 | heimferð |

**Føroyar-B93 5-1 (1-1)**

Liðið:
Karstin Hansen - Rói Olsen - Jákup F. Hansen (liðs.) - Bartal Wardum - Levi Jøkladal - Betuel Hansen - Aron Clementsen - Absalon Eliasen - Sunnvar G. Hansen - Ari M. Olsen - Jákup L. Thomsen

Inn/útskiftingar:

| | |
|---|---|
| 20.min | Meinhard Olsen inn fyri Sunnvar G. Hansen |
| 29.min | Erlendur Magnusson inn fyri Ari M. Olsen |
| 36.min | Jákup Andreasen inn fyri Levi Jøkladal |
| 36.min | Høgni E. Nielsen inn fyri Róa Olsen |
| 47.min | Esmar Clementsen inn fyri Absalon Eliasen |
| 50.min | Hilmar L. Jakobsen inn fyri Aron Clementsen |
| 61.min | Aron Clementsen inn fyri Jákup F. Hansen |
| 61.min | Rói Olsen inn fyri Bartal Wardum |
| 65.min | Ari M. Olsen inn fyri Meinhard Olsen |
| 65.min | Levi Jøkladal inn fyri Jákup L. Thomsen |

Gult kort:
65.min Aron Clementsen

Hjalti Strømsten kom ikki á vøllin

Stórsigur í síðstu royndini gav samanlagt eitt 11.pláss í kappingini!

Munurin á liðunum í dagsins dysti var eyðsýndur. Okkara dreingir vóru bara nógv betri enn teir úr gamla felagnum hjá fyrrverandi TB-hetjuni Henrik Thomsen, B93.

Stórsigurin 5-1 gav liðnum eitt 11.pláss, ið ikki ljóðar av miklum, men niðurstøðan eftir trilvandi byrjanina móti Vejle, er hon, at munurin á okkara liði og teimum bestu elituliðunum í Danmark var lítil í hesi kappingini. Samstundis sum vit leiktu okkara dyst, leiktu Brøndby og Lyngby um 3.plássið. Tann dystin vann Lyngby 2-1. Fyri tveimum døgum síðani vóru vit sera nær vit at fáa fult hús móti júst Lyngby.

Givið er, at liðini vit møta, eru væl betri samanspæld enn okkara. Og tað tók eitt sindur av tíð hjá okkara at venja seg við ferðina í dystunum og nógva hitan. Skulu vit flyta okkum enn meiri á fótbóltsleið, er neyðugt at ungu menninir fáa fleiri slíkar dystir sum hesar, vit hava luttikið síðstu vikuna.

Men aftur til stórsigurin seinnapartin!

Tað var B93, sum kom á odda, tá ið 19 minuttir vóru leiktir. Ein misskiljing millum verjuna og málverjan loyvdi B93 at koma í millum og stjala bóltin og seta hann í tóma málið.

Okkara svaraðu skjótt aftur. Innskifti Meinhard Olsen fær eina langa sending og smýgur sær framvið málverjanum og javnar til 1-1, ið eisini varð hálvleiksstøðan.

Í seinna hálvleiki stýrdu vit øllum og skoraðu onnur 4 mál. Fyrst Jákup L. Thomsen í 4.minutti. Eisamallur við málverjanum eftir frálíkt uppspæl frá Meinhardi, lobbar hann hegnisliga uppum málverjan. Í 17.minutti er tað innskifti Esmar Clementsen, ið brýtur ígjønum í vinstru, sendir flatt innfyri til Meinhard, ið spælir stutt afturfrá til Betuel Hansen, ið við einum innsíðuskrúðara sendir kúluna í kassanum omanfyri málverjan, ið spraklar hjálparsleysur. Í 25.minutti er Meinhard Olsen aftur leysur við málverjanum og aftur hesuferð fer hann framvið honum og trillar í málið. Jákup L. Thomsen endar ballið í 28.minutti, tá ið hann bara skal seta innsíðuna á tætt undir málinum eftir frálíkt gjøgnumbrot og sending innfyri frá Meinhardi Olsen.

Fleiri mál komu ikki, men tey 5 vóru eisini nokk og góvu okkara dreingjum ein fínan enda á einari fínari og sera avbjóðandi kapping.

Eftir æltan skuldi ferðalagið fara heimaftur á miðdegi í morgin, men bilettirnar blivur broyttar til í kvøld kl. 19.00, og tað vóru allir fegnir um!

Takk fyri hesuferð! Eli Hentze/Mathias Davidsen

# A-landsliðið kvinnur 2011

*Landsliðsvenjarar: Álvur Hansen og Jacob Thomsen*

## “Undan-undankapping” á Malta



### Venjarafrágreiðing:

**A-landsliðið kvinnur 2011**
Eftir at hava luttikið í Algarve Cup í Portugal í februar 2010 - ein sera áhugaverd kapping við heimsins bestu londum, har vit møttu ”teimum næstbestu” – var onki á skránni hjá A kvinnum á heysti í 2010.

Í oktober 2010 beint eftir kappingarlok fekk FSF boð um at ”Undan-Undankapping” skuldi verða í februar 2011. Av tí at 46 lond vóru tilmeldaði kappingina, gjørdi UEFA av, at 8 tey veikastu eftir teirra styrkimeting skuldi leika eina undankapping fyri at sleppa við til ta veruligu undan-kappingina við bólkaspæli – heima og útidystum. Ì okkara bólk komu Georgia, Armenia

og Malta sum var vertur fyri kappignini. Í hinum bólkinum vóru Luxembourg, Letland, Litava og Makedonia.

Vit báðir – Jacob Thomsen og Álvur Hansen byrjaðu fyrireikingar við úttøkuvenjingum 13. november og vandu regluliga fram til fráferðina til Malta 1. mars. Avbjóðingin var aftur stór. Kappingin var tíðliga á árinum, áðrenn okkara heimliga kapping var byrjað. Flestu feløgini vóru júst byrjað at venja, tá vit skuldu avstað. So vit máttu við landsliðsvenjingunum leggja stóran dent á tann fysiska partin. Vit vandu nógv – mest líkt einum felag. 31 venjingardagar, harav onkur við fleiri venjingum.

**Venjingarskráin var hendan:**

| | |
|---|---|
| 13-11-10 | Gøtu |
| 18-11-10 | Tórshavn |
| 20-11-10 | Streymnes |
| 22-11-10 | Gøtu |
| 11-12-10 | Streymnes |
| 14-12-10 | Tórshavn |
| 27-12-10 | Tórshavn |
| 30-12-10 | Tórshavn |
| 31-12-10 | Fuglafjørð |
| 02-01-11 | Streymnes |
| 04-01-11 | Streymnes |
| 08-01-11 | Tórshavn |
| 11-01-11 | Tórshavn |
| 16-01-11 | Runavík |
| 18-01-11 | Streymnes |
| 20-01-11 | Streymnes |
| 22-01-11 | Streymnes |
| 25-01-11 | Streymnes |
| 27-01-11 | Gøtu |
| 29-01-11 | Tórshavn |
| 06-02-11 | Kambsdalur |
| 08-02-11 | Streymnes |
| 10-02-11 | Streymnes |
| 13-02-11 | Fuglafjørð |
| 15-02-11 | Streymnes |
| 17-02-11 | Klaksvík |
| 18-02-11 | Streymnes |
| 19-02-11 | Tórshavn |
| 22-02-11 | Streymnes |
| 23-02-11 | Gøtu |
| 26-02-11 | Tórshavn |

Tær 18, ið mannaðu hópin tá farið var avstað vóru:

Mona Breckmann og Olga Kristina Hansen báðar AB; Rakul M. Johannesen og Anja Weyhe báðar B36; Sólja Eiðisgarð EB/Steymur; Bjarta Ó. Johansen HB; Rannvá B. Andreasen, Malena Josephsen, Sigrid Jacobsen, Bára Skaale Klakstein, Paula Mikkelsen, Ragna Patawary og Randi S. Wardum allar KÍ; Margit Magnusdóttir MB; Fríðrún Danielsen Skála; Ansy Sevdal og Heidi Sevdal báðar Víkingur; Rakul Magnussen Vejle BK (DK);

Leiðararnir, ið vóru við á ferðini vóru: Niklas á Líðarenda ferðaleiðari, Sonja á Líðarenda liðleiðari, Sonja Skúvadal fysioterapeutur, Andras Gango málmansvenjari, Jacob Thomsen og Álvur Hansen venjarar.



**Malta 1. – 9. mars 2011**
Ferðaðust umvegis Keypmannahavn og Brussell til Malta. Á Malta vóru vit og hini trý londini innkvarteraði á Mellieha Bay Hotel. Eitt hotel, sum fyriuttan okkum ítróttarfólk, hevði ein hóp at eldri bretum á vitjan. Fínar umstøður at búgva. Friðarligt, góður matur við buffet. Tað sum kundi verið betri, er: Fundarhølini. Var bert eitt veruligt til 4 lið at deila; Internetið riggaði ikki ov væl heldur. Og so var heldur langt at fara til alt – venjing, dyst og entá bara út at síggja fólk.
Umstøðurnar til dystirnar vóru góðar. Leiktu á graslíki. Men dysturin móti Georgia á seinasta leikdegi bleiv leiktur á grasi, tí dystirnir báðir skuldi verða samstundis. Tað kom ikki so væl við hjá okkum, og tað bleiv ikki betur av, at vit ikki sluppu at venja á grasvøllinum undan dystinum. Annars var kappingin væl fyriskipað. Heimferðin gekk væl, tá vit ferðaðust allan vegin sama dag – hesaferð umvegis Rom og Keypmannahavn.

**Armenia – Føroyar**
Hósdagur 3. mars. Fyrsti dysturin var móti Armenia, sum var styrkistmett sum sterkasta liðið í bólkinum. Vit stillaðu upp í eini 4-4-1-1 skipan.

Armenia kom á odda í 7. minutti við einum heldur tilvildarligum málið. Vit missa bóltin í uppspælinum og Armenia sleppur í álop. Hóast okkara lið sær út at verða komið í balansu aftur, so fær áleyparin bóltin uttanfyri brotsteigin millum fleiri føroyskar leikarar og sparkar skjótt upp í málhornið.

Bæði áðrenn og eftir málið høvdu vit bóltin mest, men komu ikki til gjøgnumspældar málmøguleikar. Men tey nógvu hornaspørkini

og fleiri fríspørk úr góðum støðum vóru vandamikil.

Beint fyri hálvleikssteðgin varð ein Armensk genta útvíst eftir hevnisøku. Men hóast ein leikara í yvirtal, so kláraðu okkara gentur ikki at fáa mál. Trýstið var tó nógv og spælið var nærum bert á Armensku hálvuni. Tættast við var Malena, tá hon var millimetrar frá at fáa høvdið á fríspark frá Rannvá, og tá Heidi kom til góða skotstøðu úr høgru síðu. Somuleiðis rakti Ansy tvørtræið við frísparki.

Hagtølini á UEFA.com siga, at Føroyar hevði 7 hornaspørk og tær 2, Føroyar 17 málatóknir og tær 6.

Vit vóru sera vónbrotin eftir dystin. Serliga tí at vit høvdu bóltin tað mesta av tíðini, og ikki hildu okkum tapa fyri einum betri liðið.

Malta vann 1-0 á Georgia í hinum dystinum í dag.

**Føroyar**
Randi S. Wardum - Paula Mikkelsen, Bára S. Klakstein, Ragna Patawary, Sigrid Jacobsen (Rakul Magnussen, 88') - Ansy Sevdal ( Mona Breckmann, 67'), Malene Josephsen, liðsk., 3. Fríðrún Danielsen, Heidi Sevdal - Olga Kristina Hansen, 9. Rannvá B. Andreasen

**Á beinkinum uttan at verða skiftar inn**:
Bjarta O. Johansen, Anja Wejhe, Rakul M. Johannesen, Margit Magnussdóttir, Sólja Eiðisgarð

**Malta - Føroyar**
Leygardagur 5. mars. Næsti dysturin var móti Malta.
Tað var fitt av vindi tá vit leiktu ímóti Malta, og vit løgdu hart út og settu Malta undir stórt press frá fyrsta bríklsi, men fingu ikki hol á fyrr enn í 26. minutti, tá Malena Joesephsen setti fótin á bóltin eftir hornaspark. Stóra yvirvágin helt fram allan hálvleikin og vindurin gjørdi at nærum alt spælið var á Maltesisku hálvuni. Men tað komu ikki fleiri mál í fyrra hálvleiki.

Í seinna hálvleiki hildu okkara gentur fram har tær sleptu í fyrra. Hóast vindurin gjørdi at Malta nú fekk nakrar naskar royndir, so komu vit til enn fleiri opnar málmøguleikar enn í fyrra. Tað kundu saktans verið 5 - 6 mál í seinna hálvleiki, men neyvleikin var ikki tá bólturin skuldi inn um málstikuna. Sum seinni hálvleikur leið og vit ikki fingu tað næsta málið, so hevði Malta onkra naskar royndir, men Randi Wardum var á røttum stað og syrgdi fyri at tað ongantíð veruliga gjørdist vandamikið. Tá fimm minuttir vóru eftir var Olga Kristina Hansen spæld leys og hon var trygg og økti til 2-0.

Ein sera góður arbeiðsinnsatur og væl spældur dystur av føroysku gentunum.

Hin dysturin í dag millum Armenia og Georgia endaði við javnleiki 0-0.

**Føroyar**
Randi S. Wardum - Paula Mikkelsen, Bára S. Klakstein, Ragna Patawary, Sigrid Jacobsen - Heidi Sevdal (Rakul Magnussen, 90'), Malene Josephsen, liðsk., Fríðrún Danielsen, Rannvá B. Andreasen - Olga Kristina Hansen ( Ansy Sevdal, 93'), Mona Breckmann (Margit Magnussdóttir, 89')

**Á beinkinum uttan at verða skiftar inn**:
Bjarta O. Johansen, Anja Wejhe, Rakul M. Johannesen, Sólja Eiðisgarð

**Føroyar – Georgia**
Týsdagur 8. mars. Triðji dysturin var móti Georgia. Kravið undan dystinum var púra greitt. Vit skuldu vinna dystin ímóti Georgia og vóna at Malta kláraði at taka stig frá Armenia. Tað seinna hendi, men vit kláraðu ikki at greiða okkara skyldu.
Trupuleikin var ikki tann, at liðið ikki kom til kjansir, men heldur at um seta kjansirnar til mál. Okkara gentur høvdu tamarhald á dystinum allan dystin, men eins og í hinum dystunum, so kláraðu tær ikki at fáa mál.
Kostnaðurin var tann, at Georgia fekk mál uppá brotsspark, langt inni í yvirtíðini og vann dystin 1-0

**Føroyar**
Randi S. Wardum - Paula Mikkelsen, Bára S. Klakstein, Ragna Patawary, Sigrid Jacobsen (Margit Magnusdóttir, 92') - Heidi Sevdal, Malene Josephsen, liðsk., Fríðrún Danielsen, Rannvá B. Andreasen (Rakul V. Magnussen, 87') - Olga Kristina Hansen, Mona Breckmann

**Á beinkinum uttan at verða skiftar inn**:
Bjarta O. Johansen, Anja Wejhe, Sólja Eiðisgarð, Rakul M. Johannesen, Ansy Sevdal

**UEFA Undan-undankapping til EM 2013 í Svøríki, bólkur 2 á Malta**

Føroyar – Armenia 0 – 1
Georgia – Malta 0 - 1

Føroyar – Malta 2 – 0
Armenia – Georgia 0 - 0

Føroyar – Georgia 0 – 1
Armenia – Malta 1 – 1

Armenia vann bólkin við 5 stigum, meðan Malta og Georgia komu næst við 4 stigum. Niðast endaðu Føroyar við 3 stigum. Armenia víðari til EM-undankappingina

Í Makedonia leikti Makedonia seg víðari. Tær vunnu bólk 1 við 7 stigum, nummar 2 gjørdist Litava við 4 stigum, nummar 3 gjørdist Luxembourg við 3 stigum og aftast endaðu Letland við 3 stigum.

***Eftirmeting:***
Vit høvdu vænta sterka og javna mótstøðu í Undan-undankappingini á Malta, og høvdu vóna og ætlað at tað fór at eyðnast okkum at vinna bólkin og spæla okkum víðari.

Londini vit møttu vóru á tí støði vit væntaðu, og kappingin var eins jøvn sum mett, men vit greiddu ikki setningin. Øll hini trý londini luttóku í seinastu HM undankapping. Meðan vit ikki hava havt veruligar dystir.

Vit høvdu yvirvág í spæli allar tríggjar dystirnar. Komu til nógvar málmøguleikar í øllum dystunum. Men skora ikki mál. Kann vera at vit serliga í fyrsta dystinum løgdu ov nógvan dent á verjupartin í taktikkinum.

Undanfarna ár í Algarve Cup hildu vit at orkan ikki var til seinastu dystirnar. Men hesaferð sá út sum at vit vóru eins væl fyri sum hini londini. Tað at kappingarnar hjá landsliðinum er uttanfyri kappingarárið, ger at fyrireikingarnar fyri stóran part er konditiónsvenjing. Og vit vandu tríggjar ferð um vikuna.

Fyri framhaldandi menning av A-landsliðinum er týdningamikið við regluligum passandi avbjóðingum. Gera eina langtíðarætlan.

Vit eru nú nummar 80 á FIFA styrkilistanum 23. sept. 2011 og nummar 35 av UEFA-londunum. Vit vóru nummar 69 við ársbyrjan.

At enda vilja vit takka leikarunum, liðleiðara, fysioterapeutum, ferðaleiða frá túrunum á Malta – og ikki minst ein stór tøkk til teir leikarar ið vandu við, men ikki vóru endaligar úttiknar, hjálparfólk, venjarar og leiðarar úti í feløgunum, øllum teimum ið stillaðu upp til venjingardystirnar og FSF fyri gott samstarv í kappingarárinum 2011

Álvur Hansen og Jacob Thomsen
Venjarar

# Hagtøl frá dystum

## FØROYAR – ARMENIA

**EM 2013 Undankapping**

**Úrslit** 0-1 (0-1)
**Dato** 3. mars 2011 kl. 14.00
**Leikvøllur** Centenary – Ta Qali

**Dómarar:** Dómari: Sjoukje de Jong (NED)
Hj.dómarar: Anouk De Jong (NED), Duncan Sultana (MLT)
4. Dómari: Esther Azzopardi (MLT)

**Lið**

| FØROYAR | | | ARMENIA | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 16 | Randi Wardum (GK) | | 1 | Anna Karapetyan (GK) | |
| 3 | Frídrún Danielsen | | 4 | Mariam Torgomyan | |
| 6 | Bára Klakstein | | 5 | Ani Ghukasyan | |
| 7 | Ragna Patawary | | 6 | Kristina Aleksanyan | |
| 8 | Malena Josephsen (C) | | 7 | Kristine Mangasaryan | |
| 9 | Rannvá Andreasen | | 8 | Vardine Khanzatyan | |
| 10 | Olga Kristina Hansen | | 9 | Gayane Kostanyan (C) | 7<br>37 |
| 11 | Heidi Sevdal | | 11 | Armine Khachatryan | |
| 12 | Ansy Sevdal | 67 | 13 | Lilit Karapetyan | |
| 17 | Sigrid Jacobsen | 86 | 17 | Eleonora Davtyan | 45+1 |
| 18 | Paula Mikkelsen | | 18 | Marine Karapetyan | |

| **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Bjarta O. Johansen (GK) | | 12 | Taguhi Grigoryan (GK) | |
| 2 | Anja Maria Weyhe | | 2 | Hasmik Yeremyan | |
| 4 | Sólja T. Eidisgard | | 3 | Kristine Hakobyan | |
| 5 | Rakul M. Johannesen | | 10 | Olga Osipyan | 90+2 |
| 13 | Mona Brekkmann | 67 | 14 | Mariam Stepanyan | 37 |
| 14 | Rakul Magnussen | 86 | 15 | Arpine Arzumanyan | |
| 15 | Margit Magnusdottir | | 16 | Sona Shahinyan | |

**Venjari** Ákvur Hansen — Vagharshak Aslanyan (ARM)

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

# FØROYAR - MALTA

**EM 2013 Undankapping**

**Úrslit** 2-0 (1-0)
**Dato** 5. mars 2011 kl. 14.00
**Leikvøllur** Centenary – Ta' Qali

**Dómarar:** Dómari: Lilach Asulin (ISR)
Hj.dómarar: Tzvia Malca (ISR), Anouk De Jong (NED)
4. Dómari: Sjoukje de Jong (NED)

| **Lið** | | **FØROYAR** | | | **MALTA** | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 16 | Randi Wardum (GK) | | 12 | Sharon Costantino (GK) | |
| | 3 | Frídrún Danielsen | | 3 | Kirsty Feasey | |
| | 6 | Bára Klakstein | | 4 | Natasha Pace | |
| | 7 | Ragna Patawary | | 5 | Rebecca D'Agostino (C) | 73 |
| | 8 | Malena Josephsen (C) | 26 | 6 | Dorianne Theuma | |
| | 9 | Rannvá Andreasen | | 7 | Ylenia Carabott | |
| | 10 | Olga Kristina Hansen | 86<br>90+3 | 8 | Rachel Cuschieri | |
| | 11 | Heidi Sevdal | 58<br>90 | 9 | Rebecca Chircop | |
| | 13 | Mona Brekkmann | 89 | 10 | Antoinette Sammut | 81 |
| | 17 | Sigrid Jacobsen | | 15 | Corissa Vella | 70 |
| | 18 | Paula Mikkelsen | | 16 | Charlene Zammit | |
| | | **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | |
| | 1 | Bjarta O. Johansen (GK) | | 1 | Dorianne Grech (GK) | |
| | 2 | Anja Maria Weyhe | | 2 | Gabriella Zahra | 70 |
| | 4 | Sólja T. Eidisgard | | 11 | Kathleen Saliba | 81 |
| | 5 | Rakul M. Johannesen | | 13 | Mandy Debono | |
| | 12 | Ansy Sevdal | 90+3 | 14 | Oriana Bedingfield | |
| | 14 | Rakul Magnussen | 90 | 17 | Maria Azzopardi | 73 |
| | 15 | Margit Magnusdottir | 89 | 18 | Emma Xuereb | |
| **Venjari** | | Álvur Hansen | | | Pierre Brincat (MLT) | |

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

# GEORGIA – FØROYAR

**EM 2013 Undankapping**

**Úrslit** 1-0 (0-0)
**Dato** 8. mars 2011 kl. 14.00
**Leikvøllur** Ta' Qali National Stadium – Ta' Qali

**Dómarar:** Dómari: Lilach Asulin (ISR)
Hj.dómarar: Tzvia Malca (ISR), Duncan Sultana (MLT)
4. Dómari: Esther Azzopardi (MLT)

| **Lið** | **GEORGIA** | | | **FØROYAR** | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1 | Kristina Shadoba (GK) | | 16 | Randi Wardum (GK) | |
| | 2 | Nino Sutidze | 67 | 3 | Frídrún Danielsen | |
| | 3 | Nino Pasikashvili | | 6 | Bára Klakstein | |
| | 4 | Tamar Kvelidze | | 7 | Ragna Patawary | |
| | 6 | Teona Todadze | | 8 | Malena Josephsen (C) | |
| | 7 | Tatiana Matveeva (C) | | 9 | Rannvá Andreasen | 26<br>87 |
| | 9 | Khatia Tchkonia | 66 | 10 | Olga Kristina Hansen | |
| | 10 | Gulnara Gabelia | | 11 | Heidi Sevdal | 48 |
| | 11 | Ana Pogosian | 88 | 13 | Mona Brekkmann | |
| | 14 | Tamari Tatuashvili | | 17 | Sigrid Jacobsen | 90+2 |
| | 16 | Natia Skhirtladze | | 18 | Paula Mikkelsen | 90+4 |
| | **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | | |
| | 12 | Tamar Nadirashvili (GK) | | 1 | Bjarta O. Johansen (GK) | |
| | 5 | Tamta Malidze | 88 | 2 | Anja Maria Weyhe | |
| | 8 | Lela Chichinadze | 66 | 4 | Sólja T. Eidisgard | |
| | 13 | Maia Meskhidze | | 5 | Rakul M. Johannesen | |
| | 15 | Nino Kochmazashvil | | 12 | Ansy Sevdal | |
| | 17 | Gvantsa Dolidze | | 14 | Rakul Magnussen | 87 |
| | 18 | Tamriko Kvaliashvili | | 15 | Margit Magnusdottir | 90+2 |

**Venjari** Teimuraz Svanadze (GEO) Álvur Hansen

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

# Onnur Hagtøl

## Landsliðið 2011

| Nr. | Navn | Fødd | Felag | Føroyar-Armenia 0-1 (0-1) | Malta - Føroyar 0-2 (0-1) | Georgi-Føroyar 1-0 (0-1) | Dyst | Min |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Bjarta O. Johansen | 28.04.93 | HB Tórshavn | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 2 | Anja Weyhe | 18.04.81 | B36 Tórshavn | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 3 | Fríðrún Danielsen | 29.04.91 | Skála, Skála | 90 | 90 | 90 | 3 | 270 |
| 4 | Sólja T. Eiðisgarð | 30.08.93 | EB/Streymur, Eiði | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 5 | Rakul Maria Johannesen | 27.07.93 | B36 Tórshavn | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 6 | Bára Skaale Klakstein | 24.03.73 | KÍ Klaksvík | 90 | 90 | 90 | 3 | 270 |
| 7 | Ragna Patawary | 10,11,80 | KÍ Klaksvík | 90 | 90 | 90 | 3 | 270 |
| 8 | Malena Josephsen | 03,01,77 | KÍ Klaksvík | 90 | 90 | 90 | 3 | 270 |
| 9 | Rannvá B. Andreasen | 10,11,80 | KÍ Klaksvík | 90 | 90 | 87 út | 3 | 267 |
| 10 | Olga Kristina Hansen | 28,02,90 | AB, Argir | 90 | 90 út | 90 | 3 | 270 |
| 11 | Heidi Sevdal | 06,03,89 | Víkingur, | 90 | 90 út | 90 | 3 | 270 |
| 12 | Anna Sofía Sevdal (Ansy) | 20.12.93 | Víkingur, | 67 út | 2* inn | 0 | 2 | 69 |
| 13 | Mona Breckmann | 06.09.91 | AB, Argir | 23 inn | 89 út | 90 | 3 | 202 |
| 14 | Rakul V Magnussen | 03.04.89 | Vejle BK (DEN) | 2 inn | 3* inn | 3 inn | 3 | 8 |
| 15 | Margit Magnusdóttir | 26.02.92 | MB, Miðvágur | 0 | 4* inn | 5* inn | 2 | 9 |
| 16 | Randi S. Wardum | 22,11,86 | KÍ Klaksvík | 90 | 90 | 90 | 3 | 270 |
| 17 | Sigrid Jacobsen | 26,04,90 | KÍ Klaksvík | 88 út | 90 | 90 út | 3 | 268 |
| 18 | Paula Mikkelsen | 28.09.80 | KÍ Klaksvík | 90 | 90 | 90 | 3 | 270 |
| | | | | | | | | |
| | Álvur Hansen | | Venjari | | | | | |
| | Jacob Thomsen | | Hj. Venjari | | | | | |
| | Andras Gango | | Málmansvenjari | | | | | |
| | Sonja Skúvadal | | Fysioterapeut | | | | | |
| | Sonja á Líðarenda | | Liðleiðari | | | | | |
| | Niklas á Líðarenda | | Head of delegation | | | | | |

## Landsliðsleikarar – 1995/2011

| Leikari | Føðingardagur | Ár | Landsdystir | Mál |
|---|---|---|---|---|
| Randi Wardum | 22.11.86 | 2004/2011 | 24 | -44 |
| Rannvá B. Andreasen | 10.11.80 | 2004/2011 | 24 | 15 |
| Malene Josephsen | 03.01.77 | 2004/2011 | 24 | 9 |
| Heidi Sevdal | 06.03.89 | 2006/2011 | 21 | 7 |
| Olga Kristina Hansen | 28.02.90 | 2006/2011 | 21 | 4 |
| Ragna Patawary (Andreasen) | 10.11.80 | 2004/2011 | 16 | |
| Fríðrún Danielsen | 29.04.91 | 2008/2011 | 15 | |
| Bára Skaale Klakkstein | 24.03.73 | 1996/2011 | 14 | |
| Sólva Joensen | 18.01.78 | 1995/2010 | 14 | 1 |
| Ragna Patawary (Andreasen) | 10.11.80 | 2004/2011 | 16 | |
| Annelisa Justesen | 18.02.82 | 2006/2009 | 13 | |
| Mona Breckmann | 06.09.91 | 2008/2011 | 12 | 3 |
| Rósa Magnussen | 24.03.90 | 2007/2010 | 11 | |
| Bjørg Syderbø | 26.02.88 | 2006/2009 | 10 | |
| Borglis Fagradal | 07.11.73 | 1995/1996 | 8 | |
| Birita Ellefsen | 12.01.67 | 1995/1996 | 8 | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Ingun Hansen | 04.05.74 | 1995/1996 | 8 | |
| Brynhild Klein | 24.05.78 | 1995/1996 | 8 | |
| Margit Joensen | 12.02.74 | 1995/1996 | 8 | |
| Elin Katrina Haraldsen | 01.01.85 | 2006/2008 | 8 | 2 |
| Kristina Lervig | 13.09.74 | 1995/1996 | 7 | |
| Helga Ellingsgaard | 12.02.73 | 1995/1996 | 7 | 1 |
| Judith Joensen | 10.07.76 | 1995/1996 | 7 | |
| Steintóra Joensen | 03.06.91 | 2008/2010 | 7 | |
| Gunrid Hansen | 19.05.70 | 1995/1996 | 6 | |
| Doris í Garði Joensen | 13.07.86 | 2006/2008 | 6 | |
| Paula Mikkelsen | 28.09.80 | 2010/2011 | 6 | |
| Asta Magnussen | 05.01.85 | 2005/2009 | 6 | |
| Rakul Magnussen | 03.04.88 | 2008/2011 | 6 | |
| Hellen Haraldsen | 26.12.88 | 2006/2009 | 6 | |
| Anna Sofía Sevdal | 20.12.93 | 2010/2011 | 5 | |
| Kristina Holm | 29.09.73 | 1995/1995 | 5 | -14 |
| Kára á Dunga | 08.12.67 | 1995/1995 | 5 | |
| Anja Rein | 15.09.73 | 1995/1995 | 5 | 1 |
| Sigrun Mikkelsen | 17.05.66 | 1995/1995 | 5 | |
| Sigrid Jacobsen | 26.04.90 | 2010/2011 | 5 | |
| Eyðfríð Kristiansen | 07.01.80 | 2006/2006 | 5 | 1 |
| Vivian Bjartalíð | 02.06.79 | 2004/2007 | 5 | 3 |
| Jacoba Langgaard | 24.09.88 | 2005/2006 | 5 | 1 |
| Ann Olsen | 27.07.81 | 2004/2009 | 5 | |
| Rúna Højgaard | 26.02.89 | 2006/2008 | 5 | |
| Monika Samuelsen | 31.07.89 | 2008/2010 | 5 | |
| Lilja Petersen | 14.05.79 | 2010/2010 | 4 | |
| Sonja Hansen | | 1995/1996 | 4 | |
| Heidi Heinesen | 26.06.73 | 2004/2006 | 4 | |
| Mary-Ann Isaksen | 31.03.86 | 2005/2007 | 4 | |
| Rannvá Augustinussen | 17.11.79 | 2004/2005 | 3 | |
| Maria Vang | 22.02.79 | 2006/2006 | 3 | |
| Kristinbjørg Frederiksberg | 01.05.91 | 2009/2010 | 3 | |
| Durita Rouch | 19.11.73 | 1995/1995 | 2 | |
| Eyðvør úr Dímun | 29.11.73 | 1996/1996 | 2 | |
| Maibritt Eystberg | 22.04.78 | 1996/1996 | 2 | -4 |
| Unn Kragesteen | 13.01.86 | 2005/2005 | 2 | |
| Halltóra Joensen | 15.03.81 | 2005/2005 | 2 | |
| Margit Magnusdóttir | 16.02.92 | 2011/2011 | | |
| Elsa Maria Simonsen | 08.03.84 | 2008/2008 | 2 | |
| Unn Jarnskor | 02.07.77 | 1996/1996 | 1 | -9 |
| Sólgerð Viderø | 16.01.77 | 1996/1996 | 1 | |
| Anja Weihe | 18.04.81 | 2004/2004 | 1 | |
| Silja á Borg Færø | 23.07.81 | 2004/2004 | 1 | |
| Lydia V. Vesturtún | 30.12.79 | 2004/2004 | 1 | |
| Maibritt Olsen | 15.08.84 | 2004/2004 | 1 | |
| Hanna Isaksen | 07.04.89 | 2005/2005 | 1 | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Ása Dam á Neystabø | 26.09.86 | 2005/2005 | 1 |
| Jeanett Holm | 03.04.90 | 2008/2008 | 1 |
| Marjun Herup Olsen | | 2008/2008 | 1 |
| Barbara á Dunga | 11.12.88 | 2008/2008 | 1 |
| Evi Mikkelsen | 14.09.78 | 2010/2010 | 1 |
| | | | **68 leikarar tilsamans** |

## Landsliðsmálskjúttar

| Leikari | Mál | Dystir |
|---|---|---|
| Rannvá B. Andreassen | 15 | 24 |
| Malena Josephsen | 9 | 24 |
| Heidi Sevdal | 7 | 21 |
| Olga Kristina Hansen | 4 | 21 |
| Vivian Bjartalíð | 3 | 5 |
| Mona Breckmann | 3 | 12 |
| Elin Katrina Haraldsen | 2 | 8 |
| Sólvá Joensen | 1 | 14 |
| Helga Ellingsgaard | 1 | 7 |
| Rósa Magnussen | 1 | 11 |
| Anja Rein | 1 | 5 |
| Eyðfríð Kristiansen | 1 | 5 |
| Jacoba Langgaard | 1 | 5 |
| Sjálvmál | 1 | |
| | | |
| **Tilsamans** | **50** | |

## Landsliðsmálverjar

| Leikari | Mál | Dystir |
|---|---|---|
| Randi Wardum | -44 | 24 |
| Kristina Holm | -14 | 5 |
| Unn Jarnskor | -9 | 1 |
| Maibritt Eystberg | -4 | 2 |
| **Tilsamans** | **-71** | |

## 32 altjóða landsdystir Føroya 1995/2011

| Nr. | Dagur | Staður | Dystur | Úrslit | Slag |
|---|---|---|---|---|---|
| | 1986 | | Ísland-Føroyar | 6-0 | Vin. |
| | 1986 | | Ísland-Føroyar | 2-0 | Vin. |
| | | | | | |
| 01 | 24.09.1995 | Svangaskarð | Føroyar-Írland | 0-2 (0-1) | EM 1996 |
| 02 | 11.10.1995 | Roi Boudouin, Brússel | Belgia-Føroyar | 2-0 (2-0) | EM 1996 |
| 03 | 23.10.1995 | Dumfries | Skotland-Føroyar | 7-1 (3-1) | EM 1996 |
| 04 | **25.10.1995** | **Farrar Road** | **Wales-Føroyar** | **0-1 (0-1)** | **EM 1996** |
| 05 | 28.10.1995 | Rich,pmd Parl. Dublin | Írland-Føroyar | 3-1 (2-1) | EM 1996 |
| 06 | 18.05.1996 | Svangaskarð | Føroyar-Belgia | 0-9 (0-2) | EM 1996 |
| 07 | 25.05.1996 | Svangaskarð | Føroyar-Skotland | 0-3 (0-1) | EM 1996 |
| 08 | 08.06.1996 | Svangaskarð | Føroyar-Wales | 0-1 (0-1) | EM 1996 |
| 09 | 12.10.2004 | Klaksvík | Føroyar-Írland | 1-2 (0-0) | Vin. |
| 10 | 06.06.2005 | Dublin | Írland-Føroyar | 2-1 (0-1) | Vin. |
| 11 | **12.07.2005** | **Cunningsburg, Hetl.** | **Bermuda-Føroyar** | **0-3 (0-0)** | **OyL 2005** |
| 12 | 18.11.2006 | Strumica, Makedonia | Wales-Føroyar | 2-1 (1-0) | EM 2009 |
| 13 | 20.11.2006 | Strumica, Makedonia | Føroyar-Kasakstan | 0-1 (0-1) | EM 2009 |
| 14 | **23.11.2006** | **Strumica, Makedonia** | **Makedonia-Føroyar** | **0-7 (0-3)** | **EM 2009** |
| 15 | 02.11.2007 | *Šiauliai,* Litava | Litava-Føroyar | 3-0 (1-0) | Vin. |
| 16 | **04.11.2007** | **Telšiai Litava** | **Føroyar-Estland** | **2-1 (2-1)** | **Vin.** |
| 17 | **07.11.2007** | **Panevėžys, Litava** | **Letland-Føroyar** | **0-3 (0-2)** | **Vin.** |
| *18* | *10.05.2008* | *Junglinster, Luksemburg* | *Føroyar-Kasakstan* | *0-0 (0-0)* | *Vin.* |
| 19 | **12.05.2008** | **Rodange, Luksemburg** | **Lettland-Føroyar** | **2-4 (2-1)** | **Vin.** |
| 20 | **15.05.2008** | **Junglinster, Luksemb.** | **Føroyar-Luksemburg** | **4-2 (1-0)** | **Vin.** |
| 21 | **25.10.2008** | **Marjepole, Litava** | **Føroyar-Litava** | **4-1 (3-1)** | **Vin.** |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 22 | **27.10.2008** | **Marjepole, Litava** | **Føroyar-Luksemburg** | **6-2 (3-1)** | **Vin.** |
| 23 | **11.04.2009** | **Virje, Kroatia** | **Kroatia-Føroyar** | **1-3 (1-1)** | **Vin.** |
| 24 | 13.04.2009 | Pitomaca, Kroatia | Føroyar-Bosnia-Hers. | 2-3 (2-2) | Vin. |
| 25 | **16.04.2009** | **Krizevci, Kroatia** | **Litava-Føroyar** | **1-3 (1-1)** | **Vin.** |
| 26 | 24.02.2010 | Algarve, Portugal | Portugal-Føroyar | 5-0 (4-0) | Vin. |
| 27 | 26.02.2010 | Algarve, Portugal | Eysturríki-Føroyar | 3-0 (2-0) | Vin. |
| 28 | 01.03.2010 | Algarve, Portugal | Rumenia-Føroyar | 5-1 (0-0) | Vin. |
| 29 | 03.03.2010 | Algarve, Portugal | Eysturríki-Føroyar | 6-0 (0-0) | Vin. |
| 30 | 03.03.2011 | Ta' Qali, Malta | Føroyar – Armenia | 0-1 (0-1) | EM 2013 |
| 31 | 05.03.2011 | Ta' Qali, Malta | Føroyar – Malta | 2-0 (1-0) | EM 2013 |
| 32 | 08.03.2011 | Ta' Qali, Malta | Georgia - Føroyar | 1-0 (0-0) | EM 2013 |

| **Vunnir dystir, javnleikir og tap** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | d. | s. | j. | t. | mál |
| EM | 14 | 3 | 0 | 11 | 13-32 |
| Vinadystir | 17 | 8 | 1 | 8 | 34-39 |
| Oyggjaleikir | 1 | 1 | 0 | 0 | 3-0 |
| Í alt | **32** | **12** | **1** | **19** | **50-71** |

| **Vunnir dystir, javnleikir og tap** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | d. | s. | j. | t. | mál |
| á heimavølli | 5 | 0 | 0 | 5 | 1-17 |
| á útivølli | 9 | 4 | 0 | 5 | 19-20 |
| á uttanveltaðum vølli | 18 | 8 | 1 | 9 | 30-34 |
| Í alt | **32** | **12** | **1** | **19** | **50-71** |

| Land | Dystir | s. | j. | t. | Mál | Nr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Armenia | 1 | 0 | 0 | 1 | 0-1 | 30 |
| Belgia | 2 | 0 | 0 | 2 | 0-11 | 2, 6 |
| Bermuda | 1 | 1 | 0 | 0 | 3-0 | **11** |
| Bosnia-Hers. | 1 | 0 | 0 | 1 | 2-3 | 24 |
| Estland | 1 | 1 | 0 | 0 | 2-1 | **16** |
| Eysturríki | 2 | 0 | 0 | 2 | 0-9 | 27,29 |
| Georgia | 1 | 0 | 0 | 1 | 0-1 | 32 |
| Írland | 4 | 0 | 0 | 4 | 3-9 | 1, 5, 9, 10 |
| Kasakstan | 2 | 0 | 1 | 1 | 0-1 | 13, *18* |
| Kroatia | 1 | 1 | 0 | 0 | 3-1 | **23** |
| Letland | 2 | 2 | 0 | 0 | 7-2 | **17, 19** |
| Litava | 3 | 2 | 0 | 1 | 7-5 | 15, **21, 25** |
| Luksemburg | 2 | 2 | 0 | 0 | 10-4 | **20, 22** |
| Makedonia | 1 | 1 | 0 | 0 | 7-0 | **14** |
| Malta | 1 | 1 | 0 | 0 | 2-0 | **31** |
| Portugal | 1 | 0 | 0 | 1 | 0-5 | 26 |
| Rumenia | 1 | 0 | 0 | 1 | 1-5 | 28 |
| Skotland | 2 | 0 | 0 | 2 | 1-10 | 3, 7 |
| Wales | 3 | 1 | 0 | 2 | 2-3 | **4,** 8, 12 |
| **Í alt** | **32** | **12** | **1** | **19** | **50-71** | |

# U19-landsliðið kvinnur 2011

*Landsliðsvenjarar: Bjørn Krogh og Jacob Thomsen*



## U-19 kvindelandsholdet sæsonen 2011

Det overordnede mål med sæsonen 2011 var at forsvare U-19 kvindernes 3. Plads ved EM-kvalifikationen i Norge i 2010.
Delmålene frem mod dette overordnede mål var målrettet udvikling af den enkelte spiller samt holdet som helhed.
Fokus blev derfor rettet mod at udvikle holdet og de enkelte spillere således at U-19 kvinderne kunne blive spilstyrende i større dele af kampene end tidligere.
Spillestilen der blev arbejdet med tog udgangspunkt i en kompakt defensiv hvor der til træningen blev fokuseret på de individuelle defensive færdigheder samt samarbejdet i- og mellem kæderne.

Ved bolderobring blev der arbejdet med hurtig omstilling til angreb når modstanderholdet var i ubalance og ellers med sikkert og tålmodigt opspil når modstanderne var i balance.
Træningen startede 13. nov. 2010 og der blev afholdt 29 træningssamlinger i sæsonen og der blev afviklet 35 træningspas inkl. træningskampe.
35 spillere ialt blev indkaldt til træning i løbet af sæsonen.
Igennem sæsonen blev der afviklet flere træningskampe for at vurdere de enkelte spillere i kamp samt for at afprøve de forskellige elementer i spillestilen. U-19 holdet har spillet kampe mod A-kvinderne, AB, U-17 og et sammensat hold fra HB/B36. Derudover spillede U-19 mod drengeholdet fra Víkingur.
En stor tak skal lyde til de klubber, spillere og trænere der har hjulpet til ved at stille op til disse træningskampe.
Igennem forårets træningssamlinger begyndte arbejdet med holdets spillestil at tage form og udvælgelsen af de 18 spillere der skulle med til

EM-kvalifikationspuljen i Finland i september nærmede sig.
Kriterierne for udvælgelsen af de 18 spillere var ud over de spillemæssige kvaliteter de enkelte spilleres villighed til at arbejde hårdt og målrettet både ved landsholdssamlinger, men også i hjemklubberne. Alle spillere blev således i sæsonens løb superviseret i hjemklubben i både træning og kamp.
15. august blev den endelige trup til EM-kvalifikationspuljen i Finland udtaget. Her skulle U-19 landsholdet spille imod Skotland, Findland og Hviderusland.
Truppen bestod af følgende spillere:

Bjarta Osberg Johansen, B36
Vár Næs, B36
Birita Mortansdóttir, B36
Rakul Maria Johannesen, B36
Annika Petersen, ÍF
Sólja T. Eiðisgarð, Víkingur
Anna Sofía Sevdal, Víkingur
Eyðvør Klakstein, KÍ
Maria K. Thomsen, KÍ
Birna T. Johannesen, Skála
Ásleyg Súnadóttir, AB
Gunnrið F. Joensen, KÍ
Elin Maria Isaksen, AB
Maria S. Mikkelsen, B36
Kristianna Balle, B36
Monika Biskopstøð, KÍ
Íðunn E. Magnussen, EB/Str.
Elsa Splidt Jacobsen, AB

**Skotland – Føroyar, 9-0**
Kampen mod Skotland blev en hård start for holdet i turneringen. Som det ses af "Match Statistics" havde det skotske landshold initiativet og overvægt i alle spillets faser i kampen.  Vi var efter kampen både trænere og spillere meget skuffede over resultatet, da vi alle vidste, at holdet burde have kunnet yde en bedre indsats.




**Finland – Føroyar, 3-0**
Efter kampen mod Skotland var holdet indstillet på at revanchere sig i den 2. Kamp mod Finland.
Som det ses af "Match Statistics" var kampen meget lige trods tabet på 0-3. Begge hold havde lige mange afslutninger indenfor målrammen og de færøske piger viste vilje og mod i hele kampen mod et hold der var på samme niveau som det skotske. Vi følte faktiske efter kampen at 3-0 til det finske hold var noget i overkante efter spil og chancer. Det færøske hold viste i denne kamp sine kvaliteter og finnerne måtte kæmpe meget hårdt for sejren. Indsatsen mod finnerne gav grund til optimisme før holdets 3. Kamp mod Hviderusland.




Føroyar – Hvítarusland 2-1

I kampen mod Hviderusland var de færøske U-19 piger det hviderusiske hold overlegent ikke mindst i viljen til at ville vinde kampen. Trods bagud 0-1 efter 11. min. lykkedes det holdet at kæmpe og spille sig tilbage i kampen i løbet af 1. Halvleg og var kommet foran 2-1 efter de første 45. min.
I 2. halvleg bevarede det færøsk hold et spillemæssigt overtag dog uden at score

yderligere selv om der var flere kvalificerede afslutninger mod det hviderussiske mål. Hviderusserne havde 2 afslutninger indenfor målrammen – den ene scorede de på og den anden afslutning var et straffespark som Bjarta Johansen reddede i stor stil.

**MATCH STATISTICS**

| | Faroe Islands | Belarus |
|---|---|---|
| Goals scored | 2 | 1 |
| Attempts on target | 9 | 2 |
| Attempts off target | 6 | 7 |
| Corners | 5 | 2 |
| Fouls committed | 11 | 22 |
| Yellow cards | 0 | 3 |
| Red cards | 0 | 0 |

Slutstillingen i gruppe 7 kom derefter til at se således ud:

**STANDINGS**

**Group 7**

| | | P | Pts |
|---|---|---|---|
| 1 | Scotland | 3 | 7 |
| 2 | Finland | 3 | 7 |
| 3 | Faroe Islands | 3 | 3 |
| 4 | Belarus | 3 | 0 |

**Konklusion**
Det lykkedes således holdet at forsvare U-19 holdets 3. Plads fra 2010, hvilket var den overordnede målsætning for sæsonen 2011.

Målsætningen om at blive spilstyrende i længere perioder af kampene lykkedes mod Finland og mod Hviderusland var det færøske landshold spilstyrende i hovedparten af kampen.

I betragtning af, at 11 af spillerne der var med i Finland har alder til at spille U-19 i 2012 ser perspektiverne lyse ud for også i 2012 at kunne præstere et godt resultat.

Målsætningen for 2012 er at opnå en 2. Plads i EM-kvalifikationspuljen og derved sikre holdet adgang til 2. runde og dermed mellem de 24 bedste hold (af 44) i Europa.

For at dette skal kunne lykkes må det gode arbejde i klubberne fortsætte og styrkes samtidig som landsholdet i sine forberedelser må sikres kvalificeret modstand i træningskampene frem imod EM-kvalifikationen.

Bjørn Krog
U-19 Kvindelandsholdstræner

# Hagtøl frá dystum

## SKOTTLAND – FØROYAR

**U19 kvinnur EM 2012 – Undankapping, bólkur 7**

| | |
|---|---|
| **Úrslit** | 9-0 (5-0) |
| **Dato** | 17. september 2011 kl. 11.00 |
| **Leikvøllur** | Puistolan Urheilukentta – Helsinki |

**Dómarar:** Dómari: Ana Jovanović (SRB)
Hj.dómarar: Jasmina Zafirović (SRB), Hanna Peltonen (FIN)
4. Dómari: Jenny Kaarnasaari (FIN)

**Lið**

| | **SKOTTLAND** | | | **FØROYAR** | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Lauren Sangster (GK) | | 1 | Bjarta O. Johansen (GK) | |
| 2 | Emma Brownlie | 80 | 2 | Vár Naes | |
| 3 | Chloe Craig | | 3 | Birita Mortansdottir | |
| 5 | Eilish McSorley (C) | 39 | 4 | Rakul M. Johannesen | |
| 6 | Rebecca Zoltie | 17 | 5 | Annika Petersen | |
| 7 | Lana Clelland | 20 34 49 68 | 7 | Ansy Sevdal (C) | |
| 9 | Heather Richards | 78 | 8 | Eydvør Klakstein | |
| 10 | Emily Thomson | 64 81 | 9 | Maria K. Thomsen | |
| 11 | Claire Emslie | | 10 | Birna T. Johannesen | |
| 14 | Kelly Clark | | 11 | Ásley Súnadóttir | 65 |
| 17 | Jennifer Callaghan | 12 57 | 17 | Idunn Magnussen | 46 |
| | **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | |
| 12 | Hannah Reid (GK) | | 16 | Monika Biskopstø (GK) | |
| 4 | Stefanie Malcolm | | 6 | Sólja T. Eidisgard | 65 |
| 8 | Mairead Fulton | 57 | 12 | Gunnrid Joensen | |
| 13 | Kirsten McGuire | 80 | 13 | Elin Maria Isaksen | 46 |
| 15 | Amy Bulloch | 68 | 14 | Maria S. Mikkelsen | |
| 16 | Siobhan Hunter | | 15 | Kristiana Balle | |
| 18 | Gillian Sloey | | 18 | Elsa Jacobsen | |

**Venjari** Shelley Kerr (SCO) — Bjørn Krog Christensen (FRO)

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

# FINLAND – FØROYAR

**U19 kvinnur EM 2012 – Undankapping, bólkur 7**

**Úrslit** 3-0 (2-0)
**Dato** 19. september 2011 kl. 19.00
**Leikvøllur** Pallokentta – Helsinki

**Dómarar:** Dómari: Ana Jovanović (SRB)
Hj.dómarar: Jasmina Zafirović (SRB), Sanja Rodjak Karšić (CRO)
4. Dómari: Mihaela Gurdon Basimamović (CRO)

| **Lið** | **FINLAND** | | | **FØROYAR** | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 12 | Liisa Rahkola (GK) | | 1 | Bjarta O. Johansen (GK) | |
| | 2 | Mia Rein | | 2 | Vár Naes | 89 |
| | 3 | Janni Mönkkönen | 46 | 3 | Birita Mortansdottir | |
| | 5 | Emma Koivisto | | 4 | Rakul M. Johannesen | |
| | 6 | Riikka Ketoja (C) | | 5 | Annika Petersen | |
| | 7 | Ella Vanhanen | 84 | 7 | Ansy Sevdal (C) | |
| | 8 | Nora Heroum | | 8 | Eydvør Klakstein | |
| | 9 | Linda Norrena | 42 | 9 | Maria K. Thomsen | |
| | 10 | Adelina Engman | 33<br>80 | 10 | Birna T. Johannesen | |
| | 11 | Vera Saastamoinen | 46 | 17 | Idunn Magnussen | 84 |
| | 13 | Siiri Hammar | | 18 | Elsa Jacobsen | |

| **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Vera Varis (GK) | | 16 | Monika Biskopstø (GK) | |
| 4 | Nea-Stina Liljedahl | 46 | 6 | Sólja T. Eidisgard | |
| 14 | Tia Hälinen | 46 | 11 | Ásley Súnadóttir | 84 |
| 15 | Miina Tapaninen | 84 | 12 | Gunnrid Joensen | |
| 16 | Netta Hannula | | 13 | Elin Maria Isaksen | |
| 17 | Karla Makkonen | | 14 | Maria S. Mikkelsen | |
| 18 | Roosa Ärväs | | 15 | Kristiana Balle | |

**Venjari** Marianne Miettinen (FIN) Bjørn Krog Christensen (FRO)

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

## FØROYAR – HVÍTARUSSLAND

**U19 kvinnur EM 2012 – Undankapping, bólkur 7**

**Úrslit** 2-1 (1-1)
**Dato** 22. september 2011 kl. 17.30
**Leikvøllur** Pallokentta – Helsinki

| | | |
|---|---|---|
| **Dómarar:** | Dómari: | Linn Andersson (SWE) |
| | Hj.dómarar: | Asa Olsson (SWE), Hanna Peltonen (FIN) |
| | 4. Dómari: | Jenny Kaarnasaari (FIN) |

**Lið**

| **FØROYAR** | | | **HVÍTARUSSLAND** | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Bjarta O. Johansen (GK) | | 12 | Olga Goryd (GK) | |
| 2 | Vár Næs | | 2 | Anna Kozyupa | 11 |
| 3 | Birita Mortansdottir | | 3 | Valeria Karachun | |
| 4 | Rakul M. Johannesen | | 4 | Yulia Slesarchik | |
| 5 | Annika Petersen | | 5 | Polina Beshten | |
| 7 | Ansy Sevdal (C) | 34 | 6 | Anna Potapkina | 79 |
| 8 | Eyðvør Klakstein | | 7 | Anastasia Linnik (C) | 45 |
| 9 | Maria K. Thomsen | 46 | 10 | Ekaterina Khrischenovich | 62<br>71 |
| 10 | Birna T. Johannesen | | 13 | Vita Nikolaenko | |
| 17 | Idunn Magnussen | 45<br>66 | 17 | Tatiana Krasnova | |
| 18 | Elsa Jacobsen | 46 | 18 | Svetlana Yunitskaya | 35 |

| **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 16 | Monika Biskopstø (GK) | | 8 | Tatiana Markushevskaya | 82 |
| 6 | Sólja T. Eidisgard | | 11 | Antonina Migel | 35<br>82 |
| 11 | Ásley Súnadóttir | 46 | 14 | Anastasia Babich | |
| 12 | Gunnrid Joensen | | 15 | Polina Dubovec | |
| 13 | Elin Maria Isaksen | 66 | 16 | Valeria Solokha | |
| 14 | Maria S. Mikkelsen | 46 | | | |
| 15 | Kristiana Balle | | | | |

**Venjari** Bjørn Krog Christensen (FRO) Marina Lis (BLR)

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

# U17-landsliðið kvinnur 2011

*Landsliðsvenjarar:* Bára S. Klakstein og Jóannes Jakobsen




## Frágreiðing úr Moldova - U 17 gentur

Vit spældu tríggjar dystir á túrinum. Úrslitini vóru, eftir umstøðunum, nøktandi.

Hósdagin verða vit vakt kl 05.30 til morgunmat. Kl 08.00 flúgva vit til Riga, har bíða verður eftir propellfarinum, ið skal flúgva okkum til Moldova (ca 3t.) Komin til Chisnau, stóð bussur fyri okkum, sum skuldi flyta okkum til "leirin" Túrurin varð ein rutsjitúrur uttan líka á teim vánaligu landavegunum.

Komin á pláss, fingu vit at vita, at um vit skuldu venja, so skuldu vit aftur at koyra ein tíma til venjingarvøllin. Tað kom ikki uppá tal! Vit kundu sleppa at venja á einum graslíkið tveir tímar aftan á vit vóru á staðnum. Maturin var heldur ikki klárur tá vit komu. Vit vandu so kl. 19.00 og ótu kl. 20.00. Maturin og drekkivatnið gjørdist so eisini, í stóran mun, ein snávingarsteinur. Meira enn helvtin av okkara leikarum , megnaðu ikki at eta, eiheldur drekka.

Aftaná matin fóru vit til songar. Vakt kl. 05.00. Morgunmat og síðani at gera klárt til busstúr til stadion, har dysturin móti frakkum skuldi spælast kl 10.00.

Tú skalt ikki vera raket inginør fyri at síggja hvussu vánaligar fyritreytir okkara leikarar høvdu at virkað til fulnar.
Sjálvandi skuldi vit verið á staðnum eitt samdøgur áðrenn, so vit høvdu ein møguleika at koma fyri okkum. Vit høvdu undir ongum umstøðum vunnið fyrsta dystin men møguliga tann næsta!

**Frankaríki – Føroyar 10 – 0 (5 – 0)**
Í hesum dysti var snøgt sagt einki at gera hjá okkum. Møttu allarhelst heimsins bestu, í hesum árganginum, hvat úrslitið eisini ber boð um. Hevði bori til at fingið eitt snøggari úrslit? Ja, Heilt avgjørt!

Hesar byrjaðu ímóti Fraklandi
Lea Reginsdóttir - Marta S. Thomsen, Anna Brimnes, Vár Næs, Ásla Johannesen (Bjørt Magnussen, 52'), Marianna Jacobsen, Brynja Høj, Eyðvør Klakstein, Maria K. Thomsen (Dania Olsen, 76'), Margunn Lindholm (Jóhanna Lervig, 64'), Elsa Jacobsen

Á beinkinum uttan at verða skiftar inn: Hanna Poulsen, Helga Kjærbo, Katrina Akursmørk, Kára Jarnskor

**Wales – Føroyar 1 – 0 ( 0 – 0 )**
Aftaná fransa møti, høvdu vit ein hvílidag. Avrikið varð munandi betur men ikki optimalt. Vit høvdu framvegis trupulleikar við matinum og vatninum, heldur ikki vóru vit komin yvir tað strævnu ferðini. Wales høvdu bóltin meira men okkara vardu sera væl. Wales hevði tveir góðar møguleikar, Báðar aftaná hornaspark, har tær fáa málið.
Skulu vit meta útfrá málmøguleikum, so burdu vit vunni dystin.
Vit vóru, útfrá teimum givnu fysisku og mentalu fyritreytunum noydd at leggja ein orkusparandi taktik, ið mundi og skuldi givið stig. Høvdu tveir risamøguleikar men tá tú spælir og manglar tað lítla avgerandið yvirskotið, so ber ikki nóg væl til..Spell!

Hesar byrjaðu ímóti Wales
Lea Reginsdóttir - Kára Jarnskor, Anna Brimnes, Marta Thomsen, Elsa Jacobsen - Vár Næs, Marianna Jacobsen, Brynja Høj, Maria K. Thomsen (Ásla Johannesen, 75') - Eyðvør Klakstein, liðsk., Margunn Lindholm (Helga Kjærbo, 75')

Á beinkinum uttan at verða skiftar inn: Hanna Poulsen, Katrina Akursmørk, Bjørt Magnussen,

**Moldova – Føroyar 0 – 1 ( 0 – 1)**
Tveir hvílidagar. Fingu kokkin at gera okkurt øllum dámdu og so bar til. Besta avrikið á túrinum og ein fult uppiborin sigur, har vit spæla væl og við skilið. Hóast sigur, so heldur venjaratoymið, at vit ikki raktu toppin. Hettar grundað á tann troyttleika, ið rakti okkum frá fyrsta degi og ikki minst við vatni og matinum. Ein fiskur kókaður í onkrum húsi í Føroyum, er ikki sama fiskur, sum er tilgjørdur úti á bøh-andinum í Moldovia.

Hesar byrjaðu ímóti Moldova:
Lea Reginsdóttir - Elsa Jacobsen, Anna Brimnes, Marta S. Thomsen, Vár Næs, Maria K. Thomsen, Marianna H. Jacobsen, Brynja Høj, Ásla Johannesen (Katrina Akursmørk, 79'), Eyðvør Klakstein, liðsk., Margunn Lindholm

Á beinkinum uttan at verða skiftar inn: Hanna Poulsen, Helga Kjærbo, Bjørt Magnussen, Jóhann Lervig, Dania Olsen kort: Marta S. Thomsen, 45' og Elsa Jacobsen 66

Annars ein stór tøkk til okkara leikarar. Tær vóru fyrimyndarligar. Hóast svongd og tosti nívdi, so megnaðu tær at offrað seg 100 prosent fyri Føroyar. Undir ringum umstøðum megnaðu tær at fáa eitt gott úrslit fyri Føroyar, takk fyri tað!
Takk til Anniku, Sonju og Signar fyri loysnir heldur enn trupulleikar!

Vinarliga Bára og Jóannes



# Hagtøl frá dystum

## FRANCE – FØROYAR

**U17 kvinnur EM 2012 – Undankapping, bólkur 5**

**Úrslit** 10-0 (5-0)
**Dato** 14. oktober 2011 kl. 12.00
**Leikvøllur** District Sport Complex – Orhei

**Dómarar:** Dómari: Nelli Stepanyan (ARM)
Hj.dómarar: Araksya Saribekyan (ARM), Vera Onică (MDA)
4. Dómari: Olga Tanschi (MDA)

**Lið**

| | **FRANCE** | | | **FØROYAR** | |
|---|---|---|---|---|---|
| 16 | Romane Bruneau (GK) | | 1 | Lea Reginsdóttir (GK) | |
| 2 | Margaux Leconte | | 2 | Anna A. Brimnes | |
| 3 | Magdalène Vasseur | | 5 | Ásla Johannesen | ⇄ 52 |
| 4 | Marie Adram | | 7 | Marianna Jacobsen | |
| 5 | Griedge Bathy Nka | | 8 | Maria K. Thomsen | ⇄ 76 |
| 7 | Léa Declercq | ⚽ 35<br>⇄ 41 | 11 | Margunn Lindholm | ⇄ 64 |
| 8 | Laura Blanchard | ⚽ 8'<br>⚽ 9'<br>⇄ 41' | 12 | Marta S. Thomsen | |
| 10 | Sandie Toletti (C) | ⚽ 11 | 13 | Brynja Høj | |
| 12 | Laurie Saulnier | ⚽ 17 | 15 | Eydvør Klakstein (C) | |
| 14 | Ghoutia Karchouni | | 17 | Vár Næs | |
| 18 | Pauline Cousin | ⚽ 48<br>⇄ 57 | 18 | Elsa Jacobsen | |
| | **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | |
| 1 | Léana Bineau (GK) | | 16 | Hanna Poulsen (GK) | |
| 6 | Candice Gherbi | | 3 | Helga Kjærbo | |
| 9 | Kadidiatou Diani | ⇄ 57<br>⚽ 66<br>⚽ 68 | 4 | Katrina Akursmørk | |
| 11 | Johana Geairain | ⇄ 41<br>⚽ 46<br>⚽ 78 | 6 | Bjørt Magnussen | ⇄ 52 |
| 13 | Marion Romanelli | | 9 | Johanna Lervig | ⇄ 64 |
| 15 | Noémie Carage | | 10 | Dania Olsen | ⇄ 76 |
| 17 | Laura Douessin | ⇄ 41 | 14 | Kára Jarnskor | |

**Venjari** Francisco Rubio (FRA) Jóannes Jakobsen(FRO)

⚽ Mál   Sjálvmál   Brotsspark   Reytt kort   Gult Kort   ⇄ Útskifting

# FØROYAR – WALES

**U17 kvinnur EM 2012 – Undankapping, bólkur 5**

**Úrslit** 0-1 (0-0)
**Dato** 16. oktober 2011 kl. 11.00
**Leikvøllur** Dinamo Auto – Ternovca

**Dómarar:** Dómari: Danijela Marković (SRB)
Hj.dómarar: Aleksandra Kojović (SRB), Vera Onică (MDA)
4. Dómari: Olga Tanschi (MDA)

**Lið**

| FØROYAR | | | WALES | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Lea Reginsdóttir (GK) | | 1 | Ffion Ashman (GK) | |
| 2 | Anna A. Brimnes | | 2 | Rhian Cleverly | 60 |
| 7 | Marianna Jacobsen | 63 | 3 | Katie Williams | |
| 8 | Maria K. Thomsen | 75 | 4 | Mali Summers | |
| 11 | Margunn Lindholm | 75 | 6 | Hannah Lewis | |
| 12 | Marta S. Thomsen | | 8 | Rachel Hignett (C) | 66 |
| 13 | Brynja Høj | | 9 | Emma Beynon | 72 |
| 14 | Kára Jarnskor | | 10 | Allie Young | 41 |
| 15 | Eydvør Klakstein (C) | | 11 | Ellie Leek | 59 |
| 17 | Vár Naes | | 14 | Rachael Nattrass | |
| 18 | Elsa Jacobsen | | 17 | Samantha Quayle | |

| Eykaleikarar: | | | Eykaleikarar: | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 16 | Hanna Poulsen (GK) | | 12 | Delyth Morgan (GK) | |
| 3 | Helga Kjærbo | 75 | 5 | Hannah Williams | |
| 4 | Katrina Akursmørk | | 7 | Sophia Rees | |
| 5 | Ásla Johannesen | 75 | 13 | Bridie Davies | 72 |
| 6 | Bjørt Magnussen | | 15 | Georgia Evans | 41 |
| 9 | Johanna Lervig | | 16 | Stacey Webber | 59 |
| 10 | Dania Olsen | | 18 | Sydney Hinchcliffe | |

**Venjari** Jóannes Jacobsen (FRO) Jarmo Matikainen (FIN)

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

# Moldova – FØROYAR

**U17 kvinnur EM 2012 – Undankapping, bólkur 5**

**Úrslit** 0-1 (0-1)
**Dato** 19. oktober 2011 kl. 14.00
**Leikvøllur** ICPSM – Vadul lui Voda

**Dómarar:** Dómari: Danijela Marković (SRB)
Hj.dómarar: Aleksandra Kojović (SRB), Yolanda Parga Rodriguez (ESP)
4. Dómari: Mayte Porro Araico (ESP)

| **Lið** | **MOLDOVA** | | | **FØROYAR** | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 12 | Anna Zatuşevscaia (GK) | | 1 | Lea Reginsdóttir (GK) | |
| | 2 | Olga Popova | | 2 | Anna A. Brimnes | |
| | 3 | Aneta Şapovalenco | | 5 | Ásla Johannesen | 79 |
| | 5 | Claudia Chiper | | 7 | Marianna Jacobsen | 10 |
| | 7 | Cristina Cerescu (C) | | 8 | Maria K. Thomsen | |
| | 11 | Anastasia Toma | | 11 | Margunn Lindholm | |
| | 13 | Alexandrina Vutcariova | | 12 | Marta S. Thomsen | 45 |
| | 14 | Adriana Antoniuc | 24 | 13 | Brynja Høj | |
| | 15 | Victoria Gurdişi | 60 | 15 | Eydvør Klakstein (C) | |
| | 17 | Danuţa Chicu | | 17 | Vár Naes | |
| | 18 | Lilia Tacot | | 18 | Elsa Jacobsen | 66 |
| | **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | | |
| | 1 | Elena Corai (GK) | | 16 | Hanna Poulsen (GK) | |
| | 4 | Sanda Negrescu | | 3 | Helga Kjærbo | |
| | 6 | Alina Arhirii | 60 | 4 | Katrina Akursmørk | 79 |
| | 8 | Anastasia Balan | | 6 | Bjørt Magnussen | |
| | 9 | Victoria Ursachi | | 9 | Johanna Lervig | |
| | 10 | Nadejda Colesnicenco | 24 | 10 | Dania Olsen | |
| | 16 | Elena Gratii | | 14 | Kára Jarnskor | |
| **Venjari** | Igor Spaniora (MDA) | | | Jóannes Jakobsen (FRO) | | |

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

# FSF-leikaramenningin 2011

**Inngangur**
Ávísar broytingar vóru gjørdar í FSF-Leikaramenningini (LM) í 2011 í mun til árini frammanundan. Á fyrsta sinni fevndi LM eisini um U16 (dreingir). Hinvegin so varð venjingin við U12 (piltar) munandi *niðurtónað*. Tað vil siga at LM í 2011 fevndi um U16, U14 og partvíst um U12. Útveljingin av leikarum byrjaði í februar/ mars og sjálv venjingin byrjaði í fyrru helvt av apríl.

Fyri U16 og U14 hava verið tilsamans umleið 23 venjingar og 7 felagstiltøk. Hjá U12 vóru trý felagstiltøk kring landið.
Summarsteðgur var í juli/august, umleið 6 vikur. Alt endaði við felagstiltakinum í Ítróttarhøllini á Eiði 19. november, har leikararnir eisini fingu luttøkubræv. Teir mest nærlagdu fingu eisini heiðursbræv.

Í 2011 luttóku sum sagt fyrst og fremst dreingir, føddir í 1995-96 (U16) og smádreingir, føddir 1997-98 (U14). Tilsamans í hesum báðum aldursbólkunum vóru umleið 130 dreingir – umleið helvt um helvt dreingir og smádreingir:

- Norðurøkið: KÍ, ÍF og Víðkingur, tilsamans umleið 16 leikarar í hvørjum aldursbólki. Venjari var Meinhardt Dalbúð
- Eysturøkið: B68, NSÍ, Skála og EB/Streymur, umleið 16 leikarar í hvørjum aldursbólki. Venjari var Meinhardt Dalbúð.
- Vesturøkið: O7 Vestur, SÍF, MB og SÍ, 8-10 leikarar í hvørjum aldursbólki. Venjari var Hegga Samuelsen
- Miðøkið: HB, B36, AB og B71, umleið 16 leikarar í hvørjum aldursbólki. Venjari var Eli Hentze.
- Suðurøkið: Royn, TB og FCS, umleið 10 leikarar í hvørjum aldursbólki. Venjari var Pól F. Joensen.

Samskipari: Petur Simonsen.


Dreingir 2011


Smádreingir 2011

## Mál & mið 2011

Í endamálorðingini fyri FSF-leikaramenningina stendur m.a.. at LM er eitt tilboð um servenjing, sum m.a:

- skal geva ungum, evnaríkum og ídnum leikaranum serliga venjing og undirvísing, sum kann stuðla undir menningina hjá tí einstaka sum fótbóltsleikari.
- skal stuðla upp undir miðvísa og kvalifiseraða venjing úti í feløgunum og knýta feløg og ungdómsvenjarar í eitt mennandi og landsumfatandi netverk.
- skal eggja til framhald í fótbólti og til leik í fremstu røð.

Málsetningurin fyri 2011 var m.a., við støði í tí arbeiði, sum varð gjørt frá 2007 til 2010 og teimum meginreglum sum eru galdandi fyri FSF-leikaramenninginga:

- at seta krøv um nærlagni og miðvísi hjá teimum leikarum sum eru við í LM
- at fáa einstaka leikaran at seta sær mál og røkka hesum m.a. við miðvísari eginvenjing
- at halda fram við felagstiltøkunum eftir kappingarlok og møguliga at økja um hesi
- at gera eitt miðvíst arbeiði fyri, at fáa foreldur, feløg og venjarar kring landið at stuðla upp undir LM
- at fáa málmansvenjingina í eina trygga legu

Serstøku málini fyri 2011 vóru sett fyri betur at røkka megin endamálinum við leikaramenningini, sum er: **at ungir og evnaríkir fótbóltsleikarar kring landið skulu hava eitt tilboð um serstaka venjing sum kann stuðla upp undir, at teir mennast mest møguligt sum fótbóltsleikarar.**

Ítøkiliga merkti hetta, at í 2011 skuldi LM leggja seg eftir:

1. at leikarar og avvarandi greitt fáa at vita, at ert tú við í LM, so er uppmøting til venjing og felagstiltøk ein sjálvfylgja
2. at nærlagni undir venjing er ein fyritreyt fyri framhaldi
3. at leikararnir fáa eina dagbók til at skriva eginvenjing og eginmál í
4. at skipa verður fyri nøkrum kappingum í Gundadali í oktober/november umframt at hildið verður fast við tey trý vanligu felagstiltøkini sum hava verið kring landið
5. at samstarvið millum økisvenjara, lokala venjaran og foreldrini verður styrkt, m.a. við regluliga at samskifta við lokalu venjararnar, hava foreldrafundir og kunna um venjingina við m.a. at senda teldupost til leikarar, foreldur og venjarar
6. at venjingin í onkrum øki verður á einum stað. Hetta verður gjørt fyri at tryggja sær, at leikaramenningin altíð sleppur framat einum vølli
7. at avtala verður gjørd við málmansvenjarar um at gerast partur av venjarahópinum, og á tann hátt tryggja sær, at málmansvenjingin kemur í eina fasta legu
8. at hildið verður fram við vitjanum og kappingum millum økini
9. at geva leikarum, sum vísa serligt ídni, eina viðurkenning
10. at seta í verk eina skipan uttan fyri LM, so leikarar kunnu hava møguleikan at taka FSF-teknikkmerkið

## Frágreiðing til mál & mið 2011 fyri U16 & U14

Samanumtikið kann sigast, at flestu leikarar og foreldur góðu til kennar, at 2010 hepnaðist sera væl. Afturmeldingar frá feløgunum/lokalu venjarunum benda á sama borið. Og økis-venjarar og samskipari eru eisini heilt væl nøgdir við 2010.

V iðv. pkt 1 og 2: Uppmøtingin sum heild var góð – betri hjá U14 enn U16. Og tað sama var við áhuga og ídni undir venjing. Framvegis eru tað leikarar sum ikki møta nóg regluliga.

Viðv. pkt 3: Leikarar fingu "logbók" útflíggjaða í 2010. Hetta sama varð gjørt í 2011, men kortini ikki í øllum økjunum, hóast hetta var ætlanin.
Hinvegin, so hevur dentur verið lagdur á at gera leikararnar tilvitaðar um tað, at seta sær ítøkilig mál, og um hvussu teir kunnu røkka hesum málunum. Og undir venjingini hava leikararnir javnan skula mett um egið avrik.
Í desember fingu allir leikarar í miðøkinum eina persónliga eftirmeting av árinum. Ein eftirmeting sum m.a. sigur frá avrikinum í árinum, hvat hevur eydnast væl og hvat skal til fyri at koma longur á leið sum fótbóltsleikari.

Viðv. pkt 4: Felagssamlingar vóru í Gundadali 30. apríl & 15. Oktober, á Toftum 11. Juni & 3. september. Felagstiltøkini vóru í Gundadali og á Toftum, tí at har fingu vit brúkt tveir vallir um somu tíð.
Harumframt vóru onnur felagstiltøk í Gundadali í oktober/november.
Leikaramenningin endaði árið við eini innandurakapping í ítróttarhøllini á Eiði.
Uppmøtingin til felagstiltøkini var var sum heild sera góð – ikki minst hjá U14. Við tað, at U12 ikki var partur av hesum felagstiltøkum, vóru foreldrini ikki so røsk at møta upp sum árini frammanundan.
Heldur ikki var nakar skipaður foreldrafundur til endatiltakið á Eiði hesaferð. Hetta hevur verið vanligt árini frammanundan og hava umleið 90 foreldur møtt tá. Men eftirmetingarfundurin um ungdómsfótbólt, sum var í FSF húsinum sama dagin, gjørdi at hetta ikki lat seg gera.
Felagstiltøkini eru fyrst og fremst merkt av fótbóltskapping, har økini sleppa at royna seg móti hvørjum øðrum.
Hjá U14 fara teir uml 60 dreingirnir í 8 lið sum spæla 7:7 á ½ vølli. Fyrst tríggjar dystir í einum bólkaspæli og síðani ein dyst um plaseringinina. Onkuntíð var kappast eftir "Street football" leistinum. Tá vóru liðini miksað, tvs, at dreingir úr ymsum økjum leiktu á sama liði.
Hjá U16 tosa vit um økislið – norðurøkið, eysturøkið, miðøkið og so vestur-/suðurøkið.
Økisliðini leiktu á heilum vølli, 11:11, øll móti øllum. Tvs, at hvørt liðið leikti tríggjar dystir á 30-40 minuttir.
Hesar kappingarnar eru samstundis eitt frálíkt høvi hjá U15 og U17 landsliðsvenjarunum at síggja hvørjir leikarar eru viðkomandi fyri landsliðini.
Til eina felagstiltakið hjá U16 vóru Christian R Mouritsen og Ingi Højsted og greiddu frá teirra lívsleið sum leikarar og royndum at gerast yrkisleikarar í Onglandi. Ungu luttakararnir lýddu á við stórum áhuga.

Viðv. pkt 5: Tað vísir seg í øllum viðurskiftum, eisini tá talan er um leikaramenningina hjá FSF, at samskifti og opinleiki eru lyklaorð og fyriteyt fyri einum vælvikandi og mennandi átaki. Sum árini eru farin, er hesin parturin vorðin betri.
Onkustaðni er samskiftið heilt gott. Aðrastaðir restar nakað væl í enn. Men samanumtikið er meira gjørt burtur úr at samskifta um teldupost við leikarar, foreldur og venjarar í 2011 enn árini frammanundan. Hetta hevur gjørt, at gerandisdagurin í 2011 sum heild hevur gingið betri enn árini frammaundan. Hetta samskiftið hevur m.a. fevnt um temaði og innihaldi í næst venjingini. Men hetta hevur eisini ofta víst til leinkjur til viðkomandi tilfar og heimasíður, sum kunna eggja børnunum til sjálvsvenjing.
Alt við tí endamáli, at leikararnir kundu fyrireika seg betur til næstu venjing.

Viðv. pkt 6: Venjingin í norðurøkinum var fyri tað mesta í Leirvík. Í eysturøkinum skifti hon millum vallirnar á Toftum, í Runavík, á Skála og í Streymnesi. Somuleiðis í miðøkinum, har skift varð millum Gundadal, Argir og Sand. Í vesturøkinum varð fyrst og fremst skift millum vallirnar í Sørvági og Miðvági. Somuleiðis í suðurøkinum, har skifti var millum vallirnar á Tvøroyri og í Vági.

Tað eru fyrimunir og vansar í báðum skipanunum. Ert tú á einum stað, ber betri til at hava ymiskan útbúnað tøkan, sum ikki er so lættur at flyta runt við. Leikararnir fara heldur ikki skeivir av hvar venjingin er. Hinvegin, so er tað helst ikki so hugaligt at skula fara av bygd hvørja ferð vant verður, og kanska eru trupulleikarnir við koyringini eisini størri tá.

Viðv. pkt 7: Málmansvenjingin kom í rættiliga fasta legu í miðøkinum. Aðrar staðir bleiv hetta ikki nóg regluligt. Trupulleikin stendst ikki av, at tað ikki verður gjørd nøkur roynd at loysa málið, men heldur, at málmansvenjararnir hava verið óstøðugir og hava ikki kunnað møtt sum avtalað.

Viðv. pkt 8: Í 2009 varð farið undir, at økini av og á vitjað hvørt annað til venjing og kapping – t.d. at miðøkið vitjaði norðurøkið og eysturøkið vitjaði vesturøkið. Hóast hetta var nakað, sum leikarunum dámdu sera væl, so varð ikki hildið fast við hetta í 2011. Tvørligar umstøður viðv. ferðing o.l. er ein av orsøkunum. Nógvu felagstiltøkini eru ein onnur. Og tað, at U12 ikki longur var partur regluligu LM er ein triðja orsøkin.

Viðv. pkt 9: Í 2009 varð farið undir at lata trimum leikarum í hvørjum aldursbólki í hvørjum øki eitt heiðursbræv fyri førleikar, ídni og gjørd framstig í árinum. Hetta fekk góða undirtøku og skipanin helt fram í 2010 og eisini nú í 2011. Endamálið er at eggja til nærlagni og áhaldni – ikki minst seinasta partin av árinum, tá landskappingin annars er endað.
Umframt heiðursbrævið fingu allir, sum vóru við í Leikaramenningini, eitt luttøkubræv.

Viðv. pkt 10: í august fekk ein persónur í hvørjum av teimum fimm økjunum til uppgávu at skipa so fyri, at leikarar kundu taka FSF-teknikkmerkið á heystið 2012. Málbólkurin var U12. Men rættilig gongd kom ikki á alla staðni. Helst tí, at at tað varð farið ov seint í gongd. Skal hetta fáast at virka er neyðugt at byrja við hesum arbeiði í várhálvuni.



Smádreingir, sum fingu heiðursbræv



Dreingir, sum fingu heiðursbræv



Dreingir eftir felagstiltak í Gundadali 15. Oktober 2011

**Undirtøkan**
Heildarmyndin fyrstu árini hevur verið, at tað er torførari at motivera og halda fast við eldru leikararnar. Men broytingarnar, sum vórðu gjørdar í 2009 og 2010, bøttu munandi um hetta. Og broytingin, sum varð gjørd í 2011 hevur sum heild riggað væl.
Broytingarnar, sum her er talan um, eru m.a.:

- herdu krøvini um uppmøting og nærlagni,
- at dentur verður lagdur á at venjingarnar raka aldursbólkin,
- at skipað verður fyri felagstiltøkum við kappingum bæði í várhálvuni og heysthálvuni, umframt at nøkur felagstiltøk eru eftir, at landskappingin er av.
- at U16 er tikið við og U12 er niðurtónað.

Men tað skal heldur ikki undirmetast, at flestu av elstu leikarunum hava verið við frá tí at LM byrjaði í 2007 og tí eru “skúlaðir” til hesa skipanina. Harumframt kemur so tað, at góða undirtøkan frá foreldrum og feløgum hava gjørt sítt til, at undirtøkan hjá eldra árganginum eisini er vorðin betri seinastu trý árini.

**Úttøka av leikarum**
Sjálvsagt eru tað helst bæði einstøk foreldur og einstakir leikarar sum hava kent seg at vera sett uttanfyri FSF-leikaramenningina uttan haldgóða grund. Men hesum slepst neyvan undan beinanvegin talan er um eina útveljing av leikarum. So mikið meir ræður um, at útveljingin fer fram á ein skynsaman hátt og er merkt av opinleika, samskifti og greiðum linjum. Hetta hevur dentur verið lagdur á øll árini – eisini í 2011.




Taktikkurin skal fínpussast

## Leikaramenningin hjá U12

**Felagstiltøk**
Sum fyrr nevnt, so varð FSF-leikaramenningin við U12 niðurtónað. Tað merkir, at vikuliga venjingin varð slept, og harvið varð heldur ongin úttøka av leikarum.
Sum so hevur U12 bólkurin virkað sera væl øll árini. Uppmøtingin hevur verið góð, venjingin hevur verið merkt av ídni, nærlagni og góðum huglagi, og foreldrini hava bakka sera væl upp hetta tiltakið. Men orsøkin til broytingina kemst fyrst fremst av, at vit alla tíðina hava verið í iva um U12 aldursbólkurin var nóg búgvin til slíka úttøku. Harumframt var neyðugt við eini raðfesting millum U12 og U16 út frá teimum fíggjarligu viðurskiftunum.

Í 2011 varð skipað fyri trimum felagstiltøkum fyri U12 og U11. Harumframt var eitt endaspæl fyri várhálvuna og fyri heysthálvuna.
7. mai var felagstiltak í Klaksvík fyri norður- og eysturøkið. Samstundis var felagstiltak í Sørvági fyri mið-, vestur og suðurøkið.
27. august vóru felagstiltøk í Runavík og í Vági, og 17. september í Fuglafirði og á Argjum.

Dagur var skipaður soleiðis, at U11 byrjaði kl 9½ og hildu á til uml kl 12, meðan U12 byrjaði kl 12½ og helt á til kl 15. Tað var frí tilmelding.
Á skránni var bæði venjing og kapping. Venjingin varð skipað sum “støðvenjing” og á hvørjari “støð” var eitt ávíst tema, sum tveir venjarar tóku sær av. Tilsamans fimm “støðir”. Aftaná ein stuttan steðg við frukt og øðrum leskiligum varð farið undir kappingina, sum varð skipað eftir “street-football” leistinum.

Undirtøkan til hesi felagstiltøkini fyri U11 og U12 var heilt góð í flestum førum. Samanlagt 150-210 piltar hvørja ferðina.

Foreldrini møttu sum vanligt sera væl upp, og vertsfeløgini tóku vertsleiklutin á seg og loystu uppgávuna til fulnar.
Ein annar síðu-vinningur av hesum var, at lokalir venjarar komu at arbeiða saman við venjarum í LM og hjá U-landsliðunum.

**Venjaraskeið fyri piltavenjarar**
Umframt felagstiltøkini vóru fýra venjaraskeið kring landið. Endamálið við hesum skeiðunum var at geva piltavenjarum og øðrum sum venja yngri børn íblástur.
Skeiðini vóru í Klaksvík, á Toftum í Tórshavn og á Tvøroyri. Hvørt skeiðið var umleið 4 tímar og temaði var “Piltavenjing”. Skeiðið var helvt um helvt í skeiðshølinum og á vøllinum.
Tilsamans umleið 70 fólk luttóku á hesum skeiðunum. Eli Hentze, Meinhardt Dalbúð og Petur Simonsen vóru instruktørar.

## Samanumtøka

Sum sæst av frammanfyristandandi, so royndist árið 2011 sum heild væl hjá FSF-leikaramenningini. Undirtøkan millum leikararnar var góð – eisini hjá U16. Uppmøting og nærlagni merkti leikararnar sum heild. Fáir trupulleikar stóðust av at fáa pláss á venjingarvølli, og flestu feløg, venjarar og foreldur stóðu saman um tiltakið. Nógvir leikararnir fingu "loggbók", og arbeitt varð við at fáa leikarar at seta sær mál og seta tíð av til eginvenjing. Málmansvenjing var tíverri ikki ein fastur táttur í FSF-leikaramenningini í øllum økjunum, men tó partvíst. Einstøk feløg hava framvegis ikki heilt tikið FSF-leikaramenningina til sín, við tí úrsliti, at ov fáir leikarar frá hesum feløgunum luttaka nóg regluliga í tiltøkunum hjá FSF-leikaramenningini.

Á næstu síðunum er viðfest ymiskt tilfar, sum er viðkomandi og sum gevur eina breiðari fatan av hvat FSF-leikaramenningin inniheldur og hvussu hevur verið arbeitt.

FSF-leikaramenningin hevur alla tíðina ment seg, gjørt tillagingar og støðugt tikið nýggjar tættir upp. Sum nú er, er nógv sum talar fyri, at FSF-leikaramenningin eftir verandi leisti ikki heldur fram í 2012. Tí gevur tað heldur ikki nógva meining, at vísa á hvørjar tillagingar skulu gerast og hvørji mál FSF-leikaramenningin skuldi sett sær fyri 2012. Vit halda tó, at verandi leistur í stóran mun hevur rokkið megin endamálinum, sum var: *at ungir og evnaríkir fótbóltsleikarar kring landið skulu hava eitt tilboð um serstaka venjing sum kann stuðla upp undir, at teir mennast mest møguligt sum fótbóltsleikarar.*

11. januar 2012

Petur Simonsen
Tekniskur stjóri

# Ársfrágreiðing fyri Grassroots 2011




Grassrootsfótbóltur – *fótbóltur fyri øll*

UEFA peikaði á 25. mai sum serstakan Grassrootsdag í 2011. Í Føroyum kunnu vit siga, at nærum allur fótbóltur er grassrootsfótbóltur. Í hesi frágráðingini verður tó fyrst og fremst tað tikið fram, sum fór fram í sambandi við grassrootsdagin hjá UEFA.

Barnagarðar í Gundadali
Í hesum sambandið skipaði FSF fyri einum tiltakið í Gundadali undir heitinum *Fótbóltur fyri øll*, og sum var ætlað børnum í aldrinum 5-7 ár.

Allir barnagarðar/dagstovnar kring landið høvdu fingið innbjóðing um at vera við í tiltakinum. Og undirtøkan var sera góð. Umleið 450 børn møttu saman við knapt 100 pedagogum/hjálparfólkum, umboðandi 30 stovnar í Tórshavn og kring landið.

Á skránni vóru ymisk spøl, fótbóltur og hoppiborg. Børnini spældu og hugnaðu sær óført. Og tey fingu frukt og ótu matpakka í góðveðrinum í Gundadali.
Umleið 40 NámX næmingar hjálptu til við tiltakinum. Alt í alt vóru sostatt eini 600 fólk í gongd um somu tíð á Niðara vølli hesar báðar tímarnar frá kl 11 til 13. – Ein sannur meldur av lívi.









Helst er onkur komandi landsliðsleikari á myndini



Niðari vøllur, deildur í 32 smáar vallir

Samstundis heitti FSF á fótbóltsfeløgini kring landið um eisini at skipa fyri tiltøkum undir somu yvirskrift – *Fótbóltur fyri øll.*

Undirtøkan var í lakara lagi, men trý feløg tóku so áheitanina í álvara og skipaðu fyri ymiskum sera áhugaverdum og lívsjáttandi tiltøkum.

Fótbóltur fyri øll í Runavík
NSÍ við Toru Davidsen og hjálparfólki stóðu fyri heili fimm tiltøkum.
Stovnar og brúkarar hendan dagin vóru:
- Eysturoyar Ellis- og Røktarheim. 40 fólk og 6 starvsfólk
- Verkhúsið Stíggjur, Saltangará. 8 fólk og 2 starvsfólk
- Rásin, Saltangará. 4 børn og eitt starvsfólk
- Setrið, Runavík. 5 børn og 4 starvsfólk
- Reiðrið, Toftir. 8 børn og 8 starvsfólk

Myndirnar tala so sanniliga ... og siga okkum, at fótbóltur er fyri øll.







Fótbóltur fyri øll á Argjum
GIZA skipaði fyri eini fótbóltskapping fyri kvinnur. Tiltakið var á Argjum og øll feløgini í havn vóru boðin við. Trý feløg/lið luttóku í kappingini – GIZA, Undrið FF og B36. Umleið 40 kvinnur/gentur luttóku.
Eitt gott átak fyri at skapa áhuga fyri fótbóltinum millum kvinnur í høvuðsstaðnum.

Fótbóltur fyri øll á Tvøroyri

TB skipaði fyri fýra tiltøkum yvir tríggjar dagar.
Fyrsta tiltakið var á Sevmýri, har børn, ung og vaksin hugnaðu sær hóast vánalig veðurlíkindi. 50 fólk luttóku.



Síðani varð fokus sett á tey 5-6 ára gomlu børnini inni í barnagarðinum í Trongisvági. Umleið 50 børn saman við starvsfólkum luttóku í alskins bóltspæli. Tað gjørdi ikki løtuna verri, at Kularrøtur settu punktum fyri einum frálíkum tiltaki við frálíkum sangi.
Børnini í 1-8 flokki áttu síðani tørn. Tey umleið 160 børnini royndu síni fótbóltskynstur bæði í Ítróttarhøllini og á sparkivøllinum í Trongisvági
Endabresturin á fótbóltinum fyri øll á Tvøroyri var millum fiskakassar og fiskakør á Delta Seafood. Møguliga hugnaðu teir við sterti sær líka nógv sum tey í gummistyvlum og arbeiðshandskum. Tað er ikki langt frá at hugsa "at tann løtan sum er góð ... er ikki ring".



NSÍ, GIZA og TB hava stórt rós uppiborið fyri at taka á seg at skipa fyri tiltøkum undir heitinum Fótbóltur fyri øll, har umleið 400 børn, ung og vaksin luttóku. Feløgini fáa sum lovað 20 bóltar hvørt.

At enda kann vera nevnt, at ein leistur er gjørdur fyri “Stjørnufótbólt”, sum væntandi verður settur í verk í 2013. Stjørnufótbóltur hevur sum mál fyrst og fremst at stuðla upp undir arbeiðið í feløgunum við grassrootsfótbóltinum – ella *fótbólti fyri øll.*

# Ársfrágreiðing - Venjaraútbúgvingin 2011

**A-útbúgvingin**
Í juni 2011 tóku 12 luttakarar A-prógv, og á samkomu á Hotel Hafnia 7. Juni fingu teir prógv handað. Hetta var so endin og hæddarpunktið á A-útbúgvingini hjá hesum 12 sum byrjaðu útbúgvingina í januar 2010.
Tilsamans hava nú 46 tikið A-prógv hjá FSF. Næsta A-skeiðið byrjar eftir ætlan í januar 2013.



Teir sum tóku A-prógv juni 2011

*Aftara rað*: Janus Rasmussen, Dánjal Jákup Joensen, Jóannes Jakobsen, Lenard Pedersen, Jón Pauli Olsen, Kári Reynheim og Milan Kuljic. *Fremra rað*: Allan Mørkøre, Kim V Petersen Jan C Dam og Aleksandar Jovevic. Svenn Ó Olsen manglar á myndini.

**B-útbúgvingin**
Í 2011 vóru tvey B1 skeið við tilsamans 41 luttakarum, eitt B2 skeið við26 luttakarum, eitt B3 við 21 luttakarum og eitt B4 við 11 luttakarum. Harumframt var próvtøka í september og tóku 12 luttakarar B-prógv. Tilsamans eru tað nú 99 sum hava tikið B-prógv. Av hesum eru so 46 sum eru farnir víðari og hava tikið A-prógv.

**Málmansvenjaraskeið**
Málmansvenjaraskeiðið M1 var í mars mánaði. Hetta er eitt 20 tímar skeið og verður tikið yvir eitt vikuskiftið. Tað vóru tilsamans 16 luttakarar á skeiðinum.
Ætlanin er at M1 framyvir skal vera partur av B2 skeiðinum, sum tí verður 50 tímar móti teimum 40 tímunum higartil.

Hinvegin so verður málmansvenjaraskeiðið M2 í mars mánað. Eitt skeið sum er heilar 50 tímar. Hetta verður fyrstu ferð at M2 skeið verður í Føroyum.

**Impulsskeið**
Okkurt av modulunum á A-venjaraútbúgvingini plagar at vera opið fyri øðrum luttakarum. Soleiðis var eisini tá Jakob Hansen, ítróttarsálarfrøðingur hevði skeiðið "Mental venjing". Tá vóru 8 luttakarar umframt teir 12 luttakararnar.

Fýra impulsskeið undir heitinum “Venjing við børnum 10-12 ár” vóru hildin kring landið. Tilsamans 64 luttakarar vóru til hesi 4 tímar skeiðini.

At enda so var eitt 3 tímars skeið í “FUTSAL” í Ítróttarhøllini í Kollafirði í oktober mánað, har 25 luttakarar sluppu at royna seg við fyri okkum eitt sindur ókenda háttinum at spæla fótbólt.

## Lisensskipanin/UEFA góðkenning

Omanfyri er nevnt um, at nakrir venjarar hava B-prógv og nakris hava A-prógv. Hetta við A og B prógvum er ein skipan sum UEFA hevur sett í verk. Eitt A-prógv í Føroyum kann síðustillast við eitt A-prógv í hinum UEFA limalondunum. Útbúgvingin skal lúka ávís minstu krøv fyri at vera góðkend av UEFA. Og tað var júst tað venjaraútbúgvingin hjá FSF varð fyri nøkrum árum síðani. Fyrst B-útbúgvingin og síðani A-útbúgvingin í 2007. Men góðkenningin er tíðaravmarkað. Tí var umboð fyri UEFA á vitjan í vár at “eftirhyggja” venjaraútbúgvingini hjá FSF. Fyrst í desember 2011 fekk Fótbóltssambandið bræv frá UEFA har sagt verður, at venjaraútbúgvingin hjá FSF hevur fingið endurnýggjað sína góðkenning.

Brævið frá UEFA endar soleiðis: “We congratulate you on your federation’s execelent work in this field”.

UEFA-umboðsmaðurin segði millum annað tá hann var her, at FSF gjørdi meira burtur úr A-útbúgvingini enn flest onnur lond, og serliga var hann væl nøgdur við, at vit í Føroyum løgdu so stóran dent á tann praktiska partin/supervisiónina.

Men tað er ikki bara FSF, sum javnan skal fáa sína útbúgvingarskipan góðkenda. Einstøku venjararnir við B ella A prógvi skulu endurnýggja lisensin triðja hvørt ár. Í hesum tíðarskeiði skulu teir luttaka í minst 15 tímar á góðkendum impulsskeiði.

## Mál og mið 2012

Eitt fokusøki í 2012 verður at fáa fleiri konufólk í gongd sum venjarar. FSF hevur fingið fíggjarligan stuðul frá UEFA til at hetta átakið. Hetta verður m.a. gjørt við at skipa fyri serstøkum skeiðum fyri kvinnur og at kvinnur ikki skulu rinda luttøkugjald á teimum venjaraskeiðum sum tær luttaka á.
Eitt annað er at hava nøkur impulsskeið, so bæði A og B venjarar hava møguleika at uppstiga seg og samstundis varveita lisensin.

## Hagtøl

Niðanfyri eru hagtøl, sum siga nakað um virksemið farna ár. Samanlagt vóru 14 skeið í tilsamans 282 tímar við í alt 236 luttakarum. Umroknað svarar hetta til 4845 luttakaratímar.

Knappliga helvtin av skeiðunum hava ligið uttanfyri Havnina.

| Skeið | Dagur | Stað | Tímar | Lutt. | Lutt.tímar |
|---|---|---|---|---|---|
| B1 | Januar | Tórshavn | 20 | 14 | 280 |
| B1 | Januar | Leirvík | 20 | 27 | 540 |
| B2 | Februar | Tórshavn | 40 | 26 | 1040 |
| B3 | November | Tórshavn | 50 | 21 | 1050 |
| B4 | Mars-juni | Tórsh/kring landið | 40 | 11 | 440 |
| B-próvtøka | September | Tórshavn | 5 | 12 | 60 |
| | | B-útbúgving tils. | 175 | 111 | 3410 |
| | | | | | |
| M1 | Mars | Tórshavn | 20 | 16 | 320 |
| A-útbúg (1/3 av tíðini) | Jan-juni | Tórsh/kring landið | 60 | 12 | 720 |
| | | | | | |
| Impulsskeið | | | | | |
| Mental venjing | Mars | Tórshavn | 8 | 8 | 64 |
| Venj við børnum 10-12 ár | Mars | Klaksvík | 4 | 13 | 64 |
| Venj við børnum 10-12 ár | Apríl | Toftir | 4 | 17 | 68 |
| Venj við børnum 10-12 ár | Mai | Tórshavn | 4 | 15 | 60 |
| Venj við børnum 10-12 ár | Mai | Tvøroyri | 4 | 19 | 76 |
| Futsal | Oktober | Kollafirði | 3 | 25 | 75 |
| | | Impulsskeið tils. | 27 | 97 | 395 |
| | | | | | |
| | Øll skeið tils. | **14 skeið** | **282** | **236** | **4845** |

## Yvirlit yvir venjara við B og A-prógvi

**B-prógv**

| | Navn | Eftirnavn | B-prógv |
|---|---|---|---|
| **1** | Albert | Ellefsen | 2( |
| **2** | Alexandre da Silva | Braga | 2011 |
| **3** | Allan | Dybczak | 2( |
| **4** | Annfinn | Hansson | 2009 |
| **5** | Arnbjørn | Danielsen | 2( |
| **6** | Bergur | Hansen | 2005 |
| **7** | Bjarni | Arnason | 2( |
| **8** | Bjarni | Johansen | 2007 |
| **9** | Bogi | Lervig | 2( |
| **10** | Christian | Danielsen | 2009 |
| **11** | Dan | Brimsvík | 2( |
| **12** | Egil | Finnsson | 2007 |
| **13** | Egil | Olsen | 2010 |
| **14** | Eilif | Petersen | 2009 |
| **15** | Eliesar | Olsen | 2009 |
| **16** | Erland | Tvørfoss | 2010 |
| **17** | Hans Bogi | Ellefsen | 2010 |
| **18** | Harry | Knudsen | 2011 |
| **19** | Hentzar | Steingrímsson | 2011 |
| **20** | Hjalti | Gleðisheygg | 2010 |
| **21** | Hjalti | Lundsbjerg | 2010 |
| **22** | Ingemar | Guttesen | 2009 |
| **23** | Ingi | Rasmussen | 2009 |
| **24** | Ingun | Hansen | 2011 |
| **25** | Jacob | Skaaning | 2007 |
| **26** | Jacob Eli | Olsen | 2007 |
| **27** | Jan Mølvad | Laursen | 2011 |
| **28** | Jógvan P. | Joensen | 2005 |
| **29** | Jógvan Páll | Hansen | 2005 |
| **30** | Johannes | Ejdesgaard | 2011 |
| **31** | Jóhannis | Joensen | 2010 |
| **32** | Jón | Johannesen | 2010 |
| **33** | Kári | Sørensen | 2011 |
| **34** | Kristian | Danielsen | 2009 |
| **35** | Mikkjal K | Thomssen | 2011 |
| **36** | Mouritz | Mohr | 2010 |
| **37** | Nenad | Stankovic | 2009 |
| **38** | Ólavur | Larsen | 2004 |
| **39** | Óli | Ludvík | 2009 |
| **40** | Ørvar | Jacobsen | 2004 |
| **41** | Pætur | Niclasen | 2009 |
| **42** | Petur A. | Dalbø | 2004 |
| **43** | Ransin | Djurhuus | 2004 |
| **44** | Sámal | Hansen | 2011 |
| **45** | Sigurð H | Sigurðsson | 2011 |
| **46** | Símun | Eliasen | 2010 |
| **47** | Sonni | Djurhuus | 2009 |
| **48** | Súni Fríði | Barbá | 2009 |
| **49** | Sveinbjørn | Danielson | 2005 |
| **50** | Terji L. | Hansen | 2005 |
| **51** | Torkil | Hansen | 2011 |
| **52** | Tummas | Djurhuus | 2010 |
| **53** | Tummas Eivind | Hansen | 2011 |

## Venjarar við A-prógv

| | Navn | Eftirnavn | A- pr |
|---|---|---|---|
| **1** | Abraham | Løkin | 2009 |
| **2** | Áki | Johansen | 20[illegible] |
| **3** | Aleksandar | Jovevic | 2011 |
| **4** | Alexander | Djordjevic | 20[illegible] |
| **5** | Allan | Mørkøre | 2011 |
| **6** | Álvur | Hansen | 20[illegible] |
| **7** | Anfinn | Danielsen | 1999 |
| **8** | Anton | Skoradal | 20[illegible] |
| **9** | Bill Mc. Leod | Jacobsen | 2006 |
| **10** | Bjørn | Krog | 19[illegible] |
| **11** | Dánjal Jákup | Joensen | 2011 |
| **12** | Eli | Hentze | 19[illegible] |
| **13** | Eyðun | Klakstein | 2006 |
| **14** | Finn | Johannessen | 20[illegible] |
| **15** | Frankie | Jensen | 2008 |
| **16** | Hans Mourits | Foldbo | 19[illegible] |
| **17** | Heðin | Askham | 2006 |
| **18** | Jan Christian | Dam | 20[illegible] |
| **19** | Janus | Rasmussen | 2011 |
| **20** | Jens Martin | Knudsen | 20[illegible] |
| **21** | Jóannes | Jakobsen | 2011 |
| **22** | Jógvan H. | Samuelsen | 2009 |
| **23** | Jógvan Martin | Olsen | 1999 |
| **24** | Johan | Nielsen | 1999 |
| **25** | John | Petersen | 2009 |
| **26** | Jón | Simonsen | 2009 |
| **27** | Jón Pauli | Olsen | 2011 |
| **28** | Kári | Reynheim | 2011 |
| **29** | Kim Vangberg | Petersen | 2011 |
| **30** | Krzysztof | Popczynski | 2006 |
| **31** | Lennard | Pedersen | 2011 |
| **32** | Mathias | Davidsen | 1999 |
| **33** | Meinhardt | Dalbúð | 2009 |
| **34** | Milan | Cimburovic | 2006 |
| **35** | Milan | Kuljic | 2011 |
| **36** | Oddbjørn | Joensen | 2006 |
| **37** | Pætur S. | Clementsen | 2006 |
| **38** | Pauli | Poulsen | 2006 |
| **39** | Petur | Simonsen | 1999 |
| **40** | Petur H | Mohr | 1999 |
| **41** | Piotr | Krakowski | 2006 |
| **42** | Pól F. | Joensen | 2006 |
| **43** | Rúni | Nølsøe | 2009 |
| **44** | Sámal Erik | Hentze | 2006 |
| **45** | Sigfríður | Clementsen | 2009 |
| **46** | Svenn Ó. | Olsen | 2011 |
Teir leikarar, sum felagið hevur keypt, tvs. sum felagið hevur goldið pengar fyri til onnur feløg eru hesir:

Í 2008 keypti felagið Levi Hansen, og rindaði tá kr. 10.000, í 2009 keypti felagið Gudmund Nielsen og Dánjal Davidsen, og rindaði tá ávikavist kr. 37.000 og kr. 10.000, og í 2010 keypti felagið Kristoffur Jacobsen, og rindaði tá kr. 30.000.

Felagið hevur ongantíð selt nakrar leikarar á hendan hátt.
Leikaralønirnar ganga fram av viðløgdu roknskapum.

Til hetta er at siga, at lønarútreiðslurnar í 2008 uppá tilsamans kr. 1.354.000 kunnu býtast upp á venjaralønir uppá kr. 690.668 og spælaralønir uppá kr. 663.332.

Fyri 2009 vóru lønirnar til venjaran kr. 660.000, og restin av lønarútreiðslunum sambært roknskapin er til spælarar.

Til februar 2010 er goldið uml. 50.000 til venjarar, men vit hava ikki rættiliga yvirlit yvir spælaralønirnar. Hetta kann tó fáast til vega, um tað er neyðugt.

Ongar íløgur eru gjørdar í fótbóltsumstøðurnar annars, tvs. vøll v.m.

Nú vita vit ikki, um tit hava fingið svar uppá allar spurningarnar. Um so er, at tykkum tørva fleiri upplýsingar, eru vit sjálvandi fúsir at fáa hesar til vega.

Vit halda, at tað kundi verið skilagott, at vit komu á fund við aganevndina at greiða nærri frá hesum, áðrenn aganevndin tekur endaliga avgerð."

- Aganevndin hevur somuleiðis fingið hetta svar frá FSF-umsitingini:

"Upplýsingar um løgfrøðiligu eindina EB/Streymur í tíðarskeiðnum mars 2008 til februar 2010

EB/Streymur var í tíðarskeiðinum eitt samstarv ímillum EB og Streym, samstarvið fevndi um allan fótbólt. EB og Streymur høvdu í felag ábyrgd av Felagsdeildin EB/Streymur, fíggjarliga og ítróttarliga. Íðkandi í EB/Streymi skuldu vera limir í EB ella í Streymi.

Yvirlit yvir inntøkur orsakað av luttøku í Evropiskum fótbólti í tíðarskeiðnum mars 2008 til februar 2010

2008 EB/Streymur meistari og fáa í desembur 2009 €330.000 fyri at vinna í 2008 og at luttaka í Champions League 09/10 t.e. kr. 2.452.450,49.

2009 EB/Streymur steypavinnari og fáa í novembur 2010 €90.000 fyri at luttaka í Europa League 10/11 t.e. kr. 670.020,12.

2010 EB/Streymur steypavinnara og fáa væntandi €90.000 fyri at luttaka í Europa League 11/12 uml. Kr. 670.000 sum vera útgoldnar nov/des 2011

Innanhýsis viðgerð og møguligar viðmerkingar/átekningar, sum FSF umsitingin hevur gjørt til roknskapirnar í tíðarskeiðnum mars 2008 til februar 2010.
FSF umsitingin hevur ikki gjørt viðmerkingar/átekningar til roknskapirnar fyri tíðarskeiði, staðfest er bara at grannskoðaðir roknskapirnir sum lúka settu treytir í loyvisskipanini eru innkomnir ísv loyvisumsókninar.

Aganevndin biður umsitingina útvega upplýsingar um møgulig fordømi í okkara grannalondum um mál viðv. fíggjarligum sviki og undandrátti í fótbóltsfeløgum
Tað hevur ikki eydnast umsitingini at finna fram til møgulig fordømi ella líknandi mál í okkara grannalondum."

**Málsviðgerðin hjá Aganevndini**
Í dómi frá Føroya Rætti, sagdur tann 30. apríl 2011, varð kassameistarin ella peningarøkilin hjá EB/Streymi dømdur fyri fíggjarligan undandrátt uppá kr. 5.357.840,75 kr. Í dóminum er staðfest, at EB/Streymur hevur fingið hendan pening í tíðarskeiðnum mars 2008 til februar 2010. Sambært upplýsingum frá EB/Streymi og FSF er nettoupphæddin, sum EB/Streymur móttók í hesum tíðarskeiði góðar 4,3 mió. kr.

Viðgerðin í Aganevndini fevnir ikki um borgarliga rættargangin ella brot á borgarliga lóggávu, men einans um møgulig brot á fótbóltsregluverkið. Tó verður dómurin frá Føroya Rætti lagdur til grund, sum óvikalig fakta í viðgerðini av málinum um møgulig brot á regluverk FSF's.

**Heimildargrundarlag**
Aganevndin viðger sbrt. grein 2 í Agareglugerðini *"øll mál í samband við møgulig brot á Kappingarreglurnar fyri Fótbólt, Lógir og reglur FSF's, UEFA loyvisgóðkenningina og lógir og reglur hjá UEFA og FIFA. "*

Agareglugerðin er galdandi fyri allar limir FSF's og allar einstaklingar, sum beinleiðis ella óbeinleiðis útinna uppgávur innan fótbólt sum ítróttargrein, tað veri seg leiðarar, venjarar, leikarar og aðrir ábyrgdarpersónar, sum hava við hesa ítróttargrein at gera.

Staðfestast kann sostatt, at Aganevndin hevur heimild at viðgera málið sbrt. grein 2 í Agareglugerðini, sbr. grein 1, stk. 6 í kappingarreglunum fyri Fótbólt, sum hevur tilvísing til Loyvishandbókina.

**Loyvisskipanin hjá FSF (og UEFA)**
Loyvishandbókin ásetir ítróttarlig, umsitingarlig og fíggjarlig krøv til feløg fyri at fáa luttøkuloyvi frá FSF. Feløgini skulu árliga søkja um luttøkuloyvi. Loyvishandbókin ásetur eisini karmar um sjálva loyvisumsitingina. Sambært reglu 3.2.2.2. í Loyvishandbókini skulu stovnast tvær nevndir: ein Loyvisnevnd og ein Kærunevnd at hava ábyrgdina av avgerðum í loyvismálum og ansa eftir, at krøvini í Loyvishandbókini verða fylgd, ella sagt við øðrum orðum, at halda eyga við fíggjarligum Fair Play í føroyskum fótbólti, serliga innan Vodafonedeildina.

**AGANEVNDIN**

Krøvini í Loyvishandbókini eru býtt upp í tríggjar ymiskar bólkar (A, B og C krøv) sbrt. reglu 2.1.1.3.

Umframt skipanina við loyvisnevnd og kærunevnd, ásetir Loyvishandbókin í reglu 3.2.2.1 at "Loyvisveitarin skal seta eina hóskandi umsiting og seta í starv hóskandi starvsfólk." Loyvisveitari er Fótbóltssamband Føroya, sbr. reglu 3.2.1.1. Sambært reglu 3.2.2.3 skulu hesar nevndir vera óheftar av hvørji aðrari og fáa hóskandi hjálp frá umsiting FSF's.

Loyvishandbókin ásetur faklig krøv til limirnar í ávikavist Loyvisnevndini og Kærunevndini, sbr. reglurnar í broti 3.2.6. Harumframt er ásett í reglu 3.2.3.2. at "Loyvisumsitingin má hava skikkað starvsfólk og neyðugar umstøður. Kostnaðin av tí tekur FSF."

Grundreglan í Loyvishandbókini er, at fíggjarligu krøvini til fótbóltsfeløg eru strangari enn krøvini til feløg í samfelagnum annars. Í Loyvishandbókini verður hendan reglan somuleiðis staðfest fleiri staðni sum A-krav og m.a. er í Kap. 10 í Loyvishandbókini ásett at, *"ásettu minstukrøvini, hvat upplýsingarskyldu viðvíkur, eru meira víðfevnd enn føroyska lóggávan setir partafeløgum, serliga viðv. peningastreymsfrágreiðing, minstukrøvini viðv. rakstrarroknskapinum, fíggjarligari leiðslugjøgnumgongd og nærstandandi pørtum"*

**Bygnaðurin í FSF**

FSF er skipað við umsiting og nevndum. Eyðkenni fyri Loyvisnevndina og Kærunevndina í Loyvismálum er, at hesar nevndir eru skipaðar og skulu arbeiða óheft av FSF-umsitingini og øðrum nevndum. Sama er galdandi fyri Aganevndina og Yvirkærunevndina. Aðrar nevndir í FSF hava ikki somu strongu fakligu krøv til, hvørjir persónar kunnu manna hesar nevndir. Innan umsitingarligu nevndirnar hjá FSF, er Starvsnevndin ovast. Niðanfyri er ein skitsa, sum vísir bygnaðin í FSF í mun til Loyvisskipan, FSF-umsiting og Aganevnd og sum vísir gongdina í málinum innan FSF, síðani dómur varð sagdur í Føroya Rætti um ólógliga peningaflutningin til EB/Streym.




5

AGANEVNDIN

**Staðfestingar**
Aganevndin staðfestir við støði í dómsúrskurði hjá Føroya Rætti, og uttan aðra neyðuga próvførslu, at EB/Streymur av órøttum í næstan 2 ár, hevur móttikið góðar 4,3 mió. kr. Staðfest verður eisini, grundað á roknskapir hbjá felagnum og upplýsingar frá sitandi formanni í felagnum, at hesar 4,3 mió. kr. eru brúktar til rakstur av EB/Streymi í sama tíðarskeiði.

Aganevndin staðfestir, at nevndin í EB/Streymi hevur evstu ábyrgd av felagnum mótvegis FSF, tað veri seg ítróttarliga, umsitingarliga og fíggjarliga.

Aganevndin staðfestir, at reglurnar hjá FSF um luttøkuloyvi, loyvisumsiting og krøv til ítróttarlig, umsitingarlig og fíggjarlig avrik í fótbóltsfeløgunum hevur sum yvirskipað endamál at hækka støðið í føroyskum og evropeiskum fótbólti. Yvirskipaða endamálið við fíggjarligu krøvunum er at tryggja betur gjøgnumskygni um fíggjarviðurskiftini hjá feløgum og at tryggja ábyrgdarfulla fíggjarstýring, fíggjarligt støðufesti og framhaldandi rakstur, so feløgini megna at svara hvørjum sítt og tí framhaldandi kunnu vera við at menna føroyskan og evropeiskan fótbólt.

Aganevndin staðfestir, at fíggjarligu krøvini og roknskaparligu krøvini sambært Loyvishandbókini eru strangari fyri fótbóltsfeløg, sum hava lið í Vodafone-deildini, og sum hava tryggjað sær luttøku í altjóða kappingum í UEFA-høpi, enn líknandi krøv til feløg annars í føroyska samfelagnum.

**Viðmerkingar frá EB/Streymi**
Nevndin sigur seg ikki kenna til ólógliga peningastreymin, fyrr enn málið kom fram í 2010.

**Partshoyring**
Málið hevur verið til hoyringar hjá EB/Streymi og hjá teimum nevndarlimum, sum myndaðu nevndina í 2008-2009.

Í hoyringssvarinum kom m.a. fram at:

1. *"tað mesta av flytingunum fór fram í 2009"*
2. *"fíggjareftirlitið helst ikki hevur verið verri enn hjá øðrum feløgum í Føroyum"*
3. *"orsøkin til at nevndin ikki hevur verið varug við ólógliga peningaflutningin er netup tær upphæddir, sum felagið fekk í sambandi við luttøkuna í altjóða fótbólti"*
4. *"vísa aftur at nevndin á nakran hátt hevur havt mistanka um ólógligau peningaflytingarnar"*
5. *"Stuðlarnir hjá einum fótbóltsfelag eru nógvir, og tað er ikki altíð at øll hava fult yvirlit yvir, hvaðani stuðulin kemur"*
6. *"Undirstrika at táverandi nevndarlimir hvørki hava medvirka til ella verið vitandi um at nakað ólóligt gekk fyri seg."*

Til 1 og 3: Aganevndin metir, at upplýsingarnar um, at meginparturin av ólógligu flytingunum, fór fram í 2009, og at peningaupphæddin frá UEFA ikki kom inn í felagið fyrr enn í desember 2009, eru at meta sum herðandi umstøður, tá metast skal um, hvussu culpiøst nevndin hevur handlað.
Til 2: Aganevndin metir ikki at hesi viðurskifti á nakran hátt frítaka nevndini í EB/Streymi fyri sína ábyrgd.

Til 4 og 6: Sitandi nevnd vísir aftur, at táverandi nevnd hevur verið vitandi um nevndu viðurskifti. Aganevndin heitti tí á FSF um, at senda uppskotið til avgerð til endurhoyringar hjá felagnum við umbøn um, at avgerðin varð send hesum áðurnevndu nevndarlimum. Táverandi nevndarlimir vísa á tað sama, og siga seg vera óvitandi um fíggjarliga óreglusemi og at tey høvdu fult álit á kassameistaranum, sum var kendur fyri at vera ein dugnaligur og álítandi maður.
Til 5: Aganevndin hevur áður staðfest, at tað er uppgávan hjá nevndini at hava yvirlit yvir allar avtalur, sum felagið ger sambært reglunum í Loyvishandbókini.

**Metingar hjá Aganevndini**

Aganevndin metir, at nevndin í EB/Streymi ikki á nøktandi hátt hevur røkt sínar nevndarskyldur sambært Loyvishandbókini.

Staðfestast kann, at inntøkurnar hjá felagnum í eitt tvey ára tíðarskeið, t.e. í 2008 og 2009, eru roknskaparførdar til at vera 11.466.334 kr. Sambært dóminum í Føroya Rætti er ólógliga peningaupphæddin, sum er tilførd felagnum í nøkulunda sama tíðarskeiði, kr. 4.361.840,75.

Aganevndin metir tað vera serstakliga undrunarvert at eitt felag av órøttum kann hava tikið ímóti og brúkt so nógvan pening, uttan at nakar í nevndini varnast hesi viðurskifti. Aganevndin metir, at stóra upphæddin í sær sjálvum sáar grundaðan iva um, at nevndin hjá EB/Streymi ikki hevur røkt sínar skyldur sbrt. Loyvishandbókini til fulnar.

Aganevndin ásannar, at stórur partur av føroyskum fótbólti hevur flutt seg frá at vera ein ítróttargrein fyri leikfólk til eina ítróttargrein fyri professionellar spælarar, har peningur í alt størri mun gerst íbundin partur av at reka eitt fótbóltsfelag. Hetta setir strangari krøv til allar aktørar innan føroyska fótbóltsumsiting, og serliga til tey feløg, sum hava lið í ovastu og næstovastu deildini.

Nevndirnar hjá feløgunum hava evstu ábyrgd av, at felagið verður rikið í samsvari við tað regluverk, sum til hvørja tíð er galdandi fyri føroyskan fótbólt. At peningur er blivin partur av fótbóltinum hevur við sær, at krøvini til feløgini eru munandi herd og hetta gevur nevndini størri ábyrgd. Tað sæst týðiliga av reglunum í Loyvishandbókini, at endamálið er at tryggja, at feløg verða rikin ítróttarliga, umsitingarliga og fíggjarliga forsvarligt og lógligt sambært tí regluverki, sum er galdandi fyri felagið og luttøkuloyvi teirra.

Aganevndin metir, at allir nevndarlimir í 2008 og 2009 áttu at verið vitandi um ólógliga peningastreymin í felagnum, tí talan er um lutfalsliga stórar upphæddir. At nevndin ikki hevur vitað, ella ikki hevur ynskt at vita, hvaðani peningurin stavaði, er álvarsamt brot á fleiri krøv í Loyvishandbókini. Aganevndin staðfestir, at grundaður ivi kann verða sáddur um, at nevndin við undanláti hevur skúgvað til viks fleiri av sínum grundleggjandi uppgávum, sum nevndin átti at røkt í sambandi við raksturin av felagnum. At nevndin við undanláti soleiðis ikki hevur røkt sínar uppgávur, frítekur ikki nevndina fyri ábyrgd av felagnum og rakstrinum av felagnum sum heild.

Aganevndin kann staðfesta, at roknskapurin ikki lýkur grundleggjandi treytir í Loyvishandbókini, sum eitt nú leiðslufrágreiðing, sbr. krøvini í reglu 10.3.4.3 og at nevndin í felagnum hvørki hevur røkt sína innaneftirlitsskyldu ella sína upplýsingarskyldu mótvegis FSF, sum ásett í Loyvishandbókini.

**Loyvisumsitingin**

**AGANEVNDIN**

Aganevndin metir tað vera serstakliga undrunarvert, at eitt fótbóltsfelag av órøttum kann taka ímóti og brúka so nógvan pening, uttan at nakar í Loyvisumsitingini varnast hesi viðurskifti.

Sambært roknskapinum fyri 2007 hevði felagið EB/Streymur eina negativa eginogn á 490 tkr. Og sambært Kap. 10 í loyvishandbókini, varð felagið tí sett undir hert eftirlit av FSF Loyvisumsitingini.

Aganevndin kann staðfesta, at EB/Streymur sambært regluverkinum var undir herdum eftirliti í 2008 orsakað av negativum eginpeningi í roknskapinum í 2007. Aganevndin setir spurnartekin við, um Loyvisskipanin hjá FSF og Loyvisnevndin hava røkt sínar skyldur sambært Loyvishandbókini til fulnar. Loyvishandbókin gevur loyvisveitara víðar ræsur at kanna innkomnar umsóknir frá feløgum og til eftirfylgjandi eftirlit við loyvishavum. Havandi í huga, at EB/Streymur í 2008 var undir skerpaðum eftirliti grundað á negativa eginogn, staðfestir Aganevndin, at Loyvisumsitingin hvørki hevur brúkt sínar heimildir ella útint sínar skyldur sambært kapittul 4 í Loyvishandbókini á nøktandi hátt og tí hevur loyvisumsitingin ikki avdúka fíggjarliga óreglusemi í EB/Streymi. At størsti parturin av ólógliga peningaflutninginum, sambært upplýsingum frá EB/Streymi, hevur gingið fyri seg í 2009 kann hava verið atvoldin til, at loyvisumsitingin ikki varnast fíggjarliga óreglusemi í 2008. Tó er tað ikki upplýst fyri Aganevndini, júst hvussu stórar upphæddir talan er um í ávikavist 2008 og 2009.

At feløg á hvørjum ári skulu søkja um luttøkuloyvi ber í sær, at Loyvisumsitingin javnan og árliga skal meta um, hvørt feløg lúka treytirnar fyri at fáa og varðveita luttøkuloyvið. Havandi í huga at loyvisskipanin frammanundan setir strangari krøv til feløgini enn tey, sum føroyska lóggávan annars setir partafeløgum viðv. upplýsingarskyldu v.m., kann Aganevndin staðfesta, at kanningar- og eftirlitsuppgávan hjá loyvisumsitingini ikki hevur verið nøktandi í hesum máli.

FSF hevur upplýst fyri Aganevndini, at FSF umsitingin bara hevur staðfest, "*at grannskoðaðir roknskapir, sum lúka settu treytir í loyvisskipanini, eru innkomnir í sambandi við loyvisumsóknir.*" Aganevndin staðfestir, at ein slík mannagongd og grunn viðgerð ikki er í samsvari við reglurnar í Loyvishandbókini. Ein grannskoðaður roknskapur við frágreiðing frá grannskoðara, kann á ongan hátt skúgva til viks tær skyldur, sum liggja á ávikavist nevndini í felagnum og Loyvisumsitingini hjá FSF.

Aganevndin skilir ikki, at Loyvisnevndin, uttan grundgeving, tann 17. juni hevur viðgjørt málið og er komin fram til, "*at nevndin, útfrá teimum fyriliggjandi uppýsingunum í málinum, ikki metir, at hetta er eitt mál, sum er viðkomandi fyri Loyvisnevndina og ger nevndin tí á fyriliggjandi grundarlag ikki meira við málið.*"

Loyvishandbókin ásetir karmar um sjálva loyvisumsitingina og stovnast skulu tvær nevndir: ein Loyvisnevnd og ein Kærunevnd at umsita loyvisskipanina.

Aganevndin staðfestir, at tað sambært hesum reglum sostatt eru Loyvisnevndin og Kærunevndin í loyvisskipanini, sum skulu viðgera og handhevja loyvisregluverkið og biðja um allar viðkomandi upplýsingar frá feløgunum, sum eru neyðugar fyri at umsita reglurnar í Loyvishandbókini.

**Avgerð**
Starvsnevnd FSF's hevur heitt á Aganevndina um at taka støðu til hesi viðurskifti:

AGANEVNDIN

1) Av málinum framgongur, at fyrrverandi kassameistari og nevndarlimur í felagnum av órøttum hevur flutt stórar peningaupphæddir til felagið. Aganevndin verður biðin um at taka støðu til, um felagið kann ábyrgdast fyri henda peningaflutning, herundir um felagið kann sigast hava fingið ein órimiligan fyrimun í mun til onnur fótbóltsfeløg.
2) Aganevndin verður biðin um at taka støðu til, um nevndin í EB/Streymi hevur havt eitt nøktandi eftirlit við fíggjarligu viðurskiftini í felagnum og um felagið kann ábyrgdast fyri hetta.
3) Aganevndin verður biðin um at taka støðu til, um nevndin í EB/Streymi kann metast at hava verið vitandi um viðurskiftini, nevnd undir pkt. 1 -2, og um felagið kann ábyrgdast fyri hetta.

Til 1: Aganevndin staðfestir, at ólógligur peningaflutningur er komin felganum til góðar. Kassameistarin hevur viðurkent og er dømdur fyri at hava framt hendan peningaflutning til felagið. Aganevndin metir, at ólógliga upphæddin er so stór, at hon hevur givið EB/Streymi ein týðandi fíggjarligan fyrimun.

Til 2: Aganevndin staðfestir, at nevndin í EB/Streymi ikki hevur havt eitt nøktandi eftirlit við fíggjarligu viðurskiftunum í felagnum, og eigur nevndin í felagnum at ábyrgjast fyri hetta.

Til 3: Aganevndin staðfestir, at nevndin í EB/Streymi átti at verið vitandi um nevndu viðurskifti, og um nevndin hevði røkt sína eftirlitsskyldu er sannlíkt, at nevndin hevði verið vitandi um fíggjarliga óreglusemi nógv fyrr. Nevndin í felagnum eigur at ábyrgjast fyri hetta.

**Úrskurður:**
Grein 8 í Agareglugerð FSF's heimilar Aganevndini at geva feløgum og persónum sekt fyri brot á lógarverk FSF's .

Aganevndin hevur í viðgerðini av ásetan av revsing, tikið avgerð um ikki at revsa aftureftir, hóast brotið er framt yvir fleiri undanfarin kappingarár. Høvuðsorsøkin er, at fíggjarliga óreglusemi, sum er til viðgerar í hesum máli, endaði í februar 2010, áðrenn núverandi kappingarár byrjaði. Revsingin í hesum ítøkiliga máli er tí vend móti felagnum og teimum, sum myndaðu felagið, tí Aganevndin metir, at nevndin átti at vita, at EB/Streymur í týðandi mun var ríkin við óvanliga stórum peningaupphæddum.

Sambært grein 8, stk. 2, litra g, verða hesir persónar, sum myndaðu nevndina hjá EB/Streymi í roknskaparárunum 2008-2009, sektaðir soleiðis:

Rólant Højsted – forboð fyri at luttaka í virksemi, sum hevur við fótbólt at gera í 12 ár frá tí at henda avgerð er vorðin endalig.

Durita Joensen - forboð fyri at luttaka í virksemi, sum hevur við fótbólt at gera í 12 ár frá tí at henda avgerð er vorðin endalig.

Esmar Olsen - forboð fyri at luttaka í virksemi, sum hevur við fótbólt at gera í 12 ár frá tí at henda avgerð er vorðin endalig.

Aganevndin metir tó, at orsakað av at Loyvisumsitingin hjá FSF ikki hevur havt fullgóða umsiting og fullgott eftirlit við loyvunum hjá EB/Streymi í 2008-2009, verður hetta at meta sum linnandi

**AGANEVNDIN**

umstøður, sum ávirka ásettu persónligu revsingar. Revsingin av Rólant Højsted og Duritu Joensen verður tí niðursett til útistongsul frá fótbóltsvirksemi í 6 ár.

Aganevndin staðfestir, at EB/Streymur við fótbóltsavrikum í kappingarárinum 2009-2010 hevur spælt seg til luttøku í evropeiskum fótbólti í 2011. Staðfestast kann eisini, at hesi fótbóltsavrik stava frá einum tíðarskeiði, har helmingurin av ólógliga peningaflutninginum gekk fyri seg. Aganevndin metir tó, at spurningurin um møguligar ítróttarligar avleiðingar fyri EB/Streym í evropeisku kappingini er eitt mál fyri føroysku loyvisnevndina ella eitt mál fyri loyvisnevndina hjá UEFA

Sambært grein 8, stk. 1, litra c, verður fótbóltsfelagið EB/Streymur sektað við eini bót uppá kr. 400.000,-. Bótin kann gjaldast til FSF yvir eitt 2 ára tíðarskeið, tvs. í 2011 og 2012.

Aganevndin metir, at grundarlag nú er fyri, at Loyvisnevndin viðger málið av nýggjum vísandi til hesa avgerð og til, at ídøming av revsingum sambært Loyvishandbókini eisini kunnu gerast av Loyvisnevndini og Kærunevndini, sbr. reglu 2.2.3 í Loyvishandbókini.

Avgerðin hjá Aganevndini kann innan 5 dagar kærast til Yvirkærunevndina sbrt. grein 12 í Agareglugerðini.

Vegna Aganevndina

Ingunn Eiriksdóttir
forkvinna

AGANEVNDIN

**KÆRA 7/2011**

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: Undrið FF kærir NSÍ fyri at nýta ólógligar leikarar** | |
| Deild: 3. deild menn | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 04.06.2011 | Aganevndin móttikið kæru: 14. juli 2011 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: Ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna, Sissal Kj. Kristjansen, ráðgevi og Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna.

**1. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's**

Undrið FF hevur kært NSÍ fyri at nýta ólógligar leikarar í dysti millum NSÍa og FF Giza tann 4. juni 2011 í 3. deild menn.

Í kæruni vísir FF Giza á, *"at NSÌ hevur nýtt tveir leikarar, ið ikki vóru skrásettir í teirra felag, talan er um leikararnar: Nr. 1 Andreas Troest og nr. 7 Tonny Kjelnæs".*

NSÌ er hoyrt í málinum, men er ikki komið við viðmerkingum, hóast FSF umsitingin longdi upprunaligu svarfreistina frá 17. juni 2011 til 30. juni 2011.

**2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

**3. Fakta í málinum**

Tann 4. juni 2011 varð dystur leiktur millum FF Giza og NSÍ í 3. deild menn. Leikararnir Andreas Troest og Tonny Kjelnæs leiktu sambært dómaraseðlinum fyri NSÍ

FSF skrivstovan upplýsir fyri Aganevndini, at tá dysturin varð leiktur vóru nevndu leikarar ikki skrásettir sum lógligir leikarar hjá NSÍ sbrt. leikaraskráseting FSF's.

**4. Lógarverkið**

Sambært grein 15, stk. 3 í Kappingarreglum fyri Fótbólt er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's, ella tá loyvisbræv er útskrivað.

**5. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin kann staðfesta, at regluverkið er greitt innan hetta øki, sbrt. grein 15, stk 3 í Kappingarreglum fyri Fótbólt er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's ella tá loyvisbræv er útskrivað. Aganevndin staðfestir, at leikararnir Andreas Troest og Tonny Kjelnæs ikki vóru skrásettur í leikararskrá FSF's sum lógligir leikarar, tá omanfyri nevndi

AGANEVNDIN

dystur varð leiktur.

**6. Niðurstøða**

Leikarnir Andreas Troest og Tonny Kjelnæs leiktu ólógliga í dystinum tann 4. juni 2011 millum FF Giza og NSÍa, sbrt. grein 15, stk. 3 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's. Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikarum verður sektað við, at felagið verður dømt at tapa dystin.
Aganevndin metir, at síggjast kann ikki burtur frá slíkum fordømum.

**7. Úrskurður**

Grein 8 í Agareglugerð FSF's heimilar Aganevndini at geva feløgum og persónum sekt fyri brot á lógarverk FSF's. Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's og tað skipan, sum er gjørd fyri brúka av spælarum.

Við heimild í grein 8, litra h í Agareglugerðini verður NSÍa 3 deild menn dømt at tapa dystin móti FF Giza tann 4. juni 2011 fyri brúk av ólógligum leikara við málmuninum 0-3 sambært grein § 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

**8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Sambært grein 12, litra f í Agareglugerðini, kann avgerðin kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar aftaná móttøku av úrskurðinum.

**9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn 15. juli 2011**

Ingunn Eiriksdóttir, forkvinna

AGANEVNDIN

KÆRA 8/2011

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: AB kærir FC Suðuroy fyri at nýta ólógligar leikarar** | |
| Deild: 2. deild menn | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 13.08.2011 | Aganevndin móttikið kæru: 23. august 2011 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: Ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna, Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi og Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna.

**1. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's**

AB hevur kært FC Suðuroy fyri at nýta ólógligar leikarar í dysti millum AB og FC Suðuroy tann 13. august 2011 í 2. deild menn.

Í kæruni vísir AB á, *"at FC Suðuroy nýtti minst tveir ólógligar leikarar í dystinum"*. Talan er um leikararnar Rene Thomsen nr. 11 og Ingi Poulsen nr. 14.

FC Suðuroy er hoyrt í málinum og vísir á, at Rene Thomsen er skrásettur sum leikari hjá FC Suðuroy og at Ingi Poulsen er uppvaksin í felagnum og hevur leikt øll ungdómsárini í VB og VB/Sumba. FC Suðuroy vísir á, at Ingi Poulsen er skrásettur á heimasíðuni www.faroesoccer.com og at hetta má síðustillast við skráseting í leikaraskráseting FSF's.

**2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

**3. Fakta í málinum**

Tann 13. august 2011 varð dystur leiktur millum AB og FC Suðuroy í 2. deild menn. Leikararnir Rene Thomsen og Ingi Poulsen leiktu sambært dómaraseðlinum fyri FC Suðuroy.

FSF skrivstovan upplýsir fyri Aganevndini, at leikarin Rene Thomsen er skrásettur sum leikari hjá FC Suðuroy. FSF skrivstovan upplýsir somuleiðis at leikarin Ingi Poulsen ikki er skrásttur í leikaraskráseting FSF's.

**4. Lógarverkið**

Sambært grein 15, stk. 3 í Kappingarreglum fyri Fótbólt er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's, ella tá loyvisbræv er útskrivað.

**5. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin kann staðfesta, at regluverkið er greitt innan hetta øki, sbrt. grein 15, stk 3 í

**AGANEVNDIN**

Kappingarreglum fyri Fótbólt er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's ella tá loyvisbræv er útskrivað. Aganevndin staðfestir, at leikarin Ingi Poulsen ikki er skrásettur í leikararskrá FSF's sum lógligur leikari hjá FC Suðuroy.

**6. Niðurstøða**

Leikarin Ingi Poulsen leikti ólógliga í dystinum tann 13. august 2011 millum AB og FC Suðuroy, sbrt. grein 15, stk. 3 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's. Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikarum verður sektað við, at felagið verður dømt at tapa dystin.
Aganevndin metir, at síggjast kann ikki burtur frá slíkum fordømum.

**7. Úrskurður**

Grein 8 í Agareglugerð FSF's heimilar Aganevndini at geva feløgum og persónum sekt fyri brot á lógarverk FSF's. Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's og ta skipan, sum er gjørd fyri brúk av spælarum.

Við heimild í grein 8, litra h í Agareglugerðini verður FC Suðuroy, 2. deild menn dømt at tapa dystin móti AB tann 13. august 2011 fyri brúk av ólógligum leikara við málmuninum 0-3 sambært grein § 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

**8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Sambært grein 12, litra f í Agareglugerðini, kann avgerðin kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar aftaná móttøku av úrskurðinum.

**9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn 26. august 2011**

Ingunn Eiriksdóttir, forkvinna

AGANEVNDIN

KÆRA 9/2011

| FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini: | |
|---|---|
| Málsheitið: MB kærir Víking fyri at nýta ólógligar leikarar | |
| Deild: 3 deild menn | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 20.08.2011 | Aganevndin móttikið kæru: 9. september 2011 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: Ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna, Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi og Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna.

**1. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's**

MB hevur kært Víking fyri at nýta ólógligar leikarar í dysti millum MB og Víking tann 20. august 2011 í 3. deild menn.

Í kæruni vísir MB á, *"at Víkingur nýtti tveir ólógligar leikarar í dystinum"*. Talan er um leikararnar Rúna Klein og Elias Hansen.

Víkingur er hoyrt í málinum og vísur á, at leikarin Rúni Klein Joensen stendur sum Rúni Klein á dómaraseðlinum, men er skrásettur sum Rúni Joensen hjá Víkingi.

**2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

**3. Fakta í málinum**

Tann 20. august 2011 varð dystur leiktur millum MB og Víking í 3. deild menn. Leikararnir Rúni Klein og Elias Hansen leiktu sambært dómaraseðlinum fyri Víking.

FSF skrivstovan upplýsir fyri Aganevndini, at leikarin Rúni Klein Joensen er skrásettur sum Rúni Joensen í leikaraskráseting FSF's, sum leikari hjá Víkingi, meðan leikarin Elias Hansen ikki er skrásettur í leikaraskráseting FSF's.

**4. Lógarverkið**

Sambært grein 15, stk. 3 í Kappingarreglum fyri Fótbólt er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's, ella tá loyvisbræv er útskrivað.

**5. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin kann staðfesta, at regluverkið er greitt innan hetta øki. Sambært. grein 15, stk 3 í Kappingarreglum fyri Fótbólt er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's ella tá loyvisbræv er útskrivað. Aganevndin staðfestir, at leikarin Elias Hansen ikki er

AGANEVNDIN

skrásettur í leikararskrá FSF's sum lógligur leikari hjá Víkingi.

**6. Niðurstøða**

Leikarin Elias Hansen leikti ólógliga í dystinum tann 20. august 2011 millum MB og Víking sbrt. grein 15, stk. 3 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's. Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikarum verður sektað við, at felagið verður dømt at tapa dystin.
Aganevndin metir, at síggjast kann ikki burtur frá slíkum fordømum.

**7. Úrskurður**

Grein 8 í Agareglugerð FSF's heimilar Aganevndini at geva feløgum og persónum sekt fyri brot á lógarverk FSF's. Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's og ta skipan, sum er gjørd fyri brúk av spælarum.

Við heimild í grein 8, litra h í Agareglugerðini verður Víkingur, 3. deild menn dømt at tapa dystin móti MB tann 20. august 2011 fyri brúk av ólógligum leikara við málmuninum 0-3 sambært grein § 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

**8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Sambært grein 12, litra f í Agareglugerðini, kann avgerðin kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar aftaná móttøku av úrskurðinum.

**9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn 14. september 2011**

Ingunn Eiriksdóttir, forkvinna

AGANEVNDIN

KÆRA 10/2011

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: Royn kærir ÍF fyri at nýta ólógligan leikara** | |
| Deild: 2 deild menn | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 13.08.2011 | Aganevndin móttikið kæru: 16. september 2011 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: Ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna, Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi og Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna.

## 1. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's

Royn hevur kært ÍF fyri at nýta ólógligan leikara í dysti millum Royn og ÍF tann 13. august 2011 í 2. deild menn.

Í kæruni vísir Royn á, at ÍF nýtti ein leikara, sum ikki er at finna skrásettan hjá FSF og at hesin leikari er Jóhan Sólheim Ellingsgaard.

ÍF er hoyrt í málinum og vísur á, at felagið fleiri ferðir, og seinast í 2006, hevur latið FSF skrivstovuni upplýsingar um leikaran Jóhan Ellingsgaard og tá við røttum føðidegi.

## 2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

## 3. Fakta í málinum

Tann 13. august 2011 varð dystur leiktur millum Royn og ÍF í 2. deild menn. Leikarin Jóhan Ellingsgaard leikti sambært upplýsingum í málinum fyri ÍF.

FSF skrivstovan upplýsir fyri Aganevndini, at leikarin Jóhan Ellingsgaard er skrásettur í leikaraskrá FSFs, men at umsitingarligir feilir eru í skrásetingini. Feilir, sum vegna nýggjar mannagongdir í sambandi við leikaraskráseting sannlíkt ikki kunnu koma fyri nú.

Jóhan H. Ellingsgaard hevur staðið skrásettur í leikaraskráseting FSFs síðan í 1992, tó uttan føðidato, sum ÍF leikari. Hesin flytir seinni til Skála at leika, tó uttan at leikaraloyvið í ÍF verður strikað samsvarandi í leikaraskráseting FSF's. Í 1996 byrjar Jóhan S. Ellingsgaard at leika fyri ÍF og hesin leikari er einnevndur í felagnum sum Jóhan Ellingsgaard. Ábyrgdarhavandi fólk í felagnum ÍF eru eftirfylgjandi av teirri sannføring, at skrásetti leikarin Jóhan H. Ellingsgaard, ÍF í veruleikanum er Jóhan S. Ellingsgaard. ÍF sendir eisini FSF-skrivstovuni rætta føðingardag hjá Jóhan S. Ellingsgaard.

Málið snýr seg í veruleikanum um tveir navnar, báðir við uppruna í ÍF, men við hvør sínum

millumnavnið. Sum felag hevur ÍF verið av teirri fatan, at tað er teirra Jóhan Ellingsgaard, sum hevur verið skrásettur sum ÍF leikari í leikaraskrá FSFs. Hesa misskiljing hevur ÍF hvílt í og hetta sæst m.a. aftur við tað at ÍF fleiri ferðir hevur víst FSF á, at leikarin hevur verið skrásettur uttan føðidato og at ÍF hevur sent FSF umsitingini rætt føðidato, og kortini er leikarin ikki skrásettur við føðidato.

**4. Lógarverkið**

Sambært grein 15, stk. 3 í Kappingarreglum fyri Fótbólt er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's, ella tá loyvisbræv er útskrivað.

**5. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin kann staðfesta, at regluverkið er greitt innan hetta øki. Sambært. grein 15, stk 3 í Kappingarreglum fyri Fótbólt er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's ella tá loyvisbræv er útskrivað.

Aganevndin staðfestir, at leikarin Jóhan Ellingsgaard er skrásettur sum leikari í ÍF. Samstundis staðfestir Aganevndini, at ÍF afturvendandi hevur gjørt FSF umsitingina varuga við, at leikarin Jóhan Ellingsgaard er skrásettur uttan føðidag, og hevur sent FSF umsitingini rættan føðidag hjá Jóhan S. Ellingsgaard.

Aganevndin hevur fingið upplýst frá FSF umsitingini, at orsaka av umsitingarligum umskipanum í mannagongdunum fyri skráseting av leikarum, og vegna dupultskráseting av Jóhan H. Ellingsgaard, kann ÍF av røttum hava hildið, at talan hevur verið um rætta skráseting av leikaranum Jóhan S. Ellingsgaard.

**6. Niðurstøða**

Aganevndin staðfestir, at tað hevur stóran týdning at leikaraskrá FSF's til hvørja tíð er røtt og sonn og at tað eru limafeløgini í FSF, sum hava ábyrgd av at veita rættar og sannar upplýsingar til skránna, meðan FSF-skrivstovan hevur ábyrgd av, at skráin verður umsitin á rættan hátt.

Aganevndin metir, at í hesum ítøkiliga máli er talan um villeiðandi skráseting i leikaraskrá FSFs. Ein villeiðing, sum vegna vantandi skráseting av føðidegi hjá leikara, stendur við í áravís. Aganevndin staðfestir, at ÍF hevur upplýst FSF umsitingini navn og rættan føðidag hjá Jóhan S. Ellingsgaard. At hesar upplýsingar ikki eru vorðnar skrásettar rætt í leikaraskrá FSFs, metir Aganevndin ikki, at ÍF og Jóhan S. Ellingsgaard kunna lastast fyri.

Aganevndin gevur tí ikki Royn viðhald í kæruni.

**7. Úrskurður**

Aganevndin gongur ikki kæruni frá Royn á møti.

**8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Sambært grein 12, í Agareglugerðini, kann avgerðin ikki kærast til Yvirkærunevndina.

**9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

AGANEVNDIN

| |
|---|
| **Tórshavn 20. september 2011**<br><br>____________________<br>Ingunn Eiriksdóttir, forkvinna |

AGANEVNDIN

**KÆRA 11/2011**

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: HB kærir ÍF fyri at nýta ólógligar leikarar** | |
| Deild: Unglingadeildin | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 07.09.2011 | Aganevndin móttikið kæru: 24. september 2011 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna, Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi og Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna.

**1. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's**

HB hevur kært ÍF fyri at nýta ólógligar leikarar í dysti millum HB og ÍF tann 7. september 2011 í unglingadeildini.

Í kæruni vísir HB á, at fleiri av leikarunum hjá ÍF hava leikarloyvi skrásett í Víkingi, og at tveir av leikarunum als ikki eru skrásettir.ÍF er hoyrt í málinum og vísur m.a. á, at Víkingur ikki hevur lið í Unglingadeildini, og at nevndu leikarar tí lógliga kunnu leika við ÍF.

**2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

**3. Fakta í málinum**

Tann 7. september 2011 varð dystur leiktur millum ÍF og HB í Unglingadeildini.

Sambært upplýsingunum í málinum leiktu hesir fýra leikarar fyri ÍF: 7. Andreas Dalbø, 4. Heðin Hansen, 3. Bergur Gregersen og 2. Tróndur á Høvdanum.

FSF skrivstovan upplýsir at allir hesir fýra leikarar hava leikaraloyvið sítt skrásett hjá Víkingi.

**4. Lógarverkið**

Grein 15 í Kappingarreglum fyri Fótbólt ásetur treytir fyri nær ein leikari kann metast sum lógligur leikari og lógliga kann luttaka í lands- og steypakappingini. Sambært grein 15, stk. 3 í Kappingarreglum fyri Fótbólt er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's, ella tá loyvisbræv er útskrivað.

Serskipan er fyri yngri leikarar. Sambært reglum um deilt spæliloyvi hjá yngri leikarum á síðu 132 í Skipan 2010, so skal umbøn um deilt spæliloyvi sendast skrivliga til FSF.
FSF skrivstovan upplýsir fyri Aganevndini at ongin umbøn sæst vera móttikin frá ÍF í hesum sambandi, eins og FSF ikki hevur móttikið nakra fráboðan um felagslið til ÍF og Víking í unglingadeildini 2011.

AGANEVNDIN

**5. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin kann staðfesta, at sambært vanliga mannagongd hjá FSF, so høvdu umrøddu leikarar verið lógligir á unglingaliðnum, um talan antin var um felags lið millum ÍF og Víking í unglingadeildini ella um deilt leikaraloyvi.

Samsvarandi reglunum um **Deilt spæliloyvi hjá yngri leikarum** á síðu 132 í Skipan 2010 so skal umbøn um deilt spæliloyvi sendast skrivliga til FSF. Ongin slík umbøn sæst vera móttikin frá ÍF í hesum sambandi, eins og FSF ikki hevur móttikið nakra fráboðan um felagslið til ÍF og Víking í unglingadeildini 2011.

FSF skrivstovan hevur upplýst fyri Aganevndini, at felagið hvørki hevur fráboðað felags lið ella hevur søkt um deilt leikaraloyvi til nevndu leikarar.

Aganevndin staðfestir, at nevndu leikarar vóru at meta sum ólógligir leikarar hjá ÍF.

**6. Niðurstøða**

Leikarnir 7. Andreas Dalbø, 4. Heðin Hansen, 3. Bergur Gregersen og 2. Tróndur á Høvdanum leiktu ólógliga í dystinum tann 7. september 2011 millum HB og ÍF, sbrt. reglunum um deilt spæliloyvi.

Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's. Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikarum verður sektað við, at felagið verður dømt at tapa dystin.
Aganevndin metir, at síggjast kann ikki burtur frá slíkum fordømum.

**7. Úrskurður**

Grein 8 í Agareglugerð FSF's heimilar Aganevndini at geva feløgum og persónum sekt fyri brot á lógarverk FSF's. Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's og ta skipan, sum er gjørd fyri brúka av spælarum.

Við heimild í grein 8, litra h í Agareglugerðini verður ÍF unglingadeildin dømt at tapa dystin móti HB tann 7. september 2011 fyri brúk av ólógligum leikara við málmuninum 0-3 sambært grein § 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

**8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Sambært grein 12, litra f í Agareglugerðini, kann avgerðin kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar aftaná móttøku av úrskurðinum.

**9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn 4. oktober 2011**

Ingunn Eiriksdóttir, forkvinna

2

AGANEVNDIN

KÆRA 12/2011

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: TB/Royn kærir Skála fyri at nýta ólógligan leikara** | |
| Deild: Smádreingjadeildin | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 27.08.2011 | Aganevndin móttikið kæru: 30. september 2011 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: Ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna, Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi og Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna.

**1. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's**

TB/Royn hevur kært Skála fyri at nýta ólógligan leikara í dysti millum TB/Royn og Skála tann 27. august 2011 í smádreingjadeildini.

Í kæruni vísir TB/Royn á, at Skála nýtti ein leikara (leikari nr. 16), sum er føddur 28.12.1996 og sostatt er ov gamal at leika við smádreingjadeildini.

Skála er hoyrt í málinum men hevur ikki gjørt viðmerkingar til málið.

**2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

**3. Fakta í málinum**

Tann 27. august 2011 varð dystur leiktur millum TB/Royn og Skála í smádreingjadeildini. Leikari nr. 16 leikti sambært upplýsingum í málinum fyri Skála.

FSF skrivstovan upplýsir fyri Aganevndini, at leikari nr. 16 er ov gamal at leika í smádreingjadeildini. FSF umsitingin upplýsir somuleiðis fyri Aganevndini at Skála ikki hevur fingið undantaksloyvi at nýta nevnda leikara í smádreingjadeildini.

**4. Lógarverkið**

Í Kappingarreglur fyri Old boys, Old girls og yngru deildirnar, grein 2, litra d, er ásett: "Fyri at kunna luttaka í smádreingjadeildini skal viðkomandi leikari ikki vera fyltur 14 ár 01. januar í Kappingarárinum".

**5. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin kann staðfesta, at regluverkið er greitt innan hetta øki.

Aganevndin staðfestir, at leikarin nr. 16 er ov gamal at leika í smádreingjadeildini. Aganevndin

AGANEVNDIN

staðfestir somuleiðis, at Skála ikki hevur fingið undantaksloyvi at nýta nevnda leikara í smádreingjadeildini.

**6. Niðurstøða**

Leikari nr. 16 leikti ólógliga í dystinum tann 27. august 2011 millum TB/Royn og Skála, sbrt. grein 2, litra d, í Kappingarreglur fyri Old boys, Old girls og yngru deildirnar.

Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's. Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikarum verður sektað við, at felagið verður dømt at tapa dystin.

Aganevndin metir, at síggjast kann ikki burtur frá slíkum fordømum.

**7. Úrskurður**

Við heimild í grein 8, litra h í Agareglugerðini verður Skála smádreingjadeildin dømt at tapa dystin móti TB/Royn 27. august 2011 fyri brúk av ólógligum leikara við málmuninum 0-3 sambært grein § 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

**8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Sambært grein 12, litra f í Agareglugerðini, kann avgerðin kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar aftaná móttøku av úrskurðinum.

**9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn 4. oktober 2011**

________________________

Ingunn Eiriksdóttir, forkvinna

AGANEVNDIN

KÆRA 13/2011

| FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini: | |
|---|---|
| **Málsheitið: FC Hoyvík kærir 07Vestur fyri at nýta ólógligan leikara** | |
| Deild: 1. deild menn | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 24.09.2011 | Aganevndin móttikið kæru: 2. oktober 2011 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna, Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi og Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna.

**1. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's**

FC Hoyvík hevur kært 07Vestur fyri at nýta ólógligan leikara í dysti millum FC Hoyvík og 07Vestur tann 24. september 2011 í 1. deild menn.

Í kæruni vísir FC Hoyvík á, at 07Vestur nýtti ein leikara, sum er skrásettur hjá SÍ og tí er at meta sum ólógligur leikari fyri 07Vestur. Umrøddi leikarin er David Clarlund Petersen. Í kæruni verður somuleiðis víst til kæru 12/2010 hjá Aganevndini.

07Vestur er hoyrt í málinum og vísir á, at teir hava flutt fleiri leikarar men at hetta eina tíverri lá eftir.

**2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál, sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

**3. Fakta í málinum**

Tann 24. september 2011 varð dystur leiktur millum FC Hoyvík og 07Vestur í 1. deild menn. Leikarin David Clarlund Petersen leikti sambært upplýsingum í málinum fyri 07Vestur.

FSF skrivstovan upplýsir fyri Aganevndini, at nevndi leikari ikki var skrásettur sum lógligur leikari hjá 07Vestur, tá dysturin varð leiktur.

Í telefonviðtalu við aðalskrivaran í FSF hevur samskiparin hjá 07Vestur viðgingið, at teir høvdu fingið upplýst frá FSF, at í ár skuldu øll loyvini flytast til samanlagda felagið, og høvdu teir flutt "fleiri 100", men hetta eina lá tíverri eftir.

**4. Lógarverkið**

Grein 15 í Kappingarreglum fyri Fótbólt ásetur treytir fyri nær ein leikari kann metast sum lógligur leikari og lógliga kann luttaka í lands- og steypakappingini.

**5. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin kann staðfesta, at regluverkið er greitt innan hetta øki. Sambært. grein 15, stk. 3 í Kappingarreglum fyri Fótbólt er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's ella tá loyvisbræv er útskrivað.

Aganevndin staðfesti í kærumáli 12/2010 at í kappingarárinum 2011 verða ongir linnar givnir frá kravinum í grein 15 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt fyri vantandi rætta skráseting av leikarum hjá samanløgdum feløgum.

Aganevndin staðfestir, at leikarin David Clarlund Petersen leikti sambært upplýsingum í málinum fyri 07Vestur í dystinum tann 24. august 2011 og at nevndi leikari ikki var skrásettur sum lógligur leikari hjá 07Vestur, tá dysturin varð leiktur.

**6. Niðurstøða**

Leikarin David Clarlund Petersen leikti ólógliga í dystinum tann 24. september 2011 millum FC Hoyvík og 07Vestur, sbrt. grein 15, stk. 3 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt.

Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's. Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikarum verður sektað við, at felagið verður dømt at tapa dystin.
Aganevndin metir, at síggjast kann ikki burtur frá slíkum fordømum.

**7. Úrskurður**

Við heimild í grein 8, litra h í Agareglugerðini verður 07Vestur 1. deild menn dømt at tapa dystin móti FC Hoyvík 24. august 2011 fyri brúk av ólógligum leikara við málmuninum 0-3 sambært grein § 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

**8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Sambært grein 12, litra f í Agareglugerðini, kann avgerðin kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar aftaná móttøku av úrskurðinum.

**9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn 4. oktober 2011**

Ingunn Eiriksdóttir, forkvinna

AGANEVNDIN

**KÆRA 14/2011**

| ***FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:*** | |
|---|---|
| **Málsheitið: Giza kærir Víking fyri at nýta ólógligar leikarar** | |
| Deild: 3. deild menn | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 24.09.2011 | Aganevndin móttikið kæru: 2. oktober 2011 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna, Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi og Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna.

**1. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's**

Giza hevur kært Víking fyri at nýta ólógligar leikarar í dysti millum Víking b og Giza a tann 24. september 2011 í 3. deild menn.

Í kæruni vísir Giza á, at leikarar nr. 15: Rúni Jacobsen og nr. 13: Andras Mikkelsen vóru ólógligir leikarar í omanfyri nevnda dysti vísandi til grein 9, pkt. 1 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt.

Víkingur er hoyrt í málinum, men hevur ongar viðmerkingar til málið.

**2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál, sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

**3. Fakta í málinum**

Tann 24. september 2011 varð dystur leiktur millum Víking b og Giza a í 3. deild menn. FSF skrivstovan upplýsir fyri Aganevndini at hesin dystur varð leiktur aftaná at 4. seinasta umfar varð spælt í 3. deild menn.

Leikararnir nr. 15: Rúni Jacobsen og nr. 13: Andras Mikkelsen leiktu sambært upplýsingum í málinum fyri Víking b.

FSF skrivstovan upplýsir fyri Aganevndini, at nevndu leikarar hava leikt fleiri enn 3 dystir í hægri deild.

**4. Lógarverkið**

Grein 9 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt ásetur treytir fyri nær leikari lógliga kann flyta frá hægri til lægri deild. Í grein 9 er ásett: "Leikari kann ikki flyta frá hægri til lægri deild, eftir at fjórðseinasti dystur er leiktur í lægi deildini. Hetta umfatar eisini leikarar, sum koma undir grein 8, stk. 2. Tó er loyvt leikara, sum í kappingarárinum hevur leikt í mesta lagi 3 dystir í hægru deildini, at flyta niður í lægri deildina í hesum dystum samsvarandi ásetingunum í grein 8."

AGANEVNDIN

**5. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin kann staðfesta, at regluverkið er greitt innan hetta øki og at grein 9 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt ásetur treytir fyri nær leikari lógliga kann flyta frá hægri til lægri deild.

Aganevndin staðfestir, at umrøddi dystur er leiktur eftir at 4. seinasta umfar varð spælt í 3. deild menn. Aganevndin staðfestir somuleiðis, at nevndu leikarar hava leikt fleiri enn 3 dystir í hægri deild.

Aganevndin staðfestir sostatt, at leikararnir nr. 15: Rúni Jacobsen og nr. 13: Andras Mikkelsen hjá Víkingi b vóru ólógligir leikarar í omanfyri nevnda dysti vísandi til grein 9, pkt. 1 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt.

**6. Niðurstøða**

Leikararnir nr. 15: Rúni Jacobsen og nr. 13: Andras Mikkelsen hjá Víkingi b leiktus ólógliga í dystinum tann 24. september 2011 millum Víking b og Giza a, sbrt. grein 9 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt.

Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's. Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikarum verður sektað við, at felagið verður dømt at tapa dystin.
Aganevndin metir, at síggjast kann ikki burtur frá slíkum fordømum.

**7. Úrskurður**

Við heimild í grein 8, litra h í Agareglugerðini verður Víkingur b 3. deild menn dømt at tapa dystin móti Giza a tann 24. august 2011 fyri brúk av ólógligum leikara við málmuninum 0-3 sambært grein § 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

**8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Sambært grein 12, litra f í Agareglugerðini, kann avgerðin kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar aftaná móttøku av úrskurðinum.

**9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn 5. oktober 2011**

Ingunn Eiriksdóttir, forkvinna

AGANEVNDIN

**KÆRA 15/2011**

| | |
|---|---|
| ***FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:*** | |
| **Málsheitið: HB kærir EB/ST fyri at nýta ólógligan leikara** | |
| Deild: 1 deild menn | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 05.10.2011 | Aganevndin móttikið kæru: 16. oktober 2011 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna, Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi og Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna.

**1. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's**

HB hevur kært EB/ST fyri at nýta ólógligan leikara í dysti millum EB/ST og HB tann 5. oktober 2011 í 1. deild menn.

Í kæruni vísir HB á, at EB/ST nýtti leikaran Árna G. Olsen, sum sbrt. skásetingini hjá FSF stendur at vera skrásettur sum leikari hjá Skála.

EB/ST er hoyrt í málinum og vísur á, at "Árni G. Olsen skifti í mars frá EB/Streymi til Skála, men eftir at hann ongan dyst hevði spælt við teimum ynskti hann at skifta aftur til EB/Streym seint í mai mánað í ár. 27. mai sendir EB/Streymur mail við pdf-fili við avriti av skjali til leysgeving av loyvisbrævi upp á Árna, har felagið biður Skála flyta EB/ST leikaraloyvið aftur.

Sama kvøld (27. mai) sendir Skála EB/ST mail aftur, har teir siga seg hava tekniskar trupulleikar, so teir fáa ikki nakað inn í eina pdf, men vóna, at FSF kann brúka mailin til endamálið. Teir leysgeva í mailinum Árna G. Olsen til EB/Streym.".

EB/Streymur víðarisendir so hendan meylin til FSF tann 28. mai, men hoyrir ikki nakað aftur frá FSF.

Eftirfylgjandi er EB/ST vorið varugt við at pdf-filurin ikki var við í meylinum til FSF, men hinvegin sigur EB/ST seg hava handlað í góðari trúgv, og at FSF átti at havt reagerað uppá vantandi upplýsingarnar í meylinum.

**2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

**3. Fakta í málinum**

Tann 5. oktober 2011 varð dystur leiktur millum EB/ST og HB í 1. deild menn. Leikarin Árni G. Olsen leikti sambært upplýsingum í málinum fyri EB/ST.

AGANEVNDIN

FSF skrivstovan upplýsir fyri Aganevndini, at leikarin Árni G. Olsen er skrásettur í leikaraskrá FSF's sum leikari hjá Skála.

FSF skrivstovan upplýsir somuleiðis fyri Aganevndini, at FSF umsitingin tann 28. mai 2011 kl. 11.14 móttók eina umbøn um flyting av leikara loyvinum hjá Árna G. Olsen frá Skála til EB/ST, men at hendan flyting er dottin niðurímillum hjá FSF umsitingini og sostatt ongantíð avgreidd.

**4. Lógarverkið**

Sambært grein 15, stk. 3 í Kappingarreglum fyri Fótbólt er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's, ella tá loyvisbræv er útskrivað.

**5. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin kann staðfesta, at regluverkið er greitt innan hetta øki. Sambært. grein 15, stk 3 í Kappingarreglum fyri Fótbólt er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's ella tá loyvisbræv er útskrivað.

Aganevndin staðfestir, at leikarin Árni G. Olsen er skrásettur sum leikari í Skála.

Samstundis staðfestir Aganevndin, at EB/ST tann 28. mai 2011 sendir eina flyting/leysgeving av nevnda leikara frá Skála til EB/ST. Orsakað av mistøkum hjá FSF umsitingini, verður henda flyting ikki avgreidd. Aganevndin metir, at hetta kann ikki lastast EB/ST.

EB/ST hevur sent flytiumbøn til FSF skrivstovuna, og hóast at upplýsingar vantaðu í umbønini, so átti FSF skrivstovan at sett seg í samband við EB/ST fyri at biðja um fleiri upplýsingar. Av tí at hetta ikki er gjørt hevur EB/ST verið í góðari trúgv um at viðurskiftini ísbv. flyting av nevnda leikaraloyvi vóru í lagið.

Fordømi er at finna í líknandi máli hjá Aganevndini um, at umsitingarlig mistøk ikki skulu lastast feløgum og leikarum, sum hava hildið seg til vanligar mannagongdir, sí kærumál 10/2011.

**6. Niðurstøða**

Aganevndin staðfestir, at tað hevur stóran týdning at leikaraskrá FSF's til hvørja tíð er røtt og sonn og at tað eru limafeløgini í FSF, sum hava ábyrgd av at veita rættar og sannar upplýsingar til skránna, meðan FSF-skrivstovan hevur ábyrgd av, at skráin verður umsitin á rættan hátt.

Aganevndin metir, at í hesum ítøkiliga máli er talan um umsitingarlig mistøk hjá FSF umsitingini, sum hava verið atvoldin til vantandi skráseting av leikaranum Árna G. Olsen, og at hetta ikki kann lastast EB/ST.

Aganevndin gevur tí ikki HB viðhald í kæruni.

**7. Úrskurður**

Aganevndin gongur ikki kæruni frá HB á møti.

**8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

AGANEVNDIN

| |
|---|
| Sambært grein 12, í Agareglugerðini, kann avgerðin ikki kærast til Yvirkærunevndina. |
| **9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**<br><br>**Tórshavn 17. oktober 2011**<br><br>Ingunn Eiriksdóttir, forkvinna |

AGANEVNDIN

KÆRA 16/2011

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: TB kærir HB fyri at nýta ólógligar leikarar** | |
| Deild: 1. deild menn | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 09.10.2011 | Aganevndin móttikið kæru: 16. oktober 2011 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna, Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi og Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna.

**1. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's**

TB hevur kært HB fyri at nýta ólógligar leikarar í dysti millum HB og TB tann 9. oktober 2011 í 1. deild menn.

Í kæruni vísir TB á, at leikararnir Kristin R. Mouritsen, Jógvan Rói Davidsen og Pál Mohr Joensen hjá HB leiktu ólógliga í dystinum, vísandi til grein 9 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt.

TB vísir somuleiðis til frágreiðing á heimasíðu FSF's til Kappingarreglur, har stendur: "*Ein leikari, sum hevur leikt við hægru deildini í einum dysti, sum liggur nakrar dystir áðrenn 3. seinasta dystinum, men sum ikki hevur leikt við hægru deildini í 4. seinasta dysti, kann sostatt ikki flyta niður í 3. seinasta dysti, hetta sjálvt um hann á henda hátt kann sigast at hava sitið fleiri dystir yvir.*" TB metir, at reglan forðar fyri øllum niðurflytingum eftir 4. seinasta umfar.

TB leggur í síni prógvførslu dentin á orðini: "*Leikari sum hevur leikt við hægru deildini í 4. seinasta dysti*" og ger galdandi at "*Hevur leikari leikt við hægri deildini í fjórseinasta umfari, hevur hann ikki loyvi til at flyta niður í lægri deild.*"

TB vísir somuleiðis á, at í Vodafonedystinum millum HB og 07 Vestur tann 2. oktober leiktu nevndu leikarar við, og hetta var 4. seinasta umfar í hægru deildini.

HB er hoyrt í málinum, og hevur hesar viðmerkingar til málið:
"Sum TB rætt vísir á, so spældi HB 1. deild fjórðseinasta dyst mikudagin 05/10/11, og henda dagin vóru Pál M. Joensen, Kristin Mouritsen og Jógvan R. Davidsen við á liðnum, og tí kunnu hesir leikarar, vísandi til grein 9, spæla aftur við 1. deild móti TB tann 09/10/11."

HB vísir aftur pástandinum hjá TB um, at HB hevur tambað reglurnar. HB vísir á, at dysturin millum EB/ST og HB skuldi leikast 28. september, men bleiv av Kappingarnevndini fluttur fyrst til 29. september og síðani til 5. oktober. Orsøkin var, at ein útsettur dystur í Vodafonedeildini millum EB/ST og ÍF skuldi leikast 28. september, og vegna vánalig ljósviðurskifti bleiv hesin dysturin útsettur til 29. september. HB ger vart við, at HB ikki hevur havt nakað við flytingina av dystinum at gera.

HB ger at enda galdandi, at "talan ikki er um fjórðseinasta umfar, sum TB vísir á, men umfjórðseinasta dyst í lægri deild og at Vodafonedysturin millum HB og 07 Vestur tann 2. oktober,

liggur 3 dagar innan fjórðseinasta dyst hjá HB í 1. deild, ið varð leiktur 5. oktober.

**2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál, sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

**3. Fakta í málinum**

Tann 9. oktober 2011 varð dystur leiktur millum HB og TB í 1. deild menn. Sambært upplýsingunum í málinum leiktu leikararnir Kristin R. Mouritsen, Jógvan Rói Davidsen og Pál Mohr Joensen fyri HB í hesum dysti.

Aganevndin staðfestir, at avgerandi er, nær ein dystur í roynd og veru verður leiktur og ikki nær hann sambært kappingarskipanini upprunaliga er ásettur at verða leiktur, tá Kappingarnevndin hevur framt broytingar í kappingarskipanini.

Leggjast má tískil til grund, at 4. seinasti dystur í 1. deild hjá HB varð leiktur 5. oktober 2011. Dysturin millum HB og TB, sum varð leiktur tann 9. oktober var sostatt 3. seinasti dystur í 1. deild hjá HB.

Sambært upplýsingum frá FSF umsitingini eru Kristin R. Mouritsen, Jógvan Rói Davidsen og Pál Mohr Joensen U21 leikarar, og leika bæði við Vodafonedeildini og 1.deild hjá HB og hava leikt soleiðis:
5.okt. 2011 EB/ST-HB (1.deild) – 4. seinasti dystur í 1.deild hjá HB
9.okt. 2011 HB-TB (1.deild) – 3. seinasti dystur í 1.deild hjá HB

**4. Lógarverkið**

Grein 9 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt ásetur treytir fyri nær leikari lógliga kann flyta frá hægri til lægri deild.

Í grein 9, stk. 1 er ásett: "Leikari kann ikki flyta frá hægri til lægri deild, eftir at fjórðseinasti dystur er leiktur í lægri deildini. Hetta umfatar eisini leikarar, sum koma undir grein 8, stk. 2. Tó er loyvt leikara, sum í kappingarárinum hevur leikt í mesta lagi 3 dystir í hægru deildini, at flyta niður í lægri deildina í hesum dystum samsvarandi ásetingunum í grein 8."

**5. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin kann staðfesta, at regluverkið er greitt innan hetta øki og at grein 9 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt ásetur treytir fyri nær leikari lógliga kann flyta frá hægri til lægri deild.

Aganevndin staðfestir somuleiðis, at tað er tað til eina og hvørja tíð galdandi regluverk, sum regulerar viðurskiftini í føroyskum fótbólti. Aganevndin hevur áður víst á, at lógarverkið, sum er samtykt á Aðalfundi FSF, til hvørja tíð kemur fram um generellar vegleiðingar á heimasíðuni, herundir eisini gamlar vegleiðingar.

**AGANEVNDIN**

Aganevndin metir tað vera óheppið at vegleiðingar, sum ikki eru dagførdar sambært broytta regluverkinum, liggja á heimasíðuni. Regluverkið hjá FSF er hægst í stigvísu regluskipanini og skúgvar tí til viks fyrisitingarligar vegleiðingar, sum eru í andsøgn við regluverkið.

Aganevndin staðfestir sostatt, at nevndu leikarar vóru at meta sum lógligir leikarar í omanfyri nevnda dysti vísandi til grein 9, pkt. 1 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt.

Aganevndin staðfestir, at nevndu leikarar leiktu við 1.deild hjá HB, tá liðið leikti fjórðseinasta dyst mikudagin 05.10.11, og eru sostatt fluttir niður áðrenn triðseinasta dyst.

Aganevndin vil vísa á, at tað sum er avgerandi, í samband við §9, ***er, nær 4. seinasti dystur í lægri deildini verður leiktur***.

**6. Niðurstøða**

Aganevndin staðfestir sostatt, at nevndu leikarar vóru at meta sum lógligir leikarar í omanfyri nevnda dysti vísandi til grein 9, pkt. 1 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt.

Aganevndin staðfestir, at nevndu leikarar leiktu við 1.deild hjá HB, tá liðið leikti fjórðseinasta dyst mikudagin 05.10.11, og eru sostatt fluttir niður áðrenn triðseinasta dyst.

Aganevndin gevur tí ikki TB viðhald í kæruni.

**7. Úrskurður**

Aganevndin gongur ikki kæruni frá TB á møti.

**8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Sambært grein 12 í Agareglugerðini kann avgerðin ikki kærast til Yvirkærunevndina

**9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn 17. oktober 2011**

Ingunn Eiriksdóttir, forkvinna

3

AGANEVNDIN

**KÆRA 17/2011**

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: Kappingarnevndin leggur mál fyri Aganevndina um ólógligar leikarar í dysti millum B36 og AB** | |
| Deild: 1. deild kvinnur | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 8. oktober 2011 | Aganevndin móttikið kæru: 3. november 2011 |
| Kærugjald goldið: | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna, Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi og Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna.

## 1. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's

Kappingarnevndin hevur sjálv tikið málið upp og lagt tað fyri Aganevndina. Málið snýr seg um ólógligar leikarar í dysti í 1. deild hjá kvinnum millum B36 og AB, tann 8. oktober 2011.

Kappingarnevndin hevur hesa frágreiðing um málið:

"Í sambandi við dyst 08. oktobur 2011, millum B36 og AB í 1. deild kvinnum, hevur Kappingarnevndin fingið fráboðan um, at B36 hevur nýtt tveir leikbannaðar leikarar og at AB hevur nýtt ein leikara uttan leikaraloyvi.

Umsitingin hevur staðfest, at leikararnir Rakul M. Johannesen og Maria S. Mikkelsen hjá B36, høvdu fingið sítt triðja gula kort í dysti tann 02. oktobur, og at leikararnir tískil vóru leikbannaðir í dysti tann 08. oktobur 2011. Umsitingin hevur eisini staðfest, at leikarin Olga Kristina Hansen hjá AB, ikki hevur leikaraloyvi hjá AB, og tískil ikki er lógligur leikari nevnda dyst.

Tann 11. oktobur 2011 var hoyringsskriv sent B36 og AB við svarfreist til 14.10.2011, B36 hevur svara 11. oktobur 2011 og AB tann 12. oktobur 2011. Bæði liðini siga í hoyringssvari, at avtalað varð gjørd millum feløgini um at nýta leikarar, sum vóru ólógligir leikarar orsakað av vantandi leikaraloyvi og leikbanni. Hetta var gjørt av ymsum orsøkum og mett varð, at hetta hevði ikki so stóran týdning, tí kappingin var longu avgjørd og hetta var seinasti dystur í árinum.

Tann 24.oktobur 2011 var málið fyri á fundi í Kappingarnevndini, og tók Kappingarnevndina avgerð um, at lata málið til Aganevndina til avgerðar.

Tískil var nýtt hoyringsskriv sent til B36 og AB um málið tann 26. oktobur 2011, har feløgini eisini vóru kunnaði um, at málið fór at verða latið Aganevndini.

Frá AB hava vit fingið upplýst, at tey ikki hava aðra frágreiðing enn hana, sum var send FSF tann 12. oktobur 2011, meðan FSF hevur móttikið eina útgreinaða frágreiðing frá B36 tann 26. oktobur 2011."

Kappingarnevndin biður Aganevndin taka støðu til um ongin vinnari skal vera av dystinum, tí bæði feløgini hava nýtt ólógligar leikarar og annars at taka støðu til, um feløgini kunnu verða revsað við

sekt og átalu fyri at hava nýtt ólógligar leikarar.

**2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál, sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

**3. Fakta í málinum**

Tann 8. oktober 2011 varð dystur leiktur millum B36 og AB í 1. deild kvinnur.

Leikararnir Rakul M. Johannesen og Maria S. Mikkelsen leiktu sambært upplýsingum í málinum fyri B36. Somuleiðis er upplýst, at leikarin Olga Kristina Hansen leikti fyri AB í omanfyri nevnda dysti.

FSF umsitingin hevur upplýst fyri Aganevndini, at bæði Rakul M. Johannesen og Maria S. Mikkelsen høvdu fingið sítt triðja gula kort í dysti tann 2. oktober 2011, og hesir leikarir vóru sostatt leikbannaðir í dystinum tann 8. oktober 2011.

FSF umsitingin hevur somuleiðis upplýst fyri Aganevndini, at Olga Kristina Hansen ikki hevði leikaraloyvi hjá AB, og sostatt var at meta sum ólógligur leikari í nevnda dysti.

Harumframt er tað staðfest, at feløgini og liðini bæði undan dystinum avtalaðu at gera brúk av ólógligu leikarunum. Við øðrum orðum, so gjørdu feløgini og liðini bæði avtalu um at seta til viks lógarverk FSF's og spæla dystin við ólógligum leikarum.

**4. Lógarverkið**

Grein 15 í Kappingarreglum fyri Fótbólt ásetur treytir fyri nær ein leikari kann metast sum lógligur leikari og lógliga kann luttaka í lands- og steypakappingini.

Grein 37, stk. 2 í Kappingarreglunum fyri fótbólt er ásett, at tá leikari hevur fingið 3 gul kort, fær hann 1 dag leikbann.

**5. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin kann staðfesta, at regluverkið er greitt innan hetta øki. Sambært grein 15, stk. 3 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt, sum eisini er galdandi fyri landskappingina í bestu kvinnudeildini, er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's ella tá loyvisbræv er útskrivað. Í grein 37, stk. 2 í Kappingarreglunum fyri fótbólt er ásett, at tá leikari hevur fingið 3 gul kort, fær hann 1 dag leikbann.

Aganevndin staðfestir, at leikararnir Rakul M. Johannesen, Maria S. Mikkelsen og Olga Kristina Hansen leiktu í dystinum tann 8. oktober 2011 hóast allir tríggir leikarir vóru at meta sum ólógligir leikarir í nevnda dysti orsakað av ávikavíst vantandi leikaraloyvi og leikbanni.

Aganevndin staðfestir, at avtalað spæl ímillum feløg og lið er álvarsligt brot á regluverk FSF's, Laws of the Game og aðalreglur um Fair Play. At slíkt brot verður framt í bestu kvinnudeildini í føroyskum fótbólti kann ikki fara afturvið borðinum órevsað. Aganevndin metir, at avtalur um

AGANEVNDIN

brúk av ólógligum leikarum til dyst, óansæð um tað kanska er trupult hjá øðrum ella báðum liðum at manna lið til ásetta dystin, skrikkir grundarlagið undan skipanini og regluverki FSF's, sum ásetur strangar reglur um brúk av leikarum. Aganevndin hevur í hesum ítøkiliga máli viðgjørt spurningin um hóskandi revsing fyri lógarbrotið og metir, at bæði liðini og bæði feløgini skulu hava somu revsing.

**6. Niðurstøða**

Leikararnir Rakul M. Johannesen, Maria S. Mikkelsen og Olga Kristina Hansen leiktu ólógliga í dystinum tann 8. oktober 2011 millum B36 og AB, sbrt. grein 15, stk. 3 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt.

Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's. Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikarum verður sektað við, at felagið verður dømt at tapa dystin 0-3. Aganevndin metir, at siggjast kann ikki burtur frá slíkum fordømum.

At lið og feløg gera ólógligar avtalur fyri at umganga lógarverk FSF's, Laws of the Game og reglur um Fair Play er sera álvarsamt lógarbrot.

**7. Úrskurður**

Við heimild í grein 8, litra h í Agareglugerðini verða bæði liðini dømd at tapa dystin fyri brúk av ólógligum leikarum við málmuninum 0-3 sambært grein § 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

Við heimild í grein 8, litra c í Agareglugerðini verður hvørt liðið sektað við kr. 5.000,- fyri avtalað spæl, sum skúgvar til víks regluverk FSF's, Laws of the Game og andan um Fair Play.

**8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Sambært grein 12, litra f í Agareglugerðini, kann avgerðin kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar aftaná móttøku av úrskurðinum.

**9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn 8. desember 2011**

Ingunn Eiriksdóttir, forkvinna

# Yvirkærunevndin 2011

**Avgerð 1/2011 frá Yvirkærunevndini**

**Hjá**

**Fótbóltsambandi Føroya.**

**Viðvíkjandi kæru frá Loyvisnevndini, um úrskurð hjá Aganevndini, dagfest 12. Juli 2011.**

Yvirkærunevndin hevur móttikið mál til viðgerðar, har ið Loyvisnevndin ikki er samd við Aganevndini í avgerð hennara, um m.a. málsræði og málsøki hjá Loyvisnevndini.

Loyvisnevndin afturvísir eisini, at nevndin ikki hevur umsitið sitt økið á fullgóðan hátt.

**Formellar reglur.**

Yvirkærunevndin hevur viðgjørt kæruna hjá Loyvisnevndini við heimild í § 11, stk. 4 í agareglugerðini, har tað framgongur, at Yvirkærunevndin tekur avgerðir í kærumálum viðvíkjandi avgerðum hjá Aganevndini, ið ikki eru endaligar.

Eisini verður víst til § 13, stk. 2, har tað er ásett, at kærurætt hava feløg og einstaklingar, sum verða beinleiðis raktir av eini avgerð og onnur, sum hava ein serstakan og konkretan rættarligan áhuga í málinum.

**Fakta í málinum.**

Aganevndin hevur í avgerð síni funnist at leiklutinum hjá Loyvisnevndini og er m.a. komið til ta niðurstøðu, at Loyvisnevndin ikki hevur framt nøktandi eftirlit. Loyvisnevndin hevur í kæru síni til Yvirkærunevndina afturvíst tí harting, sum Aganevndin hevur av Loyvisnevndini í úrskurðinum mótvegis EB/Streymi.

Aganevndin og Loyvisnevndin hava grundleggjandi ymiska fatan av, hvat málsræði og málsøki er hjá ávikavist Aganevnd og Loyvisnevnd. Eisini hava Aganevndin og Loyvisnevndin ymiska fatan av vegleiðingarskrivi frá UEFA, Clarification Memo No. 3, har ið víst verður á, at talan er um tvær sjálvstøðugar eindir við hvør sínum málsræði og við hvør sínari kæruskipan.

1

**Partshoyring.**

**Kæra av Aganevndaravgerð, dagfest 12. juli 2011 (j.nr. 6/2011)**

Loyvisnevndin loyvir sær formelt at kæra hesa avgerðina hjá Aganevndini til Yvirkærunevndina.

Kært verður við heimild í § 13 í Agareglugerðini, ið m.a. ásetur, at kærurætturin tilkemur teimum, sum beinleiðis verða rakt av eini avgerð og/ella sum hava ein serstakan og konkretan rættarligan áhuga í málinum.

Loyvisnevndin hevur ein serstakan og ein konkretan rættarligan áhuga í málinum, og harvið er Loyvisnevndin at meta sum partur í málinum.

Loyvisnevndin, ið eisini verður beinleiðis umrødd í avgerðini hjá Aganevndini, lýkur sostatt fyritreytirnar fyri at kæra avgerðina hjá Aganevndini.

Málskrav

Avgerðin hjá Aganevndini verður kærd við kravi um, at avgerðin verður víst aftur til nýggja viðgerð í Aganevndini og at tað verður álagt Aganevndini í avgerð síni ikki at leggja seg út í viðurskifti, ið viðvíkja málsøkjum, ið eru løgd til Loyvisnevndina.

Loyvisnevndin krevur við øðrum orðum, at Aganevndin tekur málið uppaftur til viðgerðar og kemur við einari nýggjari avgerð, har Aganevndin ikki ger seg inn á málsræði hjá Loyvisnevndini.

Málsgrundir

Sum Aganevndin eisini vísir á í avgerð síni undir heitinum "Bygnaðurin í FSF," so er talan um tvær sjálvstøðugar eindir við hvør sínum málsræði og við hvør sínari kæruskipan. Tað framgongur eisini av Clarification Memo no. 3 frá UEFA.

Tá tað snýr seg um loyvisskipanina, er FSF eisini undirlagt einari altjóða góðskuskipan, ið verður kallað SGS. SGS-skipanin skal tryggja, at FSF heldur seg til tær mannagongdir, sum settar eru av UEFA í sambandi við UEFA loyvisskipanina.

Seinastu 7 árini hevur útlendskur grannskoðari frá SGS verið á grannskoðan hjá Loyvissumsitingini á hvørjum ári.

Grannskoðanin frá SGS hevur ongantíð havt nakrar stórvegis atfinningar til loyvisskipanina í Føroyum. Tað merkir, at loyvisskipanin í Føroyum verður umsitin á ein fullgóðan hátt og í tí liggur eisini, at loyvisumsitingin er við til at tryggja, at tað er grundarlag fyri áliti á, at viðurskifitini innan føroyskan fótbólt eru í lagi og undir einari framhaldandi menning.

Harumframt tryggjar SGS-skipanin og grannskoðanin av umsitingini í Føroyum, at Loyvisskipanin áhaldandi og støðugt leggur seg eftir og er við til at hækka góðskukrøvini, tá tað snýr seg um føroyskan fótbólt.

Loyvisumsitingin hjá FSF og Loyvisnevndin taka sær sostatt av loyvisskipanini undir áhaldandi eftirliti frá UEFA. Loyvisnevndin gevur árliga luttøkuloyvi til feløgini. Avgerð hjá Loyvisenevndini kann kærast til yvirskipaðan kærumyndugleika, sum tekur sær av kærumálum um loyvisspurningar.

Endmálið við Aganevndini er í høvuðsheitum at taka sær av disiplinærspurningum innan føroyskan fótbólt við kærurætti til ein yvirskipaðan kærumyndugleika.

Tað framgongur m.a. av § 2 í Agareglugerðini, at reglugerðin er galdandi fyri mál um brot á loyvisgóðkenningina. Í loyvishandbókini er ásett, at fyri brot á loyvisgongdina (t.d. innlating av falsaðum skjølum, brot á tíðarfreistir, etc.) skal loyvisumsøkjarin vísast til disciplinernevndina í samsvar við disciplinerlógirnar. Loyvisnevndin hevur ta fatan, at orsøkin til hesa áseting er, at nøkur av viðurskiftunum í loyvisgongdini kunnu hava ávirkan á fórbóltskappingina/fótbóltsspælið og harvið verða ein disciplinerspurningur, sum Aganevndin tekur sær av, og kann sekta feløg og persónar sambært § 8 fyri brot á reglurnar.

Loyvisnevndin og Aganevndin hava sostatt hvør sítt málsøki og hvør sítt málsræði, ið ikki er samanfallandi. Aganevndin skal halda seg til sítt málsøki og viðgera spurningar og kærur eftir teimum reglum, ið Aganevndin virkar undir.

Aganevndin hevur ikki heimild til at fara inn á øki ella viðgera spurningar, ið hoyra undir Loyvisnevndina. Hesum tekur Loyvisnevndin – undir eftirliti av UEFA - sær av.

Hóast hesi greiðu mørk, so hevur Aganevndin í avgerð síni mett tað vera serstakliga undrunarvert, at eingin í Loyvisumsitingini hevur varnast, at eitt fótbóltsfelag kann taka ímóti og brúka so nógvan pening.

Um inntøkurnar hjá EB/Streym í tíðarskeiðinum 2008-2010 kann viðmerkjast, at Loyvisskipanin fær hesi árini roknskapir frá felagnum, sum eru grannskoðaðir av skrásettum grannskoðara eftir galdandi ásetingum.

Hesir roknskapir eru uttan fyrivarni, og geva ikki loyvisumsitingini ella Loyvisnevnd høvi ella orsøk til at kanna viðurskiftini nærri.

Loyvisumsitingin og Loyvisnevndin kunnu als ikki taka undir við Aganevndini í, at tað er nakað serstakliga undrunarvert í, at eitt fótbóltsfelag kann taka ímóti og brúka nógvan pening, tá tað fyriliggur ein grannskoðaður roknskapur, ið verður váttaður at geva eina rættvísa mynd av inntøkum felagsins.

Aganevndin setir eisini spurnartekin við, um Loyvisnevndin hevur røkt sínar skyldur til fulnar. Eisini staðfestir Aganevndin, at Loyvisumsitingin hvørki hevur brúkt sínar heimildir ella útint sínar skyldur á nøktandi hátt.

Ítøkiliga metir Aganevndin í tí sambandi, at loyvisumsitingin ikki hevur brúkt sínar heimildir ella hevur útint sínar skyldir sambært kapitul 4 í Loyvishondbókini, tá tað kemur til skerpa fíggjarligt eftirlit (m.a. spot-check) grundað á negativa eginogn í 2007.

Loyvisnevndin kann í tí sambandi viðmerkja, at hendan staðfestingin er grundað á skeivt grundarlag, tí í 2008 var Loyvishondbók 2,0 í gildi, og har stendur onki um hetta skerpaða fíggjarliga eftirlitið, sum stendur í kapitul 4 í Loyvishondbók 2,1.

Aganevndin tykist ikki at verða vitandi um, at tað er Loyvisbók 2,0, ið varð galdandi í sambandi við hetta mál. Avgerðin og staðfestingarnar hjá Aganevndini eru grundaðar á Loyvisbók 2,1, ið júst er komin í gildi.

Við grundarlag í Loyvisbók 2,0, sum var galdandi, hevði loyvisumsiting FSF's ikki tá rætt til at gera eitt tílíkt skerpað eftirlit, sum Aganevndin eftirlýsir, fyrrenn Loyvishondbók 2,1 kom í gildi í 2011.

Loyvisumsitingin hevur í sambandi við eftirlitið í 2008 av røttum brúkt reglurnar um brot á indikator (negativan eginpening), har tað varð kravt ein nýggj og meira víðfevnandi fíggjarætlan umframt ein hálvársroknskap.

EB/Streymur hevur hetta tíðarskeiðið eisini fingið boð frá Loyvisumsitingini, at felagið skuldi prógva mótvegis Loyvisumsitingini, at felagið megnaði at venda negativu gongdini, og at felagið skuldi megna at hava framhaldandi rakstur restina av kappingarárinum.

Hendan mannagongd er í samsvar við Loyvishondbók 2,0, og avleiðingin varð eisini, at EB/Streymur vendur gongdini og hevur positivan eginpening árið eftir, og fellur sostatt uttanfyri omanfyri nevndu ískoytiskrøv í 2009. Endamálið við eftirlitinum, sum m.a. er at tryggja, at felagið ikki fer av knóranum í kappingarárinum, varð tá rokkið.

Loyvisumsiting og Loyvisnevnd høvdu ikki heimild til at krevja annað ella seta strangari krøv í hesum tíðarskeiðinum. Heimildargrundarlagið varð í Loyvishondbók 2,0 og ikki Loyvishondbók 2,1, sum Aganevndin eftir øllum at døma hevur nýtt í sinum niðurstøðum viðvíkjandi loyvisumsitingini.

Við Loyvishondbók 2,1 sum er komin í gildi í 2011, hevur loyvisumsitingin fingið rætt til at brúka reglurnar um skerpað eftirlit og spot check sambært kap. 4 í Loyvishondbók 2,1. Men tað varð ikki heimild fyri hesum í tíðarskeiðnum sum málið snýr seg um.

Loyvisnevndin hevur víst á, at tað er ikki farið nakað skeivt ella ivasamt fram í sambandi við hetta mál, tá tað snýr seg um loyvisviðurskifti.

Og tað er Loyvisnevndin og ikki Aganevndin, ið er myndugleikin, ið tekur støðu til loyvisviðurskifti.

Møgulig ivamál um loyvisumsiting verða viðgjørd av avvarandi kærumyndugleika, sum er omanfyri Loyvisnevndina, og annars undir eftirliti av UEFA. Slíkir spurningar hoyra als ikki undir Aganevndina, ið skal halda seg til sítt málsøki og málsræði.

Loyvisnevndin skal í hesum sambandi vísa á, at Aganevndin greitt er farin útum sínar heimildir og er farin inn á málsræði og málsøki hjá Loyvisnevndini.

Tí verður kravt at Aganevndin verður áløgd at taka málið upp til nýggja viðgerð og undir tí viðgerðini at halda seg innanfyri sítt egna málsøki og málsræði.

Niðurstøðurnar hjá Aganevndini viðv. virkseminum hjá Loyvisumsitingini og Loyvisnevndini eru tiknar á skeivum grundarlag og uttan at biðið er um innlit í málið frá Loyvisumsitingini. Og óskiljandi er tað, at Aganevndin – í stríð við agareglugerð og góðan fyrisitingarsið - noktaði Loyvisnevndini at fáa málið til hoyringar.

**Niðanfyri eru viðmerkingar og grundgevingar frá Aganevndini til avgerð 6/2011 grundað á uppáhald frá Loyvisnevndini í síni kæru til Yvirkærunevndina.**

**Vísandi til Kæru frá Loyvisnevndini**
1) Loyvisnevndin vísir á at hon sbrt. grein 13 í Agareglugerðini hevur kærurætt
2) Avgerðin hjá Aganevndini verður kærd við kravi um, at avgerðin verður víst aftur til nýggja viðgerð í Aganevndini
3) Tað verður álagt Aganevndini í avgerð síni ikki at leggja seg út í viðurskifti, ið viðvíkja málsøkjum, ið eru løgd til Loyvisnevndina
4) Talan er um tvær sjálvstøðugar eindir við hvør sínum málsræði og við hvør sínari kæruskipan
5) SGS Grannskoðanin
6) Grannskoðaðir roknskapir
7) Loyvishandbók 2.0 vs Loyvishandbók 2.1
8) Fyrisitingarligur siður og hoyring í málinum

**Vísandi til Kæru frá Loyvisnevndini**
**Til 1: Loyvisnevndin vísir á at hon sbrt. grein 13 í Agareglugerðini hevur kærurætt.**

Aganevndin er ósamd. Aganevndin metir ikki, at loyvisnevndin hevur kærurætt í málinum sum snýr seg um limafelagið EB/Streymur.
Grein 2 í Agareglugerðini vísur heilt greitt, at "Reglugerðin er galdandi fyri allar limir FSFs og allar einstaklingar sum beinleiðis ella óbeinleiðis útinna uppgávur innan fótbólt sum ítróttargrein, tað verið seg leiðarar, venjarar, leikarar og aðrar ábyrgdarpersónar, sum hava við hesa ítróttargrein at gera."

Loyvisnevndin og onnur organ í FSF, tað verið seg politiskt vald organ ella ópolitiskt vald organ, kunna ikki vera partar í avgerðum, sum snúgva seg um limafeløgini hjá FSF og teir persónar, sum mynda hesi feløg.
Skipanin og lógarverkið er gjørt til og fyri tey feløg, sum eru limir í FSF og fyri FSF sum limafelag í FIFA. Grein 2, sbr. grein 7, sbr. grein 8 og sbr. grein 13 í Agareglugerðini tala greitt fyri hesum.

Tí kann hvørki Loyvisnevnd ella onnur nevnd hjá FSF gerast partur av málum, sum verða viðgjørd í dómsvaldinum hjá FSF, i.e. Aganevndin og Yvirkærunevndin.
Vísast kann somuleiðis til FIFA Disciplinary Code, Article 3, sum verður løgd til grund, tá tulkingarivi er, ella tá ongar reglur eru á økinum í føroyska fótbóltsregluverkinum. Her er ásett, hvørji pligtsubjektini eru í FIFA høpi, sbr. eisini grein 3 í Agareglugerðini, sum sigur: "Í tann mun henda reglugerð onga áseting hevur, er tann til ein hvørja tíð galdandi agareglugerð fyri fótbólt hjá FIFA galdandi."

**Til 2: Avgerðin hjá Aganevndini verður kærd við kravi um, at avgerðin verður víst aftur til nýggja viðgerð í Aganevndini**

Aganevndin er ósamd í, at avgerðin hjá Aganevndini skal vísast aftur til nýggja viðgerð í Aganevndini.

Aganevndin og Yvirkærunevndin eru dómsvaldið hjá FSF. Sambært article 73 í FIFA Disciplinary Code eru Aganevndin og Yvirkærunevndin og etiska ráðið einasta dómsvald í fótbóltshøpi, sbr. tó eisini grein 19 í Agareglugerðini um altjóða ítróttardómsstólin CAS og gerðarrættarskipan.

Eyðkenni fyri hesa dómsskipan er, at hon er stigvís. Hetta merkir, at ein avgerð tikin av einum undirliggjandi dómsstóli, bert kann kærast uppeftir í stigvísu skipanini. Tí kann málið ikki vísast aftur til Aganevndina.

Í einari fyristingarligari skipan er støðan ein onnur. Tá kann ein yvirskipaður fyrisitingarligur myndugleiki vísa mál aftur til nýggja viðgerð í einum undirliggjandi fyrisitingarligum myndugleika.

Við øðrum orðum, so er Aganevndin ikki ein fyrisitingarligur myndugleiki men ein dømandi myndugleiki. Mótsatt er Loyvisnevndin og kærunevndin í loyvismálum ikki dómsstólar, men fyrisitingarligir myndugleikar.

Sambært Clarification Memo No. 3 fyri UEFA Club Licensing System frá 28. februar 2003, er myndugleikabýti ímillum fyrisitingarligu eindirnar í Loyvisskipanini og teirra heimildir greitt lýst, eisini við atliti at teirra støðu mótvegis dømandi valdinum. Sambært Clarification Memo No. 3 eru Loyvisnevndin og Kærunevndin at rokna sum "Specialised decision-making bodies", meðan Aganevndin og Yvirkærunevndin eru at rokna sum "Statutory judicial bodies".

Sambært brot VI Competence of FIB and AB (Loyvisnevndin og Kærunevndin) pkt. eitt, so er teirra málsføri einans knýtt at "national club licensing manual" (Loyvishandbókin).

Sambært brot VI Competence of FIB and AB, pkt fimm, stendur tað púra greitt, at Aganevndin hevur málsføri í øllum málum, sum snúgva seg um brot á reglur í Loyvishandbókini. Heimildin at taka aftur luttøkuloyvi liggur tó bert hjá Loyvisnevndini, sí brot VI, pkt

**Til 3: Tað verður álagt Aganevndini í avgerð síni ikki at leggja seg út í viðurskifti, ið viðvíkja málsøkjum, ið eru løgd til Loyvisnevndina**
Víst verður til svar til pkt. 2 og til niðanfyristandandi mynd, sum er endurgivin úr Clarification Memo No. 3.
Harumframt skal Aganevndin vísa á, at dómsvaldið er eitt óheft organ uttanfyri fyrisitingarliga bygnaðin í FSF. Eyðkenni fyri dómsvaldið er, at mál verða viðgjørd og mett grundað á galdandi rættarreglur í fótbóltsregluverkinum. Tað serliga við dómsvaldinum er, at dómsviðgerðin eisini kann umfata fyrisitingarligu eindirnar og er

Annexe 1


UEFA CLUB LICENSING MATTERS
- grant a license
- sanction on C-criteria
DISCIPLINARY MATTERS
sanction an individual or a club
Licensing documets for verification
violation of statutes and regulations etc.
Disciplinary matters submitted to Disciplinary bodies
FIRST INSTANCE BODY
CONTROL AND DISCIPLINARY BODY
Option: Submission of sanction on C-Criteria
Appeal on FIB decision with regard to license
Appeal on decision on control and disciplinary body
Disciplinary matters submitted to Disciplinary bodies
APPEALS BODY
APPEALS BODY (Disciplinary matters)
Appeal to arbitration court to avoid civil court
Appeal to arbitration court to avoid civil court
recognised ARBITRATION COURT (national level) not compulsory - see your statutes
takes final and binding decision

tað hetta, sum gevur dómsvaldinum eina øðrvísi og hægri rættarliga tign enn fyrisitingarliga eftirlitið hjá øðrum organum í FSF, eisini eftirlitið, sum Loyvisnevndin skal útinna sambært reglunum í Loyvishandbókini.
Tí hevur Aganevndin í hesum máli eisini heimild at viðgera leiklutin hjá Loyvisumsitingini og Loyvisnevndini, sum ein liður í heildarmetingini av málinum. Sambært Clarification Memo No. 3 er tað beinleiðis ásett, at Aganevndin skal viðgera brot á reglurnar í Loyvishandbókini, sí brot VI, pkt 5. Einasta avmarking er, sum áður nevnt, spurningar um at veita og at taka aftur luttøkuloyvi, sum er málsøki hjá Loyvisnevndini.

Skipanin við Aganevnd og Yvirkærunevnd, sum er samtykt av Aðalfundi FSF's, er ein nýggjari skipan enn Loyvisskipanin. Við at hava sett á stovn eitt óheft dómsvald uttanfyri fyrisitingarliga bygnaðin, og við at áseta reglur um málsræði hjá Aganevndini í Agareglugerðini grein 2, sbr. grein 1, stk. 6 í kappingarreglunum, hevur hægsti myndugleiki hjá FSF harvið rótfest eina skipan, har dómsvaldið hevur málsræði í øllum málum í samband við møgulig brot á fótbóltsregluverkið, harímillum reglurnar í Loyvishandbókini. Tað er í Loyvishandbókini, at reglurnar um fíggjarligu krøvini til feløgini eru ásettar.
Samstundis verður víst á, at Starvsnevndin við at leggja málið fyri Aganevndina hevur víst, at Starvsnevndin hevur somu fatan sum Aganevndin av, hvussu skipanin er uppbygd.

**Til 4: Talan er um tvær sjálvstøðugar eindir við hvør sínum málsræði og við hvør sínari kæruskipan**

Sambært Clarification Memo No. 3 er tað púra rætt, at talan er um tvær sjálvstøðugar eindir við hvør sínari kæruskipan. Men sambært sama Memo, og sambært Agareglugerðini, so er Loyvisnevndarskipanin ein fyristingarlig skipan við avmarkaðum málsræði, meðan Aganevndarskipanin er ein dómsskipan við nógv víðari málsræði, sum eisini fevnir um fyrisitingarligu myndugleikarnar. Hetta er ein grundleggjandi løgfrøðilig meginregla innan dómsviðgerð.

Aganevndin vil tí staðiliga vísa á, at Loyvisnevndin fullkomiliga hevur misskilt málsbýtið millum loyvismyndugleikar og agamyndugleikar FSF's. UEFA club licensing manual (altjóða loyvishandbókin) ásetur krøv til, hvussu FSF og aðrir nationalir fótbóltsfelagsskapir skulu skipa sína loyvisumsiting. Hetta hevur FSF gjørt við reglum ásettar í síni Loyvishandbók. Krav er um, hvussu loyvisumsitingin skal skipast fyrisitingarliga, hvørji krøv verða sett umsøkjarum, sum søkja um luttøkuloyvi, hvørjir fyrisitingarligir kærumøguleikar skulu vera og hvørjir agamøguleikar agaskipanin skal rúma o.s.fr.
FSF hevur við øðrum orðum implementera altjóða loyvishandbókina hjá UEFA í føroysku útgávuni av Loyvishandbókini, tí hetta er eitt krav frá UEFA til sínar limafelagsskapir.

Tann loyvisskipan, sum er galdandi í Føroyum, og sum eisini var galdandi í árunum 2007-2010 og áðrenn hetta tíðarskeið, ásetur greitt, at loyvisumsitingin skal skipast við umsitingarligum samskipara, sum kann vera løntur og starvast í FSF umsitingini umframt við Loyvisnevnd og Kærunevnd. Høvuðsuppgávan hjá Loyvisnevndini og Kærunevndini er á hvørjum ári at taka avgerð um, hvørt eitt felag, sum søkir FSF um

luttøkuloyvi, skal fáa luttøkuloyvi ella ikki. Metingin hjá Loyvisnevndini skal byggja á eina ásannan ella verifikatión av, hvørt krøvini í Loyvishandbókini eru rokkin av umsøkjaranum ella ikki. Loyvishandbókin inniheldur trý sløg av reglum: A-krøv, B6 krøv og C-krøv. Heilt stutt kann sigast, at A-krøv skulu lúkast og treytaleyst implementerast í føroyska fótbóltsregluverkið, t.e. í Loyvshandbókini. B-krøv skulu eisini implementerast, men har er størri frælsi hjá FSF í mun til, hvussu hesi verða orðað og skipað í føroyska fótbóltsregluverkinum. C-krøv eru linari aftur, og hava ein meiri umsitingarligan dám.

A-krøv, B-krøv og C-krøv hava stóran týdning, tá metast skal um málsbýtið ímillum Loyvisnevnd, Kærunevnd og Aganevnd og Yvirkærunevnd. Sambært tulkingarskrivinum frá UEFA, t.e. Clarification Memo No. 3 frá UEFA til UEFA Club Licensing System, sum er gjørt til útgávu 1.0 av UEFA club licensing manual, so hava fleiri limafelagsskapir verið í iva um, hvussu tey nationalt skuldu skipa sína innanhýsis viðurskifti fyri at lúka krøvini frá UEFA og er tað tí, at tulkingarskrivið er gjørt.

Sambært tulkingarskrivinum er ongin ivi um, at Loyvisnevndin og Kærunevndin eru fyrisitingarligir myndugleikar, hvørs høvuðsuppgáva er at taka avgerð um at veita einum felag luttøkuloyvi ella at taka avgerð um, at luttøkuloyvið skal takast aftur frá felagnum. Sum vanligt innan fyrisitingarliga bygnaðin, so skal avgerðin hjá Loyvisnevndini um at nokta at geva luttøkuloyvi, ella ein avgerð um at taka aftur eitt luttøkuloyvi, kunna kærast til ein hægri fyrisitingarligan myndugleika, t.e. til Kærunevndina.

Ásett er eisini í tulkingarskrivinum, at í Loyvisnevndini skulu sita fólk við ávikavist løgfrøðiligum førleikum og fólk við fíggjarligum førleikum. Tað er eisini ásett, at limir í Loyvisnevndini og limir í Kærunevndini ikki kunnu vera limir í kravdu dómsnevndunum hjá einum limafelagsskapi. Sagt við øðrum orðum, so eru limirnir í Loyvisnevndini og Kærunevndini útihýstir frá at vera limir í Aganevndini og Yvirkærunevndini. Orsøkin er einfalt, at UEFA krevur greitt málsøkjabýti millum hesi organ.

Málsræði hjá Loyvisnevndini er sambært sama tulkingarskrivi greitt avmarkaður til mál, sum snúgva seg um loyvisskipanina og sum eru ásett í nationalu loyvishandbókini. Loyvisnevndin hevur málsførleika til at taka avgerð um, hvørt Akrøv, B-krøv og C-krøv eru lokin av feløgum, sum søkja um luttøkuloyvi og sum hava fingið luttøkuloyvi. Loyvisnevndin hevur serstaka málsheimild at taka avgerð um, hvørt eitt luttøkuloyvi skal veitast ella sýtast ella um grundarlag er fyri at taka aftur eitt luttøkuloyvi frá einum felag. Onki annað organ í FSF er heimilað til at taka hesar áðurnevndu avgerðir.

Staðfestir Loyvisnevndin í sínari umsiting av loyvisskipanini, at eitt felag hevur framt brot á A-krøv ella B-krøv, so skal Loyvisnevndin leggja spurningin um møguligt brot á A-krøv og B-krøv til Aganevndina. Hetta er sjálvandi ikki galdandi í førum, har Loyvisnevndin sjálv tekur avgerð um, at tað at eitt felag ikki lýkur A-krøv og B-krøv skal hava við sær fyrisitingarligan skaðavirknað, sum er afturtøka av luttøkuloyvinum. Brot á C-krøv kann Loyvisnevndin sjálv viðgera, men tá eigur tað at vera ásett í føroyska fótbóltsregluverkinum, helst í Loyvishandbókini, at Loyvisnevndin fær heimild at revsa fyri brot á C-krøv.

Aganevndin hevur í føroyska fótbóltsregluverkinum fingið serstaka heimild at viðgera spurningar um møgulig brot á fótbóltsregluverkið, herundir reglurnar í Loyvishandbókini. Brot á A-krøv og B-krøv í Loyvishandbókini eru sambært sama

tulkingarskrivi at rokna sum brot á fótbóltsregluverkið og tí hevur Aganevndin og Yvirkærunevndin málsræði og málsføri at viðgera slík mál. Dómsvaldið hjá FSF, t.e. Aganevndin og Yvirkærunevndin, eru heimila at revsa persónar og feløg fyri brot á reglurnar um føroysku loyvisskipanina. Einasta undantak er, sum áður nevnt, brot á C-krøv, um FSF hevur valt at leggja brot á C-krøv undir málsøki hjá Loyvisnevndini. Hetta er eisini greitt lýst í tí tekning, sum er fylgiskjal til tulkingarskrivi frá UEFA og sum eisini er víst til omanfyri.

Samanumtikið er Aganevndin av teirri greiðu fatan, at Loyvisnevndin hevur misskilt sínar fyrisitingarligu uppgávur og heimildir sambært Loyvishandbókini og at Loyvisnevndin hevur misskilt málsbýtið ímillum Loyvisnevnd og Aganevnd. Aganevndin metir tað vera sera álvarsamt mál fyri FSF, at Loyvisnevndin við síni kæru og framferð í miðlunum roynir at sáa iva um málsheimildirnar hjá Aganevndini at viðgera mál um brot á regluverk FSF's, herundir mál um brot á reglur í Loyvishandbókini. Aganevndin harmast um, at Loyvisnevndin soleiðis alment sáar iva um málsbýtið ímillum fyrisitingarliga valdið og dómsvaldið hjá FSF eftirsum regluverkið hjá FSF greitt ásetur, hvussu heimildarbýtið er ímillum hesi FSF organ. Eftir stendur, at fótbóltsfeløg, almennu Føroyar og møguliga UEFA kanska eru í iva um, hvørt FSF hevur skipað síni formligu viðurskifti í føroyska fótbóltsregluverkinum á ein hátt, sum er í samsvari við UEFA-regluverkið. Ein ivi, sum kanska ikki verður føroyskum fótbólti og føroyskari fótbóltsumsiting at frama næstu árini.
At enda ger Aganevndin vart við, at rætta mannagongdin í málinum um ólógliga peningastreymin til EB/Streym átti at verið, at Loyvisnevndin í sínari umsiting og eftirliti við treytunum fyri at veita EB/Streymi luttøkuloyvi tey ár, tá fíggjarliga óreglusemi gekk fyri seg, átti at tikið støðu til, um EB/Streymur lýkti øll A-krøv og Bkrøv í Loyvishandbókini. Um loyvisnevndin í sínari umsiting og eftirliti í hesum sama tíðarskeiði kom til ta niðurstøðu, at EB/Streymur møguliga hevði brotið okkurt Akrav ella okkurt B-krav, so átti Loyvisnevndin at hava lagt tað ella tey mál fyri Aganevndina til revsirættarliga støðutakan eftir fótbóltsregluverkinum. Hetta er ongantíð gjørt.

Aganevndin er av teirri fatan, at Loyvisnevndin í sínari umsiting og eftirliti av EB/Streymi í nevnda tíðarskeiði antin ikki hevur staðfest nakað brot á A-krøv ella Bkrøv hóast týðandi fíggjarliga óreglusemi í EB/Streymi hetta sama tíðarskeið, ella ikki hevur viðurkent Aganevndina sum rætta dómsmyndugleika at revsa EB/Streym fyri brot á A-krøv ella B-krøv. Um tað seinna ger seg galdandi, sum orsøk er til at halda grundað á kæruna frá Loyvisnevndini, so er støðan tíverri tann, at Loyvisnevndin ikki er vitandi um og ikki viðurkennir málsøkjabýtið ímillum myndugleikar og dómsvald í FSF og ikki er vitandi um, hvørjar rættarreglur og heimildir eru galdandi fyri tey organ, sum skulu tryggja, at FSF sum limaland í altjóða fótbóltsfelagsskapinum er skipað á nøktandi hátt.
Tað, sum Aganevndin í síni avgerð hevur hartað Loyvisnevndina fyri er sostatt, at Loyvisnevndin ikki við sínum kanningum hevur staðfest tað týðandi fíggjarliga óreglusemi í EB/Streymi í 2008 og 2009, sum objektivt er staðfest í dómi frá Føroya Rætti. At grundarlag er fyri at halda, at EB/Streymur helst hevur broti A-krøv og Bkrøv í Loyvishandbókini, men at hetta er farið afturvið borðinum uttan fyrisitingarligan skaðavirknað frá Loyvisnevndini (afturtøka av luttøkuloyvi) og uttan revsirættarlig átøk frá Aganevndini, tí at Loyvisnevndin antin ikki hevur staðfest ella tikið avgerð um møgulig brot ella tí at Loyvisnevndin ikki hevur viðurkent heimildina

hjá Aganevndini at revsa einstaklingar og feløg fyri brot á A-krøv og B-krøv í Loyvishandbókini.
Upplýst verður, at Aganevndin sum dómsvald ikki kann taka mál upp av sínum eintingum. Ein partur í málinum ella eitt FSF-organ, tað verið seg Loyvisnevndin ella Kærunevndin, hava rætt at leggja mál um møgulig brot á reglurnar í Loyvishandbókini fyri Aganevndina. Upplýsast kann eisini, at skuldi Loyvisnevndin eftirfylgjandi komi til, at EB/Streymur møguliga breyt A-krøv og B-krøv í tíðarskeiðinum, so kunnu hesi mál framvegis leggjast fyri Aganevndina til revsirættarliga støðutakan. Vanliga fyrningarfreistin fyri agamál, sum ikki snúgva seg um brot framd í einum fótbóltsdysti, er nevniliga 10 ár sambært article 42, stk. 1 í FIFA Disciplinary Code.

**Til 5: SGS Grannskoðanin**
Aganevndin vísur á, at ein SGS grannskoðan av loyvisumsitingini hjá FSF er uttan týdning fyri ítøkiliga málið um EB/Steym. Ein auditeringsskipan er ein góðskumeting av, um FSF sum limaland í FIFA lýkur altjóða krøvini um loyvisskipan.
Tað at FSF annaðhvørt ár verður auditerað merkir, at loyvisskipanin formliga er skipað sambært altjóða regluverkinum. Ein slík góðkenning kann tó á ongan hátt tulkast sum ein góðkenning av, at loyvisnevndin hevur umsitið hvørja einstøku umsókn um luttøkuloyvi á fullgóðan hátt.

**Til 6: Grannskoðaðir roknskapir**
Loyvisnevndin førir fram, at roknskapir eru latnir inn, sum eru grannskoðaðir av skrásettum grannskoðara eftir galdandi ásetingum, og av tí at roknskapirnir eru uttan fyrivarni, gevur hetta ikki loyvisumsitingini høvi at kanna viðurskiftini nærri.
Aganevndin metir ikki, at henda viðgerð hjá Loyvisumsitingini lýkur krøvini um verificering í Clarification Memo no. 3 og Loyvishandbókini.
Í viðgerðini av málinum hevur Aganevndin mett, at í mun til nevndarábyrgdina og í mun til Loyvisumsitingina, er tað ikki nøktandi bara at leggja ein grannskoðaðan roknskap uttan fyrivarni til grund fyri viðgerð av umsóknum um luttøkuloyvi. Ein slíkur framferðarháttur merkir, at hvørki nevndin hjá felagnum ella Loyvisumsitingin viðgera fíggjarviðurskiftini hjá felagnum á ein hátt, sum lagt er upp til í Loyvishandbókini.
Í roynd og veru kann ein grannskoðaður roknskapur síðusetast við at loyvisumsitingin hjá FSF verður grannskoðað av SGS. Ein grannskoðaður roknskapur uttan fyrivarni er ikki trygd fyri, at einki fíggjarligt óreglusemi er farið fram í felagnum.
Hetta eru grannskoðaðu roknskapirnir hjá EB/Streymi eisini prógv um.

**Til 7: Loyvishandbók 2.0 vs Loyvishandbók 2.1**
Rætt er, at Aganevndin í kæruviðgerðini hevur víst til Loyvishandbók 2.1 við tilvísingum og dømi, herundir spot-check. Hinvegin er tað ein sannroynd, at tað ikki er stórur munur á Loyvishandbók 2.0 og Loyvishandbók 2.1, sí eisini fororðini hjá FSF forsetanum í Loyvishandbók 2.1.
Hetta broytir heldur ikki samlaðu niðurstøðuna í málinum, tí spurningurin um spotcheck hevur havt lítlan og ongan sjálvstøðugan týdning og hevur bert verði nýttur sum eitt av fleiri dømi.
Aganevndin staðfestir framvegis, at grundleggjandi minstukrøv í Loyvishandbók 2.0 til fíggjarkrøv og roknskaparførslu ikki hava verið hildin í hesum ítøkiliga máli. Loyvishandbók 2.0 undirstrikar, at loyvisumsitingin í ávísum førum hevur skyldu til,

at lesa og meta um innkomnu upplýsingarnar, eisini upplýsingar, sum eru grannskoðaðir.

**Til 8: Fyrisitingarligur siður og hoyring í málinum**
Parturin í málinum, EB/Streymur, fekk fimm (seinni seks) daga hoyringsfreist. Sum nevnt omanfyri, pkt. 1, hevur Aganevndin ikki mett Loyvisnevndina at vera part í málinum, og tí er Loyvisnevndin heldur ikki hoyrd sum partur í málinum. Aganevndin fekk umvegis FSF skrivstovuna innlit og svar uppá spurningar viðvíkjandi loyvisumsiting og annað mangt, sum hevði týdning fyri viðgerðina av málinum.

Sum dómsvald avgerð Aganevndin sjálv, hvørjar upplýsingar nevndin tørvar og hvørji fólk nevndin ynskir at koma í tal við. Aganevndin hevði kunnað latið Loyvisnevndini málið til hoyringar, men hetta er ikki eitt krav í eini dómsskipan. Dómsskipanin er ikki bundin av fyrisitingarligum reglum um innlit og hoyring.

Vísast skal á, at Aganevndin gav Starvsnevndini høvi til at fáa uppskotið til avgerð til ummælis sambært grein 13 í Agareglugerðini, men upplýst varð frá FSF skrivstovuni, at Starvsnevndin metti ikki hetta vera neyðugt.

**Hoyringsfundur fyri Yvirkærunevndini hjá FSF, tann 17. juni 2011, kl. 14.00**

**1) Kærurættur/partsstatus**

Fyrisitingarliga partshugtakið
Meginreglan innan fyrisitingarrættin, er, at partur í einum máli er hann (fysiskur ella løgfrøðiligur persónur), sum avgerðin er stílað til.

Partur í einum máli kunnu eisini vera onnur enn tann, sum avgerðin er stílað til. Treytirnar fyri at kunna metast sum partur í hesum sambandi eru, at talan skal vera um ein persón (fysiskur ella løgfrøðiligur), sum hevur "væsentlig og individuel interesse i sagens afgørelse eller udfald", smb. s. 45 í Forvaltningsret, Hans Gammeltoft Hansen v.fl. 1.udg. 1994.

"Væsentlig interesse" merkir, at avgerðin skal viðvíkja viðurskiftum og umstøðum hjá viðkomandi (parti) við eini ávísari styrki ella intesiteti.

"Individuel interesse" merkir, at viðkomandi (partur) skal hava ein serstakan áhuga í málinum. Tvs., at avgerðin skal hava týdning fyri ein ávísan persón, og ikki fyri ein breiðan skara.

Í hesum ítøkiliga málið má metast, at avgerðin hjá Aganevndini viðvíkur viðurskiftum og umstøðum hjá Loyvisnevndini. Avgerðin hjá Aganevdini má metast hava eina beinleiðis ávirkan á viðurskiftini hjá Loyvisnevndini vísandi til, at Loyvisnevdin verður hartað fyri manglandi eftirlit og ikki nøktandi málsviðgerð.

Somuleiðis má metast, at Loyvisnevndin hevur ein serstakan áhuga í málinum vísandi til, at avgerðin beinleiðis rakar Loyvisnevndina.

Sivilrættarliga partshugtakið
Í rættargangslógini kap. 36 eru felagsreglur fyri at leggja mál fyri landsrætt og hægstarætt. Meginreglan her er eisini tann, at triðjimaður ikki kann kæra, tí hann ikki kann metast vera partur í málinum. Tó er praksis fyri, at triðjimaður hevur kærurætt og skal metast sum partur, um úrskurðurin hjá dómstólinum má metast sum ein avgerð yvirfyri triðjamanni, smb. s. 522 í Civilproces, Bernard Gomard, 3. udg. 1990.

Í hesum ítøkiliga máli má metast, at avgerðin hjá Aganevndini má metast sum ein avgerð yvirfyri Loyvisnevndini. Aganevndin hevur staðfest brot á loyvisskipanina, meðan Loyvisumsitingin ikki hevur staðfest nakað brot. Avgerðin hjá Aganevndini má tískil skiljast sum um, at Aganevndin hevur tikið eina nýggja (fyrisitingarliga) avgerð.

Revsirættarliga partshugtakið
Í § 968 í rættargangslógini framgongur, at einhvør kann kæra ein dómsúrskurð, um metast má, at úrskurðurin inniheldur eina avgerð yvirfyri viðkomandi persóni, herundir eisini triðjamanni.

Triðjimaður hevur bert rætt til at kæra, um hann hevur ein serstakan rættarligan áhuga í málinum. Sum omanfyri víst á, so verður mett, at Loyvisnevndin hevur ein serstakan rættarligan áhuga í málinum.

§ 13 í Agareglugerðini
§ 13 í Agareglugerðini vísir á, at feløg og einstaklingar, sum beinleiðis verða rakt av eini avgerð, og onnur, sum hava ein serstakan og konkretan rættarligan áhuga í málinum, hava kærurætt.

Somuleiðis er ásett í § 13, at allir partar í málinum kunnu biðja um munnliga viðgerð av málinum.

Hóast § 2 í Agareglugerðini ásetur, hvørjar persónar (fysiskar og løgfrøðiligar) Agareglugerðin er galdandi fyri, so verður mett, at Yvirkærunevndin eigur at tulka ásetingina í § 13 vítt. § 13 útgreinar ikki nærri, um kærurætturin bert er galdandi fyri tey, ið nevnd verða í § 2.

Í hesum sambandi verður eisini serliga víst til, at Yvirkærunevndin hevur játtað Loyvisnevndini møguleika at svara í málinum, og eisini játtað Loyvisnevndini at leggja málið munnliga fram fyri Yvirkærunevndini, sum bert kann loyvast pørtunum í málinum.

Um Yvirkærunevndin var av tí fatan, at Loyvisnevndin ikki hevur kærurætt, so átti Yvirkærunevndin at víst málið frá sær og ikki hoyrt bæði Aganevndina og Loyvisnevndina í málinum. Loyvisnevndin metir seg nú sum partur í málinum, vísandi til, at partarnir hava býtt nógva tíð og orku uppá málið.

**2) Málsræði**
Aganevndin vísir í sínum hoyringsskrivi á, at nevndin er at meta sum ein dómstólur, og tískil virkar undir løgfrøðiligum meginreglum innan dómsviðgerð.

Í sivilrættarligum høpi, verða mál viðgjørd eftir "forhandlingsprinsippinum", sum sigur, at rætturin skal taka eina avgerð við grundarlag í teimum krøvum og tilfari, sum partarnir í málinum hava lagt fram. Við øðrum orðum, so hevur rætturin ikki heimild til av sínum eintingum at taka onnur mál upp, sum partarnir ikki hava sett fram krav um.

Í revsirættarligum høpi, verða mál viðgjørd eftir tí "akusatoriskaprinsippinum", sum sigur, at ákæruvaldið ger kanningina av málinum og leggur málið fram fyri rættin. Hóast rætturin í revsirættarligum høpi í størri mun hevur møguleika til ex officio at seta spurningar til partarnar, so hevur rætturin ikki heimild til ex officio at viðgerða eitt fyrisitingarligt mál av nýggjum, og taka eina nýggja avgerð. Rætturin kundi møguliga tikið støðu til tað, um partarnir í málinum høvdu lagt krav fram um tað.

Í avgerðini hjá Aganevndini, dagf. 12. juli 2011, framgongur, at Starvsnevndin hjá FSF er av teirri áskoðan, at talan kann vera um brot á reglur, sum nevndar eru í § 2 í Agareglugerðini. Starsnevndin ynskir tí, at Aganevndin tekur støðu til, um fyrrverandi kassameistari og nevndin hjá EB/Streymi kann ábyrgjast í hesum sambandi.

Her skal viðmerkjast, at Starvsnevndin ikki hevur biðið Aganevndina um at taka støðu til, um loyvisumsitingin hjá FSF hevur gjørt sítt arbeiðið til lýtar. Vísandi til omanfyri standandi meginreglur fyri dómsviðgerð, so meti eg ikki, at Aganevndin hevur heimild til ex officio at fara inn og viðgerða eitt mál hjá fyrisitingini/loyvisumsitingini av nýggjum, og koma til eina nýggja avgerð. Metast má, at niðurstøðan hjá Aganevndin um, at loyvisumsitingin ikki hevur gjørt sítt arbeiðið til lýtar, má metast sum ein nýggj avgerð bæði yvirfyri EB/streymi og loyvisumsitingini.

Sum dømi úr almennu fyrisitingini kann nevnast, at kommunalu skattakærunevndinar hava beinleiðis heimild til at taka alla skattsetingina upp til viðgerðar, sama hvat kæruevnið er. Annars eru skattakærunevndirnar bundar at taka støðu til tey krøv og sjónarmið, sum partarnir bera fram í málinum.

**3) Materiella viðgerðin av málinum**
Her skal bert vísast á, at Aganevndin ikki hevur heimild til at viðgerða brot á A- og B-treytir í Loyvishandbókini, men bert brot sum eru framd á sjálva loyvisgongdina, sí somuleiðis framløgdu skjølini 1-3.

Loyvisnevndin metir seg ikki kunna staðfesta nakað brot á loyvisskipanina.

Vísast skal í hesum sambandi á, at Aganevndin í avgerð síni, dagf. 12. juli 2011, sigur seg kunna staðfesta fleiri brot á Loyvishandbókina. Tó útgreinar Aganevndin ongantíð júst hvørjar ásetingar í Loyvishandbókini, EB/Streymur hevur forbrotið seg ímóti.

**4) Sakarmálskrøv**

Sakarmálskrøvini verða hervið broytt, soleiðis at tey eru fylgjandi

Í fyrsta lagi:
Avgerðin hjá Aganevndini verður kærd við kravi um, at avgerðin verður víst aftur til nýggja viðgerð í Aganevndini og at tað verður álagt Aganevndini í avgerð síni ikki at leggja seg út í viðurskifti, ið viðvíkja málsøkjum, ið eru løgd til Loyvisnevndina.

Loyvisnevndin krevur við øðrum orðum, at Aganevndin tekur málið uppaftur til viðgerðar og kemur við einari nýggjari avgerð, har Aganevndin ikki ger seg inn á málsræði hjá Loyvisnevndini.

Í øðrum lagi:
Loyvisnevndin krevur, avgerðin hjá Aganevndini verður ógildað.

Í triðia lagi:
Loyvisnevndin krevur, at tann parturin av avgerðini hjá Aganevndini, sum snýr seg um umsitingina/viðgerðina hjá Loyvisnevndini av málinum, verður ógildaður.

Í fjórða lagi:
Loyvisnevndin krevur, at Aganevndin verður dømd at viðurkenna, at Aganevndin ikki hevur málsræði/heimild til at viðgerða mál, sum eru løgd til Loyvisnevndina at viðgerða.

Í fimta lagi:
Loyvisnevndin krevur, at Aganevndin verður dømd at viðurkenna, at Loyvisnevndin hevur havt fullgóða umsiting og fullgott eftirlit við loyvinum hjá EB/Streymi.

**5) Endaligar viðmerkingar**
Málið átti av fyrstan tíð at verðið avgreitt millum Starvsnevndina og Loyvisnevndina hjá FSF, áðrenn málið varð latið Aganevndini til viðgerðar.

Støðan í dag er tann, at avvarandi myndugleikin á økinum, Loyvisnevndin, ikki staðfestir nakað brot á loyvisskipanina, meðan Aganevndin staðfestir brot á loyvisskipanina. Skipanin hjá FSF má tískil metast verða komin í stríð við seg sjálva.

**Avgerð hjá Yvirkærunevndini:**

Yvirkærunevndin hevur mett, og vil í heusm máli staðfesta, at hóast § 2 í agareglugerðini, virkar avmarkandi fyri, hvør kann verða partur í einum máli, so verður ásett meiri umfatandi, hvør kann hava kærurætt í § 13 í agareglugerðini, at feløg og einstaklingar, sum beinleiðis verða rakt av eini avgerð, <u>og onnur, sum hava ein serstakan og konkretan rættarligan áhuga í málinum, hava kærurætt.</u>

Tá ið sagt verður í § 13, at onnur, sum hava ein serstakan og konkretan rættarligan áhuga í málinum, hava kærurætt. So verður mett, at Loyvisnevndin sum verður hartað, fyri ikki at røkja sínar skyldur, hevur kærurætt.

Yvirkærunevndin tekur eisini undir við teimum grundgevingum, sum Loyvisnevndin hevur framført í kæruskrivi og hoyringsskrivi teirra um partshugtakið.

Yvirkærunevndin metir, at málsviðgerðin hjá Aganevndini, setur rættartrygdina til viks, tá ið hon noktar Loyvisnevndini munnliga hoyring, hóast Aganevndin er av tí fatan at Loyvisnevndin ikki hevur partstatus, við tað at skuldsetingarnar hjá Aganevndini eru sera tyngjandi fyri Loyvisnevndina, og Loyvisnevndin ikki hevur møguleika ella høvið, at koma til orðana til verju ella at rætta formellar og faktuellar feilir ella misfatan hjá Aganevndini.

Í agareglugerðini § 13, stk. 7 verður ásett: Um eingin biðjur um munnliga viðgerð kunna Kærunevndir taka avgerð í málinum á tí grundarlagi sum fyriliggur, eftir at allir partar eru hoyrdir.

Yvirkærunevndin metir, at í hesum konkreta førinum, er tað sera óheppið, hóast ikki er talan um almenna fyrisiting, at nokta Loyvisnevndini møguleika fyri munnliga hoyring. Í agareglugerðini er hoyring sum heild grundarlagið fyri málsviðgerð hjá Aganevnd og Yvirkærunevnd, fyri at fáa faktum lýst væl og virðiliga.

Hóast Aganevndin vísir til skeivu Loyvishondbókini 2,1, har ið betri møguleikar gevast fyri herdum fíggjarligum eftirlitið, so staðfestir Aganevndin yvirfyri Yvirkærunevndini framvegis, at grundleggjandi minstukrøv í Loyvishandbók 2.0 til fíggjarkrøv og roknskaparførslu ikki hava verið hildin í hesum ítøkiliga máli. Loyvishandbók 2.0 undirstrikar, at loyvisumsitingin í ávísum førum hevur skyldu til, at lesa og meta um innkomnu upplýsingarnar, eisini upplýsingar, sum eru grannskoðaðir.

Yvirkærunevndin staðfestir, at hesir pástandir hjá Aganevndini eru ikki sakliga grundgivnir, við beinleiðis staðfestingum um, hvørji brot í Loyvishondbókini 2.0 Loyvisnevndin hevur framt í sínum eftirlitsarbeiði í loyvistilgongdini hjá EB/Streymi, tá ið talan er um fíggjarkrøv og roknskaparførslu.

Yvirkærunevndin hevur staðfest í sambandi við viðmerkingar frá Aganevndini, og hoyring av Loyvisnevndini, at faktum er at Aganevndin og Loyvisnevndin hava hvør sína fatan av, hvat er málsræði og málsøki hjá ávikavist Aganevnd og Loyvisnevnd.

Tí vil Yvirkærunevndin skjóta upp fyri FSF, at regluverkið hjá FSF verður broytt soleiðis, at ein útgreining verður framd sum greitt ásetir, hvat málsræði og málsøki er hjá

ávikavist Aganevnd og Loyvisnevnd, til frama og gagn fyri málsviðger hjá Aganevnd og Loyvisnevnd framyvir.

Yvirkærunevndin er av tí fatan, at Starvsnevndin ikki hevur heitt á Aganevndina, um at kanna loyvisumsitingina ella loyvistilgongdina í hesum máli. Eisini hevur Aganevndin vantandi sakligar grundgevingar, fyri at harta Loyvisnevndina, fyri ikki at umsita sítt málsøkið á nøktandi hátt.

Niðurstøðan verður tí, at Yvirkærunevndin tekur ikki undir við at Loyvisnevndin skal taka málið uppaftur í sambandi við loyvi til EB/Streym, og Yvirkærunevndin tekur heldur ikki undir við, at Aganevndin skal taka málið uppaftur.

Við tað at EB/Streymur hevur tikið sítt kærumál aftur, so verður dómsúrskurðurin hjá Aganevndiní tann 12. juli 2011 óbroyttur at verða, tó verða tær viðmerkingar, sum Aganevndin hevur um Loyvisnevndina settar úr gildi.

Tórshavn, tann 29. august 2011.

Andrass Holm Arge    Høgni J. Hagnesen    Jens Erik Magnussen

**Avgerð 2/2011 frá Yvirkærunevndini**

**Hjá**

**Fótbóltsambandi Føroya**

**Viðvíkjandi kæru frá TB, um úrskurð hjá Aganevndini, dagfest hin 17. okt. 2011.**

Tað er sambært § 12 í Agareglugerðini ikki heimild til at kæra avgerðina, ið Aganevndin hevur tikið, til Yvirkærunevndina.

Yvirkærunevndin hjá FSF hin 21. okt. 2011.

**Andrass Holm Arge** **Høgni J. Hagnesen** **Jens Erik Magnussen**

# Champions League, Europa League & Europa Cup kvinnur 2011

Evropeisku fótbóltskappingarnar hjá UEFA fyri lið
Hjá monnum eru tey feløg, ið hava leikt seg til møguleika at melda seg til omanfyri nevndu kappingar:

| | | |
|---|---|---|
| Nr. 1 | Føroyameistari 2010 | HB |
| Nr. 3 | í landskappingini | NSÍ |
| Nr. 4 | í landskappingini | ÍF |
| Nr. 1 | í steypakappingini | EB/S |

Liðini komu at luttaka soleiðis:

| | |
|---|---|
| HB | UEFA Champions League sum meistari |
| EB/Streymur | UEFA Europa League sum steypavinnari |
| NSÍ | UEFA Europa League sum nr. 3 í landskappingini |
| ÍF | UEFA Europa League sum nr. 4 í landskappingini |

Úrslitið av lutakastinum til Champions League og Europa League gjørdist hetta:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 13. juli | Malmø FF - HB | 19. juli | HB - Malmø FF |
| 30. juni | ÍF – KR Reykjavík | 7. juli | KR Reykjavík - ÍF |
| 30. juni | Fulham - NSÍ | 7. juli | NSÍ - Fulham |
| 14. juli | EB/Streymur - Quarabag FC | 21. juli | Quarabag FC – EB/Streymur |

Hjá kvinnunum er tað felag, ið hevur leikt seg til møguleika at melda seg til niðanfyrinevndu kapping:

| | | |
|---|---|---|
| Nr. 1 | Føroyameistari 2010 | KÍ |

Kappingin varð hildin í Serbia, og úrslitið av lutakastinum gjørdist hetta:

| | |
|---|---|
| 11. august | Mosta - KÍ |
| 13. august | Spartak - Gintra |
| 16. August | Glasgow City-KÍ |

## Malmø FF – HB

**UEFA Champions League – 2. undanumfar, fyrri dystur**

**Úrslit** 2-0 (0-0)
**Dato** 13. juli 2011 kl. 19.00
**Leikvøllur** Malmø New Stadium – Malmø

**Dómarar:** Dómari: Marios Panayi (CYP)
Hj.dómarar: Charalambos Charalambous (CYP), Sotiris Viktoros (CYP)
4. Dómari: Christos Nicolaides (CYP)

**Lið**

| Nr | Malmø | | Nr | HB | |
|---|---|---|---|---|---|
| 25 | Dušan Melichárek (GK) | | 1 | Teitur Gestson (GK) | Gult Kort 67 |
| 4 | Daniel Andersson (C) | | 3 | Rógvi Holm | Sjálvmál 77 |
| 6 | Markus Halsti | | 6 | Hanus Thorleifson | Gult Kort 81, Útskifting 90+2 |
| 7 | Daniel Larsson | | 7 | Fródi Benjaminsen (C) | Gult Kort 77 |
| 9 | Wílton Figueiredo | | 8 | Kári Nielsen | |
| 15 | Pontus Jansson | | 9 | Símun Samuelsen | Útskifting 90+3 |
| 17 | Ivo Pekalski | Útskifting 89 | 10 | Andrew Fløtum | Útskifting 87 |
| 19 | Dardan Rexhepi | Mál 58, Útskifting 82 | 12 | Hendrik Rubeksen | |
| 20 | Ricardinho | Gult Kort 75 | 13 | Hans Lag | |
| 21 | Jimmy Durmaz | | 18 | Rógvi Poulsen | |
| 24 | Agon Mehmeti | Útskifting 88 | 22 | Pætur Jørgensen | |

| Nr | Eykaleikarar: | | Nr | Eykaleikarar: | |
|---|---|---|---|---|---|
| 30 | Dejan Garača (GK) | | 16 | Hedin Stenberg (GK) | |
| 5 | Miljan Mutavdžić | Útskifting 89 | 11 | Jón Krosslag | Útskifting 90+3 |
| 16 | Yago Fernández | | 14 | Ólavur Ólavstovu | |
| 22 | Filip Stenström | | 15 | Jogvan Nolsøe | Útskifting 87 |
| 26 | Simon Kroon | | 21 | Kristin Mouritsen | Útskifting 90+2 |
| 28 | Alex Nilsson | Útskifting 82 | 24 | Tróndur Jensen | |
| 29 | Omid Nazari | Útskifting 88 | | | |

**Venjari** Rikard Norling (SWE) — Sigfríður Clementsen (FOR)

Mál — Sjálvmál — Brotsspark — Reytt kort — Gult Kort — Útskifting

# HB – Malmø FF

**UEFA Champions League – 2. undanumfar, seinni dystur**

**Úrslit** 1-1 (0-0)
**Dato** 19. juli 2011 kl. 19.00
**Leikvøllur** Gundadalur – Tórshavn

**Dómarar:** Dómari: Milenko Vukadinović (SRB)
Hj.dómarar: Vladimir Jovanović (SRB), Dalibor Djurdjevic (SRB)
4. Dómari: Marko Popovic (SRB)

**Lið**

| **HB** | | | **Malmø FF** | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Teitur Gestson (GK) | | 25 | Dušan Melichárek (GK) | |
| 3 | Rógvi Holm | | 4 | Daniel Andersson (C) | |
| 6 | Hanus Thorleifson | 89 | 6 | Markus Halsti | |
| 7 | Fródi Benjaminsen (C) | 70 | 7 | Daniel Larsson | |
| 8 | Kári Nielsen | | 9 | Wílton Figueiredo | 90+1 |
| 9 | Símun Samuelsen | | 15 | Pontus Jansson | |
| 10 | Andrew Fløtum | 74 | 17 | Ivo Pekalski | |
| 12 | Hendrik Rubeksen | | 19 | Dardan Rexhepi | 63 |
| 18 | Rógvi Poulsen | 65<br>88 | 20 | Ricardinho | 70 |
| 20 | Vagnur Mortensen | | 21 | Jimmy Durmaz | |
| 22 | Pætur Jørgensen | | 24 | Agon Mehmeti | 67<br>85 |
| **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | | |
| 16 | Hedin Stenberg (GK) | | 30 | Dejan Garača (GK) | |
| 11 | Jón Krosslag | | 5 | Miljan Mutavdžić | 85 |
| 13 | Hans Lag | | 10 | Jiloan Hamad | 63 |
| 15 | Jogvan Nolsøe | 74 | 16 | Yago Fernández | |
| 19 | Jógvan Davidsen | 89 | 22 | Filip Stenström | |
| 21 | Kristin Mouritsen | 88 | 28 | Alex Nilsson | |
| 24 | Tróndur Jensen | | 29 | Omid Nazari | |

**Venjari** Sigfríður Clementsen — Rikard Norling (SWE)

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

## EB/STREYMUR – Quarabag

**UEFA Europa League – 2. Undanumfar, fyrri dystur**

**Úrslit** 1-1 (0-1)
**Dato** 14. juli 2011 kl. 19.00
**Leikvøllur** Gundadalur – Tórshavn

**Dómarar:** Dómari: Mark Steven Whitby (WAL)
Hj.dómarar: Edward King (WAL), Philip Thomas (WAL)
4. Dómari: Brian James (WAL)

**Lið**

| EB/Streymur | | | Quarabag | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | René Tórgard (GK) | | 99 | Bojan Pavlović (GK) | |
| 2 | Alex dos Santos | | 5 | Maksim Medvedev | |
| 3 | Pauli Hansen | | 6 | Rashad A. Sadygov (C) | |
| 4 | Gert Åge Hansen | | 7 | Namig Yusifov | 47 |
| 6 | Pætur Dam Jacobsen | | 11 | Rauf Aliyev | 11<br>70 |
| 8 | Egil á Bø (C) | | 14 | Rashad F. Sadygov | |
| 10 | Vasile Anghel | | 17 | Vüqar Nadirov | |
| 11 | Hans Pauli Samuelsen | | 22 | Afran Ismayilov | |
| 14 | Daniel Udsen | 70 | 24 | Admir Teli | 90+3 |
| 22 | Arnbjørn Hansen | 89<br>90+3 | 25 | Ansi Agolli | |
| 23 | Leif Niclasen | 80 | 77 | Giorgi Adamia | |

| Eykaleikarar: | | | Eykaleikarar: | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 30 | Jóan Pauli Jacobsen (GK) | | 1 | Farkhad Veliyev (GK) | |
| 5 | Poul Grunnveit Olsen | | 2 | Gara Garayev | 65' |
| 7 | Levi Hanssen | 70 | 4 | Zaur Gashimov | |
| 9 | Arnar Dam | 80 | 9 | Bakhtiyar Soltanov | |
| | | | 10 | Emin Imamaliyev | 76' |
| | | | 18 | Ilgar Gurbanov | |
| | | | 20 | Nderim Nedzipi | |

**Venjari** Hedin Askham (FRO) Gurban Gurbanov (AZE)

Mál  Sjálvmál  Brotsspark  Reytt kort  Gult Kort  Útskifting

# Quarabag - EB/STREYMUR

**UEFA Europa League – 2. undanumfar, seinni dystur**

**Úrslit** 0-0 (0-0)
**Dato** 21. juli 2011 kl. 18.00
**Leikvøllur** Tofig Bahramov Republican stadium - Baku

**Dómarar:** Dómari: Goran Spirkoski (MKD)
Hj.dómarar: Igor Sirilov (MKD), Kiril Negrieski (MKD)
4. Dómari: Petar Veljanovski (MKD)

**Lið**

| **Quarabag** | | | **EB/STREYMUR** | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 99 | Bojan Pavlović (GK) | | 1 | René Tórgard (GK) | |
| 5 | Maksim Medvedev | | 4 | Gert Åge Hansen | 30 |
| 6 | Rashad A. Sadygov (C) | | 6 | Pætur Dam Jacobsen | 66 |
| 7 | Namig Yusifov | | 7 | Levi Hanssen | |
| 11 | Rauf Aliyev | | 8 | Vasile Anghel | |
| 14 | Rashad F. Sadygov | | 10 | Daniel Udsen | |
| 17 | Vüqar Nadirov | 73 | 11 | Hans Pauli Samuelsen | |
| 22 | Afran Ismayilov | 89 | 12 | Marni Djurhuus (C) | |
| 24 | Admir Teli | | 22 | Arnbjørn Hansen | |
| 25 | Ansi Agolli | | 23 | Leif Niclasen | 83 |
| 77 | Giorgi Adamia | | 27 | Alex dos Santos | |

| **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Farkhad Veliyev (GK) | | 30 | Jóan Pauli Jacobsen (GK) | |
| 2 | Gara Garayev | | 5 | Poul Grunnveit Olsen | |
| 4 | Zaur Gashimov | | 9 | Arnar Dam | 83 |
| 9 | Bakhtiyar Soltanov | | | | |
| 10 | Emin Imamaliyev | | | | |
| 18 | Ilgar Gurbanov | 89 | | | |
| 20 | Nderim Nedzipi | 73 | | | |

**Venjari** Gurban Gurbanov (AZE) Hedin Askham (FRO)

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

# Fulham - NSÍ

**UEFA Europa League – 1. undanumfar, fyrri dystur**

**Úrslit** 3-0 (1-0)
**Dato** 30. juni 2011 kl. 19.30
**Leikvøllur** Craven Cottage – London

**Dómarar:** Dómari: Bernhard Brugger (AUT)
Hj.dómarar: Armin Eder (AUT), Christopher Jaeger (AUT)
4. Dómari: Thomas Prammer (AUT)

**Lið**

| | **Fulham** | | | **NSÍ** | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mark Schwarzer (GK) | | 1 | András Gángó (GK) | |
| 5 | Brede Hangeland | | 4 | Jens Joensen | |
| 6 | Chris Baird | | 5 | Jann Martin Mortensen | Útskifting 86 |
| 8 | Andrew Johnson | Mál 70 | 6 | Jústinus Hansen | |
| 13 | Danny Murphy (C) | Brotsspark 61 | 7 | Debes Danielsen | Útskifting 78 |
| 16 | Damien Duff | Mál 33 | 10 | Christian Jacobsen (C) | |
| 18 | Aaron Hughes | | 13 | Klæmint Olsen | Útskifting 90+3 |
| 20 | Dickson Etuhu | Útskifting 74 | 15 | Helgi Petersen | Gult Kort 60 |
| 25 | Bobby Zamora | Útskifting 79 | 17 | Jónhard Fredriksberg | |
| 28 | Matthew Briggs | | 18 | Hedin á Lakjuni | |
| 29 | Simon Davies | Útskifting 69 | 25 | Petur Mikkelsen | |

| | **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | |
|---|---|---|---|---|---|
| 12 | David Stockdale (GK) | | 20 | Kristian Joensen (GK) | |
| 2 | Stephen Kelly | | 8 | Magnus Olsen | Útskifting 86 |
| 4 | Steve Sidwell | Útskifting 74 | 9 | Andrias á Líknargøtu | Útskifting 90+3 |
| 14 | Philippe Senderos | | 12 | Magnus Pauli Sørensen | |
| 17 | Bjørn Helge Riise | Útskifting 69 | 22 | Arni Fredriksberg | Útskifting 78 |
| 24 | Lauri Dalla Valle | Útskifting 79 | 20 | Kristian Joensen (GK) | |
| 27 | Jonathan Greening | | 8 | Magnus Olsen | Útskifting 86 |

**Venjari** Martin Jol (NED) Pauli Poulsen (FRO)

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

# NSÍ - Fulham

**UEFA Europa League – 1. undanumfar, seinni dystur**

**Úrslit** 0-0 (0-0)
**Dato** 7. juli 2011 kl. 18.45
**Leikvøllur** Svangaskarð – Toftir

**Dómarar:** Dómari: Nikolaj Hänni (SUI)
Hj.dómarar: Manuel Navarro (SUI), Johann Vogel (SUI)
4. Dómari: Stephan Klossner (SUI)

**Lið**

| | NSÍ | | | Fulham | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | András Gángó (GK) | | 1 | Mark Schwarzer (GK) | |
| 4 | Jens Joensen | Gult Kort 38 | 2 | Stephen Kelly | |
| 5 | Jann Martin Mortensen | Útskifting 84 | 4 | Steve Sidwell | Gult Kort 53 |
| 6 | Jústinus Hansen | | 5 | Brede Hangeland (C) | |
| 10 | Christian Jacobsen (C) | | 8 | Andrew Johnson | Útskifting 72 |
| 11 | Mamuka Toronjadze | Útskifting 90 | 14 | Philippe Senderos | |
| 12 | Einar Hansen | | 16 | Damien Duff | Útskifting 86 |
| 13 | Klæmint Olsen | Útskifting 90+2 | 20 | Dickson Etuhu | |
| 15 | Helgi Petersen | | 25 | Bobby Zamora | |
| 17 | Jónhard Fredriksberg | | 27 | Jonathan Greening | Útskifting 76 |
| 18 | Hedin á Lakjuni | | 28 | Matthew Briggs | |

| | Eykaleikarar: | | | Eykaleikarar: | |
|---|---|---|---|---|---|
| 20 | Kristian Joensen (GK) | | 12 | David Stockdale (GK) | |
| 3 | Magnus Pauli Sørensen | | 17 | Bjørn Helge Riise | Útskifting 76 |
| 7 | Debes Danielsen | Útskifting 84 | 21 | Kerim Frei | Útskifting 72 |
| 8 | Magnus Olsen | | 24 | Lauri Dalla Valle | Útskifting 86 |
| 16 | Andrias á Líknargøtu | | 32 | Rafik Halliche | |
| 22 | Arni Fredriksberg | Útskifting 90 | 40 | Alex Smith | |
| 25 | Petur Mikkelsen | Útskifting 90+2 | | | |

**Venjari** Pauli Poulsen (FRO) — Martin Jol

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

# ÍF – KR Reykjavík

**UEFA Europa League – 1. undanumfar, fyrri dystur**

**Úrslit** 1-3 (1-2)
**Dato** 30. juni 2011 kl. 19.00
**Leikvøllur** Gundadalur – Tórshavn

**Dómarar:** Dómari: Sven Bindels (LUX)
Hj.dómarar: Roland Flenghi (LUX), Laurent Kopriwa (LUX)
4. Dómari: Chris Reisch (LUX)

**Lið**

| **ÍF** | | | **KR Reykjavík** | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Jákup Mikkelsen (GK) | | 1 | Hannes Halldórsson (GK) | |
| 2 | Aki Petersen | | 2 | Grétar Sigurdsson | |
| 3 | Jan Ellingsgaard | | 4 | Bjarni Gudjónsson (C) | 82 |
| 4 | Nenad Šarić | 19<br>84 | 7 | Skúli Jón Fridgeirsson | 90+1 |
| 6 | Karl Løkin | 45 | 8 | Baldur Sigurdsson | 79 |
| 7 | Aleksandar Jović | 72 | 10 | Kjartan Henry Finnbogason | 22<br>69 |
| 10 | Bogi Løkin | | 11 | Óskar Örn Hauksson | |
| 13 | Uni Petersen | | 14 | Viktor Bjarki Arnarsson | |
| 14 | Danial Lakjuni | 8 | 20 | Magnús Már Lúdvíksson | |
| 17 | Høgni Zachariassen | 88 | 21 | Gudmundur Reynir Gunnarsson | 30 |
| 76 | Bartal Eliassen (C) | | 23 | Gudjon Baldvinsson | |

| **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 16 | Haldgrimur Hansen (GK) | | 29 | Atli Jónasson (GK) | |
| 8 | Fritleif Lambanum | 84 | 3 | Asgeir Orn Ólafsson | 82 |
| 11 | Franck Poulsen | 72 | 6 | Gunnar Thor Gunnarsson | |
| 15 | Ari Ellingsgaard | 88 | 9 | Gunnar Örn Jónsson | 69 |
| 18 | Sverri Ellingsgaard | | 12 | Dofri Snorrason | |
| 21 | Margeir Toftegaard | | 18 | Aron Bjarki Jósepsson | 90+1 |
| 22 | Bjarki Danielsen | | 30 | Jordão Diogo | |

**Venjari** Rúni Nolsøe (FRO) Runar Kristinsson (ISL)

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

## KR Reykjavík – ÍF

**UEFA Europa League – 2. umfar, seinni dystur**

**Úrslit** 5-1 (2-0)
**Dato** 7. juli 2011 kl. 19.15
**Leikvøllur** KR Vøllur – Reykjavík

**Dómarar:** Dómari: Dag Vidar Hafsås (NOR)
Hj.dómarar: Leif Erik Opland (NOR), Magnus Lundberg (NOR)
4. Dómari: Trond Ivar Døvle (NOR)

| Lið | KR Reykjavík | | | ÍF | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1 | Hannes Halldórsson (GK) | | 1 | Jákup Mikkelsen (GK) | |
| | 4 | Bjarni Gudjónsson (C) | Útskifting 38 | 2 | Aki Petersen | |
| | 6 | Gunnar Thor Gunnarsson | | 3 | Jan Ellingsgaard | |
| | 7 | Skúli Jón Fridgeirsson | | 4 | Nenad Šarić | Mál 88 |
| | 8 | Baldur Sigurdsson | | 7 | Aleksandar Jović | Útskifting 60 |
| | 10 | Kjartan Henry Finnbogason | Mál 47 | 9 | Christian Muomaife | Útskifting 71 |
| | 11 | Óskar Örn Hauksson | Mál 90 | 10 | Bogi Løkin | |
| | 20 | Magnús Már Lúdvíksson | Útskifting 56 | 13 | Uni Petersen | Útskifting 60 |
| | 23 | Gudjon Baldvinsson | Mál 18<br>Mál 56 | 14 | Danial Lakjuni | |
| | 24 | Björn Jónsson | Mál 23<br>Útskifting 68 | 17 | Høgni Zachariassen | |
| | 30 | Jordão Diogo | | 76 | Bartal Eliassen (C) | Gult Kort 27 |

| | **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 29 | Atli Jónasson (GK) | | 16 | Haldgrimur Hansen (GK) | |
| | 2 | Grétar Sigurdsson | | 5 | Poul Ennigard | |
| | 3 | Asgeir Orn Ólafsson | Útskifting 38 | 6 | Karl Løkin | Útskifting 60<br>Gult Kort 78 |
| | 14 | Viktor Bjarki Arnarsson | | 8 | Fritleif Lambanum | Útskifting 60 |
| | 17 | Hróar Sigurdsson | | 11 | Franck Poulsen | Útskifting 71 |
| | 18 | Aron Bjarki Jósepsson | Útskifting 56 | 15 | Ari Ellingsgaard | |
| | 21 | Gudmundur Reynir Gunnarsson | Útskifting 68 | 21 | Margeir Toftegaard | |

**Venjari** Runar Kristinsson (ISL) Rúni Nolsøe (FRO)

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

**UEFA Cup kvinnur**

| Lið | D | V | J | T | + | - | +/- | s |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Glasgow City LFC** | 3 | 3 | 0 | 0 | 17 | 0 | 17 | 9 |
| **ŽFK Spartak** | 3 | 2 | 0 | 1 | 15 | 6 | 9 | 6 |
| **KÍ Klaksvík** | 3 | 1 | 0 | 2 | 3 | 9 | -6 | 3 |
| **Mosta FC** | 3 | 0 | 0 | 3 | 0 | 20 | -20 | 0 |

| Dagur | Dystur | Úrslit |
|---|---|---|
| **05/08** | Kí - Mosta | 1-0 |
| **05/08** | Glasgow City – Spartak | 4-0 |
| **07/08** | Glasgow City – Mosta | 8-0 |
| **07/08** | Spartak – KÍ | 4-2 |
| **10/08** | KÍ – Glasgow City | 0-5 |
| **10/08** | Mosta - Spartak | 0-11 |

# KÍ - Mosta

**UEFA Women's Champions League – undankapping, bólkur 5**

| | |
|---|---|
| **Úrslit** | 1-0 (0-0) |
| **Dato** | 8. august 2011 kl. 15.00 |
| **Leikvøllur** | Gradski – Subotica |

| | | |
|---|---|---|
| **Dómarar:** | Dómari: | Sofia Karagiorgi (CYP) |
| | Hj.dómarar: | Niki Karagiorgi (CYP), Svetlana Bilić (SRB) |
| | 4. Dómari: | Danijela Marković (SRB) |

| Lið | KÍ | | | Mostar | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 16 | Randi Wardum (GK) | | 1 | Sharon Costantino (GK) | |
| | 3 | Sofia Purkhús | 59 | 3 | Rebecca Chircop | |
| | 8 | Malena Josephsen (C) | | 4 | Ashlie Marie Jobst | |
| | 9 | Rannvá Andreasen | | 6 | Dorianne Theuma | |
| | 10 | Maria K. Thomsen | | 7 | Karen Lia | |
| | 11 | Paula Mikkelsen | | 9 | Yanika Fenech | 56 |
| | 12 | Una Joensen | | 11 | Natasha Pace | |
| | 17 | Sigrid Jacobsen | 90+1 | 14 | Oriana Bedingfield | |
| | 18 | Elsa Maria Simonsen | | 17 | Rachel Nolan | |
| | 19 | Eydvør Klakstein | | 18 | Anna Marie Vella (C) | |
| | 20 | Bára Klakstein | | 20 | Emma Xuereb | |

**Substitutes**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Monika Biskopstø (GK) | | 5 | Rebecca D'Agostino | |
| 2 | Tove Sólheyg | 90+1 | 8 | Marisa Deguara | |
| 5 | Gunnrid Joensen | | 10 | Paulann Cassia | |
| 13 | Vár Lydersen | | 15 | Amy Abdilla | |
| | | | 19 | Deborah Atanasio | |
| | | | 23 | Melissa Galea | 56 |

| | | |
|---|---|---|
| Venjari | Erik Nielsen (FOR) | Raymond Sant (MLT) |

Mál | Sjálvmál | Brotsspark | Reytt kort | Gult Kort | Útskifting

## Spartak - KÍ

**UEFA Women's Champions League – undankapping, bólkur 5**

**Úrslit** 4-2 (1-2)
**Dato** 13. august 2011 kl. 17.30
**Leikvøllur** Gradski – Subotica

**Dómarar:** Dómari: Ausra Kance (LTU)
Hj.dómarar: Jurgita Mačikunytė (LTU), Natalia Rachynska (UKR)
4. Dómari: Kateryna Monzul (UKR)

**Lið**

| **KÍ** | | | **KÍ** | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 12 | Ana Ivanov (GK) | | 16 | Randi Wardum (GK) | |
| 2 | Marija Ilić | 55 | 3 | Sofia Purkhús | 14<br>41 |
| 5 | Violeta Slović (C) | | 8 | Malena Josephsen (C) | |
| 6 | Sanda Jovanović | | 9 | Rannvá Andreasen | 89 |
| 7 | Anja Adamov | | 10 | Maria K. Thomsen | |
| 8 | Nevena Damjanović | 1<br>67 | 11 | Paula Mikkelsen | |
| 9 | Mirela Tenkov | 72 | 12 | Una Joensen | |
| 10 | Jelena Čanković | | 17 | Sigrid Jacobsen | |
| 16 | Jelena Čubrilo | 76 | 18 | Elsa Maria Simonsen | |
| 17 | Aleksandra Savanović | | 19 | Eydvør Klakstein | |
| 18 | Sanda Malešević | | 20 | Bára Klakstein | |
| **Eykaleikarar:** | | | **Eykaleikarar:** | | |
| 1 | Ljiljana Gardijan (GK) | | 1 | Monika Biskopstø (GK) | |
| 3 | Jelena Marenić | 72 | 2 | Tove Sólheyg | 89 |
| 4 | Marija Čubrilo | | 5 | Gunnrid Joensen | |
| 11 | Željka Radanović | | 13 | Vár Lydersen | |

**Venjari** Boris Arsić (SRB) Erik Ernesto Nielsen (FRO

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting

## KÍ – Glasgow City

**UEFA Women's Champions League – undankapping, bólkur 5**

**Úrslit** 0-5 (0-4)
**Dato** 16. august 2011 kl. 17.00
**Leikvøllur** Backa – Subotica

**Dómarar:** Dómari: Kateryna Monzul (UKR)
Hj.dómarar: Natalia Rachynska (UKR), Svetlana Bilić (SRB)
4. Dómari: Danijela Marković (SRB)

**Lið**

| KÍ | | | Glasgow City | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 16 | Randi Wardum (GK) | | 1 | Claire Johnstone (GK) | |
| 3 | Sofia Purkhús | | 3 | Emma Mitchell | |
| 8 | Malena Josephsen (C) | | 5 | Eilish McSorley | Mál 64 |
| 9 | Rannvá Andreasen | | 6 | Joanne Love | Mál 41, Útskifting 55 |
| 10 | Maria K. Thomsen | Gult Kort 60, Útskifting 90+3 | 7 | Katharina Lindner | Mál 4, Mál 8 |
| 11 | Paula Mikkelsen | | 12 | Christie Murray | |
| 12 | Una Joensen | Útskifting 87 | 14 | Rachel Corsie (C) | |
| 17 | Sigrid Jacobsen | | 15 | Emma Fernon | |
| 18 | Elsa Maria Simonsen | Útskifting 75 | 16 | Leanne Ross | Mál 13, Útskifting 83 |
| 19 | Eydvør Klakstein | | 17 | Lisa Evans | Gult Kort 72, Útskifting 78 |
| 20 | Bára Klakstein | | 19 | Clare Gemmell | |

| Eykaleikarar: | | | Eykaleikarar: | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Monika Biskopstø (GK) | | 21 | Laura Williamson (GK) | |
| 2 | Tove Sólheyg | Útskifting 75 | 22 | Lee Alexander (GK) | |
| 5 | Gunnrid Joensen | Útskifting 87 | 4 | Emma Woolley | Útskifting 55 |
| 13 | Vár Lydersen | Útskifting 90+3 | 8 | Jill Paterson | Útskifting 83 |
| | | | 10 | Jane Ross | |
| | | | 18 | Danica Dalziel | Útskifting 78 |

**Venjari** Erik Ernesto Nielsen (FRO)

Mál Sjálvmál Brotsspark Reytt kort Gult Kort Útskifting